# GERÐABÓK

**Dato:** 21. juni 2023 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 135/23 – 180/23**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Súsanna Olsen
Kristian Martin Skála

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Bogi Jacobsen
Jóan Petur Hentze

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 532<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 135/23 | 23/03042-2 | Birgir Nielsen berst frá at møta á býráðsfundi 21. juni 2023 | 535 |
| 136/23 | 23/00153-1 | Mál beind í nevndir 2023 | 536 |
| 137/23 | 23/03365-1 | Býráðslimur flytir fyribils úr Tórshavnar kommunu | 538 |
| 138/23 | 21/01128-2 | Umsókn um keyp av geira til samanlegging av matr. nr. 1082d, Tórshavn | 540 |
| 139/23 | 23/03273-1 | Hvønn leiklut skal Tórshavnar kommunu hava í Koltursætlanini? | 543 |
| 140/23 | 23/01293-3 | Áheitan um ummæli til val av grindaformonnum fyri hvalvágna í Sandágerði næstu fimm árini | 546 |
| 141/23 | 23/02576-3 | Umbøn um eykajáttan - Tannlæknastovan | 548 |
| 142/23 | 14/02615-10 | Suðurendin á Tórsvølli og áskoðarapláss í Gundadali | 550 |
| 143/23 | 16/00962-1 | Tórsvøllur - vestursíðan | 557 |
| 144/23 | 21/02567-17 | Framtíðar skipan av kunningartøkni í fólkaskúlunum í Tórshavnar kommunu | 567 |
| 145/23 | 21/03719-1 | Skert virksemi á dagstovnaøkinum | 572 |
| 146/23 | 20/03750-1 | Eldradepil í Kollafirði | 577 |
| 147/23 | 23/03547-1 | Høvuðsumvæling av køkinum á Lágargarði | 583 |
| 148/23 | 23/03546-1 | Framtíðartryggja eldraøkið - reingerðartænastan | 585 |
| 149/23 | 23/03387-1 | Endurskoðan av reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað 2023 | 590 |
| 150/23 | 21/04713-1 | Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir | 593 |
| 151/23 | 23/01914-2 | Umsókn vegna Heilbrigdi um grundøki til nýggjan bygning á Velbastað | 600 |
| 152/23 | 23/03420-1 | Útstykking omanfyri Argjahamar – øki 3 | 603 |
| 153/23 | 22/03571-1 | Miðbýarkjarnan | 607 |
| 154/23 | 22/07223-1 | Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging | 613 |
| 155/23 | 21/00407-1 | Miðbýarætlan - Havnará | 618 |
| 156/23 | 22/00331-1 | Fríðkan av bygdunum | 627 |
| 157/23 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 630 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 158/23 | 17/03628-1 | Heildarætlan Eystara havnarøki | 647 |
| 159/23 | 22/00329-1 | Sethúsaútstykking á Velbastað – partur av matr. nr. 51a | 659 |
| 160/23 | 22/01139-8 | Nýggj útstykking matr. nr. 49m, Kaldbak | 663 |
| 161/23 | 21/01680-5 | Hosufóðring av kloakkum | 665 |
| 162/23 | 22/04631-1 | Eykajáttan til 8114 kavarudding | 669 |
| 163/23 | 21/02196-2 | Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK | 673 |
| 164/23 | 23/03191-1 | Víðkan av vendipláss á Reynstún og Reynsgøtu | 684 |
| 165/23 | 15/04352-4 | Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin | 686 |
| 166/23 | 22/07354-2 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 1231a og matr.nr. 1175a til A2 | 693 |
| 167/23 | 23/01619-2 | Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 16, Norðradalur | 697 |
| 168/23 | 23/01717-3 | Umsókn um at fáa gjørda serliga byggisamtykt fyri økið matr. nr. 1265u og 1265v, oman Viðarlund 1 og 3, Tórshavn | 699 |
| 169/23 | 18/00950-1 | Íbúðarbygging á Frúutrøð | 701 |
| 170/23 | 22/01377-1 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | 707 |
| 171/23 | 17/00415-66 | Skúlin við Løgmannabreyt : Karlamagnusarbreyt 47 – 188 Hoyvík – matr. nr. 135fe – Kanna klæðing – útveggir | 713 |
| 172/23 | 22/01951-1 | Skúlin á Fløtum - undirvísingarhøli | 716 |
| 173/23 | 14/02585-1 | Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin - víðkan av gravøki móti Sandá | 719 |
| 174/23 | 23/03038-3 | Skansabryggjan - liðugtgerð av uttanumøkjunum við pakkhúsini hjá Faroe Ship. | 725 |
| 175/23 | 23/03342-3 | Barðið : Umsókn um at leiga grundøki til frystugoymslu á Vestaru Bryggju | 727 |
| 176/23 | 21/03297-2 | LV mál nr. 21/01631 (VS: mál nr. 16/00514 Viðv. leigusáttmálanum á matr. nr. 1e og 1f á Sundi) | 730 |
| 177/23 | 23/02523-1 | Lántøka og gjaldføri 2023 | 735 |
| 178/23 | 23/00151-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023 | 738 |
| 179/23 | 22/01629-2 | Umsókn um keyp av lendi til búðstaðarendamál | 740 |
| 180/23 | 23/03610-1 | Asfaltering í Miðbýnum 2023 | 744 |

**Til viðgerðar**

## 135/23 Birgir Nielsen berst frá at møta á býráðsfundi 21. juni 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 135/23 | 23/03042-2 |

**Málslýsing**
Birgir Nielsen hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Kristian Martin Skála, eru loknar.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið til eftirtektar.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 536 |
| | Formansins merki: |

# 136/23 Mál beind í nevndir 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 2/23 | 23/00153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 29/23 | 23/00153-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 59/23 | 23/00153-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 87/23 | 23/00153-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 119/23 | 23/00153-1 |
| 6 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 136/23 | 23/00153-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið til eftirtektar.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 538<br><br>Formansins merki: |

# 137/23 Býráðslimur flytir fyribils úr Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 137/23 | 23/03365-1 |

**Upprunin til málið**
Áheitan frá Elsu Berg, býráðslimi hjá Tjóðveldi.

**Lýsing av málinum**
Elsu Berg, býráðslimur, fer ætlandi uttanlands í lestrarørindum í tíðarskeiðinum august 2023 til mai 2024. Av tí at býráðslimurin sigur frá sær fasta bústað sín í kommununi heitir hon á kommunustýrið um at góðkenna, at hon fer úr býráðnum, inntil hon aftur tekur fastan bústað í kommununi.

Í lógini um val til føroyskar kommunur § 26, stk. 4, er ásett, at: "*Um limur fyribils sigur frá sær fasta bústað sín í kommununi, kann verða samtykt, at hann bert fer úr bygda(r)ráðnum/býráðnum, inntil hann aftur tekur fastan bústað í kommununi.*"

Vísandi til nevndu áseting verður býráðið við hesum biðið um at taka støðu til fyrispurningin hjá Elsu Berg og góðkenna, at býráðslimurin fer úr býráðnum, meðan hon er burturstødd, og at talan er um fyribils fráflyting úr kommununi, sum merkir, at býráðslimurin aftur tekur sæti í býráðnum, tá hon aftur hevur fastan bústað í kommununi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. september 2020

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tá ið Elsa Berg fyribils flytur úr kommununi og fer úr býráðnum, tekur næsta valevni á listanum hjá Tjóðveldi sæti í býráðnum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir býráðnum til at góðkenna, at Elsa Berg, býráðslimur, fer úr býráðnum, inntil hon aftur tekur fastan bústað í kommununi.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið til eftirtektar.

## 138/23 Umsókn um keyp av geira til samanlegging av matr. nr. 1082d, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 87/21 | 21/01128-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 118/21 | 21/01128-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 174/23 | 21/01128-2 |
| 4 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 138/23 | 21/01128-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um at keypa ein geira.

**Lýsing av málinum**
Eitt felag, sum eigur 1082d, søkir um at keypa ein geira, sum liggur í millum 1082d og 1082e, Slættanesgøta.

**Viðmerkingar frá byggi- og býarskipanardeildini**
Býarskipanardeildin mælir frá at selja geirin, sum er avlagdur til at hava gongusamband millum stykkini og at framtíðartryggja um leiðingar skulu leggjast inn á økið og um gøtusamband skal gerast.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í B3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn

**§10. Ásetingar fyri umráðispart B3 í 3. grundumráði**
1. Loyvi er einans at byggja hús til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi. Tó er loyvt á hvørjum grundstykki at gera bústað til eigara ella fyristøðufólk virkisins.

2. Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 800 $m^2$ og í mesta lagi 2000 $m^2$.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki mál sum hevur týdning.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
j.nr. 21/01128-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla frá, at kommunan selur geiran millum 1082d og 1082e við Slættanesgøtu, vísandi til at geirin er avlagdur til at hava gongusamband millum stykkini og at framtíðartryggja um leiðingar skulu leggjast inn á økið og um gøtu samband skal gerast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**

Kommunan hevur eftirfylgjandi verið á ástaðarfundi saman við umsøkjara.

Fundarfrágreiðing. Ástaðarfundur Slættanesgøta 6.4.11.2022. Sí teldupost samskifti skrásett j.nr. 21/01128-14.

Fyri umsøkjara. Frank Hellisdal og Niels Winther Poulsen.
Fyri kommununa. Marius Múller ( Byggimálsdeildin ), Barbara Mikkelsen ( Býarskipanardeildin ) og Bjartur Mortensen ( Stjórnarskrivstovan )

Vit gingu kring um á økinum.

Staðfest varð, at har er stórur hæddarmunur, millum planeringshædd á ovaru stykkjunum og niðaru stykkjunum, og er " gøtan " ikki brúkilig sum er.
Fyrrverandi eigarin av grundstykkinum niðanfyri, hevur grivið undir skráan sum lá á gøtuni og eisini í ein mun inni á Stykkinum hjá Maskingrevstri. Hetta var í samband við at grannin hevur stoypt høgan stuðlamúr til egi mark, og eru stoyptir skrástuðlar til stuðlamúrin inni á gøtuni.

Mett verður at økið sum er avsett til gøtu, ongantíð verður til nakra gøtu, soleiðis sum umstøðurnar eru á staðnum, og at kommunan tí eigur at sleppa ætlanini um gøtu, og heldur leggja geiran afturat grundstykkinum hjá Maskingrevstri.

Umboðini fyri Tórshavnar kommunu vóru ikki heilt samd í hesum sjónarmiði og vóru nøkur viðurskifti nevnd í hesum sambandi.

- Gøtan gevur eina fjarstøðu millum stykkini, og er tað ikki nakar vansi fyri útstykkingina, vísandi til hæddarmunin.
- Møguliga verður gøtan gjørd einaferð, og kann tá takast í nýtslu sum gøta, millum annað vísandi til, at Skeyti/byggisamtykt loyvir bústað á vinnuøkinum. ( Loyvt at gera bústað til eigara ella fyristøðumann virkisins ) T.vs. at man kann vænta ávísa gongd millum vegirnar.
- Í " gøtuna " ber til at leggja tekniskar leiðingar, uttan tað skal umbiðjast loyvi frá møguligum eigara.

Umboðini fyri Maskingrevstur eru ikki samd í at gøta nakrantíð verður veruleiki, vísandi til umstøðurnar á staðnum. Neyðugt verður at tryggja planeringina hjá Maskingrevstri, og letur hetta seg bert gera við at tað verður fylt upp við gróti millum stykkini, og skal harumframt eisini múrur stoypast oman á steinseting, vísandi til stóra hæddarmunin.

Tosað var um hesar møguleikar.

- Søla av lendinum til Maskingrevstur. Kommunan kann tá fáa tinglýst servitutt í tann partin av økinum sum kommunan selur, um atkomurætt til at gera og viðlíkahalda tekniskar leiðingar v.m. Um so er at Maskingrevstur kann keypa økið, er Maskingrevstur sinnað til at standa fyri og rinda kostnaðin av grót uppfylling.
- Maskingrevstur fær brúksrættin til stykkið við treytum, um at kommunan til eina og hvørja tíð kann leggja tekniskar leiðingar inni á økinum. At uppfylling verður gjørd millum stykkini, sum tryggjar planering hjá Maskingrevstri. ( Maskingrevstur metir at kommunan tá skal rinda henda kostnað )

- At kommunan fyllir upp gøtuna, fyri at tryggja planering hjá Maskingrevstri, men eigur kommunan tá framhaldandi økið til gøtu. Uppfyllingin verður síðani grundarlag undir einum múri, sum Maskingrevstur setur í mark til gøtu.

Umsøkjarin hevur latið gjørt eina kostnaðarmeting fyri at gera ábøtur á nevndu gøtu, soleiðis at lendið verður í sama standi sum áðrenn grivið varð.
Kostnaðarmetingin er til samans kr. 146.700,00

Ein virðismeting fyriliggur av lendi við matr.nr. 1083a, 1087b og 1083ae, sum liggur eitt sindur longur úti við Sandá. Talan er um óplanerað jarðarstykkir við Sandá, sum liggja í 4 grundumráði, og útfrá at talan er um B3 øki í byggisamtykt. Mettur fermetraprísur er 750 kr.m2, fyri óplanerað lendi. Virðismeting er gjørd hin 07.12.2020.

Trupult er at gera eina ítøkiliga virðismeting av geiranum, vísandi til hæddarmun, at tilfarið er grivið burtur og vísandi til at stuðlamúrur er gjørdur út í geiran.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at selja umsøkjara geiran, sum er til víddar uml. 85 m2 fyri kr. 750.m2 = uml. 64.000,00 kr.

Keyparin rindar harumframt fyri avgreiðsluna av málinum, herundir kostnað til matrikulering og tinglýsing av skeyti.

Í søluskeytinum verður alágt sum servituttur, at umsøkjarin leggur rør við hóskandi tjúgd gjøgnum stykkið, har kommunan kann leggja tekniskar leiðingar, umframt at kommunan til eina og hvørja tíð skal kunna sleppa framat, at leggja og viðlíkahalda møguligar tekniskar leiðingar.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 139/23 Hvønn leiklut skal Tórshavnar kommunu hava í Koltursætlanini?

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 08.06.2023 | 19/23 | 23/03273-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 177/23 | 23/03273-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 139/23 | 23/03273-1 |

**Upprunin til málið**

Ferðavinnupolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu mælir til, at kommunan stuðlar upp undir Koltursætlanina við eitt nú at dagføra vatn-, kloakk- og lendingarviðurskifti í oynni.

Tórshavnar kommuna hevur fingið fyrispurning frá Tjóðsavninum um, kommunan vil verða við Koltursætlanini – Koltur fyri øll, sum Tjóðsavnið hevur arbeitt við í nøkur ár, og í hvønn mun kommunan ynskir at verða við.

**Lýsing av málinum**

Tjóðsavnið hevur ábyrgd av Koltri, sum er partur av Tórshavnar kommunu.

Tjóðsavnið hevur í nógv ár arbeitt við Koltursætlanini, og at finna fígging til ætlanina.

Í stuttum er ætlanin at skipa oynna sum eina granskingarstøð viðv. mentanar- og náttúruarvi, at menna eina burðardygga ferðavinnu og at skapa karmar fyri burðardyggum vinnulívi.

Í sunnara partinum av oynni verða bygdarlag, bø og hagi og ætlanin er at endurreisa bygningar, byggja vitjunardepil, bátasmiðju, og skapa karmar fyri framsýningar, undirvísingartilboð og mentananarsøguligar upplivingar sum heild.

Á nátturfrøðiliga partinum er ætlanin at seta á stovn eina náttúrupark og náttúrugrannskingarstøð.

Málbólkuirn er breiður og fevnir um næmingar, lesandi, føroysk og útlendsk ferðafólk, vinnan og onnur, sum hava tørv at njóta friðin.

Arbeiðið við verkætlanini er nú komið so mikið ávegis, at fíggingin og fíggingarleisturin skal fáast uppá pláss.

Byggi- og projekteringsarbeiðið er mett at kosta uml. 67 mió.kr. og tað tekur trý ár at fremja.

Landið hevur játtað 9 mió.kr. á fíggjarlógini til verkætlanina. Umsóknir eru sendar øðrum myndugleikum, stovnum og útlendskum grunnum, ið eru jaliga sinnaðir fyri verkætlanini.

Enn vantar Tjóðsavnið tó at fáa avklárað um, Tórshavnar kommuna er sinnað at luttaka í verkætlanini og í hvønn mun.

Talan er um eitt mál, sum fevnir um bæði mentan, ferðavinnu og tekniska fyrisiting.

Málið er umrøtt í Vinnunevndini tann 11.mai 2023.

Málið er somuleiðis viðgjørt í Mentamálanevndini tann 11. November 2022, ið beindi málið víðari til Teknisku nevnd. Málið hevur ikki verið fyri í Teknisku nevnd enn.

**Lógir, ásetingar o.a.**

| | **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 544 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/læettar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Tjóðsavnið ynskir, at kommunan stuðlar verkætlanini við somu upphædd sum landið – 9 mió.kr.- sum sambært Tjóðsavninum vildi fevnt um útreiðslur til vatn, kloakk og betra atkomuna frá bryggju niðan í bygdina – serliga fyri illa gongd.

Ein minni upphædd er tó eisini ein møguleiki.

Í sambandi við ferðavinnupolitikkin varð ein kostnaðarmeting gjørd av at dagføra vatn og kloakk. Mettur kostnaður tá, var 2 mió.kr. Tá var atkoman ikki við.

Kommunan hevur raðfest ferðavinnu konto 7710 á fíggjarætlanini. Rúm er fyri at fíggja 1 mió.kr. til Koltursætlanini innan verandi fíggjarkarm í 2023.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir til, at játtaðar verða 1 mió.kr. til Koltursætlanini í ár, sum verður fíggjað av verandi játtan til ferðavinnu konto 7710.

**Vinnunevndin 08. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini.

Fíggjarnevndin tekur undir við, at kommunan luttekur í Koltursverkætlanini við 1,5 mió. kr. um árið komandi trý árini, og verður peningurin avsettur á fíggjarætlani 2024, 2025 og 2026.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 140/23 Áheitan um ummæli til val av grindaformonnum fyri hvalvágna í Sandágerði næstu fimm árini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 140/23 | 23/01293-3 |

**Upprunin til málið**
Skriv frá sýslumanninum fyri Streymoyar sýslu

**Lýsing av málinum**
Vísandi til grein 2 í kunngerð nr. 9 frá 26. januar 2017 ætlar sýslumaðurin at uppnevna hesar grindaformenn fyri næstu 5 árini til hvalvágna í Sandágerði í Tórshavn:

Hanus Højgaard, Magnus Magnussen, Jón Frímund Johansen og Bjarna Poulsen

og hesar tiltaksmenn:

Torlakkur Hansen og Sigmund Signarsson.

Tórshavnar býráð er biðið um at koma við ummæli til hesa ætlaðu uppnevnan vísandi til kunngerð nr. 9 frá 26. Januar 2017 við broytingum um grind og annan smáhval, § 2, stk. 3, sum er soljóðandi:

*Stk. 3.* Sýslumaðurin uppnevnir skrivliga grindaformenninar eftir ummæli frá bygdaráðnum ella býráðnum fyri 5 ár. Er semja millum grindamenn á staðnum, kunnu eisini hesir seta fram uppskot til grindaformenn, sum vanligt hevur verið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at taka undir við valinum av grindaformonnum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

Kári Johansen luttók ikki í viðgerðini av málinum vísandi til, at hann er ógegnigur sambært fyrisitingarlógini.

# 141/23 Umbøn um eykajáttan - Tannlæknastovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 16.05.2023 | 28/23 | 23/02576-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 156/23 | 23/02576-3 |
| 3 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 121/23 | 23/02576-3 |
| 4 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 141/23 | 23/02576-3 |

**Upprunin til málið**
Umbøn frá Tannlæknastjóranum.

**Lýsing av málinum**
Tannlæknastjórin ger vart við útreiðslur til tørvandi útgerð.

Tað snýr seg um yvirtøku av tannteknikk-høli í sertannlæknastovuni við Løgmannabreyt kr. 122.000. Tannlæknastovan keypti í hesum sambandi mesta partin av útgerð og inventari frá privatum veitara (tannrætting v.m.), sum segði hetta frá sær fyri aldur. Talan er um útgerð, sum mett verður heldur leingi aftrat, og sum er fingin til vega bíligari enn við nýútvegan. Endamál við hesum var eisini at tryggja, at sertannlæknastovan hevði hesa útgerð á staðnum fyri framhaldandi at kunna halda hesa tænastu uppi.

Harumframt eru sett stovninum strangari krøv til GDPR, sum ger, at Tannlæknastovan skal útvega nýggja telduútgerð og forrit hesum viðvíkjandi. Samlaður kostnaður fyri hetta er kr. 76.865 sambært tilboði.

Hesi bæði endamálini kostað soleiðis kr. 198.865, ið biðið verður um eykajáttan til.

Fíggjarstøðan á kontu 2310 Barnatannrøktin er merkt av meirnýtslu undanfarin ár, sum tó er innanfyri 5%, sum játtanarreglurnar seta sum mark. Við ársenda 2022 er meirnýtslan 3%, men lutfalsliga er upphæddin stór, uml. kr. 439.000.

Í sambandi við fíggjarætlanina 2023 varð gjørt vart við hækkandi kostnaðir á útgerð serliga til sertannlæknaviðgerðir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Innan grein 2 eru smáir møguleikar at fíggja hesa upphædd av rakstri. Skotið verður tí upp, at eykajáttanin í hesum føri verður fíggjað av løgukontu 2375 Tannrøkt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| **Fíggjarliga/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 2375 | L23002 | Tannlækna-miðstøð | 2310 | | Barnatann-røktin | | 200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 200.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tannlæknastjórin mæla til at játta kr. 200.000 av løgukontu 2375 Tannrøkt L23002 Tannlæknamiðstøð til kontu 2310 Barnatannrøktin sum eykajáttan. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 16. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

## 142/23 Suðurendin á Tórsvølli og áskoðarapláss í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 68/14 | 14/02615-10 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2014 | 87/14 | 14/02615-10 |
| 3 Býráðsfundur | 22.04.2014 | 74/14 | 14/02615-10 |
| 4 Fíggjarnevndin | 06.06.2014 | 159/14 | 14/02615-10 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.06.2014 | 129/14 | 14/02615-10 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.06.2014 | 161/14 | 14/02615-10 |
| 7 Býráðsfundur | 16.06.2014 | 128/14 | 14/02615-10 |
| 8 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 202/14 | 14/02615-10 |
| 9 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 19/15 | 14/02615-10 |
| 10 Fíggjarnevndin | 18.02.2015 | 36/15 | 14/02615-10 |
| 11 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 29/15 | 14/02615-10 |
| 12 Mentamálanevndin | 07.06.2023 | 117/23 | 14/02615-10 |
| 13 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 163/23 | 14/02615-10 |
| 14 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 142/23 | 14/02615-10 |

### Málslýsing:

Í sambandi við útbygging av Tórsvølli skulu áskoðarplássini í suðurendanum á Tórsvølli takast niður og møguliga endurnýtast í Gundadali. Verkfrøðingastovan v/ Magnus P. Gaard hevur átikið sær at standa fyri fyrireikingunum og kanna møguleikarnar at endurnýta elementini, og sambært frágreiðing frá fundi 6.11.2012 skulu kostnaðarmetingar gerast fyri:

1. Niðurtøku av øllum bygningslutum á sunnara enda á tribununi og upplagring av lutum, sum ikki skulu brúkast aftur beinanvegin
2. Uppskot til at brúka so nógv av tribunu-elementunum, trappur o.t., sum til ber, við ovara enda á Ovara vølli
3. Kanna møguleikan at brúka evt. avlop av tribunu-elementum, trappum o.t. millum HB og B36 húsið ella aðrastaðni
4. Kanna kostnaðin fyri element veitt á byggiplássið
5. Meting av ráðgevara- og eftirlitsarbeiðinum fyri pkt. 1, 2, 3 og 4 hvør sær.
6. Samlað kostnaðarmeting av pkt. 1 til 5.

Verkfrøðingastovan hevur sent Tórshavnar notat 19.11.2012 við hesum metingum.

**Ískoyti:**

Eftir umbøn hevur Verkfrøðingastovan latið gera uppskot til niðurtøku av tribununi á suðursíðuni og við ymsum møguleikum fyri beinleiðis enduruppseting á ovara vølli í Gundadali (norðurendin og millum HB-húsið og B36-húsið) og Tórsbreyt umframt at goyma á Skarðshjalla til seinni endurnýtslu.

Áskoðarakapasiteturin á ovara vølli er ríkiliga góður sum er. Til tess at skapa eina betri heild, verður mett skilabest at brúka nakað av tribununi aftur við at fylla út tómrúmið millum HB-húsið og B36-húsið. Sambært uppskotinum kunnu 27 elementir endurnýtast, og økist stólatalið við 528. Arbeiðið verður gjørt soleiðis, at til ber seinni at gera yvirdekking úr stáli við sama skapi sum á HB- og B36-húsunum.

Samlaður kostnaður fyri niðurtøku og flyting av tribunum til Skarðshjalla er kr. 800.000 u/mvg. Kostnaður fyri montagu av tribunu millum HB- og B36 húsið er kr. 780.000 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til burturbeining uml. kr. 200.000 og til kanningararbeiði/ráðgevingararbeiði umleið kr. 245.000.

Samlað umleið kr. 2.025.000. Við mvg og ókendum verður kostnaðurin um kr. 2.400.000.

Játtan er tøk á íløguætlanini konta 5775 ítróttaranlegg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2,4 mió av kontu 5775 ítróttaranlegg til niðurtøku av tribununi á suðurendanum á Tórsvølli, at seta í alt 27 elementir uppaftur millum HB- og B36-húsini, og at flyta rest á Skarðshjalla til seinni endurnýtslu.

**Mentamálanevndin 5. desember 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, mælir býráðnum frá at taka undir við tilmælinum vísandi til, at hon heldur áskoðarakapasitetin vera nóg stóran sum er, og at plássið heldur átti at verið nýtt til at útvega borðtennisítróttini betri umstøður.

**Býráðið 13. desember 2012:** Einmælt **s**amtykt at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini við teirri broyting, ikki at seta tey 27 elementini upp millum HB- og B36-húsini og at játta 1,5 mió av konto 5775.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at prosjekteringsarbeiðið hjá FSF av nýggja bygninginum á suðurendanum er komið longri, eru nøkur viðurskifti, sum hava stóran týdning fyri heildarútbyggingarætlanina av Tórsvølli, sum støða má takast til.

1. Í sambandi við útbjóðingina hjá FSF av jørðarbeiðinum fyri nýggja bygninginum á Tórsvølli, varð tilboð eisini heintað uppá at lækka vegin inn á Tórsvøll. Hetta var ikki upprunaliga í ætlanunum, men spurningurin varð tikin upp at gera hetta arbeiðið, meðan jørðarbeiðið kortini var í gongd. Ført varð fram, at hetta kostar minni at gera nú, enn um tað skal gerast seinni, eins og eisini praktiskir fyrimunir eru í mun til arbeiðið hjá vallarvørðinum. Um vegurin verður lækkaður eftir, at bygningurin er liðugur, er neyðugt at brekka fyri vegnum, tí hellan er so tætt við bygningin. Hetta er dýrari enn at spreingja, meirkostnaðurin mettur at verða um kr. 150.000-250.000. Articon, sum hevði lægsta tilboð samlað uppá jørðarbeiðið og byggibúningina, og sum FSF hevur gjørt sáttmála við, kann gera hetta arbeiðið fyri kr. 525.703. Arbeiðið fevnir um lækking av vegnum, gerð av nýggjum skráa og umleggingin av gøtuni niðan á parkeringsplássið aftanfyri eystaru tribunu. Í sáttmálanum millum Articon og FSF er ein option í, har tað ber til at taka av tilboðnum ella at handa tað til kommununa við freist 25. januar 2013, sí annars notat frá MAP-arkitektum. Arbeiðið liggur uttanfyri fíggjarkarmin hjá FSF.

2. Í avtaluni millum kommununa og FSF er ásett, at parturin hjá kommununi í sambandi við niðurtøku av suðurendanum og uppafturbygging av nýggjum áskoðaraplássum í bygninginum hjá FSF er kr. 6,9 mió samsvarandi kostnaðarmeting frá MAP-arkitektum. Til ber ikki neyvt at definera, hvør partur av arbeiðinum, sum kommunan eigur at gjalda, og hvør partur er FSF. Mett verður skilagott at játta samlaða karmin kr. 6,9 mió, har tær kr. 1,5 mió, sum áður eru játtaðar til niðurtøkuna av suðurtribununi, er íroknað, til byggingina. Hetta svarar til uml. 20% av metta byggikostnaðinum. Mett verður eisini skilagott at gera eina neyvari avtalu við FSF um, hvussu ein møguligur minni- ella meirkostnaður skal býtast millum kommununa og FSF.

3. Bygningurin hjá FSF á suðurendanum setir karmarnar fyri restina av byggiverkætlanini á Tórsvølli, tvs. serliga eysturskýlið og vesturskýlið bæði í mun til hæddarkotur o.líkn fyri yvirdekking og tribunur, dimensiónir, snið, funktiónalitet, tilfar v.m. Neyðugt er longu nú at hugsa hesi ymsu byggistigini saman í eina heild, so at samanhangur verður í byggistigini. Í avtaluni millum kommununa og FSF frá desember 2012 um núverandi byggistig, er ásett, at prosjektering av eysturskýlinum skal byrja í 2013. Mett verður skilagott at gera avtalu við MAP-arkitektar um eitt prosjektuppskot um eystur- og vesturskýlið samsvarandi heildarætlanini sum

fyrireiking og møguliga fremjan av prosjekteringini fyrst av eysturskýlinum, og at játtan verður sett av til endamálið.

Á íløguætlanini fyri 2013 eru settar kr. 10 mió av á kontu 5775 til Tórsvøll. Mælt verður til, at fíggingin til omanfyri standandi endamál verður henda:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Lækking av atkomuvegi v.m. til Tórsvøll | kr. 525.703 |
| 2. | Niðurtøka av suðurtribunu | kr. 1.500.000 |
| | Bygging av áskoðaraplássum FSF-bygningur | kr. 5.400.000 |
| 3. | Fíggjarkarmur prosjektuppskot eystur- og vesturskýlið og møgulig prosjektering | kr. 2.574.297 |
| | | kr. 10.000.000 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 525.703 til arbeiðið at fáa lækkað atkomuvegin til Tórsvøll v.m. Harumframt verður mælt til at játta kr. 5,4 mió til byggingina av áskoðaraplássunum í FSF-bygninginum samsvarandi avtaluni við FSF um fígging frá kommununi uppá í alt kr. 6,9 mió. Mælt verður somuleiðis til at geva umsitingini heimild at gera avtalu við ráðgeva um at fáa til vega eitt prosjektsuppskot um eystur- og vesturskýlið samsvarandi heildarætlanini innanfyri írestandi fíggjarkarmin kr. 2.574.297 sum fyrireiking og møguliga fremjan av prosjekteringina.

**Mentamálanevndin 15. januar 2013:** Samtykt at taka undir við punkt 1 og 2 omanfyri og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina. Punkt 3 verður tikið upp á næsta fundi.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2013:** Fíggjarnevndin samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við punkt 1, 2 og 3 í tilmælinum frá trivnaðarstjóranum, tekniska stjóra og mentamálaleiðaranum.

**Býráðið 24. januar 2013:** Einmælt samtykt.

- Kunning.

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Høvuðsráðgevin hevur í uppriti dagfest 02.04.14 mælt kommununi og FSF til, at umhugsa at fremja arbeiði at byggja tribunu á eystaru síðu á Tórsvølli við at gera partalagsavtalu við sama arbeiðstakara, sum í løtuni byggir sunnaru tribunu. Uppritið er viðgjørt í fakliga prosjektbólkinum hjá FSF og kommununi, sum tekur undir við, at soleiðis sum umstøðurnar á byggimarknaðinum eru í løtuni, kann hetta verða skjótasti og bíligasti hátturin at halda áfram við byggingini á eystaru síðu.

Høvuðsráðgevin og undirráðgevararnir vísa á, at hetta er eitt øðrvísi byggiarbeiðið, og at bæði kommunan og høvuðsráðgevin hava góðar royndir við partalagsleistinum frá øðrum verkætlanum. Teir vísa m.a. á fylgjandi grundgevingar fyri tilmæli sínum:

- Byggiarbeiðið á syðru síðu hevur verið í útboði og er tað ikki ókent at halda áfram við arbeiðstakara í seinni byggistigi. Teir vóru bíligast til lisitatiónina fyri sunnara enda og eru har á staðnum, kenna prísirnar og fortreytirnar at byggja á Tórsvølli.
- Tilgongdin/tíðin kann styttast, so sleppast kann undan vetrarbygging og ringa veðrinum, sum higartil hava darva á
- Av tí at hetta er eitt øðrvísi byggiarbeiðið, er vandi fyri at tilboðsgevarar leggja meira enn vanligt upp fyri váðanum við byggingini, og at eitt útboð tí vil føra til hægri kostna enn metingin.

- Um farið verður í partalagssamstarv ber til at minka um váðan hjá arbeiðstakaranum við, at hann kann verða við í tilgongdini og verða við í optimeringini.
- Hann kann tíðliga tilrættisleggja sítt arbeiði. Ráðgevarnir kunnu taka optimeringina við í projekteringina og endaliga prosjektið.
- Fyrimunurin hjá kommununi og FSF er, at tað ber til at fylgja prísgongdini, og byggiharrarnir kunnu raðfesta, so trygd er fyri, at prísurin kann halda.
- Fíggjarligi fyrimunur er við at fáa stytt um byggitíðina og harvið um byggiplásskostnaðin

Avbjóðingin verður at tryggja, at arbeiðið ikki verður dýrari enn mett er. Hetta gerst við, at arbeiðstakarin er opin um sínar eindarprísir og fíggjarviðurskifti annars í tilgongdini, innan endaligur arbeiðstakarasáttmáli verður undirskrivaður.

Um tað av eini hvørjari orsøk ikki eydnast at fáa semju um prís og tíð, so gevur partalagsleisturin møguleika fyri, at tað ikki verður farið víðari við partalagnum og eingin arbeiðstakarasáttmáli verður gjørdur fyrr enn arbeiðið hevur verið bjóðað út.

Um kommunan og FSF meta, at partalagsleisturin er ein gongd leið, verður gjørd ein partalagsavtala við arbeiðstakaran, sum nágreinar samstarvið millum byggiharra, ráðgeva og arbeiðstakara. Hetta skal gerast skjótt, fyri at fáa tíðar- og fíggjarligu fyrimunirnar, ið eru nevndir omanfyri, og eisini áðrenn projekteringin er komin inn í endaspurtin.

Arbeiðstakarin skal hava samsýning fyri arbeiðið, hann ger í hesum fyrsta partinum av tilgongdini, sum tó verður mótroknað í tilboðnum, um/tá endaligur arbeiðstakarasáttmáli verður gjørdur. Mett verður at hetta kann gerast fyri 100-200 tús. Kr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til,

- at heimilað umsitingini at gera partalagssáttmála við MAP og J & K Petersen um prosjektering og bygging av eystaru síðu á Tórsvølli
- at partalagsavtalan gevur kommununi og FSF møguleika at uppsiga partalagsavtaluna við endan á Fasu 1, um semja ikki fæst um tíðarætlan og kostnað
- at gjaldast kunnu upp til í mesta lagið kr. 200 tús av verandi játtan til Fasu 1 í partalagstilgongdini
- at seta ráðgevum og arbeiðstakara treytir um, at endamálið við at gera partalagsavtalu er, at spara tíð og at sperrur skulu verða reistar innan veturin 2014
- at seta ráðgevum og arbeiðstakara treytir um, at endamálið við at gera partalagsavtalu er, at spara pening til m.a. byggiplássrakstur og arbeiðið annars
- at Fasa 1 skal verða liðug í seinasta lagi ultimo mai 2014.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina
**Fíggjarnevnd 22. apríl 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.
**Býráðsfundir 22. apríl 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við framhaldandi útbyggingina av Tórsvølli á eytstursíðuni, skal gerast nýggj avtala við FSF, herundir m.a. um fíggjarliga býtið av íløgukostnaðinum. Umsitingin leggur fram upppskot til fíggjarligt býti.

Býráðið hevur 13. september 2012 (mál 2012-0903) samtykt ein samlaðan íløgukarm fyri Tórsvøll 2013-2015 uppá kr. 35 mió kr. Roknast skal við tørvi á meirfígging til byggingina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at heimila umsitingini at gera avtalu við FSF um byggingina, og at tað í hesum sambandi verður tikin politisk støða til fíggjarliga býtið við FSF og at játta tørvandi fíggingina á íløguætlanini í 2015.
**Fíggjarnevnd 06. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at leggja uppskot til avtalu fyri aftur fíggjarnevndina við atliti til politiska støðutakan og at játta fígging.

**Ískoyti:**
Umsitingin, ráðgevar og J&K Petersen hava arbeitt við eini partalagsavtalu sambært býráðssamtykt frá 22. apríl 2014.

Samráðingarnar hava gingið væl og hava verið konstruktivar. Úrslitið av samráðingunum er, at partarnir eru samdir um ein target-kostnað á kr. 34.708.989 u. mvg. Afturat hesum koma so aðrar neyðugar byggiharraútreiðslur, so sum íbindingargjøld, mvg. o.l., soleiðis at samlaði kostnaðurin við mvg verður kr. 39.703.456.

Viðvíkjandi tíðarætlanini er hon tillaga teir landsdystir, sum verða í heyst og á sumri 2015. Stálsperrurnar koma upp í hesum árinum, meðan takpláturnar verða verða lagdar á komandi vár. Tíðarætlanin er sostatt í samsvari við býráðssamtyktina frá 22. apríl 2014.

Fylgibólkurin hjá kommununi og FSF hava viðgjørt málið, og mæla til at gera nøkur tilkeyp afturat á tilsamans kr. 1.010.760 v. mvg, og verður samlaði kostnaðurin við hesum tilkeypum tá mettur til kr. 40.714.216 v. mvg.

Fylgibólkurin hevur eisini viðgjørt spurningin um býtið av íløgukostnaðinum fyri sunnaru og eystaru síðu tilsamans. Sunnara síða er blivin dýrari enn upprunaliga mett, meðan eystara síða svarar til upprunaligu metingina. Samlaði kostnaðurin fyri sunnaru og eystaru síðu er mettur til kr. 84.825.741.

Fylgibólkurin samdist um at mæla nevndini í FSF og býráðnum til at partarnir rinda hvør sína helvt av samlaða kostnaðinum, svarandi til kr. 42.412.871 í part. Nevndin í FSF hevur boða frá, at tikið verður undir við hesum býtinum.

**Tilmæli:**
Fylgibólkurin mælir til:

1. at góðkenna uppskotið til partalagsavtalu
2. at góðkenna uppskotið til høvuðsarbeiðstakarasáttmála
3. at góðkenna uppskotið til helvtarbýtið millum kommununa og FSF fyri eystaru og sunnaru síðu
4. at játtað kr. 12 mió av avsetta íløgukarminum fyri 2014 til verkætlanina
5. at samlaða játtan kommununar fyri 2013-2015 á kr. 35 mió verður hækkað við kr. 7.412.871, samsvarandi pkt. 3 um helvtarbýtið millum partarnr, av samlaða metta kostnaðinum fyri sunnaru og eystaru síðu.

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 11. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at írestandi játtanin kr. 7.412.871 verður fíggjað av íløgukarminum 2015, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevnd 16. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.
**Býráðsfundir 16. juni 2014:** Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge; Helena Dam á Neystabø; Tróndur Sigurðsson; Halla Samuelsen; Bogi Andreasen; Annfinn Brekkstein; Bjørghild Djurhuus; Elin Lindenskov; Sjúrður Olsen; Sigrún Mohr og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Marin Katrina Frýdal hevur serstøðu í hesum máli, tí hon metir ikki at rættir upplýsingar vóru givinir um máliið á býráðsfundinum 22. apríl 2014.
**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sum partur av samlaða íløgukarminum eru tkr. 20.500 settar á íløguætlanina á 5775 fyri 2015 .

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin biðja um, at upphæddin verður flutt til verkætlanina L57020, Tórsvøllur.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevnd 18. februar 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.
**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Samtykt við við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Jan Christiansen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

**Ískoyti:**
Byggingin av eystur- og suðursíðuni á Tórsvølli var liðug fyri rúmari tíð síðani, og hevur verið væl eydnaður karmur um fleiri landsdystir, steypafinalur og í ár eisini fleiri landskappingardystir.

Verkætlanin er tó ikki formliga lokað. Hetta er drigið út vegna ógreiðu um byggiroknskapin.

Málið byrjar afturí í 2012 við niðurtøku av suðurtribununi. Byggingin hevur verið skipað í partalagið, sum er kommunan, FSF, arbeiðstakarin og høvuðsráðgevin. Partalagið hevur í felag gjøgnumgingið byggiroknskapin og hava eftirfylgjandi góðkent hann.

Úrslitið er ein meirnýtsla uppá kr. 1.446.013,07. Tað eru serliga tveir postar, sum eru orsøk til úrslitið:

- Ráðgevarasáttmálin kostar kr. 5,19 mió, men av onkrari orsøk eru bert játtaðar kr. 3,87 mió til sáttmálan. Meirnýtslan sbrt. byggiroknskapinum er kr. 1,28 mió.
- Avsettar eru kr. 1,89 mió til mvg-útreiðslur, men nýtslan er kr. 2,45 mió. Meirnýtslan sbrt. byggiroknskapinum er kr. 0,56 mió.

Talan hevur verið um tilgongd, sum byrjar sum stakar verkætlanir í 2012 við niðurtøku av suðurtribununi og lendisarbeiði. Í 2014 verður skipað partalag um byggingina, har verkætlanirnar við eysturskýlinum og bygninginum á suðursíðuni verða lagdar saman.

Verkætlanin kann formliga lokast við at játta kr. 1,446 mió av kontu 5775 Ítróttaanlegg L57026 Tórsvøllur vestursíðan til kontu 5775 Ítróttaranlegg L57020 Suðurendin á Tórsvølli.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og leiðari á bygningsdeildini mæla til:
- at loka málið L57026 Tórsvøllur suðurendin
- at játta kr. 1,446 mió til L57026 Tórsvøllur suðurendi av løgukarminum 5775 Ítróttaanlegg (av restupphæddini viðvíkjandi Tórsvøllur vestursíðan/L57026), og

- at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 07. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 143/23 Tórsvøllur - vestursíðan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 59/16 | 16/00962-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 185/16 | 16/00962-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 244/16 | 16/00962-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 173/16 | 16/00962-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 16.06.2016 | 193/16 | 16/00962-1 |
| 6 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 76/17 | 16/00962-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 34/18 | 16/00962-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 12/18 | 16/00962-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 27/18 | 16/00962-1 |
| 10 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 17/18 | 16/00962-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 28.02.2018 | 79/18 | 16/00962-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 28.02.2018 | 63/18 | 16/00962-1 |
| 13 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 38/18 | 16/00962-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 258/18 | 16/00962-1 |
| 15 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 217/18 | 16/00962-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 255/18 | 16/00962-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 07.12.2020 | 334/20 | 16/00962-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 336/20 | 16/00962-1 |
| 19 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 307/20 | 16/00962-1 |
| 20 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 10/21 | 16/00962-1 |
| 21 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 98/21 | 16/00962-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 87/21 | 16/00962-1 |
| 23 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 118/21 | 16/00962-1 |
| 24 Mentamálanevndin | 12.01.2022 | 19/22 | 16/00962-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 7/22 | 16/00962-1 |
| 26 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 7/22 | 16/00962-1 |
| 27 Mentamálanevndin | 07.06.2023 | 116/23 | 16/00962-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 164/23 | 16/00962-1 |
| 29 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 143/23 | 16/00962-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Útsett.

**Tórsvøllur vestursíða**
Tá Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya í 2010 settu sær fyri at fáa Tórsvøll til góðkent altjóða stadion, var fyrsta stig at fáa til vega eina heildarætlan, tann sonevndi masterplanurin, sum bæði viðgjørdi skipan av øllum ítróttaøkinum í Gundadali og tørvin á kravdum fasilitetum til sjálvan Tórsvøll sum landsliðsstadion til altjóða kappingar hjá UEFA og FIFA.

Viðurskifti, sum vóru sett á skrá til tess, vóru m.a.:

- At vaksa um sjálvan leikvøllin samsvarandi altjóða krøvum
- At skifta grasvøllin út við altjóða góðkent graslíkið
- At seta upp nýtt ljósannlegg samsvarandi krøvum til sjónvarping av altjóða dystum
- At yvirdekka áskoðaraplássini til tess at reisa verju fyri vindi og regni, og í hesum sambandi at betra um komfort til áskoðararnar

- At avmarka talið av áskoðarum úr 6.440 niður á uml. 5.000
- At reisa nýggjan bygning á suðursíðuni, ið kann brúkast til nógv ymisk endamál bæði ítróttarliga, vinnuliga og umsitingarliga
- At skipa stadion við nýggjum inn- og útgongdum, ið lúka altjóða krøv

Útyggingarstigini hava í høvuðsheitum verið hesi:

- Nýtt ljósannlegg 2011
- Grasvøllur skiftur til graslíki 2012
- Suðurtribunan tikin niður og nýggjur bygningur bygdur 2013 – er m.a. høvuðsinngongd til Tórsvøll, umsitingarhøli hjá FSF, og 900 áskoðarapláss undir taki og nýggjum setrum
- Eystara skýlið bygt 2014-2015 – tak yvir áskoðarapláss, nýggj setur, vesi og búðir. Eystara skýlið er bundið saman við bygninginum og áskoðaraplássini á suðurendanum.

**Vestara skýlið**

Vestara skýlið er framhald av heildarætlanini, har áskoðaraplássini verða dagførd og koma undir tak. Vesturskýlið verður eins og eysturskýlið bygt saman við bygninginum á suðurendanum og skapar sostatt samanhangandi form sum hestaskógvur. Tá vesturskýlið er bygt, er tað samært heildarætlanini bert torgið frammanfyri Tórsvølli, sum er eftir.

Verkætlanin við vesturskýlinum fevnir eisini um útbygging av gamla FSF-húsinum bæði norður- og suðureftir sum liður í, at Tórsvøllur skal røkka ásetingini um “Category 4” leikvøllir, ið er ásetingin fyri leikvøllir til altjóða landsdystir. Í løtuni er Tórsvøllur ein “Category 3” leikvøllur. Til tess at røkka hesum, skulu umklæðingin til spælarar og dómarar betrast, eins og umstøður til dopingkanningar og læknarúm. Umstøður til tíðindafólkini og VIP eru heldur ikki nøktandi.

Hesir nýggju fermetrarnir hava tann vinning umframt, at umklæðingarrúm, vesir og tey almennu økini kunnu eisini brúkast til tiltøk, sum eru í Gundadali, serliga á Niðara vølli, sum harvið fær høliskarmar til taks, ið ikki eru dag.

Á ovastu hædd eru góðir møguleikar fyri fleirnýtsluhølum, eitt nú gisting í sambandi við landsliðsvenjingar ella skúla, skrivstovur og kravdar VIP-fasilitetir í sambandi við landsdystir. Til ber at byggja 200 nýggj áskoðarapláss her, so at samlaði áskoðarakapasiteturin á vestursíðuni verður uml. 1.730.

Í stuttum fevnir útbyggingin um hesi høli:

- Veghædd – høli til vaktarhaldið, 2 umklæðingarrúm til dómarar, dopingrúm, 2 nútíðar umklæðingarrúm til liðini, høli til tíðindafundir, mixed zone (fjølmiðlar/leikarar), sum harumframt er foreldralounge móti niðaravølli
- 1. hædd – vesi, arbeiðsrúm hjá tíðindafólkuj
- 2. hædd – VIP høli, sølubúðir
- 3. hædd – sonevndar skybox til fleirnýtsluendamál, vaktarrúm

Útbyggingin loysir eisini trupulleikan við inngongdum, har áskoðarar í dag mugu inn á vøllin fyri at koma til áskoðaraplássini. Sum heild fer útbyggingin at lætta munandi um fyriskipan av dystum, kappingum og tiltøkum á Tórsvølli. Tey síðstu áskoðaraplássini, gestir og tíðindafólk koma eisini undir tak. Og ikki minst, at Tórsvøllur verður endaliga liðugur og kann verða ein stoltleiki fyri bæði høvuðsstaðin og landið.

Verkætlanaruppskotið er í mai 2016 lagt fyri UEFA at góðkenna.

Ynskið hjá FSF hevur verið, at útbyggingin skuldi verða liðug í september 2018, tá nýggja kappingin Nations League, sum UEFA skipar fyri, fer av bakkastokki. Hesa tíðarætlan ber ikki til at røkka, nú so langt er útliðið, men mett verður, at til ber at skipa byggingina soleiðis, at dystir kunnu fyrskipast kortini.

Hendan kappingin verður samstundis sum vanligu EM og HM-undankappingarnar. Hetta kemur eisini at økja um virksemið á Tórsvølli, har tað í miðal fara at vera 5 A-landsliðskappingardystir um árið. Spælt verður tá alt árið, tvs. eisini um veturin, har tað eisini er møguligt við øðrum smærri millumlandakappingum.

Útbyggingin gevur eisini nýggjar og betri møguleikar fyri øðrum virksemi á Tórsvølli, serstakliga størri tiltøk og stadionkonsertir.

**Samstarv**
Eins og øll tey undanfarnu útbyggingarstigini síðan 2010, er ætlanin at skipa arbeiðið við vesturskýlinum í samstarvi við FSF eisini fíggjarliga.

Gjørt er uppskot til samstarvsavtalu við støði í avtalunum fyri hini útbyggingarstigini.

Sambært uppskotinum til avtalu verður lagt upp, at byggingi verður skipað í partalagi. Fyribilskostnaðarmeting fyri alt útbyggingarstigið er kr. 98 mió. Lagt er upp til, at hvør parturin rindar helvtina av kostnaðinum, tvs. 50/50, og at gjøldini hjá hvørjum parti fella soleiðis:

2016: FSF kr. 5 mió, TK kr. 5 mió.
2017: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2018: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2019: FSF kr. 5 mió, TK kr. 8,75 mió
2020: TK rindar FSF kr. 8,75 mió
2021: TK rindar FSF kr. 9 mió

FSF hevur góðkent henda leist. Til ber ikki at staðfesta endaliga byggiskostnaðin fyrr enn eftir útboð.

Tíðarætlan yvirskipað:
- Juli-desember 2016 – projektering
- Januar 2017 – útboð
- Februar 2017 – uppstartur og partalag
- Februar-desember 2017 – stig 1: fundamentir, stuðlamúrar, lendisarbeiði, betong, vegur og stál
- Januar-august 2018 – stig 2: Stál, stálsperrur og polycarbonate
- August 2018-august 2019 – stig 3: Komplettering, innleggingar og stólar.

Í avtaluuppskotinum verður, sum omanfyri nevnt, lagt upp til bygging av vestursíðuni í partalagssamstarvi. Harumframt, at skipanin við stýrisbólki millum TK og FSF um Tórsvallar-byggingina verður at halda fram, á sama hátt høvuðsráðgevin.

Til tess at fáa fyrireikað, prosjekterað og bjóða arbeiðið út verður mett neyðugt við játtan frá kommununi uppá kr. 5 mió í 2016 og samsvarandi kr. 5 mió frá FSF.

Sambært dagførdu íløguætlanini fyri 2016 eru settar kr. 5 mió av til Tórsvøll.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja uppskot til samstarvsavtalu við FSF um at gera yvirdekking yvir tribunir á vestarasíðu á Tórsvølli og út- og umbygging av verandi bygningi har. Mælt verður eisini til at játta kr. 5 mió av íløguætlanini 2027 5775 Ítróttaranlegg til fyrireiking, projekting og útboð.
**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Útsett.
**Mentamálanevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Halla Samulensen, samtykti at taka undir við fyriliggjandi avtalu millum TK og FSF, við teirri treyt, at tær upphæddirnar sum eru nevndar í avtaluni eru endaligar fyri TK, eisini um verkætlanin verður dýrari, men at útreiðslubýtið verður 50/50 um verkætlanin verður bíligari enn mett.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við avtaluni vegna ov stóran iva um veruliga byggikostnaðin fyri hetta byggistigið.

**Ískoyti:**
Sambært fyriliggjandi uppskoti til avtalu millum TK og FSF fella gjøldini hjá hvørjum parti soleiðis í sambandi við verkætlanina:

2016: FSF 5 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2017: FSF 26,25 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2018: FSF 26,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2019: FSF 7,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2020: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2021: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2022: TK rindar FSF 7,0 mió kr.
2023: TK rindar FSF 7,0 mió kr.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við mentamálanevndini treytað av, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum TK og FSF á vestursíðuni verður tikið upp til nærri støðutakan. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, vísir til sína støðutakan í mentamálanevndini.
**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri, og tveimum ímóti at taka undir við tilmælilnum frá meirilutanum í fíggjarnevndini. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Jógvan Arge greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti**:
Ymsu byggistigini á Tórsvølli farnu 6-7 árini eru gjørd í samstarvi millum kommununa og Fótbóltssambandið. Í sambandi við undanfarnu byggingar hava umboð fyri býráðið verið tilnevnd í stýrisbólk, har eisini umboð fyri Fótbóltssambandið sita. Sambært avtaluni við Fótbóltssambandið um vestursíðuna er ætlanin, at byggingin verður skipað í partalagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóran mæla til at tilnevna tvey umboð fyri býráðið í stýrisbólkin fyri byggingina av Tórsvølli.
**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Annika Olsen, Bogi Andreasen og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.
**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lisitatión uppá bygging av tribunum og bygnigni á vestursíðuni á Tórsvølli var 31. august 2017. J&K Petersen hevði lægsta boð kr. 88.499.385 handverkaraútreiðslur. Samráðst hevur síðani verið við arbeiðstakaran um tilboðið.

Harumframt er hetta tíðarskeiðið arbeitt nærri við konstrutkiónspartinum, har tað í mun til útbjóðingartilfarið er farið frá upprunaligu loysnini við betongveggi niður á hellu millum Tórsvøll og Niðara vøll til spunsvegg, sum mett verður er ein tryggari loysn. Gjørdar eru í hesum sambandi neyvari dýpdarkanningar. Har tað er djúpast eru 7,5 metrar. Spunsveggirnir verða slidnir niður eins og kent er frá havnagerð, og so verður stoypt í erva og harfrá bygt fast í sjálvt skýlið.

Staðfesta dýpdin niður á hellu og spunsveggirnir hava gjørt verkætlanina dýrari. Gjøgnumgongd hevur somuleiðis verið við ymisku fakini saman við høvuðsarbeiðstakara við tí endamáli at fáa prísin niður. Eftir hesar broytingar og samráðing eru handverkaraútreiðslurnar kr. 90.325.687.

Samlaður kostnaður íroknað byggiharraútreiðslur, ráðgeving, innbúgv, reinsiverk v.m. er kr. 118.569.663.

Við støði í hesum kostnaðinum er gjørt nýtt uppskot til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya um bygging av vestursíðuni, har útreiðslukarmurin er kr. 118,5 mió, og har báðir partar rinda kr. hvør sín helming tó soleiðis, at parturin hjá Tórshavnar kommunu er í mesta lagi kr. 59,285 mió.

Áður eru játtaðar kr. 10 mió til verkætlanina árini 2016 og 2017. Fíggjartørvurin hjá kommununi er sostatt kr. 49,285 mió, sum sambært uppskotinum til samstarvsavtalu við Fótbóltssambandi Føroya verður at fíggja yvir íløguætlanina árini 2019-2025 soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 2019 | kr. 6,000 | mió |
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |
| 2022 | kr. 9,000 | mió |
| 2023 | kr. 7,500 | mió |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |
| 2025 | kr. 1,785 | mió |
| | kr. 49,285 | mió |

Sambært tíðarætlanini verður byggingin liðug í oktober 2020. Byggingin verður eins og undanfarna byggistig skipað í partalagi. Umframt partalagssáttmála skal støða takast til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við J&K Petersen, samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya og fígging.

Býráðið samtykti 16. juni 2016, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum Tórshavnar kommunu og Fótbóltssamband Føroya verður tikið upp til nærri støðutakan. Upplýsast skal, at ítøkiligt uppskot er gjørt um slíkt býti, harundir uppskot um rakstrar- og samstarvsavtalu fyri Tórsvøll. Uppskotið verður lagt til politiska viðgerð í mentamálanevndini á fundinum í mars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at:

- Góðkenna uppskotið til partalagssáttmála
- Góðkenna uppskotið til høvuðsarbeiðstakarasáttmála
- Góðkenna uppskotið til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya
- At játta kr. 5 mió av tøkum løgukarmi 2017 konta 5775 Ítróttaranlegg L00001 til løgukontu 5775 L57026 Tórsvøllur vestursíðan
- At játta í alt kr. 49,285 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025 samsvarandi samstarvsavtaluni við Fótbóltssamband Føroya,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Komið er eftir, at upphæddin, ið kommunan skal rinda, í málslýsingin er uttan mvg. Við mvg er upphæddin kr. 62,990 mió, fíggjartørvurni tó 52,990. Býtið í yvir ár verður so hetta:

| | | |
|---|---|---|
| 2019 | kr. 6,000 | mió |

| | | |
|---|---|---|
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |
| 2022 | kr. 9,000 | mió |
| 2023 | kr. 7,500 | mió |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |
| 2025 | kr. 5,490 | mió |
| | kr. 52,990 | mió |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin vísir til tilmælið omanfyri við teirri broyting, at játtaðar verða í alt kr. 52,990 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025.
**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi 25. januar 2018 samtykti býráðið at góðkenna uppskot til partalagssáttmála, at góðkenna uppskot til høvuðsarbeiðstakarasáttmála, og at góðkenna uppskot til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya, og í hesum sambandi at játta kr. 62,990 mió íroknað kommunalt mvg til byggingina av vestursíðuni á Tórsvølli.

Eftir hesa býráðssamtykt hevur FSF boðað kommununi frá samtykt í starvsnevnd FSF´s um, at FSF vil broyta byggiverkætlanina soleiðis, at verandi FSF-hús á vestursíðuni ikki verður út- og umbygt sum ætlað, men ístaðin verður tikið niður og at nýtt hús verður bygt uppaftur á staðnum.

Endamálið við hesi broyting er at fáa eina betri bygging bæði viðvíkjandi innrætting og funktiónum. Fyrimunur er eisini, at hæddirnar á vestursíðuni verða bundnar saman við suðurendan í somu linju, tí meðan verandi bygningur hevur fýra hæddir, verður tann nýggi at hava tríggjar hæddir eins og suðurendin.

Harumframt minkar broytta ætlanin munandi um váðan í byggingini serliga við atliti at avbjóðandi lendinum.

Fótbóltssambandið hevur í hesum sambandi boðað kommununi frá, at mettur meirkostnaður fyri hesa ætlan er kr. 25,0 mió, og at Fótbóltssambandið sjálvt vil fíggja henda meirkostnað. Fíggjarligi parturin hjá Fótbóltssambandinum av samlaðu byggingini á vestursíðuni verður eftir hesum uml. kr. 84,3 mió.

Hetta merkir tó, at verkætlanin er ikki heilt tann sama, sum býráðið samtykti á síðsta fundi út frá fyriliggjandi skjølum.

Í sambandi við fyrireikingarnar at prosjektera vestursíðuna varð henda ætlan at byggja nýtt hús heldur enn at út- og umbyggja verandi hús viðgjørd. Semja var um, at hetta er ein uppá allar mátar betri loysn, men hon kundi ikki fremjast innanfyri tann fíggjarkarm, ið verkætlanin tá hevði.

Nú Fótbóltssambandið hevur samtykt at fíggja hesa broyting, verður mælt býráðnum til at broyta verkætlanina soleiðis sum lýst omanfyri, harundir at broyta tilhoyrandi partalagssáttmálan, høvuðsarbeiðstakarasáttmálan og samstarvsavtaluna við Fótbóltssambandið, men har játtanin hjá kommununi framhaldandi verður ikki hægri enn tær kr. 62,990 mió íroknað mvg, sum longu eru játtaðar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at samtykkja verkætlanina soleiðis broytt og at tilhoyrandi skjøl – partalagssáttmáli, høvuðsarbeiðstakarasáttmáli og samstarvsavtala við Fótbóltssambandið verða broytt samsvarandi. Harumframt verður mælt til at staðfesta, at játtanin hjá kommununi til byggiverkætlanina á vestursíðuni á Tórsvølli framhaldandi verður ikki hægri enn tær kr. 62,990 mió íroknað mvg, sum longu eru játtaðar.
**Mentamálanevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.
**Ískoyti:**
Víst verður til samstarvsavtaluna millum Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunu grein 5 um fíggjarligu viðurskiftini. Sambært hesum rindar kommunan sín part av íløgukostnaðinum í pørtum soleiðis, at í 2025 er alt goldið. Byggingin er ætlað at verða liðug í 2020/21.
Fótbóltssambandið hevur sent fyrispurning til kommununa, um til ber at gjalda kommunala partin skjótari. Fótbóltssambandið greiðir frá, at til tess at fíggja byggingina, bæði meðan bygt verður og árini fram til 2025, noyðist Fótbóltssambandið at taka upp lán fyri partin hjá kommununi, ið ikki er goldin.
Í hesum sambandi er Fótbóltssambandið í gongd við at kanna tilboð frá fíggjarstovnum. Greitt er, at Fótbóltssambandið skal bera týðandi fíggjarkostnaðir av hesum. Lagt verður aftrat, at Fótbóltssambandið virðir avtaluna og góða samstarvið við kommununa um Tórsvøll, men loyvir sær at spyrja kommununa, um til ber at gjalda kommunala partin skjótari.
Sbrt. grein 5 í avtaluni, so kann kommunan gjalda gjøldini skjótari. Higartil hevur kommunan veitt 10 mkr. í fígging av 62,990 mkr. Uppskot hjá Fótbóltssambandinum er, at kommunan t.d. rindar 33 mkr. nú ella næsta ár, og restina 19,990 mkr. árini 2020-21, so at byggingin verður ikki verður óneyðuga dýrkað av fíggjarkostnaðum.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at broyta gjøldini soleiðis, at 33 mkr. verða játtaðar í 2018 av tøkum peningi. Harumframt verður mælt til at játta 10 mkr. av íløgujáttanini fyri 2020 og 9,990 mkr. í íløgujáttanini fyri 2021.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.
**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

Ískoyti:
Byggingin av vestursíðuni verður liðug uml. 21. juni 2021, sum er 4 mðr. seinni enn upprunaliga ætlað. Orsøk til hetta er spilldagar serliga viðvíkjandi veðrinum, koronatíðarskeiðnum í vár og avbjóðingar við leveransum.

Umsitingin hevur saman við Fótbóltssambandinum viðgjørt møguleikan um forseringsavtalu (framskunding), harundir at gera verkætlanina endaliga upp.

Fyri FSF hevur forseringin týdning, tí at Tórsvøllur tíðliga í mai 2021 fyri fyrstu ferð skal verða karmur um stóra EM-endakapping í Føroyum. Talan er um U17-kvinnur, har føroyska U17-kvinnulandsliðið eisini tekur lut saman við 7 øðrum londum. FSF hevur lagt nógv fyri at gerast vertir fyri enn størri altjóða kappingum enn bólkaspølini og einstøku landsdystirnir, sum hava verið higartil, og fyri býin er hetta eisini av størstu altjóða tiltøkum.

Fyri kommununa hevur forseringin eisini týdning, at tað so tíðliga sum gjørligt ber til at byrja uppá arbeiðið at skifta graslíkið á Niðara vølli, tá byggiplássið er farið av vøllinum, tí arbeiði væntast at taka eina 8 vikur.

Samráð hevur verið við arbeiðstakaran og høvuðsráðgevan um forseringsavtalu og treytir í tí sambandi. Til ber at framskunda liðuggerð av bygginini til 7. apríl fyri ein samlaðan kostnað uppá kr. 3,55 mió ráðgeving og kommunala projektleiðslu íroknað.
Harumframt er aðrir kostnaðir í sambandi við byggiætlanina, ið tørva fígging.

Tá arbeiðið varð byrjað, vórðu kommunan og FSF samd um at tekna projektábyrgdaratrygging, sum ikki var við í upprunaligu fíggingini. Kostnaðurin av hesi trygging er kr. 0,79 mió íroknað tryggingarráðgeving. Aftrat eru eisini meirútreiðslur til keyp av tribunustólum og innbúgvi kr. 0,6 mió.

Forsering, tryggingarkostnaður og hinir nevndu kostnaðirnir er tilsamans kr. 4,94 mió u/mvg, sum ætlanin er, at FSF og kommunan býta í helvt, so sum gjørt er upprunaliga. Við kommunalum mvg er parturin hjá kommununi kr. 2,62 mió.

Gjørt verður í hesum sambandi ískoyti til grein 5 í samstarvsavtaluni við FSF viðv. byggingini av vestursíðuni, har samlaði parturin hjá kommununi verður broyttur frá kr. 62,99 mió v/mvg til kr. 65,61 v/mvg. Avtalað er eisini, at kommunan rindar tær kr. 22.610.000, forseringskostnaðurin íroknaður, sum eftir eru at gjalda, soleiðis:

- 2023 kr. 9.120.000
- 2024 kr. 8.000.000
- 2025 kr. 5.490.000

Haraftrat skal gerast ískoytissáttmáli við arbeiðstakara og høvuðsráðgevan um forseringina.

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Íløgujáttan sambært samstarvsavtalu fellur árini 2023-2025.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 22.610.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 0 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2023-2025 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 5775 | L57026 | | 5775 | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja ískoytisavtaluna við FSF, har samlaði verkætlanarkostnaðurin hjá kommununi er settur til kr. 65,61 mió v/mvg. Mælt verður til, at restfíggingin verða játtað soleiðis:

kr. 9.120.000 í íløguætlanini fyri 2023,
kr. 8.000.000 í íløguætlanini fyri 2024, og
kr. 5.490.000 í íløguætlanini fyri 2025.

Harumframt verður heimilað kommununi saman við FSF at gera ískoytisavtalur við arbeiðstakara og høvuðsráðgeva um forseringina.
**Mentamálanevndin 07. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at verkætlanin við hesum er gjørd endaliga upp í mun til krøv samsvarandi sáttmálunum áðrenn verksetan.
**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært býráðssamtyktini 25. oktober 2018 og samstarvsavtaluni millum kommununa og FSF sum byggiharrar skuldi kommunan gjalda kr. 10 mió í 2020 og kr. 9,99 mió í 2021 til byggingina av vestursíðuni.

Býráðssamtyktin 17. desember 2020 broytir hetta soleiðis, at gjøldini, tilsamans kr. 22,61 mió forseringsavtala íroknað, falla árini 2023-2025.

FSF ger í hesum sambandi vart við, at FSF við samtyktini 17. desember 2020 skal leggja hesar upphæddir út fyri kommununa, og at neyðugt verður við lántøku, ið hevur rentuútreiðslur við sær uppá uml. kr. 0,75 mió. FSF heitir á kommununa um nýggja viðgerð soleiðis, at kommunala fíggingin fellur samstundis, sum byggingin er liðug, tvs. í 2021 og sostatt í samsvari við samstarvsavtaluna frá 2018.

Omanfyri nevnda avtala um forsering er ikki sett í verk, og á stýrisbólkafundi er upplýst, at tó at arbeitt er eftir tíðarætlanini sbrt. ætlaðu forseringsavtaluni, har byggingin skuldi verða liðug 7. apríl 2021, so fer tað ikki at halda. Kommunan og FSF sum byggiharrar umrøða støðuna, harundir endauppgerð fyri samlaða kostnaðin, sum so semja má fáast um millum byggiharrarnar eins væl og við arbeiðstakara og høvuðsráðgeva.

Kommunan hevur í samstarvsavtaluni við FSF frá 2018 bundið seg til at gjalda kr. 19,99 mió árini 2020 og 2021, sum tó ikki eru játtaðar í íløguætlanini. Mett verður skilabest fyri bæði kommununa og FSF, at fíggingin verður fingin til vega. Uppskot er, at fígging verður fingin til vega av langhylsverkætlanina, sum mett verður ikki hevur tørv á allari íløgujáttanini í ár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at játta kr. 19,99 mió av projektkontu L57015 Svimjihøll (langhylsverkætlanin) til kontu L57026 Tórsvøllur vestursíðan.
**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Víst verður til ískoytið og tilmælið til fundin 10. februar 2021. Skotið verður upp at játta helvtina av fíggjartørvinum, tvs. kr. 10 mió nú, og at írestandi upphæddin verður tikin uppaftur við seinni høvi. Mett verður, at til ber at fíggja hetta av tøkari játtan í langhylsverkætlanini. Talan er um flyting av játtan innan somu høvuðskontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 10 mió av L57015 Svimjihøll (langhylur) til L57026 Tórsvøllur vestursíðan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Annika Olsen varð ikki við í viðgerðini av málinum.
**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í løguætlanini fyri 2022 eru settar kr. 13 mió av til Tórsvøll vestursíðan á løgukarmi 5772 Ítróttaranlegg LK57026.

Í sambandi við upprunaliga avtaluna við Fótbóltssambandið samtykti býráðið 1. mars 2018 ein samlaðan útreiðslukarm fyri kommununa uppá kr. 62,990 mió kommunalt mvg íroknað. Í ískoytisavtalu við Fótbótssambandið hevur býráðið í samtykt 7. desember 2020 síðani hækkað samlaða útreiðslukarmin til kr. 65,61 mió kommunalt mvg íroknað.

Av hesum manglar kommunan at rinda kr. 12,61 mió.

Byggingin av vestursíðuni er liðug. Endaligur byggiroknskapur verður lagdur fyri, so skjótt hann er liðugur. Fyribils kann staðfestast ein avmarkað meirnýtsla.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta kr. 13 mió av løgukarmi 5775 LK57026 til løgukontu 5775 Ítróttaranlegg L57026 Tórsvøllur vestursíðan, og í hesum sambandi at flyta Fótbóltssambandi Føroya kr. 12,61 mió. Málið verður at beina í býráðið um fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 12. januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið. Tó verður peningurin ikki útgoldin, fyrenn semja er um eina endaliga uppgerð fyri byggingina.
**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Avtalað er gjørd við Fótbóltsamband Føroya um hetta, og at teir manglar, ið enn resta í og staðfestir við 1. ára gjøgnumgongd, verða avgreiddir av Fótbóltsambandinum. Restupphæddin, ella minninýtslan, er kr. 1.616.800.

Verkætlanin varð liðug tíðliga á summri í 2021, umleið tveir mánaðir seinni enn ætlan sbrt. upprunaligu tíðarætlanini. Verkætlanarleiðslan er nøgd við hetta, tí hetta er eydnast hóast tær óvissur, sum vóru í lendisarbeiðinum v.m., umframt teimum uttanifrá komnum ókendum hendingum sum eingin kundi spáa um. Hendingum sum korona farsóttini og avbjóðingar við tilfarsveitingum vegna typta Suezkanal.

Víst verður eisini til mál 14/02615 um at loka verkætlanina Tórsvøll suðurendin og tørvandi fígging tí viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:
- at loka verkætlanina L57026 Tórsvøllur
- at restupphæddin kr. 1.616.800 verður flutt út á løgukarmin 5775 Ítróttaanlegg, og
- at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Mentamálanevndin 07. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 144/23 Framtíðar skipan av kunningartøkni í fólkaskúlunum í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 10.03.2022 | 21/22 | 21/02567-17 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 32/22 | 21/02567-17 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 19.06.2023 | 33/23 | 21/02567-17 |
| 4 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 188/23 | 21/02567-17 |
| 5 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 144/23 | 21/02567-17 |

**Upprunin til málið**
Samskifti millum Undirvísingarstýrið og Kommunufelagið.

**Lýsing av málinum**
Í september 2020 legði Uttanríks- og mentamálaráðnum (UMMR) og Undirvísingarstýrið fram ‘Heildarætlan fyri undirvísingarverkið’ – sí her: https://undirvising.fo/news/83/nyggj-heildaraetlan-fyri-kt-umsiting?_Search=heildar%C3%A6tlan

Ætlanin fevnir um:

UMMR/Undirvísingarstýrið arbeiðir við eini ætlan, ið hevur tveir høvuðspartar:

a). LFS-skipanin
Talan er um eina heildarskipan fyri umsiting v.m. av skúlum og fevnir um alt slag av skúlum í landinum, frá fólkaskúla til miðnám, yrkisskúlar og Fróðskaparsetur. UMMR hevur sett gongd á eina menning, men er enn ógreitt hvat fyri kostna hugsanin er at kommunur skulu rinda fyri framtíðar brúk av skipanini. Umboð fyri mentmáladeildin hevur luttikið í verkstovum um skipanin.

Í verandi støðu hava TK og kommunur eina heildaravtalu við Nám, ið m.a. fevnir um skipanina Kervi, ið verður brúkt sum umsitingarskipan í fólkaskúlunum.

Avtalan er frá 26. mars 2021 og fevnir um undirvísingartilfar og aðrar talgildar loysnir og undirvísingarportalin Snar. Summir skúlar brúka allar hentleikarnar í Kervi og aðrir ikki fult, tó so grundskráseting av næmingum er á øllum skúlunum og eisini evni fyri hetta málið. Sum heild tykjast skúlarnir nøgdir við skipanina.

Avtalan við Nám gongur fram til 2024 og er ikki uppsøgd hvørki av Námi ella kommununi. Í fyrstu atløgu verður støðutakan til hesa skipan at bíða eftir nærri uppleggi frá UVS/UMMR til KF.

b). Skúlanet
Snýr seg um atgongd til forrit (t.d. Office 365), nettænastur og netverk, umframt ymiskt innan KT-trygd. Partar av hesum eru longu fevnd av heildaravtaluni við Nám, meðan nettænastur og netverk í høvuðsheitum hava verið staðsett lokalt á einstøku skúlunum.

Á størru skúlunum er talan um netverk, ið fevna bæði um funktión í mun til skrivstovuhaldið, ið er tengt at kommunala kervinum, bygningsskipanir, ið eru tengdar at kommunala kervinum, umframt oftast ffrítíðarskúla og ítrótt og vanliga skúlavirksemi.

Tískil verður ikki uttan víðari viðgerð (serliga á stóru skúlunum) mett upplagt at leggja ræði av netverkunum til skúlanet/landsnet at umsita. Hetta eigur at vera skipað sbrt. eini nærri avtalu millum kommununa og landsmyndugleikan og til ein kostna, ið partarnir semjast um. Ein komandi ábygdarbýti vil kunna innibera at skúlanet framvegis veitir ymiskar nettænastur, so sum active directory, Office 365 v.m.

KT-deildin í Tórshavnar kommunu metir at sum útgangsstøði eigur umsitingin at netverkunum at liggja hjá KT-deildini. Í sambandi við nýggja skúlan á Fløtum var skipað soleiðis fyri at KT-deildin t.d. hevur ræði á firewall v.m. Fyri TK hevur málið eisini tað perspektivi at KT-deildin fær størri øki at umsita og sum so kann vera grundarlag fyri einum starvi afturat innan netverk á KT-deildini.

Hvat viðvíkur KT-trygd so setir kommunan eins høg krøv og landið gerð og tí er meiri spurningurin um, hvussu tað verður farið fram reint praktiskt at tryggja at skúlanir liva upp til galdandi krøv. Hetta eigur at vera gjørt sbrt. nærri ætlan, dialogi og samstarvi og kundi skúlanet fingið ein váttan t.d. frá KT-grannskoðara um trygdarstigi á netverkunum í skúlunum.

TK hevur í 2021 fingið greinað netverkini á øllum skúlunum.

Greitt er, at óansæð um økið verður skipað á ein ella annan hátt kemur at krevja hægri fígging enn í verandi støðu og tí verður neyðugt til fíggjarætlanina 2023 at taka støðu til tey viðurskiftini. Á fundinum verður greitt frá fyribils metingum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
- Uppskot til SLA
- Uppskot til prísmyndil
- Framløga um skúlanet

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á KT-deildini, og mentmálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja, at TK umvegis KF tekur upp samráðingar við UVS/Skúlanet um eina samstarvsskipan.

**Trivnaðarnevndin 10. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Síðani viðgerðina seinast hevur Kommunufelagið (KF) samráðst liðugt við UVS/Skúlanet um samstarvsviðurskiftini við kommunurnar. Nú fyriliggja tað avtaluskjøl (sí hjálagt), ið KF metir eru í lagi og har tað samstundis er greitt, at UVS/Skúlanet góðtaka, at tað kunnu vera serstøk viðurskifti í TK, ið grundað onkra tillaging eins og greitt frá í málinum seinast.

Tískil er nú klárt hjá TK at fara undir realitetssamráðingar beinleiðis við UVS/Skúlanet um viðurskiftini á kommunalu fólkaskúlunum í TK. Eisini skal dagførd avtala gerast við Nám, nú partur av veitingunum, ið hava verið undir heildaravtaluni við Nám, skulu flytast yvir í samstarvsavtalu við UVS/Skúlanet.

Ikki er greitt enn hvønn meirkostna talan verður um, óansæð um hvør avtalan verður og partin, ið KT-deildin kemur at umsita. Hugsanin er at viðgera skúlarnar í nøkrum stigum og fáa greiði á tí og hava tað klárt ísv. fíggjarætlanarviðgerðina fyri 2023.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á KT-deildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja at TK fer í samráðingar við UVS/Skúlanet um eina samstarvsavtalu og at dagføra avtaluna við Nám.

**Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samskifti og felags verkstovum við Undirvísingarstýrið og KT-landsins um verkseting av Skúlaneti fyri Tórshavnar kommunu.

Sum framgongur í málslýsingini frammanfyri varð mett, at KT-deildin hjá kommununi hevur supportera skúlarnar í ein ávísan mun. KT-deildin hevur tó ikki beinleiðis umsitið netverk uttan onkran av teimum smáu. Tilgongdin omanfyri er komin til ta niðurstøðu, at har tað í mun til skipanarliga ábyrgd, trygd, menning og fígging verður mett rætt, at kommunan ger sáttmála við Skúlanet (KT-landsins). Tað loysir seg ikki kommununi heldur at standa uttanfyri.

Umsitingin vil tó mæla til, at kommunan tryggjar sær eitt umboð í Stýrisráðnum fyri Skúlanetið, so at kommunan við nærum helvtini av øllum fólkaskúlanæmingum í Føroyum hevur møguleika at hava virknan leiklut í menningini og skipanini frameftir.

Stýrisráðið er mannað við umboðum fyri KT-landsins, Undirvísingarstýrið og Kommunufelagið, og hevur m.a. til viðgera uppskot frá ávikavist Brúkararáðnum og KT-didaktiska ráðnum, veitarasáttmálar, trygdarstøðuna, rakstrarroknskap, limagjald v.m. Undirvísingarstýrið metir, at eitt umboð frá Tórshavnar kommunu eigur at verða umboðað gjøgnum Kommunufelagið. Umsitingin mælir tí til, at kommunan tekur umboðanina í Stýrisráðnum upp í Kommunufelagnum.

<u>Kostnaður:</u>
Prísmyndilin fyri einstøku skúlarnar er skipaður við grundgjaldi, brúkaragjaldi og netgjaldi.

Grundgjaldið fyri stóran skúla sum t.d. Eysturskúlin er kr. 3.700 um mðr. ella kr. 44.400 um árið. Fyri lítlan skúla sum Nólsoyar skúli er mánaðarliga grundgjaldið kr. 500, og sostatt kr. 6.000 um árið.

Brúkaragjaldið er sett saman av talinum av næmingum og næmingateldum. Eindarkostnaður fyri hvønn næming er kr. 10 og fyri hvørja næmingateldu eisini kr. 10. Skúlateldur hava ein eindarkostnað uppá kr. 60. Hinvegin rindar landið (Undirvísingarstýrið) brúkaragjaldið fyri lærarar/starvsfólk og fyri lærarateldur.

Netgjaldið er sett saman av talinum av accespunktum (kr. 100 pr. stk. um mðr.), Switch 24 port (kr. 200 pr. stk. um mðr.), Switch 48 port (kr. 300 pr. stk. um mðr.) og Firewall alt eftir slag (kostnaður varierar frá 300 pr. stk. til kr. 1.500 pr. stk. um mðr.). Hetta er eitt ymiskt fyri ymsu skúlarnar.

Ávegis kostnaðarmeting av SLA, avtalu um Skúlanet, fyri allar kommunalu skúlarnar í Tórshavnar kommunu, uml. kr. 1,6 mió í rakstri um árið. Av tí at allir skúlar ikki koma uppí frá 1. januar 2024, er fíggjartørvurin í 2024 nakað lægri, uml. kr. 1,5 mió.

Áðrenn hetta arbeiðið fer í gongd skal kommunan kanna allar netleiðingar, og at gomul útgerð (t.d. teldur eldri enn 6 ár, gamlir printarar o.líkn.), sum ikki lúka ávís krøv, verður skift út. KT-deildin metir varisliga hesar fyrireikingar at kosta uml. kr. 500.000, men her er ávís óvissa í mun til teir eldru skúlarnar. Vent aftur til neyvari kostnaðarmeting eftir summarfrítíðina, tá nærri greiningar eru gjørdar.

Konseptið í Skúlaneti viðv. keyp av útgerð er annars, at skúlar kunnu taka lut í felagsinnkeypi hjá KT-landsins, men skúlarnir rinda sjálvir teldur, skíggjar etc., men tað verður gjørt klárt av KTL.

Harumframt rindar skúlin fyri linjurnar, meðan netúgerðin (firewall, switchir og Access Points) verður umsitin av KTL. Sjálv útgerðin, rætting av feilum og dagligur rakstur av netsambandinum er við í tænastugjaldinum.

Gjaldið fyri skúlanetið fevnir haraftrat um LFS-skipanina (lestrarfyrisitingarskipanin/Kervi+), kt-trygd, hýsing, brúkaraumsiting, support vm,

<u>Skjalhald</u>
Aftrat avtaluni um Skúlanet, skal gerast avtala um at seta í verk Skjalhald, sum er journalskipan (360) til kommunuskúlarnar á Skúlanetinum. Journalskipan er krav frá Dátueftirlitinum til allar skúlar, og Undirvísingarstýrið hevur í hesum sambandi skipað felags journallyklar fyri alt undirvísingarverkið eisini eftir fólkaskúlan. Við hesum fara allir skúlar í Tórshavnar kommunu at lúka krøvini um skjalhald.

Kostnaður at seta í verk og rakstur annars journalskipan er 240 tkr. fyrsta árið við íverksetan og síðani 150 tkr. árliga.

<u>Tíðarætlan</u>
Niðanfyri framgongur tíðarætlan fyri, nær einstøku skúlarnir verða knýttir uppí Skúlanetið.

| Skúli | Byrjan stig 1. | Nema verksetur | Byrjan stig 2 | Gjaldstovan verksetur |
|---|---|---|---|---|
| Skúlin á Fløtum | 27.12.23 | netpartur | 08.01.24 | teldur, talvur, print |
| Eysturskúlin | 15.01.24 | netpartur | 31.01.24 | teldur, talvur, print |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 29.01.24 | netpartur | 19.02.24 | teldur, talvur, print |
| Skúlin á Argjahamri | 05.02.24 | netpartur | 11.03.24 | teldur, talvur, print |
| Páskafrí | | | | |
| Hoyvíkar skúli | 19.02.24 | netpartur | 25.03.24 | teldur, talvur, print |
| Próvtøka 16-18 Apríl | | | | |
| Sankta Frans skúli | 04.03.24 | netpartur | 22.04.24 | teldur, talvur, print |
| Kollafjarða skúli | 18.03.24 | netpartur | 06.05.24 | teldur, talvur, print |
| Próvtøka 22-27 Mai | | | | |
| Skúlin í Kaldbak | 02.04.24 | netpartur | 29.05.24 | teldur, talvur, print |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Skúlin í Velbastað | 08.04.24 | netpartur | 12.06.24 | teldur, talvur, print |
| Skúlin í Nólsoy | 15.04.24 | netpartur | 19.06.24 | teldur, talvur, print |

Nýggj játtan skal sostatt setast av til hesar útreiðslurnar í 2024, og sum tekur hædd fyri, nær Skúlanet og Skjalhald er rullað út á einstøku skúlarnar.

Í sambandi við fíggjarætlanina 2024 verður neyvari eftirkanna, um útreiðslur eru fevdnar av sáttmálunum, og sum eisini eru fevndar av verandi játtanum hjá skúlunum, og sum tí skulu mótroknast í samlaðu játtanini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, KT-leiðarin og mentamálaleiðarin mæla til, at allir teir kommunalu fólkaskúlarnir verða knýttir uppí Skúlanetið og Skjalhald, og í hesum sambandi

- at gera sáttmála við KT-landsins *um tænastustig av Landsnet/Skúlanet grundtænastum*, og
- at gera ískoytissáttmála um *tænastustig av Landsnet/Skúlanet grundtænastunum – Skjalhald á Landsneti/Skúlaneti.*

Harumframt verður mælt til at játta kr. 1.500.000 til kostnaðin av Skúlaneti og kr. 240.000 til kostnaðin av Skjalhald í fíggjarætlanini 2024, og at fíggjarætlanin hjá skúlunum fyri 2024 verður tillagað alt eftir, um útreiðsla er fevnd av sáttmálunum.

**Trivnaðarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býraðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 572 |
| | Formansins merki: |

# 145/23 Skert virksemi á dagstovnaøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.09.2021 | 198/21 | 21/03719-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 24/22 | 21/03719-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 17.08.2022 | 169/22 | 21/03719-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 194/22 | 21/03719-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.06.2023 | 111/23 | 21/03719-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 160/23 | 21/03719-1 |
| 7 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 145/23 | 21/03719-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Dagstovnaøkið í Tórshavnar kommunu hevur í eina tíð verið merkt av manglandi starvsfólkum, hendan støðan hevur yvir eina tíð elvt til avbjóðingar vegna starvsfólkamangul. Avbjóðingarnar hava ført við sær, at neyðugt var tí at gera eina greiða mannagongd fyri, sum hjálp til teir stovnsleiðarar, sum hava avbjóðingar við at dekka dagin vegna sjúku ella manglandi starvsfólk.

Tá stovnurin av einari ella aðrari orsøk manglar starvsfólk, er tørvur á mannagongd fyri, hvussu man skilabest kann hjálpa teimum stovnum, sum hava avbjóðingar og ikki megna at hava vanligt virksemi vegna sjúku ella manglandi starvsfólk.
Mannagongdin skal síggjast vegleiðandi í mun til hvørjar loysnir kunnu bjóðast til hvønn stovn og í mun til hvørja avbjóðing stovnurin hevur.

Viðhefta skal leggjast við.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

Mentamálanevndin 15. september 2021: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Á fleiri stovnum er átrokandi tørvur á starvsfólkum til dagstovnaøkið fyri at halda vanligum virksemi uppi.

Sum kunnugt er gjørd mannagongd fyri, hvussu eindarleiðarar og stovnsleiðarar skilabest kunnu loysa støður, tá ein stovnur av einari ella aðrari orsøk manglar starvsfólk antin vegna sjúku ella vantandi starvsfólk. Mannagongdin er vegleiðandi í mun til hvørjar loysnir kunnu gerast til hvønn stovn og í mun til hvørja avbjóðing stovnurin hevur. Henda mannagongd hevur verið nýtt til at troyta allar møguleikar, áðrenn virksemið verður skert.

Líkt er til, at hóast korona tilmælini nú verða sett úr gildi, og dagstovnar aftur skulu hava opið sum vant, verður eisini eftir korona neyðugt at koyra við skerdum virksemi á fleiri stovnum vegna starvsfólkatrot.

Nógvar starvslýsingar eru at síggja og tað eru stovnar, sum eru noyddir at lýsa fleiri ferðir antin við at leingja freistina ella at seta endurlýsing í, vegna at eingin søkir ella ov fá søkja, umsøkjararnir hava fingið annað starv ella at teir ikki eru mettir egnaðir. Hetta leggur eitt stórt trýst á einstaka leiðaran, tí hann fær ikki sett starvsfólk í normeringina, so at hon samsvarar við barnatalið á stovuni/stovninum. Børnini eru har, men starvsfólkini vanta.

Avleiðingarnar av hesum eru stórar:

- Verandi starvsfólk á dagstovnunum brenna út og orka ikki at toyggja seg longur, enn tey longu hava gjørt.
- Starvsfólk eru stúrin, trupult er at avgreiða frítíð/avspáking og yvirhøvur at fáa rúm fyri førleikamenning, tí at vikarar fáast ikki.
- Trýst verður lagt á leiðaran av atfinnandi og stúrnum foreldrum, tí at fakliga støðið fellur, tá fakfólk mangla.
- Nógv útskifting av starvsfólki nervar samanhangin og framhald í námsfrøðiliga arbeiðinum, umframt at tað skapar ótryggleika millum foreldur og børn.
- Stovnsleiðarar eru bangnir fyri at missa starvsfólk, tí starvsfólk alla tíð skulu fyrihalda seg til nýggjar støður. Arbeiðsætlanin verður ofta broytt og starvsfólk verða flutt á aðrar stovur at arbeiða. Her skulu tey fyrihalda seg til onnur børn og foreldur, sum tey dagliga ikki eru kend við. Tað er eitt inntriv í vanliga arbeiðið og tá hetta hendur ov ofta, so kann arbeiðsgleðin falla og mistrivnaður verða.
- Tá nógv fakfólk mangla, hava stovnar ikki í líka stóran mun møguleika at seta nýggj starvsfólk inn í starvið og geva upplæring í námsfrøðilig viðurskifti. Hetta trýstir námsfrøðingarnar, roynd hjálparfólk og leiðaran, tí at ov fáar hendur kunnu lyfta frálæruuppgávuna.
- Leiðarar á øllum stovnum stríðast fyri at fáa viðurskiftini at hanga saman, virka sum "kitt" á stovnunum, avloysa fyri sjúk starvsfólk og loysa leiðsluuppgávuna uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Leiðarar eru í stórum vanda fyri strongd og at brenna út vegna arbeiðstrýst.

Trupult er á fleiri stovnum at manna neyðugu størvini til at halda vanligum virksemi uppi, og ítøkiliga koyra 3-4 stovnar í løtuni við skerdum virksemi vegna starvsfólkatrot, sum ikki skyldast sjúku ísv. korona. Harumframt eru aðrir stovnar í vanda fyri tí sama, um ikki starvsfólk verða sett áðrenn mánaðarlok.

Talan er í løtuni um ítøkiligar stovnar, har arbeitt verður við at loysa trupulleikan. Væntast kann tó, at trupulleikin breiðir ella flytir seg, soleiðis at hetta verður støðan í eina tíð framyvir.

Neyðugt er í hesum førum at koyra við skerdum virksemi, og tað skapar sera stóra ónøgd millum foreldur, ið venda sær við klagum til einstakar dagstovnaleiðarar og til Barna- og Ungdómsdeildina.

Í nógvum førum ynskja/krevja foreldur eisini at fáa endurgjald frá kommununi fyri mista ansing, tá stovnurin ikki megnar at veita ta tænastu, foreldrini gjalda fyri. Fleiri foreldur eru firtin um, at tey missa arbeiðsinntøku, tá tey noyðast at hava børnini heima ella at heinta tey tíðliga.

Fyri at tryggja verandi starvsfólkahóp og fyri at fáa arbeiðsgleði og trivnað, so kundi verið umhugsað at skerja upp- og afturlatingartíðirnar hjá stovnum í eitt tíðarskeið, so at opið er millum 7:45 og 16:15. Hetta hevði allarhelst kunna ávirka, at meira yvirskot bleiv til námsfrøðina, umframt at størri partur av arbeiðsorkuni verður konsentreraður í hetta tíðarskeiðið, og at tað tí eru fleiri hendur til at lyfta námsfrøðiligu uppgávuna. Hinvegin eru stovnar, sum ikki eru eins hart sperdir viðvíkjandi starvsfólkaorku, at skerjing av virkseminum yvir alt dagstovnaøkið vil tykjast ikki at vera rætt.
Rekrutteringsavbjóðingin m.a. viðvíkjandi námsfrøðingum á dagstovnaøkinum sum heild er eisini mál, sum tikið er upp í landsstýrinum seliga hvat útbúgving viðvíkur, men er mál, sum ikki loysir støðuna her og nú.

Aftrat er støðan, at kommununi tørvar at stovna fleiri stovnspláss og harvið fleiri starvsfólk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við skert virksemi, sum gjørdi seg galdandi á nøkrum stovnum fyrr í vár, varð boðað frá, at tá kommunan ikki veitir full tænastu, verður foreldragjaldið frá 1. mars 2022 afturgoldið í lutfalli við longdina av skerda virkseminum.

Gjørd er nú uppgerð fyri tíðarskeiðið mars-juni. Útgangsstøðið hevur verið, at skerda virksemið skal í minsta lagi hava verið tveir tímar. Tey, ið fáa systkinaavsláttur ella fíggjarligt fríplass og tí einki foreldragjald rinda, fáa einki afturgoldið.

Tilsamans er talan um afturgjald kr. 164.457,91, sum verður drigið av foreldragjaldinum fyri augst 2022. Yvirlitið vísir, at skert virksemi hevur verið á 12 dagstovnum 0-6 ár.

Sum støðan við rekruttering er, kann ikki útilokast, at skert virksemi verður á nøkrum stovnum framyvir. Støða skal takast til, um kommunan framhaldandi skal gjalda aftur foreldragjald í samnbandi við skert virksemi fyri dagstovnaárið 2022-23.

Viðvíkjandi gongdini við starvsfólkum er hjálagt yvirlit, sum lýsir gongdina frá februar 2021 til mai 2022. Sambært hesum vaks starvsfólkatalið munandi. Yvirlitið lýsir eisini lutfallið millum námsfrøðingar og hjálparfólk og aldurssamanseting. Onnur viðurskifti eru eisini lýst, sum man kann arbeiða víðari við bæði viðvíkjandi fastari setan, starvsbrøki og útbúgving.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til, at nevndin tekur til eftirtektar yvirlitið yvir afturgjald fyri tíðarskeiðið mars-juni 2022. Harumframt verður mælt til, at nevndin tekur støðu til, um kommunan framhaldandi skal gjalda aftur foreldragjald í sambandi við møguligt skert virksemi fyri dagstovnaárið 2022-23 eftir sama leisti sum higartil.
**Mentamálanevndin 17. august 2022:** Samtykt at framhaldandi gjalda aftur foreldragjald í sambandi við skert virksemi fyri dagstovnaárið 2022-23 eftir sama leisti sum higartil og beina málið í fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndinin.

**Ískoyti**:
Í sambandi við skert virksemi á dagstovnum boðaði kommunan í mars 2022 frá, at frá 1. mars 2022 verður foreldragjaldið afturgoldið í lutfalli við longdina av skerda virkseminum.

Í august 2022 varð samtykt at framhaldandi gjalda aftur foreldragjald í sambandi við skert virksemi fyri dagstovnaárið 2022-23 eftir sama leisti sum higartil.

Nú er dagstovnaárið 2022-23 um at vera liðugt, og neyðugt er tí at taka nýggja støðu til, hvat skal gerast í sambandi við skert virksemi.

Síðani august 2022 hava hvønn mánað verið millum 10 til 22 stovur, sum hava verið stongdar í meira enn tveir tímar í millum 1-3 dagar í einum mánaði. Undantikið er januar 2023, tá bert 3 stovur vóru stongdar 1-2 dagar vegna skert virksemi.

Við verandi skipan hava foreldur fingið endurgjald fyri í foreldragjaldinum fyri hvønn heilan dag, har skert virksemi hevur verið tveir tímar ella meira, og har skerda virksemið skyldast starvsfólkatroti.

Frá august 2022 til og við apríl 2023 eru latnar kr. 308.000 í endurgjaldi, ella í miðal góðar kr. 34.000 um mánaðin. Fyri eitt heilt dagstovnaár kann tí roknast við, at okkurt um kr. 400.000 skulu roknast í mistum foreldragjaldi vegna endurgjald fyri skert virksemi. Henda upphædd er ikki fíggjað serstakt, og kemur tí at mangla í við foredragjaldinum.

Skal skipanin halda áfram, er tí neyðugt at gera eina serstaka játtan til at veita endurgjald fyri skert virksemi.

Í dag krevur skipanin heilt fitt av skráseting og fyrisitingarligum meirarbeiði. Hvør dagstovnaleiðari skal skráseta skerda virksemið hvønn mánað. Barna- og Ungdómsdeildin hevur síðani skrásett øll børnini, ið hava verið umfatað av skerda virkseminum galdandi mánaðin, hvørjir gjaldarar eru og hvør upphædd skal mótroknast. At enda hevur Fíggjardeildin fingið eitt samlað yvirlit, har útroknaða upphæddin skal krediterast til skrásetta gjaldaran fyri tann mánaðin. Ofta liggur talið á skrásetingum millum 200-400 børn (mótrokningar). Talan er tí um eina týðandi fyrisitingarliga byrðu við verandi skrásetingarskipan.

Skal skipanin við endurgjaldi í foreldragjaldinum fyri skert virksemi halda fram, er tí neyðugt at gera eina nýggja skipan, har mótrokningin kann fara fram meira automatiserað. Mælt verður til, at skal skipanin halda áfram, verður ein bólkur settur at finna eina meira automatiseraða loysn til at mótrokna fyri skert virksemi.

Galdandi samtykt hevur eina sólsetursáseting til og við juli 2023. Skal skipanin við endurgjaldi í foreldragjaldi fyri skert virksemi halda fram, er tí neyðugt við nýggjari samtykt. Mælt verður til, at skal skipanin halda fram, verður í mesta lagi játtað fyri eitt ár í senn.

Ætlanin kann ikki vera, at talan skal gerast um eina varandi skipan.

Alternativ til at leingja endurgjald fyri skert virksemi er at steðga skipanini soleiðis, at tað frá august 2023 ikki verður endurgoldið fyri skert virksemi. Fyri talar, at hetta er ein ampi fyri foreldur í sera stutta tíð, sum sjálvandi er keðiligur, men sum lutfalsliga ikki stórur, bert uml. 0,5% av samlaðu foreldragjøldunum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri Barna- og Ungdómsdeildina mæla til at steðga skipanini við endurgjaldi í foreldragjaldinum fyri skert virksemi frá og við juli 2023.

Um nevndin ikki tekur undir við tilmælinum, men samtykkir at halda fram við skipanini, so verður mælt til, at

- hetta verður tiðaravmarkað skipan til og við juli 2024,
- at játtaðar verða uml. kr. 500.000 í fíggjarætlanini 2024 fyri mistar inntøkur í foreldragjaldi á grein 3 Børn og ung, og
  at bólkur verður settur at gera automatiseraða loysn til mótrokning.

**Mentamálanevndin 07. juni 2023:** Samtykt at halda fram við skipanini til og við juli 2024,

- at játtaðar verða uml. kr. 500.000 í fíggjarætlanini 2024 fyri mistar inntøkur í foreldragjaldi á grein 3 Børn og ung,
  at bólkur verður settur at gera automatiseraða loysn til mótrokning, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini. Nevndin mælir til at virka fyri, at skert virksemi verður avmarkað í mest møguligan mun.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

## 146/23 Eldradepil í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 08.10.2020 | 17/20 | 20/03750-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 255/20 | 20/03750-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 223/20 | 20/03750-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.06.2023 | 92/23 | 20/03750-1 |
| 5 Heilsu- og eldranevndin | 19.06.2023 | 17/23 | 20/03750-1 |
| 6 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 146/23 | 20/03750-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Verandi sambýli í Kollafirði hýsir 7 borgarum. Táverandi Kollafjarðar kommuna keypti bygningin Inni í Firði 97 í 1995. Í sambýlinum er rúm fyri 7 borgarum. Sambýli er ikki longur tíðarhóskandi umframt at tørvur er á væl fleiri plássum enn tey 7, sum eru har í dag. Heldur ikki eru umstøður at venja í verandi hølum. Í Kollafirði er heimatænastan integrerað við sambýlið, soleiðis at tað eru somu starvsfólk, sum arbeiða á sambýlinum, sum eisini koyra út til teir heimabúgvandi borgararnar. Henda skipan hevur sum heild virka væl, men av tí at sambýli er so lítið og tørvur ikki er á, at fleiri enn tvey starvsfólk eru til arbeiðis í senn, kann tað gerast ein trupulleiki at annar má fara av heiminum til heimabúgvandi borgarar. Hetta hevði verið væl smidligari skipan um sambýli var størri við fleiri borgarum, tí so hevði starvsfólkanormeringin verið økt samsvarandi.

Í uppskoti til kommunuætlan 2020 sæst m.a., at kommunan vil virka fyri at nøkta tørvin á búplássum á eldraøkinum og at kanna tørvin á og finna hóskandi loysnir til, at eldraíbúðir kunnu byggjast og sostatt gera bústaðarmarknaðin meira fjøltáttaðan. Valið skal ikki standa millum at búgva í sethúsum ella á røktarheimi.

Fyrisitingin hevur gjørt eina virksemisætlan, ið lýsir tørvin á útbyggingum á eldraøkinum. Henda virksemisætlan var løgd fyri eldranevndina 11. sept. 2017 (j. nr. 17/00086). Í virksemisætlanini verður m.a. mælt til, at byggja eldradepil í Kollafirði at taka í nýtslu 2024-2025.

Sambært virksemisætlanini skal á deplinum vera pláss fyri 24-30 borgarum, blandað røktarbúpláss, stutttíðarpláss og røktaríbúðir. Harafturat skulu dagtilhald og venjingarumstøður verða á deplinum.

Niðanfyri verður greitt frá framtíðartørvinum á eldrabúplássum við støði í frágreiðing, ið var gjørd í 2016:

Sí leinki
https://www.torshavn.fo/get.file?ID=2434

Frágreiðingin, s. 29, sí talvu niðast, vísir, at longu í 2030 verður tørvur á 359 røktarbúplássum í Tórshavnar kommunu um verandi dekningsstig[1] verður varðveitt.

[1] Í Tórshavnar kommunu er dekningsstigið 26,5%, hetta merkir eisini, at tað er eitt røktarbúpláss fyri umleið fjórða hvønn borgara, sum er 80 ár og eldri. Hetta er væl hægri enn fyri Danmark, har tað er eitt røktarbúpláss fyri umleið 5. Hvønn borgara 80 ár og eldri. Norra og Svøríki hava uppaftur lægri dekningsstig

Elstu aldursbólkarnir vaksa meira lutfalsvís við tað, at livitíðin gerst longri. Í 2030, um 10 ár, er aldursbólkurin 80+ væntandi næstan dupult so stórur, sum hann var í 2015 og verður væntandi umleið tríggjar ferðir so stórur í 2050, sum hann var í 2015.

Aldursbólkurin 80 ár og eldri

| | 2000 | 2010 | 2015 | 2020 | 2030 | 2040 | 2050 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **80-84 ÁR** | 272 | 353 | 372 | 465 | 710 | 825 | 966 |
| **85-89 ÁR** | 137 | 192 | 245 | 248 | 405 | 543 | 761 |
| **90-94 ÁR** | 40 | 103 | 112 | 141 | 181 | 292 | 369 |
| **95-99 ÁR** | 8 | 17 | 26 | 35 | 46 | 85 | 138 |
| **100+ ÁR** | 0 | 4 | 7 | 9 | 14 | 24 | 37 |
| **TILSAMANS** | 457 | 669 | 762 | 898 | 1356 | 1769 | 2271 |
| **INDEKS, 2015=100** | **60** | **88** | **100** | **118** | **178** | **232** | **298** |

*Talva 10 Fólkaframrokning býtt á aldur 80 ár og eldri, haraftrat eru árini gjørd um til indeks, 2015=100, kelda: biløgd tøl frá Hagstovu Føroya*

Tí var eyðsæð neyðugt at venda sjóneykuna móti hesum aldursbólki og framtíðartryggja ta røkt og tey átøk, sum væntandi verða neyðug, m.a. rehabilitering og vælferðartøkni sum eru við til at útseta tørvin á røktarbúplássi.

Í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. frá 2014 er í grein 13 ásett, at kommunur kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar. Bústaðir kunnu sbrt. stk. 2 fevna um 1) røktarheim, 2) eldrasambýli, 3) eldraíbúðir, 4) umlættingarpláss og 5) samdøgursendurvenjingarpláss. Í 2019 var lógin broytt og eftir § 13, stk. 3 fingu kommunurnar nú eisini heimild at seta á stovn eldraíbúðir at leiga út til borgarar, ið eru 60 ár og eldri.

Í løtuni verður síðsta hond løgd á Umlættingar- og rehabiliteringsdepil í Hoyvík, umframt at útbygging á Tjarnargarði eru um at vera liðug. Hetta merkir at Tórshavnar kommuna komandi ár hevur 247 lang- og stutttíðarpláss.

Hugsað er, at í eldradeplinum í Kollafirði skulu umframt lang- og stutttíðarpláss eisini vera eitt ávíst tal av røktaríbúðum. Við støði í lógarásetingini, sum nevnd er omanfyri, so eru eldraíbúðir eisini bústaðarloysn, ið kommunur kunnu stovna. Talan kann vera um røktaríbúð og eldravinarliga íbúðir.

Felags fyri allar eldraíbúðir er tó, at tær skulu vera innrættaðar hóskandi við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og rúmligum baðirúmi, so tað er pláss fyri koyristóli og hjálparfólki. Íbúðirnar skulu ikki hava trappu til høvuðsinngongd, og um íbúðin ikki er í veghædd, skal lyft vera til íbúðina. Eitt annað, ið eisini er øðrvísi við eldraíbúðum í mun til búpláss á røktarheimi er, at í íbúðunum kunnu búgva hjún ella sambúgvandi. Røktaríbúð vil vanliga vera næstsíðsti bústaðurin, áðrenn upptøku til fast røktarheimspláss.

Røktaríbúðir kunnu við tí størsta fyrimuni byggjast saman við einum røktarheimi, har borgarin fær ágóða av øllum felagsfasilitetunum eitt nú venjingarumstøðum og trivnaðartilboðum annars. Eru røktaríbúðir knýttar at røktarheimi, verða tað starvsfólk á røktarheiminum, sum veita ta heimatænastu, ið borgarin annars vildi fingið sum heimabúgvandi. Hetta lættir sostatt um hjá heimatænastuni, men krevur ávísa tillaging av røktarnormeringini á heiminum. Kommunan hevur, sum omanfyri nevnt, heimild at byggja og reka røktaríbúðir.

Røktaríbúðirnar, hóast bygdar saman við ella upp at einum røktarheimi, eru leiguíbúðir, og kunnu tí byggjast og umsitast við støði í tí, men har kommunan tryggjar sær fullan visitatiónsrætt.

Visitatión til plássini á eldradepilinum í Kollafirði eins og øllum øðrum plássum í kommununi, skal fara fram sambært lóggávuni, har tann borgari sum hevur størsta tørvin, fær bjóðað plássið.

Í sambandi við bygging av nýggjum eldradepli í Kollafirði, er ætlanin sostatt, at bygt verður eitt røktarheim við røktarbúplássum, stutttíðarplássum, røktaríbúðum við dagtilhaldi og venjingarumstøðum og atknýttum røktar íbúðum. Vælferðartøkni og snildtøkni (samskiftisútgerð, trygdar- og ávaringarskipanir) eigur at hugsast inn.

Bygginevnd verður sett at áseta nærri lutfall millum ymisku búplássini og tal av røktaríbúðum saman við fakumboðum.

Lagt verður við hesum upp til at sjøtul verður settur á arbeiðið at fyrireika bygging av einum eldradepli í Kollafirði.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávísøkir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, eindarleiðari í Heilsuhúsinum mæla til, í samband við ætlan um at byggja eldradepil í Kollafirði sum tað fyrsta at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at ávísa hóskandi grundøki til at byggja á, at sett verður bygginevnd og í hesum sambandi játta kr. 2 mio. á fíggjarætlanini fyri 2021 til byggiskrá og projektering, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 08. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við Eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Vegna Kollafjarðarnevndina framsetti Elin Debess, nevndarlimur, í juni 2022 eitt ynski um at umtalaði eldradepilin í Kollafirði eigur at staðsetast á grundøkinum við matr. nr, 74a á Todnesi í Kollafirði. Grundøkið hoyrir undir Føroya jarðargrunn.
Sí hjálagda skjal: *Grundøki til umrøðu í sambandi við eldradepil í Kollafirði 24 mai 2023*, j. Nr. 20/03750-6

(Her skal skoytast uppí, at fleiri matriklar eru í økinum, sum hava heitið 74a, men talan er her um tann av teimum, sum hevur kortvíddina 8.031m², og sum tann einasti av teimum er umfataður av byggisamtyktini D3, sum er ætlað «stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt».
Henda byggisamtyktin stavar frá eini ætlan fyri Kollafjørð frá 1978.

Vegna Kollafjarðarnevndina sigur Elin Debess, her eru fleiri góðar orsøkir til, at ein eldradepil eigur at staðsetast júst her:

- Økið liggur við friðarliga gamla sjóvarvegin, sum liggur nakað omanfyri trafikeraða høvuðsvegin, har tað kundi verið trygt og hugaligt hjá búfólkinum at spáka.
- Økið er miðsavnað og liggur væl fyri í gomlu bygdini, lutfalsliga tætt at kirkjuni og handli.
- Grundøkið hevur eina góða støðd, sum ger, at góðar umstøður eru fyri at byggja út, um eitt nú fleiri eldraíbúðir skulu leggjast afturat bygginingini. Hetta er í tráð við, at tað er sannlíkt, at eftirspurningurin eftir búplássum væntandi økist í framtíðini.
- Góðir møguleikar eru fyri at skipa hugnaligar lendisgøtur niðan við ánni eystanfyri, ið kundi verið til stóra gleði fyri búfólk, ið eru lutfalsliga væl gongd.
- Góðir møguleikar eru fyri at skipa eina góða niðankoyring og atkomu frá sjóvarvegnum.

Sigast skal, at í tilgongdini at finna eitt hóskandi grundøki til eldradepilin, hevur umsitingin seinastu árini umrøtt at keypa matr. nr. 185d til endamálið (kortvídd 5.673m², í byggisamtykt A1), sum liggur "Í Líðini" einar 1.600m longur inni ímóti Kollafjarðabotni.
Orsøkin til hetta var, at hetta grundumráðið, sum p/f Bulur eigur, varð lýst til sølu.

Elin Debess, vegna Kollafjarðarnevndina, sigur tó, at hetta hevur verið umrøtt í nevndini, og at niðurstøðan var, at her eru fleiri orsøkir til, hví matr. nr 185d er ein óhóskandi staðseting til endamálið.

Hesar eru:

- Um almennur stovnur skal byggjast her, krevst at byggisamtyktin fyrst verður broytt frá A1 til D3
- Økið verður mett at vera ov lítið, um byggjast skal út.
- Økið tykist langt burturi, sambært ynskinum um eitt meira miðsavnað bygdarlív í Kollafirði
- Grannar halda tað vera óhóskandi fyri grannalagið her.

Fakliga metingin hjá Býarskipanardeildini er, at grundøkið (matr. nr. 74a), sum Kollafjarðarnevndin vísir á, <u>er betri egnað til ein eldradepil.</u>

Niðurstøðan er soljóðandi:

Umframt avbjóðingarnar, sum Kollafjarðanevndin vísir á, hevur matr. nr. 185d ta avbjóðing, at omankoyringin til júst hetta økið má gerast í eini serligari vegaloysn út á almennan landsveg við 80 km/t ferðslu. Hetta kann gerast ein kostnaðarmikil avbjóðing fyri verkætlanina, sum eisini fer við einum stórum parti av lendinum. Um talan hinvegin verður um eina niðankoyring frá Líðarvegnum í neðra, kann hetta einans gerast við eisni at keypa ella ognartaka part av privatu trøðni, matr. 185a (1.984$m^2$), ið liggur ímillum tvey sethús.

Hinvegin eru fáar avbjóðingar við matr. 74a á Todnesi.

Økið her er vallað og serstakliga náttúruvakurt, hevur góðan sólargang, og gevur rúmar umstøður fyri útbyggingum og góðari atkomu við parkering niðan frá gamla sjóvarvegnum.
Til samanberingar er grundøkið hjá URD í hoyvík 6672$m^2$ til víddar.

Møguleikarnir her í økinum eru serstakliga góðir til at skapa stimbrandi náttúruupplivingar, bæði hjá førum og minni førum búfólki á einum eldradepli, samstundis sum hetta gevur góðar møguleikar fyri, at búfólk og starvsfólk kunnu kenna seg tættari knýtt at bygdakjarnuni í Kollafirði.

At gagnnýta hetta grundøkið mennir hugsjónina um eina miðsavnaða bygd, serstakliga um hugsað verður um, at ein partur av einum nýggjum eldradepli kann hugsast at hava avleitt virksemi og útvendar bygningsfunktiónir við eitt nú verkstovu og aktivitetum av ymsum slag fyri blandaðar aldursbólkar.

Leggjast skal afturat, at fyri fótinum á grundøkinum liggur elsta varðveidda lonin í Kollafirði umframt toftirnar av fleiri eldri húsum. Ein eldradepil í hesum økinum kundi sett henda gamla søguliga býlingin í eitt nýtt ljós í nærumhvørvinum, um alt hetta grundøkið verður ment við umhugsni, nærlagni og virðing.
Í hesum sambandi viðmælir Býarskipanardeildin, at bygginevndin í málinum ráðførir seg við Søvn landsins.

Harafturat mælir Býarskipanardeildin til, at hóast byggisamtyktin fyri hetta grundøkið varð samtykt til at kunna hýsa almennum stovnum síðst í sjeytiárunum, so eigur Kollafjarðarnevndin at endur-umrøða økisskipanar-møguleikarnar saman við grannum og áhugapørtum í nærumhvørvinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Skjøl**
*Grundøki til umrøðu í sambandi við eldradepil í Kollafirði 24 mai 2023*, j. Nr. 20/03750-6

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at staðseta ætlaða eldradepilin í Kollafirði á matr. nr. 74a á Todnesi, at heimila umsitingini at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um at keypa grundøkið, at arbeiða víðari við málinum, at beina málið víðari í Býráðið umvegis Eldranevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við staðsetingini, men fýlist á faktuellar skeivleikar í lýsingini av málinum.

**Heilsu- og eldranevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:** Av misgávum varð málið ikki sent býráðnum til avgreiðslu umvegis fíggjarnevndina, áðrenn tað varð lagt fyri býráðið, og fíggjarnevndarlimir hava tískil í telduposti tikið støðu til tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini og heilsu- og eldranevndini um staðsetingina av eldradeplinum í Kollafirði.

Fíggjarnevndarlimirnir fingu soljóðandi spurning: Kunnu tit siga mær, um tit taka undir við tilmælinum?

**Fíggjarnevndin í telduposti 21. Juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanarnevndini og heilsu- og eldranevndini.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 147/23 Høvuðsumvæling av køkinum á Lágargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 19.06.2023 | 19/23 | 23/03547-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 191/23 | 23/03547-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 147/23 | 23/03547-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Lágargarður sum var sjálvsognarstovnur til kommunan yvirtók eldraøki í 2015 er 36 ára gamal. Lágargarður treingir til at umvælast og nakað er gjørt seinnu árini. Serliga køkurin treingir til eina høvuðsumvæling um hann framhaldandi skal kunna virka. Nakað av útbúnaðinum í køkinum er skift út seinnu árini, tí útbúnaðurin antin gekk fyri ella var í so ringum standi at trupult var at brúka hann.

Køkurin á Lágargarði ger umframt allan mat til teir 48 borgararnar sum búgva har, eisini mat til búfólkini á Tjarnargarði í eru 41 í tali.

Eisini ger køkurin døgurða til teir áleið 30 borgararnar sum dagliga koma í virkis- og venjingarstovuna á Lágargarði umframt at matartænastan er staðsett í køkinum á Lágargarði. Tað verða í køkinum á Lágargarði gjørdir døgurðar til áleið 110 heimabúgvandi borgarar, sum svarar til áleið 460 døgurða og 421 dessertir um vikuna til heimabúgvandi borgarar.

Tað er ikki longur gjørligt at økja um kapasitetin í køkinum. Sannlíkt er at matartænastan bara økist, sum tað gerast fleiri og fleiri eldri borgarar. Ætlanin er tí, at tá nýggja røktarheimi á Stórubrekku sum arbeitt verður við í løtuni er liðugt, verður matartænastan flutt av Lágargarði til køkin á nýggja røktarheiminum. Sostatt er tað sum so, ikki tørvur á at útbyggja køkin á Lágargarði, men alneyðugt at høvuðsumvæla køkin, eisini so at hann lýkur tey krøv sum verða sett til stórkøkar av hesum slag.
Sí støðulýsing frá bygningsdeildini

Tað er alneyðugt at fari verður undir at høvuðsumvæla/nýbyggja køkin á Lágargarið sum skjótast, men fyrst má arbeiði projekterast so ein neyv ætlan og kostnaðarmeting fyriliggur, soleiðis at fígging kann fáast til vega og arbeiði bjóðast út.

Bygningsdeildin metir at projekteringsarbeiðið kostar áleið 700.000 kr. men hevur ikki pening tøkan til hetta arbeiðið. Heilsu- og umsorganartænastan hevði eina minninýtslu í 2022 og tí er møguligt sum eykajáttan at flyta 700.000 kr. av konto 2722 Tilboð til konto 6110 Umsiting og røkt av bygningum, soleiðis at peningur er tøkur til projekteringsarbeiðið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á bygningsdeildini og Heilsu- og umsorganarstjórin mæla Heilsu- og eldranevndini til, sum eykajáttan at flyta 700.000 kr av 2722 -Tilboð á 6110 Umsiting og røkt av bygningum til projektering av høvuðsumvæling ella nýbygging av køkinum á Lágargarði.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 148/23 Framtíðartryggja eldraøkið - reingerðartænastan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 19.06.2023 | 18/23 | 23/03546-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | | | 23/03546-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 148/23 | 23/03546-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna stendur, eins og Føroyar sum heild, yvir fyri stórum fólkafrøðiligum avbjóðingum, sum setur verandi vælferðartænastur, sum kommunan hevur ábyrgd av, undir trýst.

Á eldraøkinum eru avbjóðingarnar stórar, samansettar og vaksandi.

Talið av eldri fólki økist, fólk liva longur, viðgerðarhættir í heilsuverkinum gerast alsamt betri. Tørvurin á tænastum og búplássum frá kommununi verður tískil alsamt størri. Í tráð við, at tað gerast fleiri eldri fólk, og at livialdurin hækkar, verða eisini elsamt fleiri borgarar við ellisbrekum og varandi sjúkum, og nógvir teirra fáa tørv á persónligari og praktiskari hjálp í gerandisdegnum. Tað er týdningarmikið, at hesir borgarar fáa góða umsorgan og røkt, sum tekur stæði í tørvinum hjá tí einstaka.

Harumframt eru borgarar vorðnir meira tilvitaðir, og seta alsamt størri krøv til, at kommunan skal veita tænastur, hvørjar tænastur kommunan skal veita, hvussu tænasturnar verða veittar og til góðskuna á tænastunum.
Samstundis bendir alt á, at tað gerast færri skattgjaldarar at rinda fyri tænasturnar komandi árini.

Búskaparráðið hevur víst á, at tað er neyðugt, at neyv mál verða sett fyri, hvørjar framtíðar vælferðartænastur skulu veitast til hvørjar borgarar, um fólkafrøðiliga avbjóðingin og vantandi starvsfólkaorkan skal loysast.

Tórshavnar býráð hevur sett sær fyri at loysa avbjóðingarnar, sum síggjast á eldraøkinum og at fara undir átøk, sum skulu viðvirka til at framtíðartryggja grundleggjandi tænastur fyri borgaran í Tórshavnar kommunu.

Á fundi í Heilsu- og eldranevndini tann 5. juli 2021 varð samtykt, at seta ein arbeiðsbólk at lýsa og greina verandi avbjóðingar á eldraøkinum, og gera tilmæli til, hvussu eldraøkið í Tórshavnar kommunu verður framtíðartryggjað. Ynski var um, at bæði borgarin, fakfólk og politiski myndugleikin skuldi takast við í arbeiðið.

Sum liður í hesum arbeiði eru settir tríggir arbeiðsbólkar, sum hava viðgjørt ávíkavist tænastur til heimabúgvandi fólkapensjónistar, tænastur á eldrabústovnunum og starvsfólk, útbúgving og rekruttering. Í arbeiðsbólkunum hava limir úr øllum fakbólkum verið umboðaðir. Endamálið við arbeiðsbólkunum hevur verið, at fakfólk á eldraøkinum fáa møguleika at greiða frá teirra sjónarmiðum, at luttaka í kjaki og at koma við ískoyti til møguligar loysnir.

Í arbeiðsbólkunum verður nú arbeitt við at orðað tilmæli til, hvussu eldraøkið í Tórshavnar kommunu verður framtíðartryggjað. Í hesum sambandi hevur arbeiðsbólkurin, sum hevur viðgjørt tænastur til heimabúgvandi pensjónistar, orðað tilmæli um reingerðartænastuna.

**Lýsing av reingerðartænastuni**

Reingerðartænastan er ein tænasta fyri heimabúgvandi fólkapensjónistar, ið ikki megna at gera reint sjálvi, og sum ikki búgva saman við frískum hjúnafelaga/maka ella vaksnum yvir 18 ár, ið megna at gera reint. Játtan til reingerðartænastu er treytað av, at visitator metir, at heilsufakligt grundarlag er fyri reingerðartænastu.

Borgari, sum hevur ansara, fær ikki játtað reingerðartænastu. Í serligum førum verður reingerðartænasta játtað í avmarkað tíðarskeið. Tænastan er tilskilað einkult persóni, men í ávísum førum, t.d í samband við deysðfall, verður støða tikin til, um eftirsitandi makin hevur tørv á at varðveita tænastuna.

Visitatión til reingerðartænastu fevnir í dag ikki um eina ADL metan av borgaranum. Ein ADL metan er ein metan av, hvussu væl borgari megnar gerandis uppgávur í heiminum, til arbeiðis og í frítíðini. Hetta kunnu vera uppgávur so sum persónligt reinføri, at lata seg í/úr, at eta, fara á wc, innkeyp, matgerð og reingerð. Tað er ergoterapeutur, sum ger ADL metanina.

Reingerð verður veitt 3. hvørja viku í 2 manntímar, sum svara til antin 1 tíma ið tveimum reingerðarfólkum ella 2 tímar við einum reingerðarfólki. Tað, sum vanliga verður gjørt reint, er støvsúgving, vask av gólvum og vask av vesi og baðirúmið. Reingerðin fevnir um viðlíkahaldsreingerð. Høvuðsreingerð er ikki ein partur av tilboðnum.

Núverandi játtan til reingerðartænastu er kr. 800.000 árliga, og kostnaðurin fyri tænastuna er í dag kr. 1.663.569 v/ netto MVG. Brúkaragjaldið er á kr. 170 fyri hvørja reingerðarveiting, svarandi til í alt kr. 451.520 árliga.

Upprunaliga varð avgjørt, at 1/3 av kostnaðinum skuldi fíggjast við brúkaragjaldi. Í dag er brúkaragjaldið 27% av kostnaðinum.

Reingerðartænastan var áður ein partur av tí tænastu, sum heimatænastan veitti heimabúgvandi borgarum. Reingerð varð tikin úr hesi tænastu fyri áleið 15 árum síðani, og hevur ikki verið partur av heimatænastuni síðani.

Tórshavnar kommuna valdi at seta reingerðartænastuna inn aftur í 2019, men skipað á tann hátt, at privat reingerðarfyritøka veitti reingerðarhjálpina.

Fyrsta tíðin var royndartíð, sum varð skipað soleiðis, at tað vóru teir borgarar, sum ikki megnaðu sjálvir at gera reint og sum ikki búðu saman við persóni sum kundi gera reint, sum kundu fáa reingerðartænastu. Eftir 1 ár varð skipanin sett í verk, og tá var brúkaragjald ásett. Við støði í royndarverkætlanini var mett, at pláss skuldi vera fyri 110 borgarum í skipanini.

Í 2021, tá sáttmálin við reingerðarfyritøkuna skuldi leingjast, varð víst á, at fleiri borgarar enn væntað, vóru í skipanini, og kostnaðurin av tí sama hækkaði. Tá varð avgjørt, at kommunan bar hækkingina, og brúkaragjaldið sostatt skuldi vera óbroytt.

Tað eru í løtuni 166 borgarar, sum fáa reingerðartænastu, og 42 borgarar hava fingið játta reingerðartænastu men eru á bíðilista til reingerð.

Um reingerðartænasta skal veitast teimum 208 borgarum, sum í dag hava fingið játtað reingerðartænastu, og støði verður tikið í núverandi kostnaði, fer tænastan at kosta kr. 2.084.472 v/ netto MVG.

Sáttmálin við verandi reingerðarfyritøku er gingin út, og reingerðartænastan hevur tí júst verið í útboð. Um tikið verður av einum av innkomnu tilboðunum, fer kostnaðurin av reingerðartænastuni at hækka frameftir. Harumframt fer talið av eldri borgarum at hækka komandi árini, og tað verða tí helst fleiri og fleiri borgarar, sum fara at søkja um reingerðartænastu.

Sí viðfest um nøgdsemi við reingerðartænastuna

**Niðurstøða hjá arbeiðsbólkinum**
Arbeiðsbólkurin mælir til, at reingerðartænastan skal síggjast tí breiða høpinum, og í mun til tær avbjóðingar, sum eru fyri framman. Talið á eldri borgarum í Tórshavnar kommunu fer at vaksa skjótari komandi árini, og skal kommunan megna at veita neyðturviligar røktartænastur, verður neyðugt at raðfesta og møguliga eisini at skerja tænasturnar.

Um Tórshavnar kommuna skal raðfesta við støði í teimum tænastum, sum kommunan veitir eldri borgarum í dag, so er reingerðartænastan ein tænasta, sum kann verða avtikin. Hetta við atliti til, at hetta er ein tænasta, sum privatar fyritøkur kunnu veita borgarum, og sum borgarin tí kann keypa seg til sjálvur. Í hesum sambandi vísur nøgdsemiskanningin eisini, at reingerðarhjálp frá privatari fyritøku er á einum støði, sum er nøktandi fyri borgaran og avvarðandi.

Verður avgerð tikin um, at reingerðartænasta framhaldandi skal veitast, mælir arbeiðsbólkurin til, at skipanin verður endurskoðað og at kanna verður, um tænastan kann skipast á annan hátt.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at reingerðartænastan verður avmarkað soleiðis, at tað verða settar neyvari treytir fyri at fáa tænastuna. Tað skulu einans vera teir borgarar í skipanini, sum fáa umfatandi hjálp frá Heimatænastuni, sum kunnu fáa játtað reingerðartænastu.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at tað verður gjørd ein ADL metan, tá visiterast skal til reingerðartænastu, fyri soleiðis at tryggja, at borgarar við størsta tørvi, fáa reingerðartænastu.

Eitt uppskot er harumframt, at reingerðartænastan verður ein partur av visitatión til heimatænastu, soleiðis at skilja, at tá borgari søkir um heimatænastu, metur visitator eisini, um borgarin hevur tørv á reingerðartænastu. Um tørvur er á reingerðartænastu, kunnar visitator borgaran um, at viðkomandi kann søkja um tænastuna.

Arbeiðsbólkurin hevur somuleiðis umrøtt spurningin, um reingerðarhjálp frameftir kann veitast av starvsfólki í Heimatænastuni. Vísandi til, at hjálp í heiminum fyri tað mesta verður veitt fyrrapartar, og at tað møguliga er rúm fyri, at starvsfólk kunnu brúka tíð seinnapart til reingerð.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at í minsta lagi 1/3 av kostnaðinum av tænastuni skal fíggjast við brúkaragjaldi, og at brúkaragjaldið verður hækkað um neyðugt.

Úrslitini frá nøgdsemiskanningini tala eisini fyri hesum, tá tey vísa á, at borgarar og avvarðandi yvirskipað eru nøgd við kostnaðarstøðið á tænastuni. Eitt hægri brúkaragjald hevði tí allarhelst ikki havt stórvegis ávirkan á, um borgarin valdi tænastuna til ella frá.

Arbeiðsbólkurin mælir Heilsu- og eldranevndini til at:

- Reingerðartænastan verður avtikin.

Verður reingerðartænastan ikki avtikin mælir arbeiðsbólkurin til, at:

- Neyvari treytir verða settar fyri at fáa játtað reingerðartænastu.
- Einans borgarar í skipanini, sum fáa umfatandi hjálp frá Heimatænastuni, kunnu fáa játtað reingerðartænastu.
- ADL metan verður gjørd, tá visiterast skal til reingerðartænastu, fyri soleiðis at tryggja, at borgarar við størsta tørvi fáa reingerðartænastu.
- Reingerðartænastan verður ein partur av visitatión til heimatænastu, soleiðis at skilja, at tá borgari søkir um heimatænastu, metur visitator eisini, um borgarin hevur tørv á reingerðartænastu.
- Kanna møguleikan fyri, at reingerðarhjálp frameftir kann veitast av starvsfólki í Heimatænastuni.
- Brúkaragjaldið á reingerðartænastuni verður hækkað, um tað er neyðugt fyri at røkka 1/3 av samlaða kostnaðinum av tænastuni.

**Viðmerkingar frá fyrisitingini:**
Sambært lóg um heimatænastu og eldrarøkt er tað ikki skylda hjá kommununi at veita fólkapensionistum reingerðartænastu. Tó kann kommunan seta tilboðið í verk um hon ynskir tað.

Umsitingin metir at tørvur er á at endurskoða reingerðartænastuna. At taka støðu til um reingerðartænastan skal halda fram og í øðrum lagi at gera skipanina soleiðis at tað er borgarin við veruligum tørvi sum kann fáa tænastuna. Hetta kann vera gjørt eftir leisti sum arbeiðsbólkurin mælir til. Umsitingin metir somuleiðis at reingerðartænastan altíð eigur at vera játta tíðaravmarka og tí skal revisiterast reguliga.

Reingerðartænastan er sera tíðarkrevjandi at umsita bæði fyrisitingarligt og hjá visitatiónini. Umsitingin metur at tíðin er koman at tillaga skipanina. Hetta kann gerast í trá við uppskoti frá arbeiðsbólkinum. Um skipanin skal halda fram sum nú, verður neyðugt at økja játtanina við áleið 1.5 mio. kr. í fíggjarætlanini fyri 2024

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla heilsu- og eldranevndini til at taka undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum í fyrstu syftu at reingerðartænastan skal niðurleggjast. Um nevndin ikki tekur undir við fyrsta tilmælinum so í øðrum lagi at taka undir við antin samlaða alternativa uppskotinum ella pørtum av hesum. At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 19. juni 2023:** Nevndin tekur ikki undir við at avtaka reingerðarskipanina.

Nevndin tekur undir við at endurskoða, tillaga og broyta reingerðartænastuna í samsvari við alternativa uppskotið hjá arbeiðsbólkinum umframt at reingerðartænastan verður játtað tíðaravmarkað og verður revisiterað regluliga.

Nevndin tekur ikki undir við at hækka brúkaragjaldið. Nevndin ynskir málið aftur í nevnd, tá ið omanfyri nevndu broytingar eru settar í verk og endaligur fíggjartørvur fyriliggur.

At beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

# 149/23 Endurskoðan av reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 181/23 | 23/03387-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 206/23 | 23/03387-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 149/23 | 23/03387-1 |

**Upprunin til málið**
24. februar 2022 varð reglugerðin fyri útlutan av grundøkjum til sethús endurskoðað seinast.

Síðan tá er reglugerðin roynd eina ferð í sambandi við útlutan av 4 grundstykkjum við Klingurstjørn, ið vóru latin kommununi aftur. Í hesum sambandi er umsitingin komin eftir, at tørvur er á at tillaga og nágreina nakrar ásetingar í reglugerðini.

Eisini hevur fíggjarnevndin á fundi 19. apríl 2023 samtykt at heita á umsitingina um at endurskoða reglugerðini í mun til at víðka um skaran, ið kann skriva seg upp til lutakast til grundstykki til sethús.

Skjótt verður klárt at lata upp fyri, at fólk kunnu melda til lutakast um nýggi grundstykkini, sum skulu gerast á Argjahamri. Gott hevði verið um tillagingar í reglugerðini kundi verið endaliga góðkendar 21. juni 2023, tá næsti býráðsfundur er.

**Lýsing av málinum**
Málið er lýst í hjálagda uppriti og sum snýr seg um:

- Pkt. 3b um sambúgvandi maka
- Pkt. 4a um føroyingar í lestrarørindum uttanfyri Tórshavnar kommunu
- At fólk, ið longu eiga ogn, skulu sleppa við í lutakast um grundstykki

**Lógir, ásetingar o.a.**
Reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 22/00649

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Upprit um tillagan av reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús
Reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Miðfyrisitingarstjórin, leiðarin á Stjórnardeildini og leiðarin á Snarskivuni mæla til:

- At orðingin “sambúgvandi maki” verður broytt til “maki”.
- At føroyingar í lestrarørindum verða bólkaðir saman við øðrum uttan fyri kommununa.
- Ikki at víðka um skaran, ið kann skriva seg upp til lutakast til grundstykki til sethús.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson, mælir býráðnum til at samtykkja regugerðina við hesum broytingum:

at orðingin «Sambúgvandi maki» verður broytt til «maki».

at borgarar í lestrarørindum, ið ikki vóru búsitandi í Tórshavnar kommunu, áðrenn teir fluttu burtur í lestrarørindum, verða bólkaðir saman við øðrum uttan fyri kommununa.

at borgarar, ið ikki eiga fasta ogn, hava fyrsta rætt fram um øll onnur at fáa tillutað grundøki, og at borgarar, ið eiga íbúð og raðhús, kunnu skriva seg upp til og fáa tillutað grundøki, um tøk grundøki eru í einari útstykking.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur undir við uppskotnu broytingunum frá meirilutanum, tó ikki við seinasta punktinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, mælir til, at broytingarnar, ið vórðu samtyktar á fundinum 14. juni 2023, koma í gildi við virknaði frá 1. januar 2024. Meirilutin nágreinar, at tað frá 1. januar 2024 skal vera galdandi, at tvey sløg av bólkum kunnu melda til og fáa tillutað grundøki eftir niðanfyristandandi ásetingum:

Skilt verður millum fylgjandi bólkar av luttakarum í lutakastinum:

1. Fólk, sum hava skrásettan bústað í Tórshavnar kommunu í seinasta lagi dagin áðrenn tilmeldingin verður lýst alment, og føroyingar í lestrarørindum uttan fyri Tórshavnar kommunu, sum flyta til kommununa í seinasta lagi eitt ár eftir útlutan.
2. Onnur, sum ikki hava skrásettan bústað í Tórshavnar kommunu, sum flyta til kommununa í seinasta lagi eitt ár eftir útlutan, og borgarar í Tórshavnar kommunu, sum eiga íbúð ella raðhús í Tórshavnar kommunu.

Eru fleiri meldaði til lutakast, sum hoyra til bólk 1, enn tað eru grundøki at kasta lut um, verður bert kastað lut millum hesi.

Eru færri meldaði til lutakast, sum hoyra til bólk 1, enn tað eru grundøki at kasta lut um, verður fyrst kastað lut millum tey í bólki 1. Síðani verður kastað lut millum tey í bólki 2, um grundøkini, sum eru eftir.

Borgarar í bólki 2, sum eiga íbúð ella raðhús, skulu hava selt hesa ogn, áðrenn tey fáa endaligt skeyti upp á aðra kommunala fastogn eftir ásetingini omanfyri.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Elsu Berg um at beina málið aftur í nevnd, sum fall við seks atkvøðumm fyri og sjey atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 150/23 Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.11.2021 | 228/21 | 21/04713-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.11.2021 | 311/21 | 21/04713-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 17/22 | 21/04713-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.02.2022 | 52/22 | 21/04713-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.02.2022 | 63/22 | 21/04713-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 36/22 | 21/04713-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2022 | 176/22 | 21/04713-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.04.2023 | 56/23 | 21/04713-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 141/23 | 21/04713-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 106/23 | 21/04713-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 194/23 | 21/04713-1 |
| 12 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 150/23 | 21/04713-1 |

**Upprunin til málið**
Eingin ivi er um, at við einum fjølbroyttum bústaðarmarknað kann kommunan virka fyri eini fjøltáttaðari fólkasamanseting. Týdningarmikið er, at fjølbroytni vísir seg innan bústaðarsløg men eisini innan eigaraviðurskifti. Í bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu er tað blivið lagt út í korti at náa einari samanseting av bústaðarsløgum áljóðandi 60% sethús, 20% íbúðir og 20% rað- og tvíhús innan 2030.

9 ár áðrenn framrokningina kunnu vit staðfesta, at vit meiri ella minni hava nátt hesum málinum við 59% sethúsum, 27% íbúðir og 14% rað- og tvíhús. Hetta vísir, at tað er sera ringt, sum kommuna, at planleggja hvussu tann veruligi bústaðarmarknaðurin kemur at síggja út. Tó kann kommunan gera sítt fyri at stýra planeggingini ávísar vegir, t.d. við at útleggja tey kommunalu grundstykkini til ávís endamál.

Í bústaðarpolitikkinum verður eisini víst á ein ójavnvág innan eigaraviðurskifti á bústøðum í kommununi. Í 2018 var tað einans 1% av tí samlaða bústaðarmarknaðinum, ið vóru bústaðir til leigu (her er einans tann skipaði leigumarknaðurin taldur við). Í dag sær myndin eitt sindur frægari út, fleiri leigubústaðir eru komnir til og prátið um lutaíbúðir er veruliga við at gera sína innrás.

Kanningar eru ikki gjørdar av tørvinum fyri lutaíbúðir, men umsitingin veit frá arbeiðinum við bústaðarpolitikkinum, og við útbjóðing av leigubústøðum (á Frúurøð og Undir kongavarða), at áhugi og tørvur er á lutaíbúðum.

Føroyar hevur fáar lutaíbúðir og harvið fáar royndir. Í Havn er eitt lutaíbúðafelag, ið er stovnað langt áðrenn lógin varð sett í gildi.
Bústaðir hevur fleiri ferðir tikið stig til at byggja lutaíbúðir í Tórshavn, men av ymiskum grundum er tað ikki blivið til nakað. Fyri tveimum árum síðan eydnaðist tað at byggja 8 lutaíbúðir Á Kneysum á Toftum. Hetta er á ein hátt ein søgulig hending, tí Lutaíbúðarfelagið Á Kneysum er fyrsta felagið, ið er stovnað sambært løgtingslógini um lutaíbúðarfeløg.

Í Vági er kommunan næstan liðug við byggingina av eini lutaíbúðarverkætlan. Enn hevur Vága kommuna ikki greitt frá, hvussu tað verður fíggjað ella hvør stendur fyri tí. Vit vita tó, at Bústaðir er partur av verkætlanini.

Í eini samrøðu við Pensjónsfelagið Lív, hava tey víst áhuga og eru ikki avvísandi fyri at fara inn í eina lutaíbúðarverkætlan. Tey vilja tó hoyra meira um, hvat kommunan ætlar, og síggja ítøkiligar leistir.

Leisturin, ið Bústaðir nýtir, er at Bústaðir mennir verkætlanina saman við arbeiðstakara og ráðgeva og selur lutaíbúðirnar til lutaíbúðarfelagið, tá alt er liðugt. Hetta hevur teir fyrimunir við sær, at Bústaðir kann fíggja í byggitíðarskeiðnum og taka byggiváðan uppá seg, so lutakeyparar vita, hvat teir fáa og til hvønn kostnað.

Ætlanin er í fyrsta umfari, at kommunan einans bjóðar øki út til bygging av lutaíbúðum og letur feløgini sjálvi skipa seg. Ynski er ikki, at kommunan luttekur í byggingini. Mett verður ikki, at tørvur er á at kommunan er við, hetta serliga grundað á stóra bústaðartørvin.

Í 2018 og 2019 fór Tórshavnar kommuna undir at bjóða út lendi til bygging av leigubústøðum í kommununi og tá vísti tað seg, at størsta avbjóðingin var fígging. Áhugavert verður at síggja um sama er galdandi innan bygging av lutaíbúðum, men verður mett, at tað er vert at geva tí eina roynd.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at fara undir at bjóða tríggjar matriklar út til bygging av lutaíbúðum.
Talan er um matr. nr. 1355 og 1356 sí *kortskjal 1355 og 1356* við Villingadalsvegin, og part av matr. 645a, ið er øki á Frúutrøð í miðbýnum sí *kortskjal 645a.*

**Matrikul 1355 og 1356**
Matriklarnar 1355 og 1356 liggja báðir vestan fyri Villingadalsvegin. Atkoman til stykkini skal samskipast í mun til linjuføringina av framtíðar innkomuvegi.

Innkomuvegurin kemur at ganga partvís ígjøgnum matr. nr. 1355. Tryggjast skal, at byggingin hevur eina nøktandi frástøðu frá innkomuvegnum umframt at vegurin verður hugsaður inn í byggiverkætlanina, sum ein integreraður partur, ið ikki niðursetur trivnaðin í økinum.

Matriklarnir liggja í forleingilsi av einum hamara, sum ger at vatn frá hamaranum verður uppfangað í lendinum og ger lendið sera vátt. Tí skal regnvatnsuppsamling/-seinking somuleiðis blíva ein partur av einari møguligari byggiverkætlan, soleiðis at vatnið framhaldandi kann seyra vekk.

Hamarin gongur sum ein rond allan vegin suður-/vestureftir oman framvið Undir Fjalli og Miðhorn. Býarskipanarliga hevði tað verið upplagt at nýtt tøku matriklarnar framvið hamarinum til hægri bygging. Bæði tí at teir ikki taka útsýnið frá nøkrum, bygningarnir kunnu fáa útsýni yvir allan býin umframt at hamarin skapar lívd frá vesturættini.

Sum nú er liggja matriklarnir í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Sum áður sagt, vildi tað verið upplagt at broytt byggisamtyktina fyri eitt størri øki suðureftir framvið hamaranum, við tí fyri eyga at gera ein rond av hægri bygging fram við øllum hamarum. Mest skynsamt er tí at broyta almennu byggisamtyktina til økisáseting A2, sum er ætlað høgari bústaðabygging. Ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

*§6, stk. 1. Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í sambandi við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva*.

**Matrikul 645a**
Næsta økið, ið talan er um, er partur av matrikul 645a á Frúurtrøð í miðbýnum sí *kortskjal 645a.*

Matrikulin fevnir um økið á Frúutrøð, Revagarðarnar (Jóan Karls gøta og Í Lon) og ein part av Lützenstrøð. Neyðugt verður at skipa matrikuleringina á økinum, áðrenn verkætlanin verður boðin út.

Virksemi er á økinum í løtuni. Í gamla læknabygningi eru eindarleiðarar fyri kommununa og Hondbóltssamband Føroya og í gamla musikkskúla húsast Tórshavnar Býarsavn. Fyri einum ári síðan bleiv tað samtykt, at Tórshavnar Býarsavn skuldi flyta permanent inn í gamla musikkskúlan. Støða skal tí takast til, um lendið skal bjóðast tú við verandi bygningum og virksemi.

Fyri at verkætlanin skal kunna lata seg gera, skulu kloakkirnar og vatnleiðingarnar skiftast út á økinum. Verandi kloakkskipan er gomul og krevur ábøtur umframt at hon ikki er útgjørd til fleiri húsarhald. Ein skynsamur fíggingar háttur er at dagføringin av kloakkskipanini kann blíva fíggjað av søluni av lendinum.

Talan verður um eina býartætting og gagnnýtslu av verandi infrakervi, sum vit sambært Bústaðarpolitikkinum eisini leggja upp til at gera meiri av.

Í hesum sambandi skal havast í huga, at tá tosað verður um býartætting, kann ein av avleiðingum verða, at færri parkeringspláss verða í mun til áðrenn ein bygging/tætting fer fram. Um tað ikki verður gjørligt at nøkta parkeringstørvin við teimum verandi 41 almennu parkeringsplássunum umframt tey kravdu parkeringsplássini til lutaíbúðirnar, verður tað uppgáva hjá kommununi at varðveita/skipa verandi almennu parkeringsplássini á aðrari staðseting.

Býarskipanarliga hevði økið havt gott av at blivið skipað sum ein partur av eini størri heild. Lendi inni í býnum eru sera avmarkað og kostnaðarmikil. Kommunan eigur sjálv avmarkað lendi í verandi býi, men hesi eru ikki samanhangandi og liggja oftani upp at privatum lendi. Fyri at skapa ein burðardyggan tættleika í býnum, har leiðingar, undirstøðukervi, gerandis hentleikar o.a. longu eru á staðnum eigur at verða lagt upp til at tilboðsgevari inndregur aðrar matriklar í grannalagnum sum ein part av tí samlaðu verkætlanini.

Økið er áður blivið bjóðað út til bygging av bústøðum men hendan ætlanin bleiv slept aftur. Íleggjarar og vinnan vóru sera áhugaðir í økinum, men tá alt kom til alt bjóðaði eingin. Høvuðsorsøkin til hetta var, at tað blivu settar somikið nógvar treytir til byggingina, at verkætlanin nærum bleiv ógjørlig og ov viðkvom.
Økið liggur í einum frammanundan skipaðum øki við nógvari søgu. Tað hevur við sær at borgarar í býnum hava nógvar meiningar um økið og føla somuleiðis eina eigarakenslu til økið. Tí er týdningarmikið, at kommunan er sera neyv í mun til tær treytirnar ið verða settar til byggingina og allan vegin gjøgnum tilgongdina tekur borgarar við, bæði í mun til kunning og luttøku.

Ætlanin er at bjóða matr. 1355, 1356 og 645a út alment og øll, sum lúka ávísar treytir, kunnu koma við eini boðið, eini frágreiðing og einum skitsuuppskoti, soleiðis at fleiri fáa møguleikan at bjóða uppá lendini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðmerkingar frá teknisku deild:

Kanningararbeiði skal gerast í mun til eina hóskandi atkomuloysn til matr. nr. 1355 og 1356. Framyvir verður mælt til at verkætlanir verða tillagaðar linjuføringina av innkomuvegnum.

**Skjøl**
21/04713-2 1355-1356
21/04713-2 645a
21/04713-18 Útbjóðingartilfar Frúutrøð
21/04713-19 Virðismeting - Frúutrøð 100 Tórshavn - matr.nr. 645a Tórshavn
21/04713-20 Virðismeting - matr.nr. 1355 Tórshavn 1356 Tórshavn (002)
21/04713-21 Útbjóðingartilfar Villingardalsvegur

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at fara í holt við fyrireikandi kanningararbeiði, ið skal til fyri at kunna gera útbjóðingartilfar, fyri síðan at bjóða omanfyri nevndu matriklar út til bygging av lutaíbúðum, umframt at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at onnur staðseting verður funnin til býarsavnið.
**Fíggjarnevndin 24. november 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking, at onnur staðseting skal finnast til øll, ið virka í økinum.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.
**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 blonkum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Birita B. Iversen, Annika Olsen, Rói B. Poulsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til útbjóðingartilfar fyri sølu av lendi til lutaíbúðarbygging á Frúutrøð og við Villingadalsvegin.

Samskiftið við grannar á Frúutrøð og Jónas Broncks gøtu eru ígongd og tí verður bíðað eitt sindur við at bjóða lendið á Frúutrøð út.

**Økið við Villingadalsvegin**
Matriklarnir liggja umleið 100 m frá verandi sethúsabygging, í einum náttúruvøkrum og friðarligum øki. Størsti parturin av samlaðu bústøðunum í kringumráðnum eru sethús, í form av eigarabústøðum. Umsitingin metir, at økið eisini eigur at rúma øðrum bústaðarsløgum og eigaraviðurskiftum, soleiðis at ein breiðari borgaraskarði kann búseta seg her.

Í høvuðsheitinum setir útbjóðingartilfarið treyt um;

- Byggilist. Bygningin skal ikki framstanda sum kassar við monotonum framsíðum og verður heitt á tilboðsgeva um at vísa eitt skikkað boð uppá eina bygging, ið er deild upp í smærri eindir. T.d. forskotnar framsíður. Byggingin skal avmynda sína samtíð í skapi og tilfarsvali, umframt at hon skal signalera bústaðarbygging, har trivnaður og byggilistarligu dygdirnar eru samantvinnað.
- Hæddir. Bygningarnir kunnu verða í mesta lagi fimm hæddir.
- Frí- og uppihaldsøkið skal verða í minsta lagi 10% av samlaðu víddini av økinum.

- Hvussu nógvar íbúðir talan verður um, veldst um hvussu økið er skipað í síni heild við atliti at fríøki og parkering, og harumframt skulu ásetingarnar um byggistig á 0,25 og nýtslustig á 0,8 verða fylgdar.
- Støddirnar á íbúðunum skulu verða ymsar, tó ikki minni enn 60 fermetrar.

Sí fylgiskjal *Útbjóðingartilfar Villingadalsvegur.*

Arbeiðið við tunnilsføringini av innkomuvegnum fer at byrja í næstum og meðan hetta arbeiðið er í gongd, verður partur av Villingadalsvegnum umlagdur eitt sindur inn yvir suður/eystara enda á matrikul 1355. Av tí sama má vinnarin av útbjóðingini tola, at arbeiðið á hesum parti av matriklinum ikki kann setast í gongd fyrr enn Villingadalsvegurin verður fluttur innaftur.

**Virðismeting av lendið**
Meklarafelagið Skyn hevur virðismett lendið, sum er til víddar 21.930 $m^2$, til 20. mió. kr. svarandi til 912 kr.$m^2$. Virðismetingin tekur millum annað útgangstøði í, at nøktandi vegur er til grundstykkini, og at møgulig bygging skal seljast víðari sum lutaíbúðir í fríari sølu til hægstbjóðandi. Meklarin metir, at ein íbúð hevur sama søluvirði, óansæð um talan er um lutaíbúð ella eigaraíbúð. Um keyparanum verða álagdar avmarkandi treytir í mun til víðarisølu, verður søluprísurin av lutaíbúðum lægri, og vildi virðið av lendinum tá eisini verið lægri, sí fylgiskjal *Virðismeting - matr.nr. 1355 Tórshavn 1356 Tórshavn (002).*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at bjóða omanfyri nevnda økið, matr. nr. 1356 og matr. nr. 1355, við Villingadalsvegin út, umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annika Olsen og Kári Johansen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.
**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytnigarupskot frá Elsu Berg: Mælt verður til at bjóða økið út, treytað av at umhvørvisárinsmeting verður gjørd við denti á at kanna, um mógvur er í økinum.

Broytingaruppskotið fall við átta akvøðum ímóti, fýra fyri og einari blankari atkvøðu.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóhan Petur Johannesen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jàkup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu.

Fyri akvøddu: Heðin Mortensen, Jóhan Petur Johannesen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**

Tá freistin at lata tilboð inn 1. september 2022 kl. 12 var farin, var einki tilboð innkomið.

Kommunan eigur tí framvegis lendið, matr.nr. 1355 og 1356 við Villingadalsvegin. Ynskiligt er tó framvegis at fáa fleiri fjølbroyttar búeindir í kommununi.

Kommunan hevur frætt eftirfylgjandi, at fleiri aktørar eru áhugaðir, og umsitingin mælir til, at farið verður í samráðingar við hesar partar og, um neyðugt, at bjóða lendið út umaftur við eini minimums freist á 14 dagar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at fara í samráðingar við áhugaðar partar og, um neyðugt, at bjóða lendið út umaftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2022:** Samtykt at loyva umsitingina at kanna, hvørjir møguleikar eru við økinum, og at bjóða lendið út umaftur.

**Ískoyti:**
Tá freistin at lata tilboð inn var farin tann 13. februar 2023, var einans eitt tilboð móttikið. Hetta tilboðið var frá RMP Projektmenning, og var tilboðið áljóðandi:

**Kr. 7.700.000**

RMP Projektmenning lat tilboðið inn saman við eini frágreiðing um yvirskipaðu linjurnar, karmar og møguleikar. RMP legði somuleiðis upp til, í tilboðnum, at fara í tætt samskifti við kommuna um menning av ynskjum og ambitiónum kommununar fyri økið, og samanspælið við kringliggjandi umhvørvið. Víst verður til journal nr. 21/04713-36, Tilboð Villingardalsvegur RPM

Somuleiðis greiðir tilboðið frá, at Bústaðirnir vilja hava skap innanfyri ásetingarnar um "tætt, og lág bústaðarbygging", og vilja vera eitt bland av leigubústøðum og lutabústaðareindum, har støddirnar vilja liggja millum 60 $m^2$ og upp í 125 $m^2$. Roknað verður við, at lidna projektið vil telja umleið 150 bústaðir, við eini miðalstødd á umleið 85 $m^2$. Burturúr samlaðu mongdini á projektinum á 150 bústøðum verður stovnsett eitt lutaíbúðarfelag fyri 39 eindir. Hesar eindirnar eru ætlaðar at bjóða út longu í projekteringsfasuni – aftaná at byggiloyvið er fingið til vega. Ætlanin er at byggja felagshølir til veitslur og onnur tiltøk hjá íbúgvunum.

Umsitingin hevur, síðani tilboðið kom inn, havt nakrar fundir við tilboðsbjóðarnar, og hevur umsitingin eitt nú víst á, at ynskiligt er, at tilboðsupphæddin verður nakað hægri, umframt at skipan av økinum hevur verið umrødd.

Enn eru samráðingarnar ikki komnar heilt á mál, men ganga samráðingarnar væl, og kann væntast, at endalig semja við tilboðsveitararnar verður áðrenn summarferiuna.

Avleiddar verkætlanir:
Fleiri avleiddar verkætlanir verða, um farið verður undir at byggja í hesum økinum. Eitt nú skal vegurin gerast, soleiðis at hann verður koyrandi á, umframt at leiðingar til vatn, el og kloakk skulu gerast. Harumframt kann roknast við, at nýtt reinsiverk verður gjørt til at nøkta alt økið.

Kostnaðurin av avleiddu verkætlanunum er enn ikki endaliga ásettur, men hevur tekniska deild gjørt eitt leystligt boð upp á einar 20 mió. kr.

Økið er stórt har uppi, og væntast kann, at fleiri verkætlanir verða í økinum, sum so statt so eisini skulu gjalda fyri hesar avleiddu verkætlanirnar. Mælt verður tó til, at sølukostnaðurin fyri lendið kemur at gjalda ein part av avleiddu verkætlanunum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til:
- at RMP Projektmenning fær í boði at keypa matr. nr. 1355 og 1356, tá samráðingarnar eru komnar á mál,
- at umsitingin samráðist víðari við RMP Projektmenning um endaligu skipanina av økinum,
- at nýggj verkætlan verður stovnað til avleiddu verkætlanirnar, og at hesar verða fíggjaðar partvís av tilboðsupphæddini/lendissølu, umframt framtíðar sølu av økinum.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Kunnað varð um málið.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Í samband við tilboðið, latið inn tann 12. februar 2023, og tilhoyrandi uppskot til heildarætlan og gjaldsætlan, latið inn tann 16. apríl 2023, hevur umsitingin havt fund við RPM um víðari tilgongd og tillaging av tilboðsupphædd.

Tórshavnar kommuna metti upprunaligu tilboðsupphæddina áljóðandi kr. 7.700.000 at vera ov lága fyri lendið, sum ætanin er at selja til bygging av bústøðum. Tískil varð uppskot lagt fram fyri tilboðsgevara um at økja tilboðsupphæddina til kr. 10.000.000 fyri matr.nr. 1355 og 1356.

Grundgevingin fyri, at umsitingin metti tilboðsupphæddina at vera ov lága, er, at bygging í økinum krevur rættiliga stórar íløgur fyri kommununa. Hesar íløgur eru eisini lýstar omanfyri sum avleiddar verkætlanir.

Tilboðsgevi hevur váttað eina hægri tilboðsupphædd áljóðandi kr. 10.000.000, sí fylgiskjal 21/04713-48, Villingardalsvegur – Projektfolder_revideret forslag til helds- og betalingsplan.msg.

<u>Gjaldsætlan:</u>
Tilboðsgevari hevur býtt verkætlanina upp í fleiri stig, og er ætlanin at fara undir bygging á matr. nr. 1355 fyrst og síðani á matr. nr. 1356. Tilboðsgevari hevur í hesum sambandi latið inn fyrispurning um, hvørt kommunan vil góðtaka eina gjaldsætlan fyri lendið, sum er í fýra stigum. Sambært uppskotinum fellur fyrsta gjaldið, tá ið avtala er gjørd um at fara í gongd við arbeiðið á matr. nr. 1355, og fjórða og seinasta gjald fellur, tá ið byggiloyvi til seinasta byggistig á matr. nr. 1355 er útskrivað. Sostatt verða allar tær kr. 10 míó. fyri lendið goldnar, áðrenn nøkur bygging fer í gongd á matr. nr. 1356.

**Tilmæli**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at selja matr. nr. 1355 og 1356 fyri tillagaðu tilboðsupphæddina á kr. 10.000.000,00, at sølan verður framd smb. omanfyri standandi gjaldsætlan, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 151/23 Umsókn vegna Heilbrigdi um grundøki til nýggjan bygning á Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 105/23 | 23/01914-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 195/23 | 23/01914-2 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 151/23 | 23/01914-2 |

**Upprunin til málið**
Í Mars 2023 móttók Tórshavnar kommuna umsókn frá Heilbrigdi á Velbastað um grundøki til nýggjan bygning á Velbastað.

**Lýsing av málinum**
Síðani miðskeiðis í áttati-árunum hevur viðgerðarstovnurin Heilbrigdi hildið til í einum stórum sethúsum á Velbastað.
Húsini eru ikki tíðarhóskandi í dag, og fyri at stovnurin framhaldandi skal sleppa at virka við viðgerð av rúsdrekka- og rúsevnisnýtslu, krevur góðkennandi stovnurin, Heilsutrygd, at hølisviðurskiftini verða dagførd.

Nakað av kanningum eru gjørdar, og alt bendir á, at besta loysnin er at selja verandi bygning og byggja nýtt. Vakra staðsetingin á Velbastað er góð fyri sálarbótina hjá teimum, sum eru í viðgerð, og bygdarfólkið kennir og virðir virksemið i húsinum. Tí kundi Heilbrigdi hugsað sær framhaldandi at vera í bygdini.

Vísandi til fund við borgarstjóran og trivnaðarstjóran í Tórshavnar kommunu tann 15. september 2022, sí fylgiskjal 23/01914-3 *Fundarfrásøgn 15. sept. 2022*, verður mett, at eitt hóskandi grundstykki til stovnin eigur at vera uml. 2000 fermetrar til bygging av bygningi í einari hædd. Sí viðheftu tekning, sum lýsir bygning hjá Bláa Krossi á Nesi, sí fylgiskjal 23/01914-1 *Galdandi tekn.dwg Flatynd (1).pdf*.

Umsitingin hevur tvær staðsetingar í uppskoti og raðfestir somuleiðis økini sum fylgjandi;
1. Matr. nr. 3a á Velbastað, fram við vegnum Norðuri á Trøð, niðanfyri býlingin Undir Borgarhálsi
2. Matr. nr. 52 á Velbastað, økið har tunnilsfelagið lempar grót frá Sandoyartunlinum, vestan fyri vegin.

Báðar staðsetingar eru festijørð, og má avtala tí gerast við Búnaðarstovuna og avvarðandi festara, áðrenn endaliga staðsetingin kann latast umsøkjara, sí kort – Staðsetingar.

Raðfesting 1.

Økið eystan fyri vegin; Norðuri á Trøð. Núverandi ásetingar fyri økið er sethúsaøki. Lendið er munandi slættari enn aðrir býlingar á Velbastað. Væl ber til at binda í vatn- og kloakkleiðingarnar, ið liggja oman gjøgnum matrikul 3a, sí kort *Matr.nr. 3a.*

Vegurin; Norðuri á Trøð er ein lutfalsliga smalur vegur. Vert er tí at kanna, um vegurin kann flytast, breiðkast, ella bústaðarvegur kann gerast, soleiðis at hann kann koma at ganga oman av svinginum Norðuri á Heyggi og ígjøgnum byggilendið ístaðin.

Umsitingin metir, at lættasti máti at fáa til vega byggiøki á Velbastað er, at kommunan ognar sær lendið frá Føroya Jarðargrunni, og avtala verður gjørd við festara á økinum.

Tosað hevur fyrr verið við Landsverk um at byggja á matr.nr 3a og 1a. Landsverk tekur undir við, at byggjast kann fram við vegnum, men kemur Landsverk møguliga at seta treytir um frástøðu til vegin. Um so er, at frástøðan til vegin ger, at tað ikki verður møguligt at byggja á lendinum, so verður mett ráðiligt, at kommunan yvirtekur vegin.

Við hesi staðseting gerst Heilbrigdi partur av nærumhvørvinum í bygdini.

Raðfesting 2:

Talan er um økið nakað vestan fyri bygdina, har vegurin "Úti í Dølum" kemur niðan á Kirkjubøarvegin, sí kort *Øki við Kirkubøarveg.*

Av tí at hetta øki liggur nakað frá bústaðarøkjunum á Velbastað, mangla høvuðsleiðingar, so sum kloakk, el og vatn. Við at staðseta ein stovn á hesum stað, so er tað ein byrjan upp á ein heilt nýggjan býling fyri seg, og so verður mett, at økið eigur at verða skipað í síni heild og ikki einans við at staðseta ein stovn her. Frástøðan til Velbastaðar bygd er somuleiðis rættiliga long, og tí kemur økið ikki at knýta seg í Velbastaðar bygd, sum ein natúrligur vøkstur av bygdini. Við tíðini ber sjálvandi til at leggja nýggj bústaðarøki millum bygdina og nýggja býlingin, soleiðis at hesi verða knýtt saman, men hetta er framtíðar planlegging. Av hesi somu orsøk, er hetta økið ikki raðfest sum fyrsta raðfesting.

Økið er somuleiðis tengt at ymiskum avtalum. Tunnilsfelagið hevur játtað, at kommunan yvirtekur tær avtalur, felagið hevur við festaran, tá teirra virksemi er liðugt, og fundur hevur verið millum umboð fyri Tórshavnar kommunu, Tunnilsfelagið og Búnaðarstovuna, har kommunan kunnaði Búnaðarstovuna um møguligu útstykkingarnar á Velbastað, har grótið verður deponerað.

Uppskot um at broyta byggisamtyktina fyri økið til bústaðarøki hevur ligið frammi til almenna hoyring, og har komu fleiri mótmæli mótvegis uppskotinum. Sí mál nr. 21/04063, Nýggj útstykking á Velbastað. Málið steðgaði upp eftir hoyringstíðarskeiðið og eru viðmerkingarnar, sum vórðu sendar kommununi, ikki tiknar upp til endaliga politiska viðgerð enn.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

Í báðum førum er talan um festijørð, og skulu avtalur fáast í lag um ítøkiligu staðsetingina.
Somuleiðis liggja økini fram við landsvegi, og skal málið so statt til hoyringar hjá Landsverki.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 21/03382.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**-**

**Skjøl**

Skjal 23/01914-3 fundarfrásøgn 15. Sept 2022
Skjal 23/01914-1 Galdandi tekn.dwg Flatmynd (1).pdf
Skjal 23/01914-4 Staðsetingar
Skjal 23/01914-4 Skjal Øki við Kirkubøarveg
Skjal 23/01914-4 Matr.nr. 3a

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

Enn eru ongar fíggjarligar avleiðingar av málinum, men alt eftir hvat endaliga staðsetingin verður, kunnu fíggjarligar avleiðingar verða. Hetta verður lýst, tá málið er komið nakað longur.
Talan er um fíggjarligar avleiðingar so sum:

- Keyp av lendi
- Leiðingar
- O.a.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at staðseta stovnin, Heilbrigdi, á matr.nr. 3a á Velbastað og at heimila umsitingini at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna og festaran um ítøkiliga lendið, umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at staðseta stovnin á matr. nr. 52 á Velbastað og at heimila umsitingini at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna og festaran um ítøkiliga lendið, umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini, og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Blankt atvøddu: Gunvør Balle og Annika Olsen.

# 152/23 Útstykking omanfyri Argjahamar – øki 3

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 108/23 | 23/03420-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 193/23 | 23/03420-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 152/23 | 23/03420-1 |

**Upprunin til málið**
Heildarætlan er gjørd fyri part av matr.nr. 256, Kirkjubøur omanfyri Argjahamar.
26. januar 2023 samtykti býráðið í mál nr. 22/07223, *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging*, at heimila umsitingini at fara undir at bjóða part av matr.nr. 256 út til bygging í samsvari við raðfesting niðanfyri;

1. Fyrsta raðfesting er at bjóða
    a. lendi vestanfyri verandi raðhúsaøkið á Viðargøtu út til bygging av 11 raðhúsum, sí øki 1 á tekning – bygging framvið linju 3. Hetta økið er fevnt av umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini. Í umráðisparti A1 er ikki neyðugt at gera serstaka byggisamtykt, tá stykkjast skal út til raðhús, men eitt "serloyvi" krevst – sum merkir, at útstykkingin einans skal góðkennast av býráðnum. Tí er tað hesin parturin av útstykkingini, ið kann fáast skjótast frá hondini í mun til eitt útboð, tó treytað av, at arbeiðstakarin raðfestir hetta økið fremst.
    b. lendi til bygging av raðhúsum og/ella íbúðum, sí øki 3 á tekning – bygging á vestaru síðu av linju 2.
    c. lendi til bygging av vinnubygningi við íbúðum á ovaru hæddunum og felags parkering, sí øki 4 á eystaru síðu av linju 2.

Næsta raðfesting er at bjóða írestandi lendir út til bygging av raðhúsum, íbúðum, bústovni, sethúsum og eitt øki til vinnu.

**Lýsing av málinum**
28. apríl í 2023 beyð Tórshavnar kommuna fyrsta økið út til bygging av íbúðarhúsum. Tá freistin at lata tilboð inn tann 8. juni 2023, kl. 12, var farin, var eitt tilboð innkomið.
Tilboðið er frá Jóan Petur Vang við Kontrast, sum ráðgeva. Sambært útbjóðingartilfarinum verður økið selt fyri ásettan, mettan prís áljóðandi;

**kr. 6.002.829.**

Av tí at talan upprunaliga var um mettan kostnað fyri lendið, varð víst á í útbjóðingartilfarinum, at endaligi kostnaðurin fyri lendið kundi væntast at broytast nakað. Endaligi kostnaðurin er nú gjørdur upp, og kemur at liggja á kr. 6.231.447. Sostatt kann sølan fremjast og skeyti upp á ognina gerast, um samráðingarnar koma á mál.

Umframt hetta var í útbjóðingartilfarinum sett treyt til, at tilboðsgevi lat inn ;

- váttan frá peningastovni við trygd um tøka fígging
- endakostnað fyri hvørja íbúð og/ella leigukostnað fyri hvørja íbúð
- frágreiðing av toymi.

Treytir eru eisini settar til fríøki, byggisnið og teknisk viðurskifti.

Tilboðið sum bleiv latið inn uppfyllur ikki øll krøvini í útbjóðingartilfarinum. Tilboðið upplýsir ikki endakostnað fyri hvørja íbúðareind og heldur enn váttan frá peningastovni verður ein kunning frá BankNordik um at felagið hjá Jóan Petur Vang hevur styrki og kunnleika at fremja eina slíka verkætlan,

viðløgd. BankNordik upplýsur somuleiðis, at tá verkætlanin er komin longur, og staðfest er um grundarlag er fyri verkætlanini, vil bankin endaliga viðgerða eina umsókn um fígging. Neyðugt er tí at fara í samráðingar við tilboðsveitara um víðari tilgondina og tilfarið, lati kommununi tann 8. juni 2023.

Tilboðgevi lat tvey uppskot inn uppá skipan av økinum, sí skjal nr. 23/03420-2, *Íbúðir á Hamrinum*:

**Uppskot 1:**
Hetta uppfyllir ikki krøvini í útbjóðingartilfarinum men >>*Ístaðin er uppskotið meira einkult í sniði og byggifrøðiligum loysnum uttan vatnrøttum forskjótingum millum hæddirnar*<<, sum tilboðsgevi sjálvur orðar tað.
Talan er um 3 íbúðarhús við 11 íbúðum í hvørjum, ið eru millum 75 $m^2$ og 100 $m^2$. íbúðirnar liggja runt um eina lyftu- og trappukjarnu. Trappukjarnan vendir sær inn móti lendinum, og við trappukjarnuni er løtt atgongd hjá íbúgvum at koma út á lendið aftan og framman.

Atgongd til bygningarnar er altíð frammanífrá millum báðar endaíbúðirnar gjøgnum ein portal, sum leiðir ein inn í lyftu- og trappukjarnuna.

Fyri at skapa variatión í byggingini verða bygningarnir forskotnir í plan, og staðsettir so langt afturi á stykkinum, sum til ber. Hetta fyri at faa ein grønan kíla framman fyri bygningarnar til uppihald.

Eisini hava bygningarnir innvik í fasaduni, so hvør íbúð fær antin eitt útirúm ella eina altan.

**Uppskot 2:**
Hetta uppskotið loftar ynskjunum í útboðnum í størri mun. Tó ynskir tilboðsgevi at sleppa til samráðingarborðið saman við Tórshavnar kommunu fyri at kunna prísseta íbúðirnar og fáa onnur viðurskiftir upá pláss. Talan er um 8 íbúðarhús við 4 í hvørjum, ið eru millum 77 $m^2$ og 105 $m^2$.

Byggingin verður trekt aftur á stykkið, soleiðis at tað verður bæði pláss fyri parkering og einum grønum øki millum veg og íbúðarhús. Hetta soleiðis at tað er pláss fyri uppihaldi framman fyri húsini, og at børn trygt kunnu spæla uttanfyri uttan mun til bilferðsluna á vegnum.

Stór variatión er í fasadum og framspringum og litum. Ætlanin er at íbúðarhúsini verða bygd við litaðum fasaduplátum, timburklæðing og møguliga flagtekju.

Millum íbúðarhúsini eru atkomumøguleikar við bæði trappu og lyftu. 6 tey mittastu húsini standa tvey og tvey saman við eini trappu millum hesi. Og millum tvey og tvey íbúðarhús er trappa og lyfta. Tríggjar tær ovastu íbúðirnar hava hvør sína altan oman móti vegnum, meðan niðasta íbúðin hevur lítla terrassu móti grøna økinum frammanfyri. Tvær tær ovastu íbúðirnar hava eisini lætta atgongd til lendið omanfyri, meðan íbúðirnar í neðra hava lætta atgongd til grønu økini niðanfyri. Men øll grøn øki eru almenn og kunnu nýtast av øllum.

Atkoma til íbúðirnar er ætlandi á baksíðu, men kann eisini verða frá síðu.

Frammanfyri íbúðarhúsini verða eisini smá hús, sum verða til ávíkavist rusk og súkklur. Og ætlanin er eisini at hava goymslurúm til allar íbúðir, og verða hesi staðsett á baksíðu í neðra ella í samband við lyftu- og trappukjarnir ímillum íbúðarhúsini.

Bæði uppskotini hava styrkir og veikleikar, og mælt verður til at fara undir samráðingar við tilboðsgeva, soleiðis at hann kann seta umsitingina meiri inn í viðurskifti, sum hann metir eru avbjóðandi í mun til at uppfylla krøvini úr útbjóðingartilfarinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr.nr 256 liggur í umráðispartið A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Arbeiðið við at gera serstøku byggisamtyktina verður sett í gongd beint eftir summarferiuna.

Ætlanin er, at ásetingarnar fyri øki verða soljóðandi:

- Byggistig á 0,2
- Nýtslustig á 0,7
- Bygging loyvd í 4 hæddum

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/07223, Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
23/03420-2 Íbúðir a Hamrinum (1).
23/03420-3 Útbjóðingartilfar omanfyri Argjahamar øki 3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | |

| **Upphædd** |
|---|
| 6.231.447 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaða inntøkan | Upphædd: | 6.231.447 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

Hetta málið er partur av stóru útstykkingarverkætlanini, og er talan um sølu, sum skal fíggja part av útstykkingini omanfyri Argjahamar.
Um samráðingarnar koma á mál við tilboðsgeva, so skal sølu-upphæddin flytast á L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til:

- at heimila umsitingini at fara í samráðingar við tilboðsgeva um møguleikarnar á øki 3, sambært innlatnu uppskotunum,
- at heimila umsitingini at selja lendið til tilboðsgevara, um komið verður á mál við samráðingunum,
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 607<br>Formansins merki: |

## 153/23 Miðbýarkjarnan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.08.2022 | 157/22 | 22/03571-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 200/22 | 22/03571-1 |
| 3 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 186/22 | 22/03571-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 241/22 | 22/03571-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2023 | 1/23 | 22/03571-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 16/23 | 22/03571-1 |
| 7 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 21/23 | 22/03571-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.06.2023 | 93/23 | 22/03571-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 166/23 | 22/03571-1 |
| 10 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 153/23 | 22/03571-1 |

**Upprunin til málið**
Ein býarkjarna er tað handilsliga, mentunarliga, søguliga og landafrøðiliga hjartað í einum býi. Ein miðbýarkjarna eigur at verða innbjóðandi og at leggja upp til, at fólkið hittist og hevur fyrsta rætt til infrakervið og hentleikar til bústaðir.

Hetta ynskir kommunan at stimbra undir, og hava tríggir ráðgevar fingið møguleika at lata inn tilboð uppá arbeiðið at útvega eitt skipanaruppskot/faldara av miðbýarkjarnuni, sí fylgiskjal *Útbjóðingartilfar* og *Dagført økið*.

Í mong ár hevur miðbýarkjarnan í Tórshavn verið merkt av bilferðslu. Bilurin hevur fyrsta rætt til flestu økini, og parkering fyllir nógv. Harafturat mugu vit ásanna, at vit búgva í einum vetrarbýi, og innrættingin av býnum átti í størri mun at tikið atlit til hetta.

Ein part av árinum hava vit tómar gøtur og eina so at siga lívleysa miðbýarkjarnu, ein sokallaðan "donut-bý". Orsøkin til hetta er m.a., at keyp á alnótini, hevur gjørt tað gjørligt at fáa sínar vørur flýggjaðar til úthurðina, umframt at kappingin frá handilsmiðstøðum er økt. Okkara býarkjarna hevur tørv á at fóta sær og livna upp aftur.

Ynski er at endurskoða miðbýarkjarnuna í tann mun, at býurin verður tættaður við fleiri bústøðum og trivnaðarligum átøkum, sum fær vitjandi at støðast, samstundis sum at eyðkennið í miðbýnum verður varðveitt og styrkt. Her verður serliga hugsað um at varðveita tær mongu smogurnar, ið binda býin saman, smáu og snøggu býarhúsini við mønutaki, umframt bygningar so sum gamla Føroya Banka, Ebenezer, gamla Sparikassan, Býráðið, Margarinfabrikkina/Tjóðpallin.

Faldarin, sum verður latin kommununi, kemur at liggja til grund fyri framtíðar skipanini av miðbýnum og verður grundarlagið undir eini komandi serstakari byggisamtykt.

Fyrsta juli móttók kommunan trý tilboð, sum verða lýst niðanfyri, sí fylgiskjøl *Henning Larsen, SNA, BRIM og BRIM-dagførdur prísur*.

**Lýsing av málinum**
Í útbjóðingarskrivinum, varð biðið um tilboð uppá arbeiðið umframt eina frágreiðing av, hvussu uppgávan verður loyst.

| | |
|---|---|
| SNA lat tilboð inn áljóðandi | kr. 800.000 u/mvg |
| Henning Larsen lat tilboð inn áljóðandi | kr. 840.000 u/mvg |
| BRIM lat tilboð inn áljóðandi | kr. 850.850 u/mvg |

SNA hevur lægsta tilboðið. I tilfarinum frá SNA er víst á áhugaverd diagrammir, men eingin fullfíggjað frágreiðing fyriliggur, og tí er ringt at skilja akkurát, hvussu arbeiðið verður framt. Serligt fyri hetta tilboðið er, at grønu økini (býarparkin) verða viðgjørd við princippskitsum og plantuplani.

Tilboðið frá Henning Larsen er eitt sindur lægri enn hægsta tilboðið. Tilfarið, sum tey hava latið inn, er sera gott við greiðum tekningum og lýsingum, av hvussu arbeiðið fer fram. Serligt fyri hetta uppskotið er, at alt arbeiðstøkuøkið verður teknað upp í talgildum 3D-forriti. Harumframt verða mikroklimatiskar greiningar gjørdar av býnum við at nýta planleggingarforritið *GreenScenaro*, ið sameinar greiningar og simuleringar av m.a. trivnaði hjá fólki og skugga, sól-, vind- og ljósviðurskifti. Hetta er ein áhugaverdur háttur at arbeiða uppá, sum vit ikki hava roynt fyrr í Tórshavnar kommunu. Hetta gevur kanningarúrslitinum objektivitet og gjøgnumskygni. Umframt hetta verður heitið "Urtagarðsbýurin" nýtt, ið er ein tulking av visiónini úr útbjóðingartilfarinum um eina býarpark. Tey citera Jørgen Franz Jacobsen:

*Í allar ættir er grønur gróður. Niðan ímillum urtagarðar, klettar og hús sker ein long spákingarleið við nógvum gongufólki. Hálvdoyvt ljóð av samrøðum teirra rennur út í sjóðið av ánni. Øll, sum hava verið í Havn, kenna tað: áin, sum rennur í skugganum av trøunum. Tað er sovorðin eyðkendur blíður dámur um henda gróðurgyrda [býin].*

og vísa á, at tey vilja endurskapa Tórshavn sum ein urtagarðsbý.

BRIM hevur hægsta tilboðið. Tilfarið frá BRIM er væl úr hondum greitt við neyvari frágreiðing um, hvussu arbeiðið fer fram. Serligt fyri hetta uppskotið er, at dentur verður lagdur á at arbeiða við eini neyvari endurtøku av analysum og uppskotum til býarskipan, ein sokallað repitativ process. Hetta merkir, at neyvar kanningar ligga til grundar fyri uppskotunum tey koma við.

Umsitingin hevur mett um innkomnu uppskotini, sí fylgiskjal 'Meting av tilboðum'. Allir ráðgevarnir hava latið inn nøktandi tilfar, men uppskotið frá Henning Larsen er tað, sum umsitingin metir á bestan hátt líkur ynskini fyri miðbýin og kappingartreytirnar. Umsitingin mælir til, at Henning Larsen fær í boði at gera skipanina av miðbýarkjarnuni. Uppskotið vísir á eina framúr spennandi tilgongd til arbeiðið, umframt at tey útvega eina talgilda upptekning av býnum í 3D, ið er eitt sera virðismikið tilfar í tí víðari menningini av økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu og undirliggjandi serstakar byggisamtyktir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/03571-5 Útbjóðingartilfar
22/03571-3 Dagført økið
22/03571-3 SNA
22/03571-3 Henning Larsen
22/03571-2 BRIM
22/03571-3 BRIM – dagførdur prísur
22/03571-6 Meting av tilboðum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | x |

| | Býráðsfundur<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 609<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6275 | L62052 | Fríðkan av bygdunum |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6275 | Nýggj | Miðbýar-kjarnan | Ja |

| **Upphædd** |
|---|
| 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- játta 1 mió. kr. til verkætlanina av konto 6275, L62052 Fríðkan av bygdunum
- heimila umsitingini at gera sáttmála við vinnandi ráðgevan
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøddi blankt.
**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson settu fram broytingaruppskot um at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at 1 mió. kr. verða játtaðar til verkætlanina av LK31011, Útbygging dagstovnurin á Hamrinum.

Broytingaruppskotið varð samtykt við trimum atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Annika Olsen, ið mæltu til, at peningurin, ið játtast skal til verkætlanina verður tikin av tøkum peningi heldur enn av konto 6275, L62052, Fríðkan av bygdunum ella av LK31011, Útbygging dagstovnurin á Hamrinum.
**Býráðsfundur 01. september 2022:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá minnilutanum um at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at játtanin verður tikin av tøkum peningi.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Turid Horn, Annika Olsen, Birgir Nielen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Turid Horn og Annika Olsen.
**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Heðin Mortensen setti fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at taka undir við málinum við fyrstu viðgerð við teirri broyting, at 1 mió. kr. verður játtað av LK31015, Tillagingar á dagstovnaøkinum, í staðin fyri av LK31011, Útbygging dagstovnurin á Hamrinum.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

Málið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**
'Urtagarðsbýurin – ein livandi, fjøllbroyttur og grønur miðbýur' kallast Skipanaruppskotið, sum ráðgevin Henning Larsen læt inn tann 14. desembur. Ósbjørn Jacobsen leggur uppskotið fram fyri nevndini á nevndarfundinum.

Niðanfyri sæst ein stutt lýsing av endaliga úrslitinum:
Uppskotið er gjørt við tí fyri eyga at skapa lív í miðbýnum á tann hátt, at býurin verður tettur við fleiri bústøðum og trivnaðarligum átøkum, samstundis sum at eyðkennið í miðbýnum verður varðveitt og styrkt.

Miðbýurin í Havn hevur, í mun til nógvar aðrar høvuðsstaðir, ikki verið ígjøgnum eina stóra umfatandi umskapan. Samleikin er ein samanrenning av søguni, byggilist, gróðri, støddarmunum, fólkum, tað óspilta, og mangt, mangt annað. Tað er júst hetta, sum ráðgevin í stóran mun hevur arbeitt við ikki at oyðileggja, men heldur at varðveita og brúka sum eitt tilfeingi í býarmenningini av miðbýarkjarnuni.

Tá hugt verður eftir tølunum, so kann í stuttum sigast, at «ongin» býr í miðbýarkjarnuni í Havn. Bert 3% av samlaðu gólvvíddini, ið telur 30.418$m^2$, eru nýtt til bústaðir. Ráðgevin hevur gjørt uppskot, har fermetrar eru umskapaðir, tiknir burtur og lagdir afturat. Í nýggja uppskotinum eru 7.578 $m^2$ lagdir afturat, svarandi til uml. 204 fleiri bústaðir í miðbýnum (her er útgangsstøði tikið í íbúðum á 75$m^2$ og lestraríbúðum á 35 $m^2$). Ein slík umskapan av einum býi skal gerast við skynsemi. Byggilistarlig atlit skulu takast, umframt at krøv til bygningin, framsíður, takhall o.a. skulu liggja til grund í einari serstakari byggisamtykt. Hetta er ein týdningarmikil liður í arbeiðinum at tryggja og varðveita ein áhugaverdan og fjølbroyttan miðbý.

Havnin er ein grønur býur. Grønur gróður sæst í allar ættir. Gomlu trøini og nógvu smáu urtagarðarnir eru eitt sereyðkenni fyri miðbýin. Tað grøna hevur alstóran týdning fyri trivnaðin í býnum. Uppskotið vísir eina bilfría Niels Finsens gøtu frá Steinatúni og oman á Vaglið. Gøtan er gjørd grønari, og nýggj gróðurseting av 'allé-trøum' skapa saman við stóru gomlu trøunum eina grøna tekju yvir partar av gongugøtuni, sum gevur økinum lívd og ein heilt serstakan 'urtagarðsdám'. Eisini skal hesin grøni parturin virka sum fríøki hjá teimum mongu íbúðum, ið verða lagdar aftur at miðbýarkjarnuni.

Sum tað fyrr er blivið umrøtt, so er stórur tørvur á eini gjøgnumhugsaðari og framskygdari ferðslu- og parkeringarætlan í miðbýnum. Hetta eru viðurskifti, ið ikki eru avklárað í skitsuuppskotinum, og ein verkætlan, ið er klár at fara í umbúnað, tá serstaka byggisamtyktin fyri økið er gjørd. Sama er galdandi fyri teknisku leiðingarnar í miðbýnum, so sum kloakk- og vatnviðurskifti.

Í 2016 bleiv Miðbýarætlanin gjørd, sum í fyrstu syftu snýr seg um skipan av kommunalum økjum og útirúmum. Hetta skitsuuppskotið snýr seg meiri um, hvussu innihaldið av teimum ymsu útirúmunum og bygningunum í býnum kann umskapast.

Skitsuuppskotið skal síggjast sum ein langskygd ætlan, ið er gjørd við tí endamáli at skapa lív í býnum, og sum skal liggja til grund fyri broyting av byggisamtyktini. Uppskotið lýsir, hvussu høvuðsgrepini kunnu umskipast fyri at skapa lív í býnum, umframt uppskot til hvar miðbýarkjarnan kann skipast við bústøðum. Smálutir so sum flísar, vindeygu o.a. eru ikki endalig, men einans dømi um, hvussu býurin kundi sæð út.

Hetta er ein ætlan, ið fer at hava ávirkan á býin og tað virksemið, ið har er, og tí kann talan blíva um endurgjald. Samstundis sum at hendan ætlan regulerer menningina í býnum fyri at tryggja tey trivnaðarligu viðurskiftini (ljós- og skuggaviðurskifti), so gevur hetta eisini summum pørtum í býnum fíggjarligar avleiðingar, av tí at summi fáa skerdar møguleikar fyri bygging. Møguliga endurgjaldið skal tó ikki síggjast sum ein forðing, men heldur ein møgulig fylgja, ið skal til fyri at skapa ein bý, har tey trivnaðarligu viðurskiftini eru tryggjað.

Áðrenn ein serstøk byggisamtykt verður gjørd, er sera týdningarmikið at fara undir eina tilgongd at hoyra áhugapartar, ið eru beinleiðis ávirkaðir av ætlanini. Við hesum verða tey fyrst at hoyra um ætlanina og fáa møguleika at koma við viðmerkingum. Tá henda tilgongd er liðug, verður kallað inn til almenna kunning um skitsuuppskotið.
Eftir hetta verða viðmerkingar frá hoyring og kunningarfundi viðgjørdar og møguligar tillagingar av skitsuuppskotinum gjørdar, og tilgongdin at broyta byggisamtykt kann fara í gongd.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at:

- samtykkja skitsuuppskotið
- heimila umsitingini at fara undir at fyrireika fundir við áhugapartar og síðani ein kunnandi borgarafund
- heimila umsitingini at fara undir at gera serstaka byggisamtykt fyri økið við støði í skitsuuppskotinum
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í 2022 varð peningur játtaður at gera nýggja miðbýarætlan av L62054 Miðbýarkjarnan. Ætlanin er gjørd, og arbeiðið við átøkunum í ætlanini halda áfram. Saldan á verkætlanini er kr. 60.219 í avlopi.

Umsitingin hevur havt fund við eigararnar av teimum flestu ognunum í økinum, sum nýggja ætlanin fevnir um, og eru ætlanir um at hava fundir við allar eigararnar, áðrenn farið verður víðari við ætlanini. Á fundunum er ætlanin gjøgnumgingin í mun til, hvørja ávirkan hon hevur á einstøku ognirnar. Sum heild er ætlanin væl móttikin, og hava nakrir av eigarunum viðmerkingar/ynskir í mun til ætlanina.

Á skjali *Fundarfrágreiðingar* er yvirlit yvir allar eigarar, umframt fundarfrágreiðing frá fundunum. Í einstøkum førum, matr. nr. 357b og 370 er ynski um, at kommunan fer í samráðingar við eigararnar um at keypa ognirnar. Hetta grundað á, at ognirnar hava týðandi leiklut og ávirkan á ætlanina, umframt at eigarar hava víst áhuga í at selja kommununi ognina.

Tá allir fundirnir hava verið, og støða er tikin til, um viðmerkingarnar hjá eigarunum eiga at verða tiknar til eftirtektar, verður farið víðari við arbeiðinum at gera serstaka byggisamtykt fyri økið.

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☐ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☒ |

| Játtast av: | Játtast á: | |
|---|---|---|
| | | |

| Býráðsfundur 21. juni 2023 | Blað nr.: 612 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| 6275 | L62054 | Miðbýarkjarnan |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | |

| Upphædd |
|---|
| Kr. 60.219 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:

- loka verkætlanina Miðbýarkjarnan, L62054, at flyta avlopið á kr. 60.219 á karmin LK62999, Fríðkan av býnum á konto 6275, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
- Umsitingin arbeiðir víðari við arbeiðinum at gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnvndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 154/23 Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.01.2023 | 10/23 | 22/07223-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.01.2023 | 29/23 | 22/07223-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 27/23 | 22/07223-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 107/23 | 22/07223-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 196/23 | 22/07223-1 |
| 6 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 154/23 | 22/07223-1 |

**Upprunin til málið**
Stórur eftirspurningur er eftir bústøðum og grundøki í Tórshavnar kommunu. Sambært kommunuætlan frá 2020 er tað, við væntaða fólkavøkstrinum, tørvur á útvið 3.000 nýggjum bústøðum fram til 2032. Tað er í miðal einar 250 nýggjar bústaðir um árið síðan 2020. Fyri at Tórshavnar kommuna skal kunna veita møguleika fyri at byggja so nógvar bústaðir, er neyðugt at vaksa um verandi bý, bæði við at byggja tættari í verandi býarøkjum og við at útvega meira lendi til býarvøkstur. Í hesum sambandi verður lendið oman fyri Argjahamar útnevnt sum eitt av teimum økjunum, ið liggur sum fremsta raðfesting til býarmenning.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at fara undir at bjóða ein part av matr.nr. 256, Kirkjubøur (Argir), til bygging av bústøðum, vinnu og stovnum. Ætlanin er, at økið skal kunna rúma eitt stað ímillum 170-190 bústøðum, t.e. íbúðir, raðhús og sethús. Endaliga talið av búeindum avhongur nakað av, hvussu økini í tilgongdini verða ment saman við keyparunum.
Lendið liggur oman fyri verandi bústaðarøkið Klingurstjørn, skúlan og dagstovnin á Argjahamri og bústaðarøkið á Hamrinum.

Samlaða økið verður skipað í bústaðartyssi, har hvørt tyssi ávikavist er deilt upp sum raðhúsabygging við fríøki og parkering, og sum ein blanding av raðhúsa- og íbúðarbygging við fríøki og parkering, undantikið øki 2, ið einans verður sethús, og øki 4, sum verður skipað við vinnuvirksemi í gøtuhædd og íbúðum í ovaru hæddum, umframt fríøki og deili-parkering til dagstovnin og vinnuligt virksemi.

Yvirskipað fyri alt økið er at fáa eina bygging við í mesta lagi 4 hæddum og eina bygging við mønutekju, soleiðis at byggingin verður lagað til verandi bústaðardám.

Sí skipanina av økjunum í viðheftu tekning, j.nr. 22/07223-3, Skipan av øki_útstykking omanfyri Argjahamar.

Útstykkingin er ávegis, sí mál nr. 21/01777 “Útstykking oman fyri Argjahamar”, har yvirskipaða ætlanin fyri útstykkingina er lýst. Harumframt verður farið undir at gera sertaka byggisamtykt fyri alt økið, sí mál nr. 22/07317 “Nýggj serstøk byggisamtykt fyri útstykking omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Kirkjubøur”, sum somuleiðis í yvirskipaðum teksti lýsir ætlaðu ásetingarnar fyri hvørt øki sær.

<u>Ætlanin er at bjóða bústaðabyggingina út í stigum sambært niðanfyri standandi raðfesting.</u>

2. Fyrsta raðfesting er at bjóða
   a. lendi vestanfyri verandi raðhúsaøkið á Viðargøtu út til bygging av 11 raðhúsum, sí øki 1 á tekning – bygging framvið linju 3. Hetta økið er fevnt av umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini. Í umráðisparti A1 er ikki neyðugt at gera serstaka byggisamtykt, tá stykkjast skal út til raðhús, men eitt “serloyvi” krevst – sum merkir at útstykkingin einans skal góðkennast av býráðnum. Tí er tað

hesin parturin av útstykkingini, ið kann fáast skjótast frá hondini í mun til eitt útboð, tó treytað av, at arbeiðstakarin raðfestir hetta økið fremst.

b. lendi til bygging av raðhúsum og/ella íbúðum, sí øki 3 á tekning – bygging á vestaru síðu av linju 2.
c. lendi til bygging av vinnubygningi við íbúðum á ovaru hæddunum og felags parkering, sí øki 4 á eystaru síðu av linju 2.

3. Næsta raðfesting er at bjóða írestandi lendir út til bygging av raðhúsum, íbúðum, bústovni, sethúsum og eitt øki til vinnu.

Samlaða økið er áleið 130.000 $m^2$ til víddar, íroknað vegir, fríøkir o.a.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Ásetingar fyri umráðispart A3 í 3. Grundumráði eru:**

1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.
3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús, 300 $m^2$ fyri tvíhús og 250 $m^2$ fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.
4. Byggistig 0,3
5. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykki, sum eru 200 $m^2$, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbygginini í mun til eitt natúrliga avmarkað øki.
6. Hús við vanligari mønureising mugu einans byggjast í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 metrar til hægsta punkt við útvegg og 9 metrar til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
7. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi vera 6 metrar til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi 7,5 metrar.
8. Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 metrar, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 metrar.
9. Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tali av hæddum, verða loyvt at byggja hægri og skipað so fyri, at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).

**Ásetingar fyri umráðispart A1 í 3. Grundumráði eru:**

1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski. Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
2. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil. Í samband við eitt natúrliga avmarkað øki, har flestu grundstykkini eru minni enn ásetingarnar í pkt. 2 loyva, kann byggivaldið geva serloyvi til at víkja frá ásettu støddini á grundstykkjunum. Hetta fyri at varðveita dámin á økinum.
3. Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt natúrliga avmarkað øki, og tá ið byggibúningin annars er tryggjað sambært vanligu útstykkingartreytum kommununnar.
4. Byggistigið má ikki fara upp um 0,3

5. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.
6. Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
7. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.
8. Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu, longd sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.
9. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk. 5, tá ið økið verður roknað sum heild. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir. Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.

### Upplýsingar frá umsitingini
-

### Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
-

### Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
-

### Skjøl
j.nr. 22/07223-3, Skipan av øki_útstykking omanfyri Argjahamar

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at fara undir at bjóða part av matr.nr. 256 út til bygging av bústaðar- stovns- og vinnubygging í samsvari við omanfyri standandi, umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at møgulig framtíðar útbygging av Skúlanum á Argjahamri verður við einari hædd omaná.

**Fíggjarnevndin 26. januar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Viðhefta kort jnr. 22/07223-9 *Skipan av øki - útstykking omanfyri Argjahamar - dagf 16juni2023* lýsir økini í útstykkingini, sum ætlanin er at selja. Kortið lýsir heitini fyri ymisku økini og støddirnar á teimum.

**Øki 3**
Øki 3 hevur verið í útboði, og verður framhaldandi viðgjørt í máli nr. 23/03420, Útstykking omanfyri Argjahamar – øki 3.

**Øki 5**
Samráðingar hava verið við Bústaðir um keyp av øki 5, til bygging av leiguíbúðum. Øki 5 er samanlagt 8431 m$^2$, sum verður selt fyri í alt kr. 13.932.349, umframt matrikulering. Fermetrakostnaðurin fyri lendið er áljóðandi 1652 kr/m$^2$.

- Byggiøkið er 6745 m$^2$
- Fríøkið er 1686 m$^2$

Ásetingarnar fyri byggiøkið er byggistig á 0,2 og nýtslustig á 0,7. Mest loyvda hædd verður 4 hæddir.

**Øki 4.1**
Økið 4.1 í útstykkingini er lagt av til almennan stovn. Øki er 9250m$^2$ til støddar og verður selt fyri ein samlaðan prís áljóðandi kr. 3.700.000,00, umframt matrikulering. Fermetrakostnaðurin fyri lendið er áljóðandi 400 kr/m$^2$.

Almanna- og mentamálaráðið hevur sent umsitingini í Tórshavnar kommunu umbøn um at leggja trý grundøki av til at byggja vardar íbúðir og virknistilboð á. Sí mál nr. 22/04373, *Umsókn um grundøki til vardar bústaðir*, sum lýsir hetta málið nærri.

Býráðið samtykti 23. mars 2023 at leggja øki 4.1 av til Almanna- og mentamálaráðið.

Ásetingarnar fyri byggiøkið verða gjørdar í samráð við Almanna- og mentamálaráðið, tá teirra verkætlan er komin í gongd.

**Øki 4.0**
Í løtuni verður arbeitt við at fyrireika útboðið av økinum, og verður útbjóðingarskrivið eftir ætlan lagt út alment áðrenn summarferiuna.

**Skjøl**
jnr. 22/04373-2 Fundarfrásøgn - 06.10.2022.pdf
jnr. 22/07223-9 Skipan av øki - útstykking omanfyri Argjahamar - dagf16juni2023

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |

| |
|---|
| **Upphædd** |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | | | 13.932.349 |
| | | | 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | | | 3.700.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaða inntøkan | Upphædd: | 17.632.349 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til, at selja ávikavist øki 5 fyri kr. 13.932.349 til Bústaðir og øki 4.1 fyri kr. 3.700.000 til Almanna- og mentamálaráðið og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

## 155/23 Miðbýarætlan - Havnará

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 8/21 | 21/00407-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.02.2021 | 8/21 | 21/00407-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 27/21 | 21/00407-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 57/21 | 21/00407-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 97/21 | 21/00407-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 141/21 | 21/00407-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 55/21 | 21/00407-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 143/22 | 21/00407-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.06.2022 | 49/22 | 21/00407-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 184/22 | 21/00407-1 |
| 11 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 144/22 | 21/00407-1 |
| 12 Ferðslunevndin | 25.08.2022 | 9/22 | 21/00407-1 |
| 13 Tekniska nevnd | 12.09.2022 | 54/22 | 21/00407-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.06.2023 | 96/23 | 21/00407-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 110/23 | 21/00407-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 197/23 | 21/00407-1 |
| 17 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 155/23 | 21/00407-1 |

**Upprunin til málið**
Politiskt er ynski um at raðfesta miðbýin, soleiðis at trivnaðurin í miðbýnum framhaldandi hækkar, og er ynski um at lata Havnará uppaftur á strekkinum frá Betri banka og oman á Vaglið framvið Tinghúsgarðinum.

**Lýsing av málinum**
Fleiri málsetningar eru í visiónini hjá býráðnum um at skapa trivnað í einum býi. Høvuðsstaðurin skal vera alheimsgjørdur og fjølbroyttur, har rúm skal vera fyri ymiskum áskoðanum, hugskotum og mentanum, tí soleiðis verður gott hjá øllum at liva, búgva og virka. Býurin skal vera ein livandi býur við upplivingum og avbjóðingum, men eisini ein býur við tryggleika og nærleika.

Eitt nú við hesi visjónini fyri høvuðsstaðin varð hugskots- og prosjektkappingin fyri miðbýin í 2014 hildin. Bæði kappingin og seinni Miðbýarætlanin frá 2016, arbeiða báðar fyri, at býurin gerst áhugaverdur og savnandi fyri borgararnar í kommununi, men somuleiðis ein slóðandi høvuðsstaður fyri Føroya land.

Borgarar spyrja eftir upplivingum og sakna ein livandi bý eins og teir vit kenna frá útlondunum. Býarøkini mugu skapa møguleika fyri uppihaldi millum havnarfólk, Føroya fólk og ferðafólk, og tí skal Tórshavnar kommuna skapa karmar fyri einum náttúrligum samanspæli millum hesi.

At lata Havnará upp aftur er eitt beinleiðis átak fyri at geva býnum enn eitt býarrúm við einum aktiviteti/virki, sum vit annars ikki hava niðri í miðbýnum longur. Søguliga sæð, so eru áirnar spor í lendinum, og hava tær stóran týdning fyri, hvussu lendið verður fatað, og eru tær við rennandi vatninum og tí lívið, sum kann nørast á staðnum, livandi, dragandi og savnandi.

Í uml. ár 1960 varð Havnará lokað á leiðini frá Ebenezer fram við Tinghúsinum og oman á Vaglið.

Upprunaliga gekk áin frá Villingadali, oman í Gundadal, víðari oman gjøgnum plantasjuna, framvið Sjónleikarhúsinum og oman gjøgnum miðbýin/Vaglið og oman á Kongabrúnna. Størsti parturin av ánni er í dag undir jørð, og verður væntandi heldur aldrin latin uppaftur, hetta grundað á ymisk viðurskiftir, so sum kloakk, núverandi virksemið omaná lokinum o.s.fr.

Í fyrstu atløgu verður mett ráðiligt, at fara undir at lata partin av ánni upp frá Betri banka og oman á Vaglið, fyri síðani at meta um og taka støðu til, um tað er ráðiligt at lata ánna upp allan vegin omaneftir Áarvegnum og oman á Kongabrúnna.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Øllum kunnugt, so verður áin í dag nýtt sum kloakk heilt uppi frá Sjónleikarhúsinum, og skal tað gerast møguligt at lata part av ánni uppaftur, so verður neyðugt at taka hædd fyri hesum og fáa kloakkina skipaða serskilt frá ánni. Tekniska deild, sum varðar av kloakkunum vísir á, at hetta kann gerast upp á fleiri mátar, men verður neyðugt at gera eitt neyvari kanningar og prosjekteringsarbeiði hesum viðvíkjandi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
16/00491_Miðbýarætlanin

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í framhaldandi tilgongdini verður neyðugt at kanna málið væl, tosa við avvarðandi áhugapartar, soleiðis at øll viðurskiftir eru greidd, tá farið verður undir arbeiðstøkuna.

**Skjøl**
Sí j.nr. 21/00407-2: Mynd: Havnará – Vaglið,

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | x | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | x | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Verkætlanin er í núverandi løtu ongan veg komin, og tískil er ómøguligt at lýsa fíggjarligu viðurskiftini. Hetta verður at greina nærri seinni í tilgongdini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:
- At 1.000.000 kr. verða fluttar av konto 8175, L00001, Løgukarmur fyri árið til nýggja íløgu "Havnará" á konto 8175.
- At umsitingin fer undir at lýsa verkætlanina, gera neyðugar kanningar og fyrireika verkætlanina.
- At umsitingin verður heimilað at bjóða partar av verkætlanini út, um mett verður neyðugt við serráðgeving til verkætlanina
- At avvarðandi nevndir verða kunnaðar leypandi.
- At beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við ætlanini vísandi til óvissuna um endaliga kostnaðin og hvussu hetta ávirkar aðrar grundtænastur, ið kommunan skal veita.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingararbeiðið til verkætlanina at lata ein part av Havnará upp, hevur verið neyðugt at kanna fleiri viðurskifti, áðrenn farast kann í holt við sjálvt projekteringsarbeiðið. Arbeitt hevur somuleiðis verið við uppskoti til tekniska loysn, hvussu áin kann latast upp við reinum vatni, har dálkað vatn verður leitt uttan um sjálva ánna.

Tvær tekniskar loysnir eru uppi at venda um, hvussu áin kann gerast, men áðrenn áin kann endurskapast/nýggjast, má dekkið og gamalt tilfar takast oman av ánni. Um hugt verður við arbeiðstakarans eygum, er neyðugt at skipa verkætlanina í stigum. Endurnýggjanin er treytað av niðurtøkuni, og mælir umsitingin tí til at heinta tilboð frá tveimum arbeiðstakarum fyri at kenna ítøkiliga kostnaðin á niðurtøkuni og fyrsta byggistigi.

Ímeðan bíðað verður eftir tilboðum, verður næsta byggistig fyrireikað, sum er at tekna uppskot til endurnýggjanina/skapanina av ánni. Arkitektoniski parturin fevnir um útsjónd og skipan av botni, vangum, girðingum, álegging, vøkstri o.s.fr.

Skráseting og kanningar
Í 2017 varð ein skráseting av Havnará gjørd frá Sjónleikarhúsinum og oman til Etika niðri á Áarvegnum. Skrásetingin fevndi um allar írenningar, sum eru knýttar í Havnará, og skapið á ánni, t.v.s. botn, vangar og dekk. Tilsamans vórðu 317 leiðingar skrásettar, 247 av hesum vóru annað hvørt dren ella regnvatnsleiðingar, t.e. vatn í seyrar niður í lendið og avvatning av vegum, túnum ella tekjum, meðan hinar 70 vóru kloakk leiðingar.

Flestu leiðingar, sum renna inn í Havnará, eru gomul betong ella leirrør, sum í fleiri førum eru brotin uttan fyri vangan, í støðum kemur mannatrekkur úr leiðingum, og aðrastaðni var nógv feitt at síggja. Kloakkvatn lekur tí inn millum rivur á vangunum, og eru hetta annars avleiðingar av m.a. vantandi rottangum, feittútskiljarum og skeivum íbindingum. Mett varð í 2017, at áleið ein triðingur av teimum 70 kloakkleiðingunum hava brot ella rivur. Ramur kloakkdeymur er í støðum í miðbýnum, og verður ein avbjóðing við at taka dekkið av ánni, at tað fer at lukta í miðbýnum.

Lendisuppmáting er gjørd av økinum og nærumhvørvinum, sum verður nýtt sum grundarlag til uppskotið og víðari tilgongdina. Møguliga verða avbjóðingar við verandi leiðingum, sum mugu umleggjast í sambandi við verkætlanina.

Mátingar av vatnnøgd í Havnará eru settar í gongd, og verða gjørdar yvir tíð. Neyðugt er at kenna vatnnøgdina, bæði í turki og áarføri, tí síðukanalir til umlegging av skitnum vatni, har áin skal latast upp, skulu dimensionerast út frá hesum.

Lívfrøðiligar kanningar vístu í summar, at áarvatnið í Havnará oman fyri Sjónleikarhúsið er dálkað við E. Coli og koliformum bakterium. Áarvatnið, sum skal leiðast oman, har Havnará skal latast upp, er sera illa dálkað, og úrslitið bendir á, at kloakkvatn rennur í ánna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at heinta tilboð frá tveimum arbeiðstakarum (undirhondstilboð) uppá niðurtøku og at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í tilgongdini hevur verið arbeitt við møguleikanum at lata Havnará upp og eisini partvís at lata ánna upp, men verður hetta ikki mett ráðiligt, sum umstøðurnar eru í dag, og tekur verkætlanin tí støði í at gera eina á oman á verandi Havnará. Verkætlanin fevnir í fyrsta umfari um strekkið frá Betri Banki og oman til sunnara enda á tinghúsvøllinum, har standmyndin av R.C. Effersøe stendur.

Zeta Architects hevur tilevnað eitt skipanaruppskot, sum lýsir arkitektoniska konseptið, har arbeitt verður við trimum hugtøkum; botnur, áarbakki og vatn. Uppskotið, sum fevnir um eina nýggja og nútímans á, vísir á eina loysn í trimum stigum, har áin rennur ígjøgnum ymisk býarrúm og tillagar seg til umstøðurnar við at broyta dám og eginleikar. Til tíðir er áin lyft upp úr gøtuni, aðrastaðni flýtur hon saman við gøtuni og aftur aðrastaðni grevur hon seg niður í gøtuna. Sí annars skipanaruppskotið.

Umsitingin hevur somuleiðis latið gjørt útbjóðingartilfar til verkætlanina sambært skipanaruppskoti og projekttilfari, og vórðu tríggir arbeiðstakarar bjóðaðir at lata undirhondstilboð uppá verkætlanina.

Tilboðini eru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| J&K Petersen | kr. 9.438.586 u/mvg |
| Húsavarðartænastan | kr. 15.363.149 u/mvg |
| Articon | kr. 15.469.505 u/mvg |

J&K Petersen vann útboðið við lægsta tilboði.

Grótvirkið hevur latið tilboð uppá bassaltið, ið skal nýtast í verkætlanini, og er samlaða upphæddin áljóðandi kr. 1.843.200 íroknað samlaðu tilboðsupphæddina, lýst omanfyri.

Av tí at prísurin fyri neyðugt býarrúmsinnbúgv, t.e. gøtuljós, beinkir, ruskspannir o.a., list, ráðgeving og óvantað ikki er íroknað tilboðsupphæddina, skulu hesir postarnir leggjast afturat samlaðu upphæddini.

Byggiharraráðgevi hevur havt byggileiðsluna av verkætlanini, og skal byggiharraráðgevi framhaldandi verða knýttur at verkætlanini. Talan er um eitt tíðarskeið áljóðandi 10 mánaðir, harav 2 mánaðir eru fyrireiking til verkætlanina og 8 mánaðir eru byggitíðin fram til avhanding.

Samlaða roknistykkið fyri verkætlanina er soljóðandi:

| | |
|---|---|
| J&K Petersen | kr. 9.438.586 |
| Býarrúmsinnbúgv og list | kr. 400.000 |
| Ráðgeving | kr. 300.000 |
| Óvantað 15% | kr. 1.139.308 |
| Íalt | kr. 11.277.894 |

Samlaða upphæddin fyri verkætlanina verður soleiðis kr. 11.982.762 v/mvg.

Umsitingin hevur áður fingið eina tilsøgn frá Løgtinginum uppá, at tey eru áhugaði í at rinda fyri partin, sum liggur inni á teirra matrikli. Umsitingin fer tí í samráðingar við Løgtingið skjótast gjørligt.

Byggitíðin er sett at vera 8 mánaðir, frá byrjan til avhandan íroknað frítíð og frídagar. Eftir ætlan verður arbeiðið sett í gongd beint eftir summarfrítíðina.

**Skjøl:**
Dagført skipanaruppskot, journal nr. 22/02992-1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av lægsta tilboðnum, at játta kr. 11.982.762 til verkætlanina, harav kr. 7,3 mió. verða játtaðar av LK62996, Miðbýarætlan, og kr. 4.682.762 má útvegast. Peningurin skal flytast á kt. 6275, L62045, Miðbýarætlan – Havnará og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at restupphæddin kr. 4.690.000 verður fíggjað soleiðis:
- kr. 2.860.000 av LK62997, Lendisgøtur
- kr. 1.000.000 av L62997, Lendisgøtur
- kr. 830.000 av L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykki

**Tekniska nevnd 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Annika Olsen, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti**
Í samband við verkætlanina verður breiddin á Niels Finsens Gøtu minkað móti Tinghúsvøllinum niðri við ráðhúsið. Hetta ger, at tvívegis ferðsla ikki longur verður møgulig. Býarskipanardeildin hevur í sambandi við verkætlanina um Havnará skotið upp, at ferðslan millum Sverrisgøtu og Mylnugøtu aftur gerst einsrættað omaneftir. Eisini verður skotið upp, at tað ikki longur verður møguligt, at snara oman eftir Mylnugøtu frá Niels Finsens gøtu. Tó skal framhaldandi vera møguligt at snara á Mylnugøtu frá Áarvegnum.

**Skjal**
21/00407-33 Byggiplásstekning

**Tilmæli**
Mælt verður Ferðslunevndini til at umrøða málið og á fundinum taka støðu til um:
- Niels Finsens gøta verður einsrættað omaneftir millum Sverrisgøtu og Mylnugøtu.
- Forboð verður sett at snara frá Niels Finsens gøtu oman eftir Mylnugøtu.

**Ferðslunevndin 25. august 2022:** Nevndin tekur undir við at einsrætta Niels Finsens gøtu omaneftir, millum Sverrisgøtu og Mylnugøtu. Nevndin samtykkir, at tað skal einans vera ein koyribreyt niðast á Niels Finsens gøtu, og at henda breyt hevur kantsteinar báðumegin. Nevndin vil ikki krevja forboð fyri høgrasnaring frá Niels Finsens gøtu í fyrstu atløgu, men um ferðsluviðurskiftini gerast so, at hetta verður neyðugt, kann nevndin taka henda spurningin uppaftur.

Málið verður beint víðari í teknisku nevnd, har loysnin skal vísast við greiðari tekning.

**Ískoyti:**
Í sambandi við broyttu ferðsluviðurskiftini niðast á Niels Finsens gøtu millum Tinghúsvøllin og Ráðhúsið verður uppskotið fyri Havnará tillagað til at fevna um økið millum ánna og nýggju vegalinjuna (øki 3) í mun til bert at fevna um gonguleiðina fram við ánni.

Økið, sum verður lagt afturat uppskotinum, verður ein greið avmarking millum bilferðslu og fólk til gongu. Víðkanin verður gjørd við útvaldari álegging, kantsteinum og møguligum býarrúmsinnbúgvi, og verður sostatt betrað um ferðsluviðurskiftini, eins og uppskotið verður tillagað verandi kringumstøðum.

**Skjøl:**
21/00407-35 Havnará - Ferðsluumlegging - Havnará Ferðsluætlan

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 12. september 2022:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**

Verkætlanin er nú væl ávegis, og gongur arbeiðið væl. Arbeiðstakarin hevur verið nakað seinkaður av veðrinum í vetur, men hevur boðað frá, at verkætlanin verður liðug og handað kommununi 24.07.2023.

Í tilgongdini er vorðið greitt, at nakrar meir- og minniveitingar eru í sambandi við verkætlanina. Meir- og minniveitingarnar eru partvís broytingar og ynski til verkætlanina eins og ein avleiðing av útbjóðingarháttinum (tidligt udbud).

Harafturat hava verið fleiri avbjóðingar í sambandi við verandi tekniskar leiðingar í økinum. Neyðugt hevur verið at skera í verandi dekk og gera afturleggingar av kaðalum hjá Løgtinginum, SEV, Føroya Tele (Net) og Tórshavnar kommunu (mikrofon- og hátalaraleiðingar v.m. í øllum arbeiðsøkinum). Harumframt eru nakrar loysnir valdar fyri at uppstiga verkætlanina, so sum betri pumpuskipan, stabilari uppbygnað undir flísum osfr.

Arbeitt verður í løtuni við at fáa Løgtingið, SEV og Føroya Tele (Net) at bera tær útreiðslur, ið hava staðist av arbeiðum, sum hesir partar varða av. Samanlagt er talan um kr. 2.591.500,98 íroknað mvg, sum skulu inntøkufíggjast.

Upplýsast skal, at Løgtingið hevur játtað at gjalda 1.960.312,50 íroknað mvg, sum er teirra partur av verkætlanini.

Sáttmáli er undirskrivaður við listamannin um listprýði, men var hesin sáttmálin ikki fevndur av lendis- og elarbeiðinum til sjálvt listaverkið. Talan var um eina tekniska loysn, ið skuldi loysast í samstarvi millum listamann og arbeiðstakara. Hetta hevur somuleiðis viðført eyka útreiðslur fyri arbeiðstakaran.

Somuleiðis kann staðfestast, at tá seinni sáttmálin við ráðgevarnar varð undirskrivaður, tá var hesin ikki íroknaður verandi játtan. Samanlagt er talan um kr. 1.083.750.

Nú tá verkætlanin er um at verða liðug, skal hetta sjálvandi hátíðarhaldast, og so statt er ein upphædd somuleiðis sett av til hetta serliga tiltakið.

Samanlagt eru tað hesi arbeiðir, sum hava havt meirútreiðslur við sær:
- Leiðingar
- AVI annlegg (mikrofon- og hátalaraleiðingar v.m.)
- Uppstigan av uppbygnaði undir flísum
- Lendis- og elarbeiði (Listaverk)
- Manglandi játtan til seinna sáttmálan við ráðgevarnar
- Hátíðarhald

Niðanfyri sæst eitt samlað yvirlit yvir fíggjarviðurskiftini í verkætlanini (upphæddirnar eru íroknaðar mvg).

| | |
|---|---|
| Uppruna samlaða játtanin til verkætlanina er áljóðandi | kr. 12.982.762 |
| Samlaðu útreiðslurnar fyri verkætlanina eru áljóðandi | kr. 17.284.511,56 |
| Partur Løgtingið er áljóðandi | kr. 1.960.312,50 |
| Partur SEV er áljóðandi | kr. 301.812,42 |
| Partur FT (Net) er áljóðandi | kr. 329.376,06 |
| **Vantandi játtan til verkætlanina, tá arbeiðini fyri SEV og FT (Net) eru inntøkufíggjað** | **kr. 1.710.248,58** |

Sum omanfyri lýst, so verður arbeitt við at inntøkufíggja arbeiðini, sum SEV og FT (Net) varða av, og alt eftir hvussu hesar samráðingarnar ganga, ávirka tær endaliga kostnaðin av verkætlanini.

Harumframt hevur arbeiðstakarin víst á, at møguliga verður onkur smávegis meirveiting neyðug fyri at fáa verkætlanina lidna til tíðina.

Tá endalig niðurstøða frá hesum pørtum fyriliggur, verður verkætlanin gjørd upp endaliga.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62996 | Miðbýarætlan | 6275 | L62045 | Miðbýarætlan – Havnará | | 1.750.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.750.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 1.750.000 til verkætlanina av LK62996 Miðbýarætlan á konto 6275, á L62045 Miðbýarætlan – Havnará á konto 6275, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Syðst fyri endan av tinghúsvøllinum er eitt øki, ið er seinasta byggistigið í verkætlanini. Økið er 63m$^2$ til støddar og snarar runt um tinghúsvøllin, og verður tískil nevnt *viftan* í verkætlanini.

Víst hevur verið á, at hesin parturin av verkætlanini kundi gerast trupul at útinna grundað á sniðið, sum økið hevur fingið við teimum mongu flísunum við ymsu støddunum. Men á fundi 16.03.2023 lat byggiharri upp fyri møguligum eyka gjaldi í sambandi við at fáa henda partin av verkætlanini lidnan áðrenn ólavsøku. Arbeiðstakari hevur tí boðað frá, at teir kunnu gera hetta arbeiðið afturat verandi sáttmála fyri eina eyka samsýning áljóðandi kr. 300.000 u/mvg. Arbeiðið fevnir um allar veitingar í sambandi við at leggja flísar og kantsteinar sambært nýggju loysnini av uppbygnaði av undirlendi við lími o.ø. Arbeiðstakari er byrjaður at fyrireika arbeiðið, og verður roknað við, at arbeiðið tekur 3-4 vikur at fremja.

Vísandi til fyrra ískoytið, har víst verður til eina vantandi játtan til verkætlanina áljóðandi kr. 1.750.000, gerst talan so statt um ein samlaðan meirkostnað áljóðandi kr. 2.100.000.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☐

**Vantandi játtan til verkætlanina, tá arbeiðini fyri SEV og FT (Net) eru inntøkufíggjað (fyrra ískoytið):**

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6275 | LK62996 | Miðbýarætlan | 6275 | L62045 | Miðbýarætlan – Havnará | | 1.750.000 |

**Flísaálegging (viftan) og hækkað upphædd til hátíðarhald (íroknað mvg):**

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62996 | Miðbýarætlan | 6275 | L62045 | Miðbýarætlan – Havnará | | 350.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | **2.100.000** |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 2.100.000 til verkætlanina av LK62996 Miðbýarætlan á konto 6275, á L62045 Miðbýarætlan – Havnará á konto 6275, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle og Annika Olsen.

| | Býráðsfundur<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 627<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 156/23 Fríðkan av bygdunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 20/22 | 22/00331-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 43/22 | 22/00331-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 40/22 | 22/00331-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 01.03.2022 | 1/22 | 22/00331-1 |
| 5 Kaldbaksnevndin | 02.03.2022 | 1/22 | 22/00331-1 |
| 6 Hvítanesnevndin | 03.03.2022 | 1/22 | 22/00331-1 |
| 7 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 14.03.2022 | 2/22 | 22/00331-1 |
| 8 Nólsoyarnevndin | 15.03.2022 | 1/22 | 22/00331-1 |
| 9 Hest/Koltursnevndin | 15.03.2022 | 2/22 | 22/00331-1 |
| 10 Nólsoyarnevndin | 16.03.2023 | 1/23 | 22/00331-1 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.06.2023 | 94/23 | 22/00331-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 167/23 | 22/00331-1 |
| 13 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 156/23 | 22/00331-1 |

**Upprunin til málið**
Politisk er ynski um at raðfesta bygdirnar hægri.

**Lýsing av málinum**
Ynskiligt er, at vit áhaldandi arbeiða við at fríðka um og gera ábøtur í allari kommununi.

Ætlanin er, at allar bygdirnar í kommununi skulu verða fríðkaðar á ein ella annan hátt á hvørjum ári.

Ynskiligt er at 2.000.000 kr. verða settar av til fríðkan úti í bygdunum og at allar bygdirnar fáa ein part av hesi upphædd.

Sí uppskot til raðfesting av játtanini í skjalinum, *Fríðkan av bygdunum 2022*, journal nr. 22/00331/2

Átøkini verða viðgjørd í staðbundnu nevndunum, áðrenn avgerð verður tikin um, hvørji átøk skulu gerast í teimum ymisku bygdunum.

**Skjøl**
*Fríðkan av bygdunum 2022*, journal nr. 22/00331-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 2.000.000 av LK62998, Fríðkan bygdir og økir, á nýggja verkætlan og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og hareftir í staðbundnu nevndirnar til umrøðu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið og hareftir í staðbundnu nevndirnar til umrøðu.
**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.
**Kollafjarðarnevndin 01. mars 2022:** Staðbundna nevndin ger eina rafesting og sendir hana inn til býargartnarin.
**Kaldbaksnevndin 02. mars 2022:** Staðbundna nevndin ger eina rafesting og sendir hana inn til býargartnarin.
**Hvítanesnevndin 03. mars 2022:** Staðbundna nevndin ger eina raðfesting og sendir hana inn til býargartnaran.
**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 14. mars 2022:** Staðbundna nevndin ger eina raðfesting og sendir hana inn til býargartnaran.
**Nólsoyarnevndin 15. mars 2022:** Staðbundna nevndin ger eina raðfesting og sendir hana inn til býargartnaran.

**Hest/Koltursnevndin 15. mars 2022:** Staðbundna nevndin ger eina raðfesting og sendir hana inn til býargartnaran.
**Nólsoyarnevndin 16. mars 2023:** Kirkjugarðurin verður raðfestur nú og at benkur verða settir út ymsa staðni.

**Ískoyti:**
Í 2022 varð samtykt at lata kr. 2.000.000 til fríðkan av bygdunum. Í byrjanini av 2022 sendu staðbundnu nevndirnar inn yvirlit yvir átøk, ið bygdirnar vildu raðfesta. Nøkur av hesum átøkum eru framd, eitt nú umvæling av gøtum í Kirkjubø og Velbastað, spæliplássið á Hvítanesi, eins og onnur fríðkan í bygdunum. Somuleiðis eru átøk sett í gongd, eitt nú gøta í Kollafirði og fríðkan um økið um Halganarstein. Enn eru átøk, ið ikki eru sett í verk, og tí er næsta stigið at innkalla staðbundnu nevndirnar aftur á fund at viðgera raðfestingina, soleiðis at átøk kunnu verða sett í verk. Umsitingin hevur gjørt uppskot til raðfestingar av játtanini. Sí skjal *j.nr. 22/00331-20 raðfesting bygdirnar 6275.*

- **Hestur** **100.000 kr**
  - Prýða um Kósabakka

- **Hvítanes** **140.000 kr**
  - Heildarætlan fyri økið kring skúlan
  - Skiftingarskúrur

- **Kaldbak** **425.937,5 kr**
  - Fríðka Tíggjará
  - Økisætlan kring spæliplássið
  - Skifta graslíki á fótbóltsvølli

- **Kirkjubøur** **5.950 kr**
  - Ferðavinnuøkið

- **Kollafjørður** **1.021.329,5 kr**
  - Gøta – Dalaross
  - Gøta við Traðaveg
  - Fríðka um økið við Halganarstein
  - Spæliøkið við skúlan

- **Velbastað** **201.519,42 kr**
  - Útstykking Norðuri á Trøð
  - Umvæla gøtu

- **Nólsoy** **270.000 kr**
  - Gøtur í kirkjugarðinum
  - Borð og beinkir
  - Gøta millum dagstovn og skúla

- **Norðadalur** -

- **Syðradalur** -

- **Koltur** -

- **Allar bygdirnar** **516.004,58 kr**
  - Beinkir
  - Blómukassar
  - Fyrifallandi uppgávur

Avlop frá 2022 er á kr. 1,68 mió., og av hesum eru kr. 1,37 mió. disponeraðar. Sum raðfestingin vísir, er neyðugt at játta 1.000.000 kr av karminum yvir á Fríðkan av bygdunum konto SL62052 fyri at seta raðfestu arbeiðini í gongd.

**Skjøl:**
j.nr. 22/00331-20 raðfesting bygdirnar 6275

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62998 | Fríðkan av bygdunum | 6275 | SL62052 | Fríðkan av bygdunum | | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-24 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at játta 1.000.000 kr av LK62998 á konto 6275 SL62052 Fríðkan av bygdunum
- at heimila umsitingini at fara undir at fyrireika, bjóða út og seta arbeiðini í gongd
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

## 157/23 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 270/17 | 15/01400-1 |
| 16 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 8/18 | 15/01400-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 82/18 | 15/01400-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 277/18 | 15/01400-1 |
| 20 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 52/18 | 15/01400-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 260/18 | 15/01400-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 214/18 | 15/01400-1 |
| 23 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 364/18 | 15/01400-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 350/18 | 15/01400-1 |
| 25 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 312/18 | 15/01400-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 157/19 | 15/01400-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 127/19 | 15/01400-1 |
| 28 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 106/19 | 15/01400-1 |
| 29 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 213/19 | 15/01400-1 |
| 30 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 149/19 | 15/01400-1 |
| 31 Mentamálanevndin | 24.06.2019 | 223/19 | 15/01400-1 |
| 32 Mentamálanevndin | 03.07.2019 | 229/19 | 15/01400-1 |
| 33 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 215/19 | 15/01400-1 |
| 34 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 185/19 | 15/01400-1 |
| 35 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 107/20 | 15/01400-1 |
| 36 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 100/20 | 15/01400-1 |
| 37 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 77/20 | 15/01400-1 |
| 38 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 183/20 | 15/01400-1 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.08.2020 | 215/20 | 15/01400-1 |
| 40 Fíggjarnevndin | 25.08.2020 | 199/20 | 15/01400-1 |
| 41 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 166/20 | 15/01400-1 |
| 42 Mentamálanevndin | 06.11.2020 | 297/20 | 15/01400-1 |
| 43 Fíggjarnevndin | 06.11.2020 | 294/20 | 15/01400-1 |
| 44 Býráðsfundur | 06.11.2020 | 251/20 | 15/01400-1 |
| 45 Mentamálanevndin | 19.10.2021 | 254/21 | 15/01400-1 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 278/21 | 15/01400-1 |
| 47 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 254/21 | 15/01400-1 |
| 48 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 34/22 | 15/01400-1 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 49 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 35/22 | 15/01400-1 |
| 50 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 42/22 | 15/01400-1 |
| 51 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 222/22 | 15/01400-1 |
| 52 Mentamálanevndin | 07.06.2023 | 112/23 | 15/01400-1 |
| 53 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 162/23 | 15/01400-1 |
| 54 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 157/23 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin

framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.
**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.
**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.
**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.
**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.
**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli
**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.
**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2017 eru játtaðar 4.798 tkr. á konto 5775 mentan og frítíð.

Í fjør var hugskotskapping um verkætlanina, ið toymið við SNA ark. v.fl. vunnu. Sbrt. kappingartreytunum fingu tey bæði toymini sum luttóku, men ikki vunnu, 200 tkr. fyri luttøkuna.

Seinni í heyst kemur ætlandi til viðgerðar uppskot til sáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið um projektering av verkætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 420 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.
**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti**
Serstaka nevndin fyri langhyl hevði fund 7. feb. 2018.

Soleiðis var ført í fundarfrásøgnina: "*3. Viðv. tíðarætlan og samráðingunum um projekteringssáttmála. Uppskot um projekteringssáttmála umleið 7 mió. kr. Tøkar eru umleið 4,5 mió. kr. í løgukarminum í 2017. Tað, sum er á karminum, er ikki flutt í 2018 enn. Hinvegin, hvat ið er tøkt, verður vantandi endaligt í mars 18. Stjórnin metir, at projektið eigur at vera forskotið, til fíggingin er tøk til samlaðu projekteringina og rúm er í íløguætlanini fyri byggikostnaðinum. Fundur hevur verið við SNA-toymið um at forskjóta projektið til ársskiftið 18/19. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina á einum komandi fundi. Fyribils meting hjá teknisku fyrisiting er, at projektering tekur umleið 1 ár (við fyrivarni) + útbjóðing 2-3 mánaðir.*

*Heðin Mortensen metir ikki, at projektið eigur at útsetast, tí 4,5 mió. kr. eru avsettar í 2017, og eiga at verða fluttar yvir í 2018. Við at avseta restfígging í 2019, verður komið á mál við projekteringini. Síðani avseta pening til bygging av svimjihøllini á íløguætlanini fyri komandi árini."*

Fráboðað er Havnar Svimjifelag og Svimjisamband Føroya at projektering ætlandi verður planløgd at byrja um árskiftið 2018/19. Í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2019 verður ætlandi gjørt eitt uppskot til fíggingarætlan fyri projektering og bygging av langhyli. Vent verður aftur í nevndina við málinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at projekteringin verður sett at byrja um ársskiftið 2018/19 og at fígging til projektering og bygging verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlan 2019.
**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, krevja málið fyri býráðið.
**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til, at projekteringin av langhylinum fer í gongd beinanvegin, at 4,5 mió. kr., avsettar á fíggjarætlanini 2017, verða fluttar til fíggjarárið 2018, og at restfígging, umleið 2,5 mió. kr. at fíggja projekteringina, verður avsett í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2019.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Ímóti: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Odd Færø.

**Ískoyti**
Á løgukarminum 5775 mentan og frítíð fyri 2018 eru framfluttar 5.029 tkr. Umsitingin er í holt við at samráðast um ráðgevarasáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið og kemur ætlandi í nevnd við málinum í oktober/november 2018 soleiðis at projekteringin kann byrja í desember 2018/januar 2019. Tørvur er at hava tøkan pening á projektkontuni í sambandi við samráðingarnar v.m., ið er í gongd í løtuni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 5.029 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.
**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**UPPSKOT Í GERÐ!!!!!**

Serstaka nevndin (bygginevndin) fyri gerð av langhyli, hevur á fundi 16, 20 og 2x. november 2018 samtykt at taka undir við samráðingarúrslitinum frá samráðingunum um ráðgevarasáttmála við vinnandi SNA samtakið, ið fevnir um SNA umframt LBF og SMJ. Bygginevndin mælir til at høllin og hylurin verða breiðkað nakað, umframt at støða verður tikin til um verkætlanin eisini skal fevna um 2 terapihyljar.

Fylgjandi viðurskifti eru at viðgera nærri í sambandi við ráðgevarasáttmálan:

I. Stødd á langhylinum

Í sambandi við tilgongdina at gera ráðgevarasáttmála var 10. oktober 2018 fundur millum umsitingina, umboð fyri Svimjisambandið og Havnar Svimjifelag við Joaquin Pujol, formann í FINA (altjóða svimjisambandinum) Facilities Committtee um verkætlanina. Sí hjálagt fundarfrásøgn frá fundinum og niðurstøður.

Eftirfylgjandi hevur umsitingin fingið afturmelding frá Joaquin Pujol um, at frásøgnin er rættvísandi, og avtalað er, at tá nýtt skipanaruppskot er tøkt, ætlandi í fyrsta ársfjórðingi 2019, verða nýggj frágreiðing og tekningar sendar FINA til viðmerkingar, har støða er tikin til ymisku viðurskiftini, sum vórðu viðgjørd á fundinum í okt. 2018. Herundir sonevnt flow í høllini í sambandi við kappingar, um pláss til áskoðarar, miðlar, VIP etc. og um karmar til sjónvarp, lýsingar o.a.

Við støði í samskiftinum við FINA hevur bygginevndin viðgjørt, hvørt tað er hóskandi at breiðka hylin og høllina nakað. Semja er um, at tað er mest hóskandi at hava 10 geilar á 2,5 m. hvør, í staðin fyri 8 geilar á 2,5 m. umframt 0,5 m. skvatligeil í hvørjari síðu. Við hesi broyting verður hylurin betri egnaður til kappingar, umframt at hann fær enn betri nyttuvirði í mun til dagligu og fjølbroyttu nýtsluna hesi komandi 3-4 áratíggjuni. Vansin við hesi broyting er, at hylurin gerst størri, og harvið eisini vatnnøgdin, ið skal hitast og viðgerast størri, umframt at høllin gerst tilsvarandi breiðari. Nevndin er samd um at longdin framhaldandi

verður 50 m., umframt 1 m. afturat til eina flytiliga brúgv, so til ber at býta hylin uppá ymiskan hátt bæði til 25 m. langar geilar og samansett 25 m./50 m. langar geilar.

Annað týðandi høvuðsmál er, at høllin má gerast nakað breiðri enn í verandi støðu. Hetta serliga við atliti til at kunna seta upp fyribils áskoðarapláss (rúma fleiri áskoðarum til serligar kappingar), pláss til officials, sjónvarping, lýsingar o.a. Í tí dagliga kann øki brúkast til venjingar, upphiting, avseting o.a. Samanlagt verður høllin breiðkað til umleið 46 m. Á hjáløgdu mynd sæst, hvussu bygningurin fyllir byggiøkið í plan. Kostnaðurin av hesi broyting er í lýstur í skjali x.

II. Nýggjur innandura smábarnahylur/terapihylur og uttandura terapihylur

Í kappingaruppskotinum, ið vann, var á tekningunum lýst ein loysn við uttandura terapihyli, umframt einum serligum heitvatns-terapihyli innandura í millumøkinum millum bygningarnar. Hesin er serliga hugsaður til smærri børn, umframt til onnur, ið ynskja møguleikan at vera í einum serliga heitum hyli við terapi og vælveru í huga. Hugsanin er, at rúmið skal vera lutfalsliga lágt og tætt, soleiðis at tað er lættari at halda ein høgan hita. Meirkostnaðurin av uttandura terapihylinum og innandura terapihylinum eru lýstir í skjali x.

Bygginevndin metir at gerð av hesum báðum ískoytisverkætlanum er áhugaverd í sambandi við at umgera Svimjihøllina til ein vatndepil við vælveru, rørslu og kappingum.

III. Fleiri brúsur og skiftirúmsviðurskifti

Í byggiskránni er viðgjørt viðv. táverandi heitvatnsskipan til brúsurnar og tørv á fleiri brúsum.

Í 2017 bleiv heitvatnsskipanin til brúsurnar endurnýggjað. Í 2019 er ætlanin at greina møguleikarnar fyri útbyggingum við fleiri brúsum (óheft av langhylsverkætlanini). Miðrúmini í skiftingarrúmunum, har tað áður vóru sólir, kunnu umgerast soleiðis, at har ber til at gera fleiri brúsur. Í 2018 eru skápini í skiftingarrúmunum endurnýggjaði, og ber lutfalsliga lætt til at økja um talið av skápum. Eisini eru viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, og sum hava tørv hjálp til skifting o.a. tørv á at gerast betri í verandi høll. Hetta verður eisini tikið upp í 2019.

III. Ráðgevarasáttmálin og kostnaður

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum. Samlaða upphæddin fyri projektering er ásett til tkr. 11.500. Í hjálagda skjali er greining mettu av kostnaðarviðurskiftunum fyri verkætlanina við teimum ymisku valmøguleikunum.

Verður avgjørt at verkætlanini eisini skal geva um báðar terapihyljarnar hækkar kostnaðurin fyri projektering til tkr. 12.400.

Umframt sáttmála við SNA-samtakið, er ætlanin at hava tilknýttar 2 byggiharraráðgevar t.e. Sp/f Ráð til almenna byggiharraráðgeving og byggileiðslu í sambandi við bygningina, umframt DTI til ráðgeving og eftirlit í sambandi við hylja- og vatntøkniveiting. Hædd er tikin fyri hesum í kostnaðarmetingini.

Á løgukontu L57015 Svimjihøll eru umleið 4,9 mio.kr. tøkar til projektering o.a. Tørvur er á umleið 4 mio.kr. afturat í 2019 til projektering.

Sbrt. tíðarætlanini byrjar projektering í desember 2018 og gongur fram til á várið 2020. Hareftir skal støða takast til útbjóðing og er hugsandi at bygningin kann byrja í august 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a). at hylurin og høllin verða breiðkað

b). og mæla nevndini til at ráðgevarasáttmálin fevnir um projektering av uttandura heitvatnshyli og innandura heittvatns/terapihyli, og við teimum tillagingum at innganga ráðgevarasáttmála við SNA-samtakið um projektering av langhyli. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Neyva sáttmálaupphæddin fyri ráðgevarasáttmálan (sbrt. samtykt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini) er kr. 12.346.671.
**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Projektering av langhylsverkætlanini er í gongd. Til verkætlanina í ár eru 4.136 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Saman við framflyting á projektkontuni verða umleið 8.705 tkr. tøkar til verkætlanina í ár og verður tað mett hóskandi í mun til løgdu ætlan fyri projektering v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.136 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundinum koma umboð fyri bygginevnd og ráðgeva at leggja fram nýggjasta skipanaruppskotið, kostnaðarmetingar o.a. Bygginevndin er í fer við at leggja seinasta hond á viðgerðina og er endaligt tilmæli ávegis.

Sí hjálagt skjal við skipanaruppskotinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórnin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða framløguna.
**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Umrøtt.
**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Tikið av skrá.
**Mentamálanevndin 24. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Bygginevndin (Serstaka nevndin fyri at fyrireika nýggjan svimjihyl) hevur á fundi 28. juni 2019 samtykt hjálagda skipanaruppskot. Tó so at bygginevndin ynskir at ráðgevin í víðari tilgongdini kemur við eini nøktandi takloysn, umframt kemur við uppskotum til møguligar sparingar og hvussu bygningurin kann fáa ein enn betri orkuprofil. Í mun til viðgerðina seinast, er uppskotið rættað til við støði í samtyktunum í málinum í nov-des. 2018. Harumframt hevur ráðgevin saman við bygginevndini gjøgnumgingið málið við eini longri røð av áhugapørtum innan svimjing t.e. skúlar, dagstovnar, feløg, sersamband, KVF etc. og rættað ymiskt til. Sbrt. galdandi mannagongdum skal skipanaruppskot í byggiverkætlanum góðkennast í avvarðandi nevnd, fíggjarnevnd og býráði.

Eisini er uppskotið viðgjørt við altjóða svimjisambandið FINA saman Svimjisambandi Føroya – sí hjálagt teirra metingar. Bygginevndin metir, at verkætlanin er slóðbrótandi og kann vera ein framtíðartryggjaður karmur um alskyns svimjivirksemi langt fram í tíðina og eisini gera tað møguligt at bjóða seg fram til eina røð av fleirlanda svimjikappingum.

Við støði í skipanaruppskotinum er gjørd kostnaðarmeting, sí hjálagt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hjálagda skipanaruppskot og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Byggiskráin fyri langhylin fevnir ikki um at víðka um skiftirúms- og brúsuviðurskiftini. Skipanaruupskotið leggur upp, at øll almenn atkomu- og skiftirúmsviðurskifti framhaldandi verða í verandi høll.

Sum upplýst í málinum til býráðsviðgerðina í desember 2018 viðvíkjandi ráðgevarasáttmálanum, fer nýggja høllin at hava økt virksemi og økt tal av brúkarum við sær.

Metast má týðandi eisini við atliti at víðari prosjekteringini, at fingið verður til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, og sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum. Útreiðslur til hesa bygging liggur uttanfyri kostnaðarmetingina fyri langhylin annars.

Til tess at fáa uppskot til vega skal roknast við ávísum útreiðslum til ráðgeving v.m. Mælt verður til at geva umsitingini heimild til at biðja um tilboð hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fáa til vega ítøkiligt uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum, og at umsitingin fær heimild til at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi.

**Mentamálanevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at samtykkja skipanaruppskotið og tilmælinum um at fáa til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu, og at umsitingin fær heimild at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Projekteringin av langhylsverkætlanini er nú komin væl áleiðis og verður væntandi liðug í mai 2020 og kemur málið um góðkenning av høvuðsprojektinum, umframt útbjóðing til støðutakan í nevndum og býráð.

Til verkætlanina í ár eru 4.000 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Harumframt verður væntandi í apríl 2020 ein framflyting av tøkari játtan á projektkontuni frá 2019. Upphæddin er ikki endalig tøk enn, men fer í høvuðsheitum til at gera projekteringina lidna. Játtanin í 2020 fer ætlandi til at kunna byrja útinningina av verkætlanini í heyst t.e. í høvuðsheitum talan um burturbeining av ÍSF-húsinum, rigga byggipláss til og byrjan uppá jørð- og lendisarbeiðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.000 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Í sambandi við fyrireiking av langhylsverkætlanini er søkt um byggiloyvi til útinning av verkætlanini.

18. mai 2020 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin í máli 20/01266 Umsókn um byggiloyvi til langhyl í Gundadali matr. 1268a, Tórshavn, at "at loyva umsitingini at geva byggiloyvi, treytað av at neyðug parkeringspláss verða gjørd og annars við teimum treytum, ið umsitingin setur." Sí hjálagt yvirlit yvir p-pláss í økinum.

Í málinum framgongur at tað skulu útvegast 80 p-pláss afturat. Í upprunaliga málinum er avrátt at p-viðurskifti í Gundadali skulu viðgerast í eini heild og inngongur m.a. í mál 18/03453 Skipan av Gundadali, ið ætlandi kemur til viðgerðar í juni 2020.

Hetta kravið er ein týðandi broyting í fyritreytunum í verkætlanini, bæði ráðleggingarliga, praktiskt og fíggjarliga. Hinvegin so má roknast við, at verkætlanin fær skotbrá inntil byggiverkætlanin er liðug til at fáa hesi útvegað, væntandi um ársskiftið 2022/23.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka til eftirtektar kravið um fleiri parkeringspláss sum liður í langhylsætlanini.

Málið verður beint til ummælis í teknisku nevnd.
**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti**
Projekteringin
Verkætlanin er nú liðug projekterað og fyriliggur nú eitt sonevnt høvuðsprojekt (t.e. fullfíggjað projektering), ið er blivið granskað innanhýsis í teknisku fyrisiting, umframt hjá øðrum uttanhýsis serkønum ráðgevum.

Mett verður at tilfarið nú hevur eina dygd, ið er nøktandi til útbjóðingina. Í løtuni verða seinastu smálutirnir passaðir til áðrenn útboð.

Byggiloyvið
Verkætlanin hevur fingið byggiloyvið (sí hjálagt skjal) og er har nú ásett at verkætlanin skal útvega 42 p-pláss í nærumhvørvinum. Mett verður, at hetta ber til at loysa í nærøkinum og fáa liðugt projekterað og útinnt í 2021/2022 áðrenn Langhylurin verður tikin í nýtslu. Tekniska deild og býarskipanardeildin undir teknisku fyrisiting mæla til og leggja fyri býarskipanarnevnd og teknisku nevnd eitt ella fleiri øki í ella nærhendis Gundadali til minst 42 pláss og verður hetta loyst sum ein atknýtt men fyri seg verkætlan at prosjektera og standa liðug áðrenn langhylurin verður tikin í nýtslu. Fyribils mettur kostnaður til hetta er um 6 mió. Eitt sindur skal játtast til fyrireiking og prosjektering fyrst.

Útbjóðingartilfar
Talan er um eina útbjóðing í høvuðsarbeiðstøku sbrt. ABF06. Skotið verður upp at bjóða 5 feløgum til at luttaka í innbodnari lisitatión.

Stálhyljaviðurskifti
Í útbjóðingartilfarinum verður tilskilað, at tilboð skal fáast frá tveimum útvaldum veitarum av stálhyljaloysnum og at høvuðsarbeiðstakarin hevur viðskiftini við veitaran um hendi, tó eftir nærri góðkenning byggiharrans. Hesir báðir veitararnir eru útvaldir eftir eina umfatandi tilgongd.

Ráðgevaraleiklutir
Sbrt. ráðgevarasáttmálanum við Sp/F SNA er fyrivarni tikið fyri at byggileiðsla kann vera latin til annað felag at útinna. Hetta m.a. fyri at tryggja eina sterkari stýrings- og eftirlitsskipan kring verkætlanina. Skotið verður tí upp at byggileiðslan í verkætlanini verður latin til annað felag. Ætlanin er at sama felag

eisini veitir ávísa byggiharraráðgeving eftir tørvi í sambandi við sáttmálasamráðingar og onnur yvirskipaði viðurskifti.

Kostnaðarmeting
Í hjálagda fylgiskjali eru nærri greiningar og metingar viðv. kostnaðinum fyri verkætlanina, bæði hondverkaraútreiðslur (HVÚ) og aðrar útreiðslur í verkætlanini. Av kappingar- og marknaðarávum verða tølini ikki lýst í tekstinum og verður tí frámælt til varðsemi við at nevna tøl alment.

ÍSF-húsið
Víst verður til mál 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið, ið er til viðgerðar á hesum sama fundi. Ætlandi verður farið undir niðurtøku av húsinum í oktober 2020. Húsaumsitingin kemur at standa fyri arbeiðinum og verður útreiðslan goldin av langhylsverkætlanini.

Tíðarætlan
Útbjóðing av verkætlanini 25 august til ultimo september.
Samráðingar um sáttmála ultimo september til ultimo oktober.
Niðurtøka av ÍSF-húsinum oktober 2020
Spakin settur í – ultimo oktober 2020

Bygging til árskiftið 2022/2023.

Rúmari umstøður til skifting og brúsu
Vísandi til samtykt í máli 19/03559 verður spurningurin um rúmari umstøður til skifting og brúsur í verandi svimjihøll loyst serskilt. Málið kemur aftur fyri í nevnd í heyst.

Grannalagsviðurskifti
Umsitingin hevur í 2019 verið á fundi við grannarnar og greitt frá verkætlanini og viðurskiftini kring byggiarbeiðið v.m. Grannar hava sum heild ymisk fyrivarni fyri spronging, larmi, dusti v.m. í sambandi við byggiarbeiðið, umframt ivamál viðv. hæddini á bygninginum. Umsitingin hevur svarað hesum eftir besta førimuni. Onnur og meiri kunning verður eftir ætlan fyriskipað áðrenn og meðan arbeiðið er í gongd.

Innrættan av byggiplássi og trygd í økinum
Saman við ráðgevanum er gjørd ein ætlan, ið eisini tekur hædd fyri ferðsluni og trygdini í økinum sum heild. Henda ætlan verður partur av HTU-ætlanini í verkætlanini og fylgt upp regluliga saman við verkætlanarleiðsluni og leiðsluni í Svimjihøllini.

Bygginevndin
Bygginevndin fyri verktætlanina hevur viðgjørt málið á fundi 21. august 2020.

Bygginevndin hevur nýggjan fund mánadagin 24. august 2020.

Á fundi í bygginevndini 24. august 2020 varð samtykt at biðja um heimild at kunna bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku til 4-5 feløg
b). at heimila umsitingini at samráðast við bílígasta tilboðsgevara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð, og
c). at heimila umsitingini at gera avtalu við ráðgeva um at hava byggileiðsluna um hendi.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 24. august 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við:

a). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku til 4 feløg
b) at heimila umsitingini at samráðast við bílígasta tilboðsgevara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð, og
c). at heimila umsitingini at gera avtalu við ráðgeva um at hava byggileiðsluna um hendi.

Harumframt verður heitt á teknisku nevnd um at viðgera mál um fleiri parkeringspláss.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøður blankt vísandi til, at áðrenn arbeiðið verður boðið út, eiga fleiri ósvaraðir spurningar í málinum um langhylin at verða svaraðir.
**Fíggjarnevndin 25. august 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunnvør Balle, tekur undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt vísandi til, at áðrenn arbeiðið verður boðið út, eiga fleiri ósvaraðir spurningar í málinum um langhylin at verða svaraðir, herundir hvussu verkætlanin verður fíggjað.
**Býráðsfundur 25. august 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

**Ískoyti:**
Licitatión
1. oktober 2020 var licitatión í sambandi við útbjóðing av verkætlanini. Fýra feløg vóru boðin við í innbodnari licitatión. Inn komu trý tilboð. Sp/f Húsavarðatænastan lat ikki inn boð, hóast fyritøkan hevði sagt seg vilja bjóða.

Øll tilboðini, herundir allir postar í tilboðslistanum eru eftirkannaði og gjøgnumgingin og verður mett at øll trý tilboðini lúka treytirnar í útbjóðingartilfarinum og at tilboðið hjá J&K Petersen framhaldandi er lægst.

Sí endaliga yvirlitið her:

| Arbeiðstakarar | Tilboðsupphædd HVÚ | Eíndarprísur / optiónir | Samlað tilboð | Nr. |
|---|---|---|---|---|
| Articon P/F | 145.121.780,00 | 3.558.791,00 | 148.680.571,00 | 2 |
| Búsetur Sp/f | 156.249.015,00 | 3.652.428,00 | 159.901.443,00 | 3 |
| J & K Petersen Contractors P/F | 144.753.761,73 | 2.541.420,25 | 147.295.181,98 | 1 |

Viðv. avtalu við Tórshavnar havn um grót
Eftir at licitatiónin hevur verið, er tað, sbrt. ætlan, eydnast at fáa í lag semju við Tórshavnar havn at lata umleið 20.000 m3 grót til bátahylsverkætlanina í Álakeri. Hetta inniber eina ávísa sparing, tí annars skuldi grótið koyrast á goymslu í Húsahaga. Langhylsverkætanin skal tí ikki rinda nakað fyri koyring v.m. av hesi nøgdini. Hetta er longu innroknað í kostnaðarmetingina, men er treytað av at verkætlanin fer í gongd í næstum.

Sáttmálasamráðingar
Við støði í gjøgnumgongdini sum umrødd omanfyri, var í oktober 2020 farið undir samráðingar við P/F J&K Petersen um sáttmála. Tað hava verið fýra tingingarfundir, har partarnir hava gjøgnumgingið tilboðið hjá J&K Petersen, herundir tey ymisku fakini fyri at eyðmerkja møguligar avbjóðingar, óvissur og evt. manglar í verkætlanartilfarinum,

og eisini um møguleikar fyri at taka onkrar postar út úr veitingini ella vita, um tað ber til at gera møguligar tillagingar, ið kunnu antin betra verkætlanina og/ella minka um kostnaðin.

Tað vísir seg at vera nakrir upplagdir møguleikar fyri at minka um kostnaðin, og sum ikki broyta nakað av týdningi viðv. dygd og funktión. Samstundis er greitt, at í nøkrum førum eru eyðmerkt nøkur viðurskifti og veitingar, ið mangla í nøgdarlistanum og útboðstilfarinum. Hetta inniber ein ávísan meirkostna.

Eisini hava samráðingar verið fyri at kanna, um tað ber til at minka um óvissur við at læsa ymisk viðurskifti í sáttmálanum. Eitt nú óveðursdagar, prís- og lønarvøksur, ávísar nøgdir í nøgdarlistanum v.m., men hevur tað ikki eydnast at fáa eina nøktandi semju um hesar postar, m.a. vegna ov stutt skotbráð hjá bæði arbeiðstakara, ráðgevum og kommununi at fáa lýst hesar óvissur og at kostnaðarmeta tær.

Byggitíðin og trygd í økinum
Undir samráðingunum er eisini komið fram, at neyðugt verður at leingja byggitíðina, tó enn óvist hvussu nógvar mánaðir, hetta m.a. fyri at kunna tilrættisleggja lendis- og speingiarbeiðið meiri skynsamt í mun til umhvørvið kring byggiplássið og herundir fyri at hava trygdina í økinum í hásæti. Longd byggitíð vil bera eyka kostna við sær til byggiplássrakstur, sum full greiða ikki er á. Kostnaðarskjalið tekur hædd fyri møguligari longdari byggitíð.

Óvissur og váðar
Gjøgnumgongdin higartil hevur eisini eyðmerkt nakrar óvissur, ið eru loystar, men hevði tað tað eisini hevði verið ynskiligt at fingið greinað og avklárað nakrar aðrar óvissur nærri og soleiðis minkað um váðan. Talan kann vera um 2-3 mio.kr.

Til tess at nágreina hesi viðurskifti krevst ein tilgongd á nakrar vikur. Í tann mun tað ikki verður gjørt, vil tann óvissan fara av postinum til ókent.

Sáttmálaupphædd/hondverkaraútreiðslur (HVÚ)
Við tillaginunum sum nevndar omanfyri verður komið fram til eina sáttmálaupphædd (HVÚ) á 147.500 tkr. uttan kommunalt MVG.

Heildarkostnaður og fígging
Greitt verður á fundinum frá heildarkostnaðurin fyri verkætlanina. Til tess at fíggja verkætlanina verður neyðugt at seta av umleið 65 mio.kr í fíggjarætlanini fyri 2021. Restupphæddin verður at fíggjað í 2022 og 2023.

Gjalds- og tíðarætlan
Í sambandi við samráðingarnar hevur kommunan biðið J&K Petersen um at koma við eini gjalds- og tíðarætlan fyri verkætlanina. Henda er ikki komin enn, men verður ein fyritreyt fyri at innganga ein sáttmála. Mett verður at útreiðslurnar í 2020 í mesta lagi vera umleið 2.500 tkr og eru hesar tøkar á projektkontu L57015 Svimjihøll.

Manningarlisti – lyklapersónar
Sum liður at tryggja eina skikkaða manning í leiðsluni av verkætlanini, hevur J&K Petersen latið TK ein lista yvir lyklapersónar í felagum, ið koma at arbeiða við verkætlanini. Umsitingin er nøgd við listan.

Tryggingarviðurskifti
Til verkætlanina hevur Tórshavnar kommuna teknað eina projektábyrgdartrygging fyri projekteringina v.m. og kemur í sambandi við høvuðsarbeiðstøkuna at tekna eina arbeiðstøkutrygging, herundir spreingitrygging í sambandi við at arbeiðið byrjar.

**Atknýttar verkætlanir**
*- Brúsu- og skiftirúmsviðurskifti í verandi høll*
4. juli 2019 samtykti býráðið at fáa útvega ítøkiligt uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta

virkseminum. Málið er viðgjørt nakrar ferðir í mentamálanevndini og kemur endaligt tilmæli væntandi fyri á fundi í mentamálanevndini 16. november 2020 (sí mál 19/03559 Svimjihøllin í Gundadali: Rúmari umstøður til skifting og brúsu). Sí hjálagt tekning av loysn E og tilhoyrandi kostnaðarmeting. Talan er um eina verkætlan, ið kann fremjast í stigum t.d. yvir 2-3 ár.

*- Parkeringsviðurskifti*
Í summar var spurningurin um útvegan av 42 parkeringsplássum viðgjørdur og samtykt at serstakt mál skuldi fyrireikast til at loysa tað. Tilgongdin er byrjað og kemur tilmæli væntandi í fyrsta ársfjórðingi í 2021. Byggiloyvið treytar, at hesi eru tøk áðrenn ein komandi høll verður tikin í nýtslu – væntandi í 2023.

Hesar atknýttu verkætlanir eru ikki fíggjaðar í langhylsverkætlanini.

Viðgerð í bygginevndini
Bygginevndin hevur viðgjørt málið á nøkrum fundum og seinast á fundi 6. november 2020, og hóast stutt skotbrá, metir meirilutin (Bergun Kass, Birita Wardum, Brynhild Setberg og Sigurð Vang) av bygginevndini, at tað ber til at innganga sáttmála við P/F J&K Petersen, treytað av hóskandi upphædd til ókent og møgulig tilkeyp. Mett verður, at óvissurnar í verandi støðu, kunnu rúmast í avsettu upphæddini.

Ein minniluti í bygginevndini, Heðin Mortensen, tekur støðu á seinni fundi, vegna ov stutt skotbrá og vantandi heildarupplýsingar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin vísa til lýsingina omanfyri og mæla til:

a). at taka støðu til høvuðsarbeiðstøkusáttmála á 147.500 tkr. (uttan mvg) við P/F J&K Petersen. Útreiðslurnar í 2020 vera at rinda av tøkari upphædd á løgukontu L57015 Svimjihøll.

b). at taka støðu til at játta 65.000 tkr. í fíggjarætlanini fyri 2021 og restina av fíggingini í 2022 og 2023, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. november 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við punkt a) hvat viðvíkur sáttmálaupphæddini og fíggingini í 2020 og b), og harumframt at heimila umsitingini at gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála við P/F J&K Petersen.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, tekur støðu á seinni fundi, vegna ov stutt skotbrá og vantandi heildarupplýsingar.
**Fíggjarnevndin 06. november 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.
**Býráðsfundur 06. november 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í Fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Formaðurin setur málið á skrá.

Sum upplýst í málslýsingini til nevndar- og býráðsviðgerðina í november 2020, eru atknýttar verkætlanir, ið ikki eru fíggjaðar. Talan er um nýggj brúsu- og umklæðingarrúm, harundir eisini til tey, ið bera brek, og at útvega tey í byggiloyvinum kravdu parkeringsplássini.

Mett verður neyðugt at fáa hesar verkætlanir neyvari útgreinaðar og kostnaðarmettar, soleiðis at hesi viðurskifti kunnu verða fíggjað og klár at taka í nýtslu í seinasta lagi samstundis sum langhylurin er liðugt bygdur.

Viðvíkjandi tørvinum á nýggjum brúsu- og umklæðingarrúmum er ynskið ein loysn, sum ikki grípur inn í gomlu høllina, men soleiðis, at báðar hallirnar kunnu virka leysar av hvørjari aðrari.

Ynskið er harumframt at kanna møguleikarnar fyri einfaldari takkonstruktión.

Hesi viðurskifti – brúsu- og umklæðingarrúm, parkeringspláss, og einfaldari takkonstruktión, skulu kostnaðarmetast hvør sær og fyri samlaðu langhylsverkætlanina.

Ynskið er eisini um at fáa uppskot til, hvussu man kann betra um umstøðurnar og tilboðini til barnafamiljurnar.

Heitt kann verða á ráðgevan um at gera hesi uppskot og kostnaðarmetingar. Skotið verður upp at játta kr. 800.000 til endamálið fíggjað av verandi langhylsjáttan 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.
**Mentamálanevndin 19. oktober 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen, tekur undir við at heita á ráðgevan um at gera hesi uppskot og kostnaðarmetingar, og at játta kr. 800.000 til endamálið fíggjað av verandi langhylsjáttan 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur. Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.
**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Ein minniluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, atkvøður blankt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, Annfinni Brekkstein og Heðini Mortensen, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 3 ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Annika Olsen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen og Gunnvør Balle.

**Ískoyti:**
Arbeiðið á byggiplássinum í sambandi við gerð av langhyli v.m. hevur nú verið í gongd í eitt gott ár, og er verkætlan gjøgnumgingin við atliti il at tryggja dygdina v.m.

Tørvur er tí nú á at fáa staðfest heildarkosnaðin fyri verkætlanina. Metingin er enn óbroytt síðani viðgerðina og samtyktina um høvuðsarbeiðstakarasáttmála í endanum av 2020.

Bygginevndin hevur við støði í meting hjá bygningsdeildini og byggiharraráðgevnaum ásett heildarkostnaðin til 211.797 tkr. Á fundinum verður kostnaðarskjal gjøgnumgingið.

Mett verður at tørvur verður á fylgjandi upphæddum á fíggjarætlanum komandi árini:

2022 – 40 mio.kr.
2023 – 75 mio.kr.
2024 - 35 mio.kr.

umframt upphæddin parkering og møgulig upphædd í sambandi við skiftirúmsviðurskifti. Sí seinni í tekstinum.

Í sambandi við viðgerðina á heysti 2020 varð eisini viðgjørt evnini viðv. parkeringsviðurskiftum og skiftirúmum.

**Viðv. parkeringsloysn**
Umsitingin og ráðgevar hava verið í dialogi við byggimálsdeildina og hava funnið fram til eina loysn at nøkta nýggja tørvin á parkeringsplássum í nærumhvørvinum. Talan er um eina loysn har umleið helvtin av teimum 45 eyka plássunum verður funnin við Eysturskýlið á Tórsvølli og hin helvtin við Vestara skýlið við Ovara vøll.

Kostnaðarmetingin er umleið 4,9 mio.kr. til 45 nýggj pláss og kann vera framt í 2022 um tøk fígging verður og annars í 2023. Henda  (hetta kemur afturat teimum 211.797 tkr.)

**Viðv. eyka skiftirúmum**
Í málunum er samtykt at kanna ymsar møguleikar, men er tað ikki komið á mál. Greitt verður á fundinum frá ymiskum hugsaðum loysum og mettum kostnaðum.

**Viðgerð í nevnd og býráð**
Vegna atlit til sáttmálaviðurskifti, útbjóðingar- og kappingarviðurskifti v.m. verður mælt til at málið verður viðgjørt á býráðsfundi fyri stongdum hurðum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja ein heildarkostnað fyri langhylsverkætlanina á 211.797.000 kr.
**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt, at heildarkostnaðurin fyri langhylsverkætlanina er kr. 211.797.000 við tí viðmerking, at upphæddin ikki fevnir um parkeringsloysn og nýggj skifti- og brúsirúm, harundir til rørslutarn. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býraðið við teirri viðmerking, at kostnaðurin er íroknaður kommunalt mvg.
**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Støðug gongd er á verkætlanini við langhyli og vælverudepli í Gundadali.

Í framskrivingum av útreiðslum, væntaðum og óvæntaðum, fer tó skjótt at sansa at. Hóast tað eru settir pengar av útyvir sjálvan arbeiðstøkusáttmálan, fer hetta at verða ov lítið.

Orsøkirnar eru fleiri. Sum nevnt í samtyktari málslýsing í november í 2020 eru útreiðslur til 42 parkeringspláss ikki við og fíggjaðar av verandi langhylsverkætlan. Upplýst varð í november 2020, tá onki prosjekt fyrilá, at hetta kundi koma at kosta uml kr. 8 mió. Hetta kann tó gerast væl bíligari. 42 p-pláss aftrat í Gundadalsøkinum umframt ábøtir á verandi Gundadalsveg nærhendis svimjihøllini kunnu gerast liðug fyri  tkr. 2.730. Ætlanin er góðkend av byggimálsdeildini.

Á sumri/heysti 2021 eru samráðingar millum TK og arbeiðstakara um verkætlanin skal steðga í eina tíð og møguliga gerast øðrvísi. Avtala er síðani gjørd millum partarnar, hvussu hesin parturin skal samsýnast. Í beinleiðis og avleiddum útreiðslum kostar hetta hetta verkætlanini tkr. 3.800. Hesin parturin er ei heldur fíggjaður av verandi karmi til lanhylsverkætlanina.

Nakað er sett í kostnaðarætlanini til prísvøkstur. Á leið tað sum plagar at verða sett av til prísvøkstur sammet við aðrar verkætlanir. Hendan upphædd hevur víst seg væntandi at verða ov lítil. Príshækkingar serliga á tilfari hava verðið væl størri enn mett eftir sáttmálasamráðingar og undirskrift í 2020. Framskrivingar siga, at hesin posturin kann fara væl uppum tað, sum er avsett. Ov tíðliga er tó at siga hvussu nógv.

**Tilmæli**:

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og verkætlanarneliðari mæla til at játta tkr. 6.530 til p-pláss í økinum og samsýning fyri steðg vm. íløgujáttanini fyri 2024 til kontu 5775 løgukonta L57015 Svimjihøll, og at verkætlanarleiðsla og bygginevnd venda aftur seinni við framskrivinum av prísvøkstri.
**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Arbeiðið við nýggju langhylsverkætlanini gongur rímiliga væl og enn eftir ætlan. Fyri framman standa stórar veitingar og bygningurin stendur fyri at verða innilokaður.

Í framskrivingum av útreiðslum, væntaðum og óvæntaðum, sansar nú at. Hóast tað eru settir pengar av útyvir sjálvan arbeiðstøkusáttmálan til aðrar útreiðslur í samlaðu kostnaðarmetingini, fer hetta í summum førum at verða ov lítið.

Orsøkirnar eru nakrar.

- Sum nevnt í samtyktari málslýsing í november í 2020 eru útreiðslur til 42 parkeringspláss ikki við í kostnaðarætlanini av verkætlanini. Upplýst varð í november 2020, tá onki prosjekt fyrilá um parkeringspláss, at hetta kundi kom at kosta um 5 mió kr. Tað vísir seg, at hetta tó kann gerast bílígari.
  Ætlan við 42 p-pláss afturat í Gundadalsøkinum umframt nakrar ábøtir á verandi Gundadalsveg nærhendis svimjihøllini, kann gerast liðugt fyri 2.700 tkr

- Á sumri og heysti 2021 eru samráðingar millum TK og høvuðsarbeiðstakara um verkætlanin skal steðga í eina tíð og møguliga gerast øðrvísi. Avtala er seinni gjørd millum partarnir hvussu hesin parturin skal samsýnast. Í beinleiðis útreiðslum verða tað 2.500 t.kr og í avleiddum útreiðslum til eftirlit, byggileiðslu og prísvøkstri av tíðarleinging aðrar 1.300 t.kr. Hetta er ikki fíggjað av verandi karmi til verkætlanina við langhyli

- Nakað er sett í samlaðu kostnaðarætlanini til prísvøkstur. Á leið tað sum plagar verða at sett av til prísvøkstur sammet við aðrar verkætlanir. Hendan upphædd vísir seg væntandi at verða ov lítið. Og hetta er tað sum rakar búskettið harðats. Príshækkingar á serliga tilfari hava verðið væl størri enn mett til sáttmálasamráðingar og undirskrift í 2020. Framskrivingar siga at hesin posturin kann fara væl uppum tað sum er avsett. Framskrivingar siga um 23 mió tilsamans í príshækkingum, og settar eru bara um 7 mió av til hetta í verandi kostnaðarætlan.

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri, trivnaðarstjórin, leiðarin á byggideildini og verkætlanarleiðarin mæla til at játta 6.500 tkr. til p-pláss í økinum og samsýning fyri arbeiðssteðg v.m., og at játta 16.000 tkr. til príshækkingar, t.e. tilsamans 22.500 tkr, til løgukontu 5775 Ítróttaanlegg L57015 Langhylur, og at upphæddin verður játtað í fíggjarætlanini fyri 2024.
**Mentamálanevndin 07. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Kári Johansen og Elsa Berg, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

## 158/23 Heildarætlan Eystara havnarøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.11.2017 | 57/17 | 17/03628-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 253/18 | 17/03628-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 63/21 | 17/03628-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 26/21 | 17/03628-1 |
| 5 Havnanevndin | 13.04.2021 | 18/21 | 17/03628-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 74/21 | 17/03628-1 |
| 7 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 108/21 | 17/03628-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 258/21 | 17/03628-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 22/22 | 17/03628-1 |
| 10 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 14/22 | 17/03628-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.02.2022 | 12/22 | 17/03628-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 48/22 | 17/03628-1 |
| 13 Havnanevndin | 14.02.2022 | 9/22 | 17/03628-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.02.2022 | 50/22 | 17/03628-1 |
| 15 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 41/22 | 17/03628-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2022 | 210/22 | 17/03628-1 |
| 17 Havnanevndin | 05.12.2022 | 32/22 | 17/03628-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 22/23 | 17/03628-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 44/23 | 17/03628-1 |
| 20 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 48/23 | 17/03628-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 199/23 | 17/03628-1 |
| 22 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 158/23 | 17/03628-1 |

**Upprunin til málið:**
Eystara havnarøkið verður víðkað, og tí er tørvur á gera eina ætlan fyri hvussu økið skal skipast.
Av tí at útbyggingin ikki verður liðug fyrr enn í 2019, er tørvur á at gera tillagingar á verandi øki beinanvegin. Serliga er tørvur á at gera tillagingar í verandi farstøð.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Uppskot er gjørt til heildarætlan av Eystara havnarøki.
Uppskotið er ein lýsing av framtíðarætlanum fyri Eystara havnarøki, og lýsir verandi viðurskiftir, avbjóðingar og møguleikar.

Uppskotið lýsir verandi viðurskiftir, har undir ymiskleikan í ferðsluni, har stór skip, smábátar, størstu bilarnir og fólk til gongu eru á økinum. Hetta verður framhaldandi veruleiki, og kanska í enn størri mun enn í dag, nú havnarlagið verður víðkað.

Víðari lýsir uppskotið framtíðar menningarmøguleikar, støddir, volumenkanningar, nýggj ferðslumynstur og søgulig sambond, sum kunnu styrkjast millum Skansan, Tinganes og økið inn móti Kongabrúnni.
Til seinast lýsir uppskotið hvussu ferðsla, parkering og avgreiðsla av ferðafólki verður skipað tá útbyggingin av havnarlagnum verður liðug, soleiðis at tann vaksandi ferðingin og flutningurin, kann virka undir tryggum karmum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er avlagt sum B1 havnarøki.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
j.nr. 17/01436 Víðkan av Farstøðini

**Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Heildarætlan fyri Eystara havnarøki j.nr. 17/03628-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við heildarætlanini fyri Eystara havnarøki.

**Vinnunevndin 06. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og koyra heildarætlanina til almenna kunning og viðmerking.

**Ískoyti – kunna verður um málið.**
Uppskot til heildarætlan fyri Eystara havnarøki sampakkar bæði við Miðbýarætlanina fyri Tórshavnar kommunu og við verandi ætlanir um at útbyggja Tórshavnar havn.

Í miðbýarætlanini eins og í heildarætlanini verður dentur m.a. lagdur á, at eitt øki við Eystaru bryggju verður lagt av til býartætting við eitt nú bústøðum, vinnu og virksemi tengt at býarlívinum.

Tankin aftanfyri útbyggingina av Tórshavnar havn er at fáa eitt væl skipað kaiøki, har bleyta vinnan er staðsett næst býnum og tunga og mest larmandi vinnan longst burtur frá býnum í tí nýggju útbyggingini. Hesum tanka fylgir heildarætlanin fyri Eystara Havnarøki eisini.

Uppskotna heildarætlanin fevnir um trý øki, ið eru skipað í vinnulív, havnar- og ferðavinnuvirksemi og annað blandað virksemi.

Øki A er økið innast í Eystaru Vág og næst miðbýnum. Í heildarætlanini er hetta økið ætlað bleytum handils- og vinnuvirksemi. Her verður bleyta ferðslan leidd fram við bryggjukantinum, og søguligar frágreiðingar og rekreativt og býarkent virksemi verður borið fram, sum ein forlongdur armur frá økinum fram við Kongabrúnni, bátahylinum, Áarstovu og Essabar. Hetta sampakkar sera væl við uppskotið í miðbýarætlanini, har Kongabrúgvin skal vera framtíðar miðdepil fyri eitt nú sjóvarítrótt og rekreatión.

Harafturat verður lagt upp til, at Kongabrúgvin er eitt øki, har góðir møguleikar eru fyri býartætting, eitt nú við at byggja vinnubygningar og bústaðir og hetta sampakkar eisini væl við miðbýarætlanina.

Øki B er økið millum miðbýarvirksemi og havnarvirksemi. Uppskot til hetta øki er at skapa eitt náttúruligt skifti millum bý og bryggju, har ein seyrigøta kann leiða bleytu ferðsluna út úr býnum eftir bryggjukantinum, og eitt parkeringsøki kann skapa íbinding og avgreiðslu til havnina.

Øki C er økið tættast móti havnini og nýggju útbyggingini. Hetta økið skal tola tunga ferðslu, og kunna virka sum granni hjá stóra havnarrúminum og samferðsluplássinum.

Við havnarútbyggingini, ið fer fram í løtuni, er týdningarmikið, at verandi og nýtt virksemi, knýtt at sjóvinnuni og bryggjukantinum, er væl skipað, og somuleiðis hugsað inn í eina langskygda heildarætlan. Tórshavnar kommuna skal vera við í arbeiðinum at skipa Føroyar sum tilfeingisdepil í Norðurhøvum, og útbyggingin av Tórshavnar Havn eigur tí at vera hugsað saman við restini av økinum inn í eina heildarætlan, soleiðis at havnin kann gerast ein sameindur partur av restini av býnum.

Henda heildarætlan er ein menningarætlan, ið sameinar allar tættir í einum býarparti og stuðlar undir at ávegis avgerðir styðja uppundir langskygdar ætlanir. Hetta eru ætlanir, ið kommunan eigur at hava, bæði fyri at vera tilvitað, tá nýggjar ætlanir koma á tekniborðið og fyri at langtíðarætlanirnar verða havdar í huga, tá planlagt verður.

Heildarætlanin hevur í fyrstu atløgu ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa, men kemur heildarætlanin at liggja til grund, tá býurin skal mennast víðari út eftir Havnargøtu/Kongabrúnni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við ætlanini, undir hesum at kanna ferðsluviðurskiftini nærri og gera rúmkanningar av økinum, soleiðis at heildarætlanin verður greina út, fyri síðani at leggja málið fyri aftur nevnd.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uttanríkis- og mentamálaráðið og Landsverk fóru í fjør undir eina tilgongd um nýtt tjóðleikhús í Tórshavn. Fyrsta stigið í verkætlanartilgondini er at vísa á best egnaðu staðseting fyri tjóðleikhúsið.
Mánadagin 8. mars 2021 var kunngjørt av Uttanríkis og mentamálaráðnum, at kappingin av staðsetingini av nýggja Tjóðleikhúsinum var avgreidd, og at dómsnevndin var komin fram til, at Tjóðleikhúsið skuldi staðsetast á Bursatanga, har leikhúsið kemur at standa á markamótinum millum bý og havn.

Tórshavnar kommuna fekk handa avgerðina frá Dómsnevndini og skal nú taka støðu til valdu staðseting. Í sambandi við at taka endaliga støðu til staðsetingina, so verður neyðugt at viðgera økið út frá teimum staðbundnu avbjóðingunum, sum økið hevur við sær, og verður neyðugt at tryggja sær, at endaliga staðsetingin hóskar inn til býarskipanarligu-, havna- og ferðsluatlitini, sum kommunan beinleiðis hevur til staðið.

Sostatt verður mett, at neyðugt verður at seta gongd á arbeiðið at skipa eystara havnaøkið í eina heildarætlan fyri økið, har staðsetingin av Tjóðleikhúsinum samstundis verður nágreinað.

Av tí at 5 ráðgevara-toymir eru knýtt at kappingini um Tjóðleikhúsið, og mugu hesi, samstundis sum tey tekna upp á eitt nýtt tjóðleikhús, taka støði til nærumhvørvið, so verður mett, at besta loysnin til at fáa eina nøktandi loysn fyri bæði skipan av økinum og skipan av tjóðleikhúsinum er, at báðar kappingarnar verða samskipaðar.

Upplýst er fyri umsitingini, at hetta er sama tilgongd, sum Reykjavíkar kommuna framdi, tá Hørpan í Reykjavík og økið kring Hørpuna varð skipað.

Til at fara undir hesa tilgongd verður neyðugt, at býarskipanarligi, tekniski og havna myndugleikin nágreina ítøkiligu krøvini til eystara havnaøki nú og í framtíðini, soleiðis at ráðgevaratoymini hava nakað ítøkiligt at fyrihalda seg til, tá økið og bygningurin skal teknast.

Metta samlaða upphæddin at fíggja toymini er áljóðandi 500.000 kr., har hvørt toymið verður samsýnt við 100.000 kr.

Við at fara undir hesa tilgongd, so fær kommunan 5 ymisk uppskot til skipan av økinum, og kann hugsast, at elementir eru í øllum uppskotunum, sum kunnu gagna endaligu skipanini av økinum. Hetta er ein heldur óroynd tilgongd, og hevur kommunan ikki áður samskipa verkætlanir við landi á henda hátt, men mett verður, at týdningurin av at Tjóðleikhúsið verður staðsett í Tórshavn og týdningurin av at hendan staðseting er heldur serlig í mun til kringumstøðurnar, so er tað bara jaligt at fáa fleiri uppskot inn til skipan av økinum, soleiðis at kommunan í síðsta enda hevur eina skipan av økinum, sum tekur hædd fyri teimum staðbundnu viðurskiftum, sum kommunan metur vera av týdningi fyri økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at farið verður undir at skipa eystara havnaøki sambært omanfyri standandi leisti,
- at umsitingin fer undir at nágreina ítøkiligu krøvini, sum ráðgevin skal fyrihalda seg til,
- at 500.000 kr. verða játtaðar av konto 6275, Fríðkan av kommununi, L00001, Løgukarmur fyri árið á nýggja íløgu 'Skipan av eystara havnaøki' undir konto 6275,
  og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Havnanevndin 13. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina malið í býráðið.
**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Heðin Mortensen legði fram broytingaruppskot í málinum. Atkvøtt verður um soljóðandi uppskot: Samtykt við tí broyting, at fleiri arkitektar kunnu bjóða seg fram at gera heildarætlan. Málð um fígging verður at leggja fyri aftur.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Heðini Mortensen, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at tørvur er á eini heildarætlan fyri Eystara havnaøki, frá Kongabrúnni og út undir Skansan, stóð tað 5 ráðgevarasamtøkum í boði at luttaka í eini "Hugskotsinnsavning", sum Býarskipanardeildin skipaði fyri frá 20 okt. – 8.nov 2021.

Arbeiðið varð skipað so, at 5 ráðgevaratoymir skuldu arbeiða við hvør sínum uppskoti til eina heildarætlan hesar 7 vikurnar fyri eina samsýning á kr. 100.000 í part.
Tað vórðu 500.000 kr. settar av til hetta av konto 6275, fríðkan av Kommununi, og hetta varð samtykt á býráðsfundi longu 29. apríl 2021.

Býraðið samtykti tá eisini, broytingaruppskotið hjá Heðini Mortensen, at loyva fleiri ráðgevum at luttaka í hugskotsinnsavningini. Hetta var við støði í at tvær ráðgevarafyritøkur:

- EYA arkitektar og design
- Arkitektar 99

høvdu sýnt áhuga at vera við í verkætlanini saman við teimum upprunaligu 5 innbodnu ráðgevarasamtøkunum.

Hetta skuldi eisini samsýnast eftir sama leisti og við somu treytum. T.v.s. við 100.000 krónum í part fyri at gera uppskot til heildarætlan.
Báðar fyritøkurnar vórðu mettar at kunna innlata nøktandi talgilt tilfar.
Grundað á hesa samtykt vórðu tískil tilsamans 7 samtøk innkallað at luttaka í hugskotsinnsavningini, har tey fingu somu kravfesting og sama grundtilfar at arbeiða útfrá.

Tískil eru 2 fyritøkur afturat, sum hava rætt til at samsýnast við 100.000 í part fyri uppskotini, ið tey lótu inn. 8 nov. 2021.

Atlit skal harumframt takast til, at samsýningin fyri øll 7 innkomnu uppskotini má útgjaldast sum *samsýning fyri innkeypt ráðgevaraarbeiði*, og her má tískil íroknast meirvirðisgjald.

Afturat teimum framanundan játtaðu kr. 500.000, mugu tískil játtast kr. 243.750 afturat.
Tað er 100.000 í part til teir báðar innbodnu ráðgevarnar, umframt kommunala meirvirðisgjaldið (6,25%) av teirri samlaðu upphæddini at útgjalda til allar 7 ráðgevarnar.
Umframt tað er eisini nakað av fundarútreiðslum, sum fór til at skipa og leiga høli til verkstovu við viðgerðararbeiðinum. (Kr. 7.960 v.mvg)

Eina góða viku undan innlatingarfreistini kom fyrispurningur frá einum ráðgevi afturat (Albert Isfeldt og Jóannes Petersen) um at vera við í hugskotsinnsavningi. Ráðgevanum varð greitt frá, teir vóru vælkomnir at koma við einum sjálvbodnum ítkasti til eina heildarætlan, men at teir ikki kundu vænta samsýning fyri hetta arbeiði, tá teir ikki kundu lúka somu arbeiðstreytir sum hinum 7 ráðgevarnir arbeiddu undir, sum longu tá høvdu sitið við uppgávuni í 6 vikur. Hetta varð játtað, og ráðgevin lat eisini eitt uppskot inn, ið eisini varð tikið við í viðgerðartilgongdina.

Eftir at hugskotsinnsavningin varð lokað 8. nov. 2021 hevur býarskipanardeildin verið í eini tilgongd, har arbeitt verður við innkomna tilfarinum fyri at fáa eina ítøkiliga og framtíðartryggjaða heildarætlan samansetta.
Umsitingin kemur at kunna um verkætlanina á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játta kr. 255.000 av Løgukarminum LK62035 “Vetrarfriðing” á L62046, «Heildarætlan Eystara havnaøki», og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Tørvurin á eini heildarætlan**
Í tráð við at havnavirksemið á gomlu Eystaru bryggju so líðandi verður flutt út á nýggju ídnaðarkeiina, hevur stórur tørvur verið á eini nýggjari menningarætlan fyri Eystara Havnaøki til tess at tryggja at økið ikki kemur at standa lutfalsliga oyðið í framtíðini.

**Eystara Bryggja tømist**
Eitt nú kann nevnast, at stóra pakkhúsið undir Skansanum hjá Smyril Line Cargo, og skrivstovubygningurin hjá TAKS á ávikavist Eystaru bryggju 20 og 30 ætlandi verða niðurtikin, tá hetta virksemið heldur verður samlað úti á nýggju ídnaðarkeiini. Smyril Line fyrireikar í hesum viðfangi eisini byggingina av nýggjum altjóða ferðafólkaterminali úti á ídnaðarkeiini, har Norrøna fer at hava sítt fasta atløgupláss.

Væntast kann harumframt, at hildið verður fast um ætlanina við at bora undirsjóvartunnil millum Sandoynna og Suðuroynna um eitt stutt áramál, sambært raðfestingini á fíggjarlógini fyri 2022. Natúrligu

avleiðingarnar av hesum eru, at Strandfaraskip Landsins fyrireikar, at suðuroyarsiglingin verður niðurløgd, at Smyril verður seldur, og at ferjulegan og stóra asfaltsfløtan við bíðstøðuplássunum umborð tískil kemur at standa tóm, um Tórshavnar kommuna onga aðra ætlan hevur fyri økið.

Eftir á Eystaru bryggju stendur sostatt bert farstøðin hjá SSL við atknýttu bussplássunum, ferjulegan hjá Ternuni, og Havnarskrivstovan uttast undir Skansanum, umframt víðu asfaltsfløturnar og bíðistøðuplássini.

Um hugt verður at samlaða økinum í verandi støðu, kann Eystara Havnaøki í dag býtast upp í tríggjar partar. (sí journalnummar 17/03628-18, Økispartar_Eystara havnaøki.pdf) hesir partar eru:

- Økispartur 1 er innasti og søguliga ríkasti partur av samlaða økinum, við Kongabrúnni, bátahylinum, Bursatanga og havnalagnum yvir av Tinganesi út til Farstøðina. Hesin parturin er á leið 15.000 $m^2$ til støddar.
- Økispartur 2 er samferðslu og farmaøkið frá Farstøðini og út til nýggju ídnaðarkeiina. Hesin partur er á leið 18.900 $m^2$ til støddar.
- Økispartur 3 er útbygda ídnaðarøkið og nýggju molarnir. Hetta økið er á leið 187.600 $m^2$

**Tilgongdin við Heildarætlanini**
Býarskipanardeildin hevur saman við teknisku deild, verið í eini tilgongd at gera eina heildarætlan fyri Eystara Havnaøki hvussu teir báðir innastu økispartarnir (1 & 2) best kunnu gagnnýtast og framtíðartryggjast býarskipanarliga í mun til komandi virksemi og menning í økinum tey næstu mongu árini.

Skipað varð í hesum sambandi fyri eini hugskotskapping, har 8 arkitektasamtøk gjørdu hvør sítt uppskot uppá eina heildarætlan fyri økið. Sum grundarlag undir kappingini varð ein kravfesting gjørd við støði í teimum bindingum, sum eru í økinum, og við atliti til tey ynski, sum áhugabólkar og brúkarar í økinum hava. Harumframt varð tilfarið eisini evnað við tí í hyggju, at nágreina hvar eitt Tjóðleikhús kundi verið staðsett í økinum.

Uppskotini vórðu innlatin 8. nov 2021, og vórðu tey eftirfylgjandi viðgjørd í einum fakligum arbeiðsbólki, ið tók støðu til hvussu ein endalig heildarætlan fyri Eystara Havnaøki skuldi skipast úr teimum best eydnaðu lutunum úr kappingini.

**Heildarætlanin**
Við støði í innkomnu ráðgevarauppskotunum, hevur Býarskipanardeildin gjørt eina heildarætlan fyri Eystara Havnaøki, har stóru strokini vóru, at økispartur 1, ið er innasta og mest søguligi parturin, verður best gagnnýttur og virðiligast handfarin, um hann verður inntikin til fólksligt miðbýarvirksemi, sett av til mentan, ferðavinnu og smávinnuligt virksemi, bryggjutorg og útbygdari smábátahavn við nýggjari atløgubryggju til størri stuttleikafør við Bursatanga.

Hetta verður sostatt eitt livandi mentanarumhvørvi, ið knýtir bæði Skansan og Tinganes upp í miðbýin, samstundis, sum tað leggur lunnar undir, at her verður bygt til alment mentanarvirksemi, ið tænir tignarliga økinum heiður, og samstundis hevur virðing fyri tí søguliga smáneystaumhvørvinum, sum einaferð setti sín dám á Eystaru vág, áðrenn økið varð umlagt til ídnað og samferðslu.

Økispartur 2, millum Farstøðina og Havnarskrivstovuna varðveitir sína funktión sum samferðsludepil, men verður mentur munandi og endurskipaður í mun til ferðslurensl og virksemi.

(Sí nærri útgreining í bóklingi um heildarætlanina)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At Heildarætlanin fyri Eystara Havnaøki, sum lýst í bóklingi um heildarætlanina og atknýtta tekningstilfari, verður eitt vegleiðandi amboð fyri hvussu økið skal mennast og skipast í framtíðin.
- At økið, sum er avmerkt á flatmyndini “Uppskot um kappingarøki” áljóðandi 10.000 $m^2$ verður avsett til kappingarøkið hjá Mentamálaráðnum til nýggjan Tjóðpall við treytum grundaðar úr heildarætlanini.

- At beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Útsett
**Tekniska nevnd 07. februar 2022:** Útsett.
**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Útsett.

## Ískoyti:

## Skipan av Eystara havnaøki:

Í fyrireikingini til útbygging av Eystara havnaøki, tá ætlanin var at tilkoyringin til havnarlagið lá uttan fyri Skansan, skuldi havnarlagið víðkast við 163.000 m$^2$.

Av tí at tað tók so langa tíð at fáa tað endaliga friðingarloyvið, bleiv avgjørt at minka útbyggingina til 95.000 m$^2$.
Avleiðingin av minkingini er, at havnaøkið ikki er so stórt, sum upprunaliga ætlað, og at tilkoyringin til havnarlagið hevði verið betur, um ætlanin ikki varð minkað.

Avgjørt er, at byggja nýggj pakkhús og farstøð á økinum uttan fyri havnarskrivstovuna. Hjarnuvirksemið hjá havnini og skipafeløgunum er, at hava pláss til at avgreiða ferðafólk og frakt.

Samfelagið er í støðugum vøkstri, tí er umráðandi at skipafeløgini, hava arbeiðsumstøður og pláss at fylgja við hesum vøkstrinum.

Av tí at tað tekur fleiri ár at víðka havnarlagið, er neyðugt at økið millum havnarskrivstovuna og farstøðina framhaldandi verður ein partur av virkseminum hjá skipafeløgunum.

Økið millum havnarskrivstovuna og Bursatanga er umleið 23.000 m$^2$

Í tekning j.nr 17/03628-14, heildarætlan Eystara havnaøki skitsa 061221, sæst, at ætlanin er at venda Smyrli, soleiðis at koyrast skal í land undir havnarskrivstovuni.

Hendan ætlanin viðførir:
1. At tað verður truplari hjá Smyrli at koma til og frá, serliga á útsyðningi
2. At einasta flytiliga rampan í Havnini verður gjørd óvirkin
3. At økið beint innan fyri havnarskrivstovuna, sum eigur at vera partur av virkseminum hjá skipafeløgunum í uttanlandssigling, verður brúkt til bíðirøðir og farm, sum skal við Smyrli.
4. At íløgur skulu gerast í:
   a. Nýggja rampu undir havnarskrivstovuni
   b. Nýggja rampu út eftir molanum
   c. Styrking av bryggjukantinum innan fyri havnarskrivstovuna
   d. Nýggjar sterkar fendarar innan fyri havnarskrivstovuna
   e. Nýggjar stormpullartar til Smyril
   f. Nýggja farstøð ella landgongd við gongubrúgv til verandi terminal

**Tilmæli frá havnameistaranum:** At økið millum havnarskrivstovuna, og verðandi ferðafólkaterminal, framhaldandi verður partur av uttanlandssiglingini.
At økið frá verðandi farstøð ikki verður lagt av til miðbýarvirksemi, fyrr enn Smyril verður tikin úr sigling.

**Havnanevndin 14. februar 2022:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen samtykti at eitt økið upp á uml. 4.000 fermetrar frá Farstøðini og heim ímóti býnum verður lagt av til miðbýarvirksemi og Mentunarhús.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

**Fortreytirnar fyri nýskipan av Eystaru bryggju:**

Komandi árini verða fortreytirnar fyri virkseminum á Eystara Havnaøki somikið broyttar, at neyðugt er at nýskipa økið, so tað kann gagnnýtast á ein skynsaman og framtíðartryggjaðan hátt. Tørvur hevur verið á eini heildarætlan fyri økið millum Kongabrúnna og út til ídnaðarmolan á Eystara havnaøki. Umtalaða økið er umleið 32.800 m$^2$ til støddar.

Økið verður í verandi støðu nýtt til:

- Samferðsluøki við farstøð hjá Strandfaraskipum Landsins og Smyril Line, bæði við atløgubryggjum til uttanlandaferðaflutning, sum karmur um ferjusambandið til Nólsoyar og Suðuroyar, og sum bussmiðstøð hjá bygdaleiðum.
- Taxamiðstøð
- Pakkhús
- Havnaskrivstova hjá Tórshavnar Havn
- Skrivstovuvirsksemi.
- Smábátahavn
- Alment parkeringsøki
- Og til matstovu og handilsvirksemi.

Broytingarnar í økinum verða m.a.

- At Suðuroyarsiglingin væntandi verður niðurløgd og Smyril verður tikin úr sigling.
- At pakkhúsið og skrivstovuvirksemið á ávikavist Eystaru bryggu 20 og 30, millum Havnaskrivstovuna og verandi Farstøð, verður flutt úr økinum.
- At bussleiðirnar hjá SSL verða fleiri í tali.
- At Smyril Line flytur alt sítt uttanlanda siglingarvirksemi av økinum og út á molan við nýggjum altjóða terminali.
- At ferðslan um rundkoyringarnar og út á ídnaðarmolan fer at vaksa.

Ein nýggj skipan av økinum leggur upp til, at verandi funktiónir fáa neyðugt rásarúm til at virka og røkja sítt virksemi á ein tryggan hátt, og at leysgivnu fermetrarnir í økinum verða gagnnýttir á skilabesta hátt, hvat býarskipan og miðbýarmenning viðvíkur. Her verður serstakliga hugsað um søguliga virðið í økinum, har býareyðkenni sum Tinganes, Skansin og Kongabrúgvin er ein partur av nærumhvørvinum.

Býarskipanardeildin hevur verið í eini tilgongd at skipa eina heildarætlan fyri økið, har samskift hevur verið við uttanveltaðar ráðgevar og áhugabólkar i økinum.

**Økispartar í heildarætlan**

Heildarætlanin deilir umtalaða økið í fýra økispartar.

- Økispartur 1, ið er økið við ósan á Havnará og nakað út á Kongabrúgv (umleið 1300 m$^2$).

- Økispartur 2 er Innara bryggjuøkið frá Kongabrúnni og út til verandi farstøð. (umleið 17.000 m$^2$)

- Økispartur 3 er Miðøkið við verandi farstøð og atknýttum bussstøðubásum, tolli og parkering. (umleið 7600 $m^2$)

- Økispartur 4 er Ytra bryggjuøkið frá verandi farstøð og út til ídnaðarmolan. (umleið 7000 $m^2$).

- Uttan fyri økispart 4 er Schengen- og ídnaðarøki (umleið 157.000 $m^2$)

**Skipan av økinum**
Heildarætlanin er skipað so, at:

Økispartur 1 og 2 verður umskipaður til miðbýarkent virksemi við smáhandlum, kafé/matstovum, og ymiskt til ferðavinnuligt endamál. Her verður bryggjutorg við bátadrátti og broyttum bryggjukanti, ið er ætlaður fólki til gongu, umframt at smærri skip kunnu liggja her. Smábátahavnin verður eisini útbygd til at taka fleiri bátapláss.
Nólsoyarferjan kemur framhaldandi at hava atløgu í økinum, og her verður nýggj ferðamiðstøð bygd, við nýggjum bussstøðuplássum til bæði bygdaleiðir og býarbuss.

Her verður lutfalsliga lág bygging í 1-3 hæddum.

Økispartur 3 verður avsett til alment mentanarligt endamál, so sum leikhús og almenna parkering. Her verður ein nýggj og størri rundkoyring gjørd, við einum eyka ferðsluarmi, ið verður leiddur beint oman á bryggjuna.

Her verður hægri bygging loyvd í upp til 5 hæddum, og undantak kann í serligum føri verða givið upp til 20 m til eitt nú leikhústorn.

Økispartur 4 verður skipaður, lutvíst sum sokallað buffara-øki til uttanlandasiglingina og atløgubryggjuni hjá Norrønu/SmyrilLine. Og lutvíst sum almenn parkering á Eystaru bryggju annars.
Vegurin frá rundkoyringini og út á ídnaðarøkið verður eisini breiðkaður við eini eyka frákoyringarbreyt til tunga ferðslu niðan um Skansan.

Her kann byggjast í upp til 5 hæddum, treytað av at ikki verður bygt upp um hæddina á hamaranum á Skansanum, ið er 16 m høgur í lutfalli til bryggjukantin.

Í øki 3 og 4 eru líkindini góð fyri at ymsar funktiónir umskara, ella yvirlappa hvørja aðra. Til dømis er hugsandi at buffarastøðubásar til ferjulegurnar partvís kunnu nýtast sum almenn parkering um kvøldarnar, tá tiltøk eru á skránni í økinum.

Eisini er hugsandi at parkeringsdekk kann byggjast, um tørvurin og trýstið á hetta økið fer at vaksa.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At Heildarætlanin fyri Eystara Havnaøki, sum lýst í bóklingi um heildarætlanina og atknýtta tekningstilfarið, verður eitt vegleiðandi amboð fyri hvussu økið skal mennast og skipast í framtíðini

- At økið, sum er avmerkt á flatmyndini “Uppskot um byggiøki” áljóðandi 4.000 $m^2$ verður avsett til byggiøki hjá Mentamálaráðnum til nýggjan Tjóðpall við treytum grundaðar úr heildarætlanini.

At beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. februar 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Ruth Vang, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam, atkvøður blankt.
**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Landsverk, umboðandi Uttanríkis- og mentamálaráðið, stóð í heyst fyri arkitektakapping at gera uppskot til Tjóðleikhús. Býráðið samtykti í vár at avseta økið, sum er avmerkt á flatmyndini "Yvirlitskort heildarætlan_1til1000_A2_190222", j. nr. 17/03628-27, til byggiøki til nýggja Tjóðleikhúsið.

Landsverk hevur síðani kappingina sent kommununi vinnandi uppskotið og dómsnevndarálitið frá kappingini, sí journal nr. 17/03628-36 og nr. 17/03628-38.

<u>Soleiðis verður greitt frá vinnandi uppskotinum:</u>

*Uppskot 95516 skarar framúr á øllum givnum økjum: Arkitektonisk hugsjón, funktionalitetur, samspæl við nærumhvørvið og byggibæri, heildarkostnað og umhvørvisatlit.*
*Tað hevur eitt týðiligt og snotiligt høvuðsbragd, sum sameinir og miðlar tað nógva virki í tjóðleikhúsinum. Logistikkurin og skipanin í tjóðleikhúsinum er sera sannførandi, og sum gestur fært tú eina stóra uppliving, og tað er lætt at vitja húsið. Bygningurin er gevandi í mun til sítt umhvørvi, tí hann við sínum terassum leiðir okkum inn í tjóðleikhúsins skala á sannførandi hátt, hann hevur bleytt dánað, spælandi og kortini rytmisk mynstur og er innbjóðandi á øllum fimm síðum, og bygningurin virkar bæði sum eitt nýtt útsýnisstað, haðani tú upplivir alt havnarrúmið, og sum trappusteinur til Skansan við sambandi til Skansan og sjónarringin. Henda sambinding uppraðfestir og sameinir Skansan sum leikara í tí stóra býarlandslagnum av nýggjum. Samstundis ger dómsnevndin við sínum vali eitt greitt tilmæli um, at tjóðleikhúsgrundøkið verður tillagað, og samsvarandi eigur busskoyring á Eystaruvág at endurskoðast, so at minkað verður um ferðslutunga dámin á tí øki, sum í framtíðini skal verða ein víðkaður miðbýur í Havn.*

<u>Somuleiðis verður skrivað soleiðis í niðurstøðunum hjá dómsnevndini:</u>

*Dómsnevndin metir, at um staðsetingin av Tjóðleikhúsinum á havnarlagnum verður tillagað nakað, verður samspælið við Skansan og Tinganes betur. Eitt hjartamál hjá nevndini hevur verið, at tann nýggi bygningurin ikki oyðileggur tað søguliga samspælið millum tey týdningarmiklu mentanarsøguligu og býarlandslagsligu støðini Tinganes og Skansan, men verður settur einastaðni á tí stóra havnarøkinum, sum letur upp fyri eygnasambandi, samstundis sum býarlívi, ferðslukrøv v.m., kunnu verða gingin á møti. Við at flyta tjóðleikhúsgrundøkið burtur frá høvuðsásinum millum Tinganes og Skansan kann tjóðleikhúsið gerast eitt nýtt triðja punkt, ið stuðlar uppundir hinum báðum. Hetta fer eisini at geva gongugøtuni betri tilknýti til Skansan.*

Í dómsnevndarálitinum verður sostatt viðmælt at flyta Tjóðleikhúsið eitt lítið vet nærri Kongabrúnni aftur fyri at varðveita søguliga samspælið millum Tinganes og Skansan. Landsverk hevur eftirfylgjandi heitt á kommununa um at fara í eina tilgongd at nágreina endaligu staðsetingina/byggiøkið, sum kann liggja til grund undir einum komandi leigu-/sølusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Mentamálaráðið.

**Skjøl:**
J. nr. 17/03628-27, Yvirlitskort heildarætlan_1til1000_A2_190222
J. nr. 17/03628-36, Vinnandi uppskotið hjá MAP Arkitektum_kapping aug_sep 2022.pdf
J. nr. 17/03628-38, Dómsnevndarálit-Tjóðleikhús við undirskriftum.pdf.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og býararkitekturin mæla til,

- at heimila umsitingini at fara í eina tilgongd saman við Landsverki og teirra ráðgeva at finna endaligu staðsetingina til Tjóðleikhúsið á Eystara havnaøki, sum skal liggja til grund fyri leigu-/søluavtaluni millum Tórshavnar kommunu og Mentamálaráðið,
  og beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og mentamálanevndina og at málið verður lagt fyri nevndina aftur.
**Havnanevndin 05. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum tó við tí viðmeking, at man tekur undir við at leiga og ikki selja undirlendið, og at man heldur seg til økið sum er samtykt frammanundan í havnanevndini.

**Ískoyti:**
Peningur bleiv í 2021/2022 játtaður til verkætlanina L62046 Heildarætlan fyri Eystara havnarøki til ráðgevar at koma við uppskotum. Arbeiðið við heildarætlanini er fyribils liðugt, og saldoin á verkætlanini er 80.500 kr.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62046 | Heildarætlan Eystara havnarøki | 6275 | L0001 | Løgukarmur - Fríðkan av býnum | | 80.500 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L62046, Heildarætlan Eystara havnaøki, flyta avlopið á 80.500 kr á karmin L00001 á konto 6275, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, tekur undir við at loka verkætlanina og at flyta avlopið á karmin L64040 á konto 6275.
**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:** Almanna- og mentamálaráðið hevur í skrivi dagfest 15. mars 2023 boðað Tórshavnar kommunu frá, at fremsta ynski hjá Almanna- og mentanálaráðnum er at keypa lendið frá Tórshavnar kommunu/Tórshavnar havn til at byggja Tjóðleikhús á. Í øðrum lagi ynskir ráðið at leiga lendið í eitt so langt tíðarskeið sum til ber, í minsta lagi óuppsigiligt í 30 ár, men gjarna longri.

Havnanevndin tók 5. desember 2022 støðu til spurningin um, hvørt lendið undir tjóðleikhúsinum skal leigast ella seljast. Ein samd nevnd samtykti í hesum sambandi at leiga og ikki selja undirlendið.

Siðvenja er ikki at selja lendi, ið Tórshavnar havn umsitur. Hetta fyri altíð at kunna tryggja atgongdina til sjógvin, ið verður mett at hava alstóran týdning fyri býin. Vinnufyritøkur, ið leiga lendi frá Tórshavnar havn, hava í flestu førum langar leigusáttmálar, og so leingi talan er um leigusáttmálar, ber til hjá Tórshavnar havn at fáa lendið aftur, tá ið hesir leigusáttmálar ganag út. Dømi eru um vinnufyritøkur, ið hava havt leigusáttmála við Tórshavnar havn í fleiri áratíggju.

Vísandi til siðvenjuna, ið er nevnd omanfyri, verður ikki mett skynsamt at selja lendið, ið ætlanin er at byggja tjóðleikhús á. Hinvegin er skilligt, at ynski er um at fáa so drúgvan leigusáttmála sum til ber, tá ið farið verður undir eina slíka bygging og stóra íløgu, sum tjóðleikhúsið er.

Mælt verður tí til at gera ein leigusáttmála um lendið undir tjóðleikhúsinum, sum er óuppsigiligur í 50 ár, og at møguleiki verður fyri at leingja leigusáttmálan við 10 árum hvørja ferð, um Tórshavnar kommuna/Tórshavnar havn ikki skal brúka lendið, ið tjóðleikhúsið stendur á. Skal Tórshavnar kommuna/Tórshavnar havn sjálv brúka lendið, ið tjóðleikhúsið stendur á, tá ið leigumálið er lokið, skal kommunan endurrinda virði á ástandandi bygningi.

Mett verður, at hesar treytir eru nøktandi grundarlag fyri at fara undir verkætlanina at byggja tjóðleikhús á havnaøkinum.

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir til at Tórshavnar kommuna ger leigusáttmála við Almanna- og mentamálaráðið um lendi at byggja tjóðleikhús á, ið er óuppsigiligur í 50 ár og við møguleika fyri at leingja leigumálið við 10 árum hvørja ferð, um Tórshavnar kommuna/Tórshavnar havn ikki sjálv skal brúka lendið, ið tjóðleikhúsið stendur á. Harumframt verður mælt til, at kommunan skal endurrinda virðið á ástandandi bygningi, um kommunan sjálv skal brúka lendið, ið tjóðleikhúsið stendur á, tá ið leigumálið er lokið.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at beina málið í havnanevndina.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

## 159/23 Sethúsaútstykking á Velbastað – partur av matr. nr. 51a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 25/22 | 22/00329-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 40/22 | 22/00329-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 112/23 | 22/00329-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | | | 22/00329-1 |
| 5 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 159/23 | 22/00329-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna er í troti av bústøðum. Í heyst varð farið undir at broyta byggisamtyktina fyri ein part av matr. nr. 51a á Velbastað, sí viðhefta skjal 22/00329-2, Økið_broytt til bústaðarbygging.

Broytingin er grundað á ynski um at gera eina kommunala sethúsaútstykking í økinum.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin fór í heyst undir at broyta ein part av matr. nr. 51a til økisásetingina B – Bústaðarøkið. Broytingin er enn ikki endaliga góðkend í Býarskipanarnevnd Landsins, men verður viðgjørd í nevndini fyrst í februar.

Fyri at fara undir at gera útstykkingina, er neyðugt, at kommunan ognar sær lendið, sum ætlanin er at byggja á. Harumframt skal verkætlanin projekterast og setast í verk.

Umsitingin sær fyri sær, at økið verður boðið út til arbeiðstakara at menna og byggja, og í tí sambandinum er neyðugt at fara undir at gera útbjóðingartilfarið, sum skal liggja til grund fyri verkætlanini. Kommunan ynskir at bjóða lendið út til projektering og bygging av grundstykkjum, sum kommunan síðani lutar út til privat til bygging av sethúsum.

Økið, sum talan er um at keypa, er uml. 8500 $m^2$ til støddar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Løgtingslóg um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 194 frá 23. desember 2018
- Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn
- Reglugerð fyri útlutan av fastari ogn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sum eisini sæst í málinum um broyting av byggisamtyktini, so ynskir staðbundna nevndin at síggja útstykkingarætlanina, tá hon er liðug. Tískil verður mælt til, at umsitingin setir seg í samband við limir í nevndini í sambandi við gerð av útbjóðingartilfarinum, og eigur verkætlanin at verða løgd fyri nevndina aftur, tá tilboðini eru innkomin.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01258 Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Velbastað fyri part av matr.nr. 51a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
22/00329-2 Økið_broytt til bústaðarbygging

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar fyri verkætlanina og at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum, partur av matr. nr. 51a, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og heimila umstingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar til verkætlanina og fyrireika útbjóðing og harumframt at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum og at beina málið aftur í fíggjarnevndina, tá hesi viðurskifti eru avgreidd.

**Ískoyti**
Tá freistin at lata tilboð inn tann 13. mars kl. 12 var farin, vóru tvey tilboð innkomin.

| | | |
|---|---|---|
| P/F Tórhall Hansen á | kr. 6.037.839 u/mvg fyri | 17 grundstykki |
| Sp/f Plan á | kr. 11.191.071,05 u/mvg fyri | 14 grundstykki |

Útboðið var skipað á tann hátt, at tilboðsgevari gav tilboð upp á:
• Skipanaruppskot fyri økið
• Projektering íroknað myndugleikaviðgerð
• Byggibúning

Síðani er ætlanin, at kommunan lutar stykkini út til privatpersónar at byggja síni sethús á.

Í útbjóðingartilfarinum stóð, at tilboðsgevari vinnur upp á bíligasta kostnað. Sambært hesum hevur P/F Tórhall Hansen vunnið útboðið.
P/F Tórhall hansen hevur havt Sp/f Uni Patursson afturat sær sum ráðgevandi verkfrøðing.

Byggimálsdeildin og býarskipanardeildin fóru saman við vinnandi tilboðsgevaranum, P/F Tórhalli Hansen, í eina samráðingartilgongd at finna fram til mest skynsomu gagnnýtsluna av økinum í mun til kostnaðin.

Í hesi tilgongdini varð m.a. komið fram til, at stykkini í skipanaruppskotinum vóru teknað ov trong og avmarkandi til eina vanliga familju at innrætta seg á.
Eitt nú fór tað at gerast trupult at rúma einum bilhúsi á hvørjum av stykkjunum, ið var mett at hava stóran týdning, og tilboðsgevarin var tískil biðin um at tillaga ætlanina nakað. Úrslitið var, at tey 17, heldur trongligu stykkini, vórðu umskipað til 14 rúmligari grundstykkir.

Tilboðsgevarin lat so statt eitt tillagað uppskot inn 15. mai 2023 við nýggjari kostnaðarmeting fyri projektering og byggibúning av samlaðu útstykkingini av 14 grundstykkjum (á umleið 500m² hvørt), ið var tilsamans áljóðandi: 6.995.579 kr u.mvg.

Sí viðhefta skipanaruppskot og arbeiðstøkutilboð: *Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21

Í sambandi við at fyrireika økið við tilføringurm, reinsiverki, drenskipan o.a. hevur Tekniska deild eisini gjørt eina kostnaðarmeting fyri «avleiddar verkætlanir». Hon er soljóðandi (u.mvg):

| | | |
|---|---|---|
| Dren av yvirflatuvatni omanfyri útstykkingina: | kr | 312.000 |
| Gøtuljós og íbinding: | kr | 250.000 |
| Reinsiverk við neyðugum leiðingum: | kr | 400.000 |
| Kloakkleiðingar: | kr | 250.000 |
| Vatnleiðing: | kr | 50.000 |
| Brandpostar: | kr | 60.000 |
| | | |
| Tilsamans (u.mvg) | kr | 1.322.000 |

Leggjast skal afturat, at í einum slíkum føri heftir SEV fyri kostnaðin, sum stendst av at tryggja neyðugu el-leiðingarnar til eina nýggja útstykking sum hesa. Í hesum sambandi nevnir SEV fleiri møguleikar í økinum, har knýtast kann í verandi el-kervið á Velbastað.

Skrivlig tilsøgn er fingin frá Búnaðarstovuni um keypið av lendinum, sum Føroya jarðargrunnur eigur. Metti kostnaðurin fyri lendið á matr. nr. 51a á Velbastað (uml 8.500m² av dyrkingarbærum lendi í Øki 2 Velbastaður) er: kr. 1.050.000.

Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina er tískil:

| | | |
|---|---|---|
| Projektering og byggibúning: | kr | 6.995.579 |
| Avleiddar tekniskar verkætlanir: | kr | 1.322.000 |
| Keyp av lendi: | kr | 1.050.000 |
| | | |
| Tilsamans: | kr | 9.367.579 |
| | | |
| Íroknað kommunalt mvg á 6,25% er hetta: | kr | 9.953.053 |
| | | |
| Metti eindarkostnaðurin fyri hvørt grundstykki (á uml. 500m²) verður tískil: (9.953.053 / 14): | kr | 710.932 |

Sí annars viðheftu útgreinaðu kostnaðarmetingina fyri samlaðu verkætlanina: *Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j.nr. 22/00329-23. *Afturat kostnaðarmetingini verður mælt til at seta 1 mió. kr av til ókent. Alt eftir hvussu nógv verður brúkt av ókendu puljuni, so kann hetta ávirka endaliga eindarkostnaðin fyri hvørt grundstykki.*

Um umsitingini verður heimilað at halda fram við verkætlanini, og samráðingararbeiðið við tilboðsveitaran kann halda fram, er hugsandi, at smærri tillagingar eiga at verða gjørdar í skipanaruppskotinum, eitt nú í mun til hvussu økið til bilparkering framman fyri útstykkingini eisini tryggjar, at koyribreytin á Ervavegnum (sum er atkomuvegurin niðanfyri útstykkingina) kann breiðkast nakað niðan ímóti grundstykkjunum. Hendan koyribreytin er heldur smøl í dag.

P/F Tórhall Hansen metir, at verkætlanin verður liðugt projekterað í summar. Og um øll neyðug loyvi vera givin í næstum at stykkja út, so kann útstykkingin standa liðug um 1,5 ár eftir, at arbeiðstøkan byrjar.

**Skjøl**
*Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21
*Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j. nr. 22/00329-23

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6475 | | Byggibúning bústaðir | 6475 | | | Nýggj útstykking á Velbastað | 11.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 11.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-24 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til,:

- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen
- at játtaðar verða 11 mió. kr. til verkætlanina sum eykajáttan, og at nýggj verkætlan verður upprættað til verkætlanina.
- at fáa heimild at selja stykkini.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

# 160/23 Nýggj útstykking matr. nr. 49m, Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2022 | 169/22 | 22/01139-8 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 104/23 | 22/01139-8 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 200/23 | 22/01139-8 |
| 4 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 160/23 | 22/01139-8 |

**Upprunin til málið**
Umsóknir eru komnar frá íbúgvum í Kaldbak, um at kunna ogna sær grundstykkir til sethús í Kaldbak.

**Lýsing av málinum**
Framvið vegnum í Gørðum, hevur kommunan útlagt uml. 10.000 m$^2$, til sethúsabygging. Somuleiðis eru útlagdir uml. 3.000 m$^2$ í býlinginum við Á í Kaldbak. Í høvuðsheitum er talan um ogn hjá jarðarráðnum, festijørð og uml. 1.500 m$^2$ privatogn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í eindini A, sum er sethúsaøki.

a. Nettonýtslustigið má ikki fara upp um 0,30.
b. Hús mugu í mesta lagi verða bygd í einari hædd við kjallara og nýttum lofti.
c. Á hvørjari ogn, skal leggjast øki til í minsta lagi 2 bilpláss.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tekniskt projekt er móttikið og viðgjørt av teknisku deild.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/00161 Sethúsaútstykking Kaldbak. Kanna møguleikar fyri at stykkja út til sethúsagrundir.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti við treytum, sum umsitingin setir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðið at gera ústitstykkingina er í gongd, men Tjóðsavnið hevur gjørt vart við, at har er eitt fornminni á staðnum, har tað innasta grundstykkið er ætlað at verða. Talan er um eina toft, sum liggur eftir eina smiðju, sum hevur staðið í Kaldbak. Av tí at hetta er meira enn 100 ára gamalt, so skal friðingarmyndugleikin avgera, um hetta skal varðveitast, ella um tað kann takast burtur.
Um toftin skal varðveitast, so er neyðugt at broyta útstykkingarætlanina nakað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til, at nevndin gevur umsitingini heimild til at gera neyðugar broytingar í útstykkingarætlanini, um tað gerst neyðugt, soleiðis at atlit verða tikin til fornminni, harundir m.a. at flyta eitt grundstykki, soleiðis at vegurin ikki kann førast víðari vestureftir, og at flyta gøtuna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

# 161/23 Hosufóðring av kloakkum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.05.2021 | 30/21 | 21/01680-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 123/21 | 21/01680-5 |
| 3 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 151/21 | 21/01680-5 |
| 4 Tekniska nevnd | 22.08.2022 | 52/22 | 21/01680-5 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 198/22 | 21/01680-5 |
| 6 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 184/22 | 21/01680-5 |
| 7 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 32/23 | 21/01680-5 |
| 8 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 171/23 | 21/01680-5 |
| 9 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 161/23 | 21/01680-5 |

**Upprunin til málið**
Eftir gjøgnumgongd av støðulýsingunum, ið blivu gjørdar í 2018, har 14 km av kloakk bleiv filmað, varð úrslitið, at sera stórir partar av kloakkunum mugu umvælast.

**Lýsing av málinum**
Tað er sera dýrt og tíðarkrevjandi at endurnýggja kloakkir, tískil mugu vit hugsa alternativt. Í DK hava veitarar í meira enn 40 ár arbeitt við at fóðra kloakkir, t.v.s. umvælt kloakkirnar innanífrá, soleiðis at vit sleppa undan at grava vegir, gongubreytir og kantsteinar upp, men heldur byggja eitt nýtt rør, undir jørðini. Hetta er nógv bíligari, og til lítlan og ongan ampa fyri borgaran - við tað at arbeiðið verður avgreitt uttan graviarbeiði og tað verður gjørt uttan longri tíðarbil við uppgrivnum vegum, ið tarna ruskinnsavnan og annars kann verða til ampa fyri borgaran. Fleiri av teimum strekkjum ið blivu filma treingja til ábøtur, og liggja leiðingar her m.a. undir bygningum og yvir um høvuðsvegir. Tey strekkir, sum verða fóðrað, eru uml. 1,3 km samanlagt og mettur kostnaður er kr. 3 mió.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Arbeiðið verður avgreitt sambært sáttmála, har veitari heldur seg til Abt93.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Rakstrarstøðin hevur staðið fyri samskifti við Aarsleff

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | Minni umsiting, | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | Minni dálking | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | Skjótt og bíligt í mun til grevstur | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 666<br><br>Formansins merki: |

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Peningurin uppá 3,0 mió. verður fíggjaður av konto 6875, og talan er um eitt strekki uppá 1,3 km.

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 3.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 3.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato mai-aug. 2021 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 3.000.000 | 6875 | nýggj | | 6875 | L00001 og L00002 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk 1.911.000 | 6875 | nýggj | | 6875 | L00001 | | | |
| Dkk 1.089.000 | 6875 | Nýggj (sama) | | 6875 | L00002 | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:
- Upphædd uppá kr. 1.911.000 verður játtað av konto 6875, L00001, Løgukarmur fyri árið 2021
- Upphædd uppá kr. 1.089.000 verður játtað av konto 6875, L00002, framfluttur løgukarmur 2020
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt.

## Ískoyti

Royndirnar við hosufóðring í 2021 hava verið góðar. Tað blivu uml. 1,2 km av kloakkleiðing filmað og spulað, síðani fóðrað, og at enda aftur filmað til tess at skjalprógva arbeiðið. Kostnaðurin var uml. 3 mió kr, og gevur hetta ein kostnað á í miðal kr. 2.500 fyri meturin. Her er tá talan um leiðingar, sum í flestu førum liggja undir bygningum, á privatum øki ella undir vegum við nógvari ferðslu. Afturat sjálvari fóðringini komu eyka arbeiðir í sambandi við, at nakrir verandi brunnar á leiðingunum máttu umvælast ella skiftast, og í onkrum førum máttu nýggir brunnar etablerast. Harasturat vóru kostnaðir í samband við kunning til borgarar o.l. Hesar eyka útreiðslur vóru tá uml. kr 400.000.

Ætlanin er at halda fram við hesum arbeiðinum í september 2022, og verður í tí sambandinum tørvur á kr. 3.400.000 til at fremja arbeiðið í august-september 2022. Her er ætlanin, at 1,1 km av kloakkleiðing verður fóðrað, og avleidd arbeiðir verða gjørd. Á konto 6875 Kloakkir (íløgur), L68040 Hosufóðring av kloakkum, eru í løtuni kr. 508.000. Tí er tørvur á, at játtaðar verða kr. 2.892.000 til hesa løgukontu.

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐

| | Býráðsfundur<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 667<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 6875 | L68040 | Hosufóðring av kloakkum | |

| Upphædd |
|---|
| 2.892.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3.400.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og Býarverkfrøðingurin mæla teknisku nevnd til, at játtaðar verða kr. 2.982.000 á konto 6875 Kloakkir (íløgur) av løgukarminum LK68999 Kloakkir á løgukontuna L68040 Hosufóðring av kloakkum undir somu konto 6875 Kloakkir (íløgur). Eisini verður mælt til at játta umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakarar um arbeiðið at hosufóðra kloakkirnar og gera avleidd arbeiðir í hesum sambandi. Mælt verður til, at málið verður beint umvegis fíggjarnevndina í Býráðið.
**Tekniska nevnd 22. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Royndirnar við hosufóðring í 2021 og 2022 hava verið góðar. Í 2022 blivu uml. 1,1 km av kloakkleiðing filmað og spulað, síðani fóðrað, og at enda aftur filmað til tess at skjalprógva arbeiðið. Kostnaðurin var uml. kr. 3,1 mió., og gevur hetta ein kostnað á í miðal kr. 2.820 fyri meturin. Her er tá talan um leiðingar, sum í flestu førum liggja undir bygningum, á privatum øki ella undir vegum við nógvari ferðslu. Leiðingarnar, sum eru lagdar í 2022, eru við størri dimensiónum enn tær, sum blivu lagdar í 2021. Hetta hevur viðført ein hægri eindarkostnað enn í 2021. Afturat sjálvari fóðringini komu eyka arbeiðir í sambandi við, at nakrir verandi brunnar á leiðingunum máttu umvælast ella skiftast, og í onkrum førum máttu nýggir brunnar etablerast. Harafturat vóru kostnaðir í samband við kunning til borgarar o.l.

Ætlanin er at halda fram við hesum arbeiðinum í august/september 2023, og verður í tí sambandinum tørvur á uml. kr. 3.300.000 til at fremja arbeiðið í august-september 2023. Her er ætlanin, at 0,9 km av kloakkleiðing verður fóðrað, og avleidd arbeiðir verða gjørd. Í hesum umfarinum verður serligt fokus á leiðingar við stórum dimensiónum (Ø500-Ø800). Á konto 6875 Kloakkir (íløgur), L68040 Hosufóðring av kloakkum, eru í løtuni kr. 330.000. Tí er tørvur á, at játtaðar verða kr. 3.000.000 til hesa løgukontu til fóðring og avleidd arbeiðir í 2023.

Arbeiðið, at fóðra leiðingarnar er grundað á filming av leiðingunum í 2018, tá 14 km av leiðingum blivu filmaðir. Út av hesum 14 km eru, tá 2023 er farið afturum, 3.2 km av leiðingum fóðraðir. Tí er nú tørvur á, at tryggja, at grundarlag framhaldandi er fyri at velja røttu strekkini komandi árini. Hetta verður tryggjað við nýggjum filmingum, hesa ferð við størsta fokus á miðbýin. Tá filmað verður, verða leiðingarnar um somu leið spulaðar, har tørvur er á hesum, fyri at filmingin skal eydnast. Væntandi kann á leið sama longd av leiðingum, sum í 2018, verða filmað fyri eina upphædd á kr. 1.000.000.

Viðmerkjast skal, at báðar hesar ætlanir longu eru samtyktar í kloakkætlanini fyri 2023, tá við tí fyrivarni, at játtanin verður samtykt serskilt.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

| | **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 668<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Eyka játtan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK68999 | Kloakkir | 8175 | L68040 | Hosufóðring av kloakkum | | 4.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 4.000.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 4.000.000,- á konto 6875 Kloakkir (íløgur) av løgukarminum LK68999 Kloakkir á løgukontuna L68040 Hosufóðring av kloakkum undir somu konto 6875 Kloakkir (íløgur). Eisini verður mælt til at játta umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakarar um arbeiðið at hosufóðra kloakkirnar og gera avleidd arbeiðir í hesum sambandi. Mælt verður til, at málið verður beint umvegis fíggjarnevndina í Býráðið.
**Tekniska nevnd 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

## 162/23 Eykajáttan til 8114 kavarudding

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.03.2023 | 12/23 | 22/04631-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 81/23 | 22/04631-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 08.05.2023 | 26/23 | 22/04631-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 30/23 | 22/04631-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 172/23 | 22/04631-1 |
| 6 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 162/23 | 22/04631-1 |
| 7 Býráðsfundur | | | 22/04631-1 |

**Upprunin til málið**
Seinastu vetrarnir hava verið merktir av nógvum frost- og kavadøgum. Kavarudding og salting í sambandi við hetta veðurlagið hevur verið tilsvarandi umfatandi hesar vetrarnar. Tað varð gjørt vart við hetta í september 2022, tá veturin aftur stóð fyri durum. Víst var á, at tað var alneyðugt, at eykajáttan varð veitt hesi konto til tess at tryggja framhaldandi virksemi innan økið. Málið kom ikki til politiska viðgerð, men krav var um framhaldandi virksemi við tí úrsliti, at roknskapurin fyri 2022 vísti eitt samlað hall á kr. 7.509.000. Talan er um eitt systematiskt framflutt hall síðani 2018, sum fellur saman við einum hørðum vetri, har uml. tkr 830 meira enn miðal fyri seinastu 5 árini verður brúkt til lønir, tkr. 730 meira enn miðal til salt o.l., og salttunnilin verður tryggjaður til framhaldandi góðkenning fyri uml. tkr. 1.100.

**Lýsing av málinum**
Kavaruddingin verður fíggjað av konto 8114 Kavarudding, sum er ein konto, ið verður umsitin av rakstrarstovninum sambært endamálinum fyri kontuni. Hetta umfatar í høvuðsheitum at salta vegirnar, tá frostur er, og at rudda vegir og gongubreytir, tá kavi er. Konta 8114 Kavarudding fíggjar allar lønir í sambandi við hesi arbeiði, allar útreiðslur til maskinur, og alt tilfar íroknað salt.

Í viðfesta skjali 22/04631-3 (8114 Nýtsla 2010-2022_endaligt) ber til at síggja søguligu gongdina fyri játtan og nýtslu á hesi konto og tal av frostdøgum fyri árini 2010 til 2022. Út frá hesum tølum sæst, at hvør frostdagur hevur hesi árini kosta í miðal tkr. 111. Her skal roknast við, at tað vanliga eru fleiri kavadagar enn frostdagar, og at tað vanliga tekur meira enn ein dag at rudda allar kommunalar vegir fyri kava, tá talan hevur verið um størri kava. Samstundis sæst í skjalinum, at umrøddu árini hevur vanliga verið játtað uml. kr. 88.000 til hvønn frostdag.

Í 2020 var hall á kontuni á uml. 1.160 tkr. og hallið á tkr. 1.010 framflutt til 2021. Í 2021 gjørdist hallið samlað tkr. 2.852, íroknað framlutta hallið frá árinum frammanundan. Játtanin í 2022 var tkr. 3.259 umframt eitt framflutt hall á tkr. 2.852 frá árunum frammanundan so netto játtanin fyri 2022 var kr. 407.000.

Vanliga hava avlop og hall verið framflutt millum ár á kontuni, og tá tørvur hevur verið á tí, er eykajáttan veitt til at tryggja virksemið á økinum. Sum tað er víst á í gjøgnumgongdini av søguligu gongdini á kontuni í viðfesta skjalinum og omanfyri, so er tað kortini soleiðis, at kontan flestu ár hevur verið undirfíggjað.

Mett varð, at fyri at virksemi innan kavaruddingarøkið kundi halda fram í seinnu helvt av 2022, var neyðugt, at eykajáttan varð veitt, sum vigaði upp samlaða hallið pr. august 2022 og væntaða nýtslu fyri 11 frostdagar í seinnu helvt av 2022, sum svarar til miðal frostdagatalið í seinnu helvt av árinum seinastu 12 árini.

Mett varð ikki, at tað var ráðiligt, at halda fram við at framflyta hall á hesi konto til komandi ár, tí tað ikki er gjørligt at meta um tørvin á kontuni, tá hesin er so tætt tengdur at veðrinum. Heldur eiga møgulig avlop at verða framflutt til verri ár. Henda meting er enn óbroytt.

Nú 2022 er farið aftur um bak vísir tað seg, at eisini veturin í seinnu helvt av 2022 hevur verið harðari enn miðal, og hevur konta 8114 tí eitt endaligt hall á tkr. 7.509.

Íroknað í hetta er, at kostnaðurin av salti í 2022 hevur verið um 45% hægri enn vanligt (uml. 730 tkr.). Hetta vegna støðuna á heimsmarknaðinum. Eisini eru í 2022 goldnar tkr. 1.078 fyri at tryggja, at saltgoymslan í tunlinum við Oyggjarvegin lýkur treytirnar fyri arbeiðstrygd sambært krøvum hjá Arbeiðseftirlitinum. Um hetta arbeiði ikki varð gjørt, var eingin saltgoymsla.

Í 2022 hava tað sambært Veðurstovu Føroya verið 70 dagar har døggpunktið hevur verið undir 0 stig celsius, og 56 dagar, har hitin hevur verið undir 3 stig celsius.

Fyri 2023 er játtanin kr. 4.947.000. Væntast kann at hetta er nøktandi játtan.

Mett verður ikki at aðrar rakstrarkontur undir grein 6 kunnu fíggja hetta hallið, uttan at hetta fær avleiðingar, sum fara at merkjast á tænastustøðinum innan hesar deildir.

**Skjøl**
J.nr. 22/04631-3: 8114 nýtsla 2010-2022_endaligt
J.nr. 22/04631-4: 8114 Kavarudding Lønir 2018-2022
J.nr. 22/04631-5: 8114 Kavarudding Vørukeyp annars 2018-2022

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 8114 | | Kavarudding | |

| Upphædd |
|---|
| 7.509.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 7.509.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við,
- at eykajáttan á kr. 7.509.000 skal veitast konto 8114 Kavarudding til tess at tryggja, at kavarudding og salting framhaldandi kann verða veitt í 2023.
- at samtyktin hjá nevndini í málinum verður beind víðari í býraðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. mars 2023:** Samtykt at heita á umsitingina um at koma við einum uppskoti um, hvussu partur av hesum kann fíggjast av rakstrinum og at leggja fyri nevndina aftur á komandi fundi.
**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin í teknisku fyrisiting hevur umrøtt, hvussu partur av hallinum á kr. 7.509.000 kann fíggjast av rakstrinum.

Í skjali nr. 22/04631-8 «8114 Kavarudding dekningur av halli 2022 TF» er víst, hvussu kr. 2.215.960 kunnu finnast á rakstrarkontum fyri 2023. Her er talan um 1,6% av samlaðu játtanini á umrøddu kontunum og 4,7% av tí játtanini, sum ikki er bundin í lønum og føstum leigu- og viðlíkahaldsútreiðslum. Hesin parturin svarar til 29,5% av hallinum á konto 8114 fyri 2022.

Í fleiri førum er talan um kontur, sum longu eru i ferð við at heinta inn hall yvir avtalað tíðarskeið, og tí kann hesin eyka niðurskurður í játtanini koma at hava merkbarar fylgjur fyri virksemið undir hesum kontum.

Síðani eru eftir kr. 5.293.040,- at dekka inn írestandi hallið á konto 8114 Kavarudding fyri 2022.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 2.215.960 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 2.215.960 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við,
- at kr. 2.215.960,- verða fluttar av rakstrarkontum undir teknisku fyrisiting, sum lýst í málinum á konto 8114 Kavarudding.
- at eykajáttan á kr. 5.293.040,- skal veitast konto 8114 Kavarudding til tess at dekka inn írestandi hallið á hesi konto.
  at samtyktin hjá nevndini í málinum verður beind víðari í býraðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina

**Tekniska nevnd 08. mai 2023:** Samtykt at heita á umsitinga um at finna eina størri upphædd á rakstrinum til næsta fund.

**Ískoyti**:

Umsitingin hevur kannað, um til ber at finna fleiri sparingar í rakstrinum, serliga við at skera í lønarkostnaðum í fyrisitingini og á rakstrarstovnunum. Hesar kanningar vísa sera smáar eyka sparingar í 2023, um natúrliga fráfarin støvr ikki verða endursett. Somuleiðis kann vísast á, at beinleiðis uppsagnir ikki koma at hava munandi sparingar við sær í 2023, tí hesar uppsagnir kunnu taka langa tíð at gjøgnumføra. Eisini skal í hesum sambandi vísast á, at tað ikki verður mett forsvarligt, at minka um arbeiðsorkuna, um virksemið skal haldast á nøktandi støði. Tað eru deildir undir rakstrarstovninum, sum vegna truplar rekruteringsumstøður, ikki eru mannaðar, svarandi til normeringarnar. Á hesum deildum hevur verið neyðugt, at virksemið tá er framt av eksternum veitarum, sum vísa seg ikki at veita bíligari tænastu, enn um normeraðu størvini vóru sett.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla tí framhaldandi til:

- at kr. 2.215.960,- verða fluttar av rakstrarkontum undir teknisku fyrisiting, eins og lýst í málinum, á konto 8114 Kavarudding.
- at eykajáttan á kr. 5.293.040,- skal veitast konto 8114 Kavarudding til tess at dekka inn írestandi hallið á hesi konto.

  at samtyktin hjá nevndini í málinum verður beind víðari í býraðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at restin av fíggingini kemur í sambandi við fíggjarætlanararbeiði í heyst.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 163/23 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 37/21 | 21/02196-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 160/21 | 21/02196-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 188/21 | 21/02196-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.11.2021 | 70/21 | 21/02196-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 297/21 | 21/02196-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 302/21 | 21/02196-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 26.04.2022 | 37/22 | 21/02196-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 120/22 | 21/02196-2 |
| 9 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 99/22 | 21/02196-2 |
| 10 Fíggjarnevndin | 12.05.2022 | 123/22 | 21/02196-2 |
| 11 Býráðsfundur | 12.05.2022 | 104/22 | 21/02196-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 60/22 | 21/02196-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 253/22 | 21/02196-2 |
| 14 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 244/22 | 21/02196-2 |
| 15 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 265/22 | 21/02196-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 20.12.2022 | 76/22 | 21/02196-2 |
| 17 Fíggjarnevndin | 21.12.2022 | 329/22 | 21/02196-2 |
| 18 Býráðsfundur | 21.12.2022 | 302/22 | 21/02196-2 |
| 19 Tekniska nevnd | 19.06.2023 | 34/23 | 21/02196-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 198/23 | 21/02196-2 |
| 21 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 163/23 | 21/02196-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at samráðingar hava verið millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um at kommunan tekur á seg at gera nýggjan uttara ringveg við íbindingum til Tórshavn er gjørd avtala millum partarnar um, at Føroya landsstýri letur Tórshavnar kommunu stuðul til part av verkætlanini.

**Lýsing av málinum**
Nýggjur uttari ringvegur í Tórshavn hevur verið í umbúna í mong ár og serliga síðani farið var undir at fyrireika Eysturoyartunnilin.

Landsverk hevur arbeitt við at fyrireika henda veg, og í hesi fyrireiking er linjuføring fyri vegin løgd og knútapunkt á linjuføringini staðsett (sí kort í fylgiskjølum). Vegurin verður gjørdur millum rundkoyring oman fyri Sandvíkarhjalla (C) og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð (G). Á hesum strekkinum verða knútapunktini C1, C2 og C3, sum eru íbindingar til millum knútapunkt C og knútapunkt E, sum er rundkoyring við Villingadalsvegin/Sundsvegin. Úr knútapunkti E verður tunnil til knútapunkt F, sum er vestan fyri Hotel Føroyar. Í knútapunkti F verður gjørd rundkoyring, sum hevur fýra greinar: Ein í tunnilin, ein oman í knútapunkt G og tvær til Landið at føra ferðsluna til ávikavist Oyggjarvegin og til Sandoyarleiðina.

Alt vegastrekkið millum punkt B og G verður kommunalur vegur.

Samlaði kostnaðurin er mettur til at vera 288 mió. kr.

Stuðulin frá landinum verður í mesta lagið 110 mió. kr., sum ásett er í løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár.

Stuðulin er treytaður av, at

- arbeiðið við nýggja uttara ringvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
- Nýggi uttari ringvegur skal lúka krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá meginøkinum. Hetta er tó ikki galdandi í tíðarskeiðum, tá vegarbeiði og tílíkt verður gjørt.
- Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar, sum t.d. ferðslubungur, soleiðis at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Nýggjar íbindingar í nýggja uttara ringveg kunnu bert gerast til vegir, sum eru ætlaðir til bilferðslu; ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein veg, sum bara er ætlaður bilferðslu, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin, tá løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn er farin úr gildi.
- Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa hesa avtalu á matrikulin, tá nýggi uttari ringvegurin er liðugur.

Avtalan er víðari treytað av, at Løgtingið samtykkir uppskotið til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn, og at Tórshavnar Býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í løgtingslógini og sambært avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um Fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.

Umsitingin kannar alt tøkt verklagstilfar, forkanningar og alt annað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesa verkætlan, og sum uttan viðurlag verður latið Tórshavnar kommunu sambært avtaluni.

Byggiskrá verður gjørd við støði í úrslitinum av hesum kanningum, og arbeiðið at fremja verkætlanina verður boðið út av umsitingini sum heildarverkætlan, antin fyri:

- Alla verkætlanina samlað,
- ella fyri vegir og tunnil hvør sær.

Umsitingin arbeiðir í hesum sambandi eisini við at finna fíggingarleist fyri kommununnar part av verkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Innkomuvegur yvirlit, j.nr. 21/02196-4
Avtala_FMR_TK, j.nr. 21/02196-1
LI_uttararingveg, j.nr. 21/02196-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 675<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Biðið verður um 1 mió. kr. til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyri standandi fyrireikingar.

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: juni-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| **Upphædd íalt** | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað verkætlan** | **Eykajáttan** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | | |
| Dkk 1.000.000 | 8175 | L81037 | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við:

- avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.
- at umsitingin fær heimild til at gera byggiskrá fyri heildararbeiðstøku.
- at umsitingin fær heimild til at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku fyri:
    - Alla verkætlanina samlað,
    - ella fyri vegir og tunnil hvør sær.
- Umsitingin fær játtað ein fíggjarkarm á kr. 1.000.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, L81037, Innkomuvegur kommunali partur, til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyristandandi fyrireikingar.
- Málið soleiðis verður samtykt og beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at partar av vegnum/tunnilin kann bjóðast út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at projektering av tunli og vegum skal gerast, er tørvur á, at umsitingini verður heimilað at gera hesar sáttmálar. Í hesum sambandi er tørvur á einum samlaðum karmi á kr. 3.500.000. Hesin karmur er treyt fyri, at projekteringin av innkomuvegnum og tunli kunnu fremjast og gerast liðug. Skotið verður upp, at afturat teimum kr. 1.000.000 og kr. 751.000, sum áður eru játtaðar og framfluttar frá 2020 til

verkætlanina L81037 Innkomuvegur kommunalur partur, verða játtaðar kr. 1.750.000, sum ikki verða avgreiddar av ymiskum øðrum kontum og verkætlanum í 2021:

- 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
- 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
- 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
- 250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við at:

- Umsitingini verður heimilað at gera sáttmálar um projektering av innkomuvegi og tilhoyrandi tunli innan ein samlaðan karm á kr. 3.500.000
- Karmurin til projektering verður fíggjaður av:
    - Verandi tøkari upphædd á L81037 Innkomuvegur kommunalur partur
    - 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
    - 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
    - 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
      250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tekniska nevnd 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið verður fíggjað av íløguætlan fyri 2022 (Innkomuvegur).

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg

**Ískoyti**:
Fyrsti partur av uttara ringvegi, ið er arbeiðsvegur frá á Hjalla til Villingadagsvegin, varð boðin út og lægsta boð à kr. 17.272.128 uttan MVG, hevði Articon.
Fyri at seta arbeiðið í gongd, verður biðið um fylgjandi játtan:

| | |
|---|---|
| • Tilboð | 17.272.128 |
| • Verkætlanarleiðsla, eftirlit og byggileiðsla | 1.000.000 |
| • Avleiddar verkætlanir | 5.600.000 |
| • 6,25 MVG | 1.492.008 |
| | |
| Tilsaman | 25.364.136 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum frá Articon, at játtaðar verða kr. 25.364.136 til verkætlanina, fyrsti partur av uttara ringvegi, kr. 4.600.000 av LK81037 og kr. 20.764.136 sum eykajáttan og beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.
**Tekniska nevnd 26. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at kr. 20.764.136,00 verða játtaðar av mettum meirinntøkum í 2022. Um metingarnar ikki halda, verður fíggingin løgd fyri aftur, møguliga sum lántøka. Málið beint í býráðið sum eykajáttan hvat viðvíkur upphæddini á kr. 20.764.136,00.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:** Fyri at tryggja so stuttan flutning av grevstrartilfarinum sum gjørligt, er gjørt uppskot um avtalu við festaran á Hoyvíkshaganum Norðaripartur um at taka ímóti avlopstilfari, sum ikki verður brúkt í verkætlanini. Fyri hetta skal festarin fáa somu upphædd fyri rúmmeturin, sum annars verður kravdur í tyrvingarplássinum í Húsahaga.

Samlað er talan um ein kostnað á uml. kr. 2.150.000,00, sum ikki er íroknaður í útboðnum og givna tilboðnum ísv. verkætlanina.

Harumframt hevur verkætlanin varandi neiliga ávirkan á raksturin av festinum, tá lendið, sum festið hevur ræði á, verður lagt undir vegin og avleiddar verkætlanir umframt komandi vinnuútstykkingina í økinum. Festarin missir tá bit til seyð, undirlendi til ungneyt umframt fría atkomu til bitið. Harumframt verða skipanirnar av verandi fylgjum og gongum ávirkaðar við eyka avbjóðingum til festaran sum avleiðing. Umsitingin metir og er samd við festaran, at ein eingangssamsýning til festaran á kr. 1.500.000,00 er hóskandi samsýning fyri hesar neiligu ávirkanir á raksturin av festinum.

Avtalurnar við festaran hava við sær, at neyðugt er at hækka játtanina, ið samtykkjast skal við aðru viðgerð, úr kr. 20.764.136,00 upp í kr. 24.424.136,00.

**Tilmæli:** Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja uppskotið við aðru viðgerð við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 24.424.136,00 av meirinntøkum í 2022 og annars taka undir við fyriliggjandi avtalum við festaran

**Fíggjarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevi kommununar hevur eftir avtalu við kommununa projekterað tunnilin lidnan til høvuðsarbeiðstøku og vegurin frá rundkoyringini við Hvítanesvegin til tunnlismunnan undir Brúnni er projekteraður soleiðis, at geometri og krøv eru gjørd klár til heildararbeiðstøku – her er talan um ein lidnan projekteraðan ráveg, tað vil siga at vegkassin er liðugt projekteraður, meðan yvirbygnaður, leiðingar, avvanding, ljós búgvar o.s.fr. ikki eru liðugprojekterað, men krøvini fyri projektering av teimum eru sett upp.

Neyðugt er, at arbeiðstøkurnar fyri tunnil og veg fylgjast, soleiðis at tilfar úr tunlinum í mestan mun kann verða flutt beinleiðis úr tunlinum til vegin. Eisini verður mett, at tað er ein avgerandi fyrimunur fyri logistikkin í samlaðu verkætlanini um einans ein arbeiðstakari er fyri bæði tunnil og veg. Hetta krevur, at útboð og lisitatión fyri tunnil og veg eru samtundis.

Tunnilsgerðin inniber nógv arbeiði í sambandi við vatntrygging og bergtrygging, sum hóast tunnil hevði verið heildararbeiðstøka, helst høvdu verið avroknað øðrvísi. Tí verður mælt til, at tunnilin verður boðin út sum høvuðsarbeiðstøka. Vegurin, hinvegin, er betri egnaður at bjóða út sum heildararbeiðstøka, men vil hesin útboðsformurin krevja longri tíð, áðrenn lisitatión kann haldast fyri hesa arbeiðstøkuna. Hesi viðurskifti gera, at mett verður at besti útboðsháttur fyri samlaðu verkætlanina er, at tunnil og rávegur verða boðin út fyrst, sum høvuðsarbeiðstøka, meðan vegurin verður liðugt projekteraður til útboð til høvuðsarbeiðstøku.

Mett verður at hetta projekteringsarbeiðið saman við neyðugum kanningum verður gjørt innan ein karm á kr. 1.500.000,-. Undir hesum eru eisini neyðugar støðukanningar av verandi brúgvum, sum framhaldandi

verða partur av uttara ringvegi, og projektering av broytingum av hesum brúgvunum. Hetta arbeiðið verður mett at kostað um kr. 350.000,-.

Arbeiðið verður mett at verða liðugt og klárt at bjóða út um ársenda 2022. Tó eigur at verða sett tann treyt, at farast kann ikki undir projekteringina av lidnum vegi, áðrenn Tórshavnar býráð hevur samtykt at fara undir tunnil og veg, sum lýst omanfyri.

Tó eigur at kunna farast undir at gera støðukanningar av brúgvunum beinanvegin og projektera broytingar av teimum í mun til lidnan veg.

## Játtan:

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | 81037 | Innkomuvegur | | 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

## Tilmæli:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til, at samtykt verður at heimila umsitingini at:

1. Bjóða ráveg og tunnil út sum høvuðsarbeiðstøku
2. Gera sáttmála við ráðgevan um detailprojektering av vegaverkætlan frá rundkoyringini við Hvítanes til Tunnilsmunnan undir Brúnni innan eina rammujáttan á kr. 1.500.000,-, treytað av at Tórshavnar býráð samtykkir at taka av tilboði um ráveg og høvuðsarbeiðstøku. Tó eru støðumeting og projektering av broytingum av verandi brúgvum undantikin hesi treyt innan eina kostnaðarrammu upp til kr. 350.000,-
3. at peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir (íløgur), L81037 Innkomuvegur

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Heðin Mortensen legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til at taka undir við málinum sum samtykt við fyrstu viðgerð við teirri broyting, at pkt. 3 verður soljóðandi:

«3. at peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir (Íløgur), L81037 Innkomuvegur, av inntøkum frá avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan ringveg í Tgórshavn, frá 26. mai 2021.»

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

Uppskotið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**
Tann 1. desember 2022 varð lisitiatión um arbeiðið at gera tunnil og ráveg. Inn komu tilboð frá P/F J & K Petersen og P/F Articon áljóðandi ávikavist kr. 310.396.677,- og kr. 293.055.268,-. Harumframt lat Articon tvey alternativ tilboð inn áljóðandi ávikavist kr. 289.150.373,- og kr. 261.876.066,-. Umsitingin hevur gjøgnumgingið tilboðini.

Í stuttum umfata alternativu tilboðini ávikavist eitt fast-prís tilboð upp á arbeiðið, sum lýst í útboðnum og eitt fast-prís tilboð upp á ein styttan tunnil, sum á sunnaru síðuni kemur út við ríðibreytina, og síðani verður rávegur førdur oman í Marknagil.

Umsitingin hevur gjøgnumgingið møguleikarnar saman við ráðgevunum og Articon til tess at røkka bestu loysnini fyri uttara ringveg. Nøktandi loysn er funnin við støði í innkomnu tilboðunum, og tekur henda loysn í størst møguligan mun teknisk og fíggjarlig heildaratlit viðvíkjandi:

1. hvussu tilfar úr tunlinum kann beinast burtur ella verða eitt tilfeingi í øðrum verkætlanum,
2. hvussu loysnin er háttað vegatekniskt í mun til normar og krøv,
3. hvussu loysnin ger seg ikki inn á umhvørvið í nærøkinum,
4. hvørja ávirkan, fylgjur av loysnini hava á umhvørvið aðrastaðni.

Í hesum sambandi hava Tórshavnar kommuna og P/F Articon fyrireikað sáttmála um heildararbeiðstøku við grundarlagi í tilboðnum í alternativi 2 og seinni tilboðstillagingum. Hesin sáttmáli fevnir tá um at gera lidnan veg millum rundkoyringina á Hvítanesi og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð. Hetta er ein samlaður teinur á umleið 6.300 m, har av umleið 1.760 m eru tunnil. Tunnilin kemur at ganga millum Villingardalsvegin, undir Brúnni, til eitt øki millum ríðihøllina hjá Berg hestum og Hotel Føroyar. Her kemur tunnilin út undir ríðibreytini, soleiðis, at hendan verður varðveitt. Sáttmálaupphæddin fyri hesa heildarveiting er kr. 305.015.316,- umframt mvg. Íroknað kommunalt mvg er upphæddin kr. 324.078.773,25.

Ein partur av vegastrekkinum er vegur, sum P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil (EST) upprunaliga skuldu lata gera. Hetta snýr seg um teir fyrstu uml. 1.000 metrarnar av vegnum frá rundkoyringini á Hvítanesi. Í sambandi við at Tórshavnar kommuna skal gera vinnuútstykking á Ovara hjalla, er vorðið greitt, at hetta vegastrekkið við at verða flutt longur oman móti hamarinum gevur eina betri nýtslu av økinum, sum verður lagt av til vinnuútstykking. Tí er fyrireikað avtala við EST um, at Tórshavnar kommuna yvirtekur hetta arbeiðið og sjálvan vegin frá felagnum fyri eina samsýning á kr. 12.923.588,-, sum EST rindar Tórshavnar kommunu. Henda upphædd eigur at  verða flutt inn undir L81037 Innkomuvegur, undir deild 8175 Vegir (íløgur)

Eisini er avtala gjørd við EST um keyp av gróti úr Sandoyartunlinum, sum Tórshavnar kommuna m.a. kann nýta í verkætlanini at gera innkomuvegin, vinnuútstykking á Ovara hjalla og møguligum øðrum verkætlanum. Talan er um umleið 200.000 m³ av gróti í føstum máti. Kostnaðurin fyri hetta grót er kr. 10.800.000,-, har av Tórshavnar kommuna skal gjalda EST kr. 5.000.000,- við undirskrift av avtaluni og tær seinastu 5.800.000,- við ársenda 2024. Gjaldið við undirskrift verður tikið av løgukonto L69004 Vinnuútstykking á Ovara hjalla, undir deild 6975, Byggibúning ídnaðarøki (íløgur), sum útlegg.

Áður eru játtaðar kr. 28.924.136,- til projektering og gerð av forkanningum og arbeiðsvegi í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin. Hetta er áður fíggjað og ikki partur av hesum sáttmálanum við Articon.

Sambært avtalu milum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu verður landið at stuðla verkætlanini við kr. 110.000.000,-. Henda avtala er grundað á projekteringar av linjuføringum, íbindingum, rundkoyringum v.m., sum landsverk hevur latið gjørt frammanundan, og sum er í samsvar við samferðsluætlanina hjá landinum 2018-2030. Tórshavnar kommuna hevur, eftir at verkætlanin varð latin til kommununa at skipa, ynskt at broyta verkætlanina, so atlit til framtíðarverkætlanir hjá landinum, sum Tórshavnar kommuna ikki væntar verða framdar í næstum, verða útsett í avtaluni. Sambært verandi avtalu eiga kr. 53.600.000,- at verða útgoldnar pr. 2023.

Sáttmálin fyri framman við P/F Articon er somuleiðis grundaður á, at hesi atlit verða útsett. Fyri at tryggja, at stuðulin frá landinum hóast broytingarnar framhaldandi verður veittur kommununi, varð broytingaruppskot borðið í Løgtingið í november 2022, men bleiv tað ikki viðgjørt vegna løgtingsvalið í desember 2022. Eftir ætlan verður uppskotið við broytingum tillagað verkætlanini fyri framman og lagt aftur fyri Løgtingið, tá tað kemur saman aftur.

Á fíggjarætlan Tórshavnar kommunu fyri 2023 eru avsettar kr. 108.000.000 í úttreiðslujáttan og kr. 33.500.000 sum inntøkujáttan frá stuðlinum frá landinum.

Henda upphædd verður tó regulerað í mun til ta framdrift, sum verkætlanin kemur at hava í 2023, sambært projekteringini og tilhoyrandi gjaldsætlanini, sum Articon skal undir at gera.

## Skjøl
Skjølini verða løgd fram á nevndarfundinum.

## Fíggjarlig viðurskifti

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 108.000.000,- |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 324.078.773,25 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1.500.000 |

## Tilmæli
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til:

1. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Articon um heildararbeiðstøku við føstum prísi at gera vegastrekkið millum rundkoyringina á Hvítanesi og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð íroknað tunnil undir Húsareyni áljóðandi kr. 324.078.773,25 íroknað mvg. Tryggjast skal, at stuðulin frá landinum áljóðandi kr. 110.000.000,- kann veitast verkætlanini.
2. at arbeiðið sambært sáttmálanum við P/F Articon í 2023 verður fíggjað við kr. 108.000.000,- av løgukarminum LK 81037 Innkomuvegur undir 8175 Vegir (íløgur), og restin av játtanini verður at fíggja í 2024.
3. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil um yvirtøku av vegastrekki á Ovara hjalla, og at inntøkan frá hesari yvirtøku kr. 12.923.588,- verður flutt á L81037 Innkomuvegur undir deild 8175 Vegir (íløgur).
4. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil um keyp av gróti frá sandoyartunlinum fyri eina upphædd á kr. 10.800.000,-, har av kr. 5.000.000 verða goldnar við undirskrift. Hetta verður at fíggja við útleggi av konto L69004 Vinnuútstykking Ovari hjalli undir deild 6975 Byggibúning ídnaðarøkir (íløgur).
   at málið verður beint víðari í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. desember 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 21. desember 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, einari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Kristian Martin Skála og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddi :Elsa Berg.

Blankt atkvøddu: Ruth Vang og Turið Horn.

**Ískoyti:**
Í hjáverandi ískoyti verða hesi viðurskifti tikin til viðgerðar:

- **Byggiharraútreiðslur**: Tann 5. juni 2023 var mál 23/02456 «Fígging til avleiddar útreiðslur í samband við heildarætlan, gerð av tunli og innkomuvegi» til viðgerðar í teknisku nevnd, og málið varð samtykt. Her var tilmælið soljóðandi:
  - Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
    - at játta kr. 9.000.000 til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin og kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.
    - at peningurin verður játtaður av løgukarmi LK81037 Innkomuvegur til løgujáttan L81037 Innkomuvegur
    - At játtaðar verða kr. 12.200.000,- sum eykajáttan til løgukarmin LK 81037 Innkomuvegur.
    - At málið verður beint víðari umvegis fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir

  Vegna samanhangin við samlaðu játtina til innkomuvegin verður hetta málið tikið til umrøðu í hjáverandi máli og hiðani beint víðari til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina. Niðanfyri verða eisini tillagingar til hesa viðgerð lýstar, at taka støðu til, sum umfata átroðkandi viðurskiftir í sambandi við lendisræði. Hetta hevur týdning fyri framdriftina av arbeiðinum, soleiðis at tíðarætlanin heldur.

- **Regulering av játtan:** Í ískoytinum, sum varð samtykt í býráðnum tann 21. desember 2022 varð samtykt at gera sáttmála við P/F Articon um heildararbeiðstøku fyri tkr. 324.078. Í somu viðgerð varð samtykt, at arbeiðið í 2023 skuldi fíggjast við tkr. 108.000 av løgukarminum LK81037 Innkomuvegur. Í málslýsingini veður sagt: «Henda upphædd verður tó regulerað í mun til ta framdrift, sum verkætlanin kemur at hava í 2023, sambært projekteringini og tilhoyrandi gjaldsætlanini, sum Articon skal undir at gera.». Í apríl 2023 hevur umsitingin fingið latið prosjekt, tíðar- og gjaldsætlan frá P/F Articon. Her kann staðfestast, at fyritøkan vil gera arbeiðið skjótari enn áður lagt upp fyri. Tíðarætlanin staðfestir, at arbeiðið skal verða liðugt 1. november 2024. Sostatt verður sáttmálaupphæddin avgreidd innan 21 mánaðir, har størsti parturin liggur í 2023, tá stóra spreingiarbeiðið í tunlinum verður framt. Tí verður, um framdriftin av verkætlanini skal haldast, neyðugt at útvega størri játtan fyri 2023, enn áður samtykt.

Afturat byggiharraútreiðslunum, sum blivu samtyktar á fundi í teknisku nevnd tann 5. juni, hevur arbeiðstakarin biðið um, at lendið millum ríðibreytina, matrikul 1175h (Hotel Føroyar) og matrikul 1160a (Flatnahagin) verður tøkt í sambandi við grevstrararbeiði til inntakið av tunlinum í Marknagili. Her er talan um 15.000 m² í matr. 1175a (Húsahagi). Fyritøkan hevur tørv á hesum lendinum til atkomu og byggipláss. Samlað verður í fyrstu atløgu biðið um at leiga alt lendið, og verður tað mett, at hetta kann gerast fyri

kostnað á kr. 150.000,-. Seinni í verkætlanini verður eisini neyðugt at keypa nakað av hesum lendinum (uml. 11.000 m²), men verður hetta lagt fram, tá hetta gerst aktuelt.

Samanlagt verður tí tørvur á, at játtaðar verða tkr. 9.150 til hetta. Framhaldandi er tørvur á kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.

Eisini skal herumframt vísast á, at í sambandi við heildararbeiðstøkur kunnu javnan uppstanda støður, sum gera, at byggiánarin skal taka á seg óvæntaðar útreiðslur av ymiskum slag, sum ikki eru íroknaðar sjálvan sáttmálan um heildararbeiðstøkuna. Ofta er skotbráið fyri hesum útreiðslum stutt, og drál kann viðføra seinkingar og eykarokningar. Tað er trupult at meta um hesar útreiðslur frammanundan, men vanliga verða uml 20% sett av til hetta endamál. Av tí at talan er um heildararbeiðstøku, metir umsitingin, at í miðal uml. 1 mió. kr. um mánaðan er hóskandi. Hetta svarar til áleið 6,8% av sáttmálaupphæddini, ella 22 mió kr í alt (14.270.000 fyri 2023). Hetta er upphædd, sum hædd eigur at verða tikin fyri, um fíggjarætlanin fyri 2023 skal hækkast við lántøku í sambandi við ta frá arbeiðstakaranum upplýstu framdriftina í verkætlanini í mun til uppruna metingarnar.

Í sambandi við reguleringarnar av játtanini í mun til virksemið á verkætlanini skal vísast á, at samlaði tørvurin fyri verkætlanina í 2023 er kr. 238.444.000, tá er ikki roknað við, at sambært fíggjarlóg landsins fyri 2023 eru frá landinum settar kr. 23.000.000 av til fíggjarligan stuðul til verkætlanina. Fyri árini 2024, 2025 og 2026 eru avsettar ávíkavist 31 mió. kr., 36 mió. kr. og 20. mió. kr í stuðli frá landinum. Á fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu eru fyri 2023 avsettar kr. 108.000.000,-. Hetta merkir, at íroknað stuðul frá landinum resta kr. 107.440.000 í í mun til tørvin í 2023, sum er kr. 215.440.000,-. Um stuðulin frá landinum ikki er íroknaður er upphæddin kr. 130.440.000,-. Mett verður, at neyðugt er, at kommunan tryggjar sær, at øll upphæddin kr. 130.440.000,- er tøk, fyri at vandi ikki er fyri, at arbeiðið steðgar vegna væntandi gjaldføri.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Eykajáttan | 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | | 130.440.000 |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 130.440.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 390.943.909,25 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At samtyktin hjá teknisku nevnd frá 5. juni 2023 verður trekt aftur.
- At fíggjarætlanin fyri 2023 verður hækkað kr. 130.440.000,- við eykajáttan, sum verður fíggjað við lántøku, og henda hækking verður veitt løgukarminum LK81037 innkomuvegur undir deild 8175 Vegir (íløgur).
- At játta kr. 9.150.000 til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin og kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.

- At játta kr. 22.000.000 til óvæntaðar byggiharraútreiðslur, harav kr. 14.270.000 verða veittar av LK81037 Innkomuvegur í 2023 á L81037 Innkomuvegur og kr. 7.830.000 verða veittar í 2024 av LK81037 Innkomuvegur
- At málið verður beint víðari umvegis fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir.

**Tekniska nevnd 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

Málið samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

| | Býráðsfundur<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 684<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 164/23 Víðkan av vendipláss á Reynstún og Reynsgøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 33/23 | 23/03191-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 173/23 | 23/03191-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 164/23 | 23/03191-1 |

**Upprunin til málið**
Fjarhitafelagið grevur leiðingar í økinum og skulu frá rundkoyringini á Argjum niðan til Undir Kongavarða

**Lýsing av málinum**
Stórir trupulleikar eru við endan á vegunum, Reynstún og Reynsgøtu, tá talan er um vendiplássini. Bilar hava sera torført við at venda har. Verandi vendipláss eru ikki sambært ásetingum fyri slík. Íbúgvar hava vent sær til kommununa og kært sína neyð, og vilja hava at okkurt munagott verður gjørt.

Fjarhitafelagið er í ferð við at leggja leiðingar niðan til Kongavarða, og tá hesar verða lagdar skamt framvið báðum vendiplássunum, er upplagt at fáa gjørt vendiplássini størri í sama viðfangi.

Articon, sum ger arbeiðið fyri Fjarhitafelagið, hevur bjóðað sær til at víðka um nevndu vendipláss, fyri kr. 1.500.000 u/mvg.

Sí tekning 23/03191-2 og 23/03191-3

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/03191-2 Plantekning frá Articon.pdf
23/03191-3 Tekningar av vendiplássinum á Reynstúni

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | | | Vendipláss Reynstún og Reynsgøtu | 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- umsitingin fær heimild til at samráðast og gera sáttmála við arbeiðstakara um at fremja arbeiði at víðka vendiplássini á Reynstúni og Reynsgøtu.
- játtaðar verða kr. 1.500.000,- av løgukarminum LK81999, Vegaverkætlanir undir deild 8175 Vegir (Íløgur) á nýggja løgukonto við heitinum "Vendipláss Reynstún og Reynsgøtu", og
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 165/23 Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 14.01.2016 | 10/16 | 15/04352-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 9/16 | 15/04352-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 12/16 | 15/04352-4 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 13/16 | 15/04352-4 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 77/16 | 15/04352-4 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 69/16 | 15/04352-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 112/16 | 15/04352-4 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 29/16 | 15/04352-4 |
| 9 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 42/16 | 15/04352-4 |
| 10 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 140/16 | 15/04352-4 |
| 11 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 116/16 | 15/04352-4 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.11.2016 | 107/16 | 15/04352-4 |
| 13 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 112/16 | 15/04352-4 |
| 14 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 428/16 | 15/04352-4 |
| 15 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 343/16 | 15/04352-4 |
| 16 Tekniska nevnd | 10.01.2017 | 5/17 | 15/04352-4 |
| 17 Fíggjarnevndin | 18.01.2017 | 6/17 | 15/04352-4 |
| 18 Tekniska nevnd | 14.02.2017 | 9/17 | 15/04352-4 |
| 19 Tekniska nevnd | 04.06.2019 | 38/19 | 15/04352-4 |
| 20 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 48/19 | 15/04352-4 |
| 21 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 65/19 | 15/04352-4 |
| 22 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 25/20 | 15/04352-4 |
| 23 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 43/20 | 15/04352-4 |
| 24 Tekniska nevnd | 13.03.2023 | 10/23 | 15/04352-4 |
| 25 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 79/23 | 15/04352-4 |
| 26 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 73/23 | 15/04352-4 |
| 27 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 97/23 | 15/04352-4 |
| 28 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 165/23 | 15/04352-4 |

Málslýsing
Íbúgvar í Traðabrekku vísa á truplu atkomuviðurskiftini, tí brekkan til økið er so brøtt, serliga um veturin, tá kavi og hálka er. Tí vísa teir á møguleikan at binda eystara enda av Traðabrekku í Hoyvíksvegin. Økið millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin, matr. nr. 726c, er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Tekniska nevnd skal taka støðu til um farast skal undir fyrireikandi arbeiði at gera vegakomu á matr.nr. 726c, Tórshavn og sostatt knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig fíggjarlig meting av arbeiðinum at gera vegatkomuna, men væntast kann at kostnaðurin verður uml. 1 mió. kr.

Spurningurin um ferðsluviðurskifti á vegamótinum við Hoyvíksvegin/Stoffalágvegin er ikki viðgjørdur enn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin og at farast skal undir planleggingararbeiðið at leggja fyri nevndina. Mælt verður eisini til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið við atliti til fígging av kto. 8175 aðrar vegaætlanir 2016.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ferðslunevndin 14. januar 2016:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum. Ferðsluteljingar verða gjørdar.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Málið beint aftur í teknisku nevnd vegna ógreið viðurskifti viðvíkjandi ognini 726c og áður samtyktum ætlanum við økinum.

**Ískoyti:**
Málið um matr. nr. 726c, Tórshavn, tók sín uppruna í 2002, tá ið kommunan keypti ognina við tí endamáli at fáa vegasamband millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 14/03899, har tað framgongur, at málið um vegatkomu í byggi- og býarskipanarnevndini 10. oktober 2014 var broytt til at fevna um gøtusamband og p-pláss umframt eitt stykki til at selja. Fíggjarnevndin hevur síðani tikið undir við byggi- og býarskipanarnevndini, har stykki til møguliga sølu verður uml. 500 fermetrar til víddar og at írestandi økið út móti Hoyvíksvegnum verður lagt út til alment parkeringsøki.

Víst verður harumframt til mál nr. 14/0385, 2010-1738 og 2010-1513, har borgarar hava sýnt ognini áhuga.

Málið er sostatt ongantíð komið til teknisku nevnd

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Nevndin staðfestir samtyktina frá 13. januar 2016 og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til hesi mál:

1) mál nr. 2002-1884, Tórshavnar kommuna hevur keypt matr.nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a. Húsini eru millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, við tí endamáli, at taka húsini niður og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin.
2) Mál nr. 14/03899, Fíggjarnevndin hevur samtykt at skipa økið sambært tekning, við gøtusambandi millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, einum sethúsagrundøki á uml. 500 $m^2$ og alment parkeringsøki.

Vísandi til mál nr. 14/03899, har býarskipanardeildin hevði eina søguliga gjøgnumgongd av málinum og vísti á, at Tórshavnar kommunnu í 2004 keypti ognina matr. nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a, við tí endamáli, at taka húsini niður, og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin. Mælt var til, at beina málið í teknisku nevnd og ferðslunevndina til støðutakan um vegagerð yvir matr. nr. 726c frá Traðabrekku til Hoyvíksvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við teknisku nevnd at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Ferðsluteljingar eru gjørdar við vegamótið Hoyvíksvegur/Stoffalág. Teljingin var frá 02.03 – 09.03. 2016. Tá koyrt verður frá býnum, eru tølini: 3963 áðrenn snarað verður inn á Stoffalágvegin, og 3119 eftir vegamótið. Tølini eru ársdøgnmiðalferðsla.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Nú ferðsluteljingar eru gjørdar, metir nevndin, at einki er til hindurs fyri at gera eina íbinding.

**Tilmæli:**
Í framhaldi av tilmælinum til teknisku nevnd 13. januar 2016 og tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 4. mars 2016, mælir byarverkfrøðingurin til at játta kr. 300.000,- av íløgum fyri vegaætlanir 2016, konto 8175, til at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu:
Jógvan Arge.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur eftir áheitan frá umsitingini útvegað kommununi uppskot og kostnaðarmeting til vegagerð millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin ávikavist við og uttan 10 parkeringspláss (sí j. nr. 15/04352-24 og 26.).

Umboð fyri grannalagið kring Traðabrekku eru kunnað um uppskotið og í skrivi, dagf. 22. oktober 2016, sum er stílað til teknisku nevnd, siga umboðini seg taka undir við uppskotinum (sí j. nr. 15/04352-25).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at tikið verður undir við uppskotinum við 10 parkerings plássum, at arbeiðið verður sett í útboð millum innboðin, og innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina til støðutakan.

**Tekniska nevnd 03. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera vegin og 10 parkeringspláss var boðið út til fýra arbeiðstakarar, trý tilboð komu inn og vóru tey hesi:

- P/F Articon kr. 1.232.307,- uttan MVG
- Sp/f Maskinkoyring kr. 1.464.545,- uttan MVG
- Sp/f R. J. Brockie kr. 1.072.958,- uttan MVG

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting við støði í tilboðnum frá Sp/f R. J. Brockie, sum vísir at útbodna arbeiðið kann gerast fyri tilsamans kr. 1.737.271,- tá MVG, útboð, byggileiðsla, fakeftirlit, trygging umsiting og óvæntað er íroknað (sí j.nr. 15/04352-33).

Undanfarin játtan til arbeiðið er kr. 300.000,- og írestandi upphæddin er sostatt kr. 1.437.271,- fyri at takast kann av tilboðnum frá Sp/f R. J. Brockie uppá arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at heimila umsitingini at gera sáttmála við Sp/f R. J. Brockie um arbeiðið, at játtaðar verða kr. 1.440.000,- afturat til arbeiðið, fíggjað av ætlaðum íløgum til vegir í 2017 og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Eftir at kunnað var um ætlaðu vegagerðina í skrivi dagf. 11. november 2016 til grannar við Láarvegin og Hoyvíksvegin og sum liggja uppat ætlaðu vegagerðini, vendir ein granni aftur tann 29. november 2016 við áheitan um innlit og umbøn um skotbrá til at gera viðmerkingar til ætlaðu vegagerðina.

Nevndi granni vendir síðani aftur við mótmælisskrivi, dagf. 8. desember 2016, (sí j. nr. 15/04352-39) og vísir m.a. á, at íbúgvar við Traðabrekku framanundan hava atkomu frá Traðavegnum og Láarvegnum og at tað koma at verða fýra vegir sum møtast millum húsini, har sýnið farmanundan er sera vánaligt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin staðfestir samtykt nevndarinnar frá 29. november 2016.

**Tekniska nevnd 10. januar 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.
**Fíggjarnevndin 18. januar 2017:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd við atliti til at viðgera innkomin mótmæli.

**Ískoyti:**
Í í skrivi, dagf. 14. januar 2017, hava átta borgarar við Traðabrekku vent sær til kommununa at mótmæla ætlaðu vegagerðini, sum eftir teirra fatan ger umstøðurnar verri tá talan er um m.a. ferð og parkering og biðja samstundis um fund, at finna bestu loysnina.

Á fundi tann 3. februar 2017 høvdu umboð fyri nevndu borgarar høvið at greiða kommunalu fyrisitingini frá sínum sjónarmiðum og vístu m.a. á gøtusamband millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin sum betri loysn.

**Tilmæli:**
Við fyriliti fyri trygdini í hálku á Traðabrekku, mælir tekniski stjórin til, at nevndin gongur meirilutanum av teimum sum hava vent sær til kommununa á møti, við at staðfesta samtykt nevndarinnar frá 29. november 2016.

**Tekniska nevnd 14. februar 2017:** Tikið av skrá.
**Tekniska nevnd 04. juni 2019:** Samtykt at umsitingin kannar hvussu nógv parkeringspláss kunnu skipast á økinum.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur eftir áheitan frá umsitingini útvegað kommununi uppskot til skipan av økinum til parkering, har tilkoyringin ávikavist er frá Hoyvíksvegnum og frá Traðabrekku.
Á økinum, sum er góðar 1000 fermetrar til víddar, er eftir hesum uppskotum í báðum førum pláss fyri 31 Parkeringsbásum (sí ávikavist j. nr. 15/04352-53 og j. nr. 15/04352-51).
P-plássið við tilkoyring frá Hoyvíksvegnum hevur ráðgevi kommununnar kostnaðarmett til kr. 1.930.000,- uttan MVG, prosjektering, trygging, byggileiðslu, fakeftirlit v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til, at uppskotini um parkering verða latin grannalagnum til hoyringar.
**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Skriv varð sent grannalagnum við Traðabrekku á 25 adressum, við umbøn um viðmerkingar til tey tvey uppskotini til skipan av økinum millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin til parkering uttan gjøgnumkoyring, men við tilkoyring frá Hoyvíksvegnum ella í øðrum lagi frá Traðabrekku.

12 svarskriv, sum komu aftur, umboða ymisk sjónarmið og grundgevingar, men kunnu í høvuðsheitum bólkast nakað soleiðis:

1. Eingin ynskir P-pláss við innkoyring frá Traðabrekku og mótmælt verður staðiliga hesi loysn.
2. Flestu seta seg ikki ímóti, at P-pláss kemur við innkoyring frá Hoyvíksvegnum og nøkur viðmæla hesi loysn, men ynskja kunning áðrenn nakað verður sett í verk.
3. Fleiri ynskja, at P-plássið undir ongum umstøðum verður gjørt við gjøgnumkoyring.
4. Nøkur ynskja, at P-plássið verður gjørt við gjøgnumkoyring til Traðabrekku og at brekkan av trygdarávum verður stongd til blindveg.

Ad 1:
Mótmælið móti at P-pláss verður gjørt við innkoyring frá Traðabrekku verur grundgivið við tilvísing til at ferðslutrýstið á Traðabrekku vil økjast munandi til ampa fyri ferðslutrygdina í økinum. Millum tey sum mótmæla hesi loysn, eru umleið 50 íbúgvar við Láarvegin omanfyri, har tilkoyring er til Traðabrekku og hava hesi latið mótmæli inn við undirskriftum til mótmæli av hesum.

Ad 2:
Nøkur vísa á, at tørvur er á P-plássum í økinum og onkur sigur seg  kunna nýta P-plássið, tá kavi er.

Ad 3:
Grannarnir á eystur síðuni á Traðabrekku 4-26 næst møguligum P-plássi, umboðandi 8 adressur, hava latið mótmæli inn við undirskriftum til mótmæli av hesum.

Ad4:
Víst verður til at grannalagið upprunaliga vendi sær til kommununa  orsakað av vánaligu trygdini í brøttu brekkuni og at tey, tá kavi er, eru uttan vanligar tænastur so sum neyðsendarakfør, læknavitjan, renovatión og TAXA til t.d. læknaørindi v.m. og at eitt P-pláss á ongan hátt nøktar henda tørv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at at parkeringspláss verður gjørt við atkomu frá Hoyvííksvegnum, at grannarnir verða kunnaðir um avgerðina, at arbeiðið verður boðið út og at tilboðini verða løgd fyri nevndina aftur.
**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Samtykt at senda málið til grannakunning og til ferðslugrannskoðan.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til grannakunning og til ferðslugrannskoðan.

Megin niðurstøðurnar  frá ferðslugrannskoðanini eru hesar (sí j. nr. 15/04352-83):

- P-plássið eigur at verða gjørt við gjøgnumkoyring frá Hoyvíksvegnum til Traðabrekku.
- Traðabrekka eigur av trygdarávum at verða gjørd til blindveg, móti ávikavist Láarvegnum og Traðarvegnum.
- At gøta, sum skilur gangandi frá bilferðluni, eigur at verða gjørd framvið P-plássinum.
- At vegamótið millum P-plássið og Hovíksvegin  eigur at verða flutt nakað norðureftir fyri at fáa frástøðu til vegamótið Stoffalág – Hoyvíksvegur.

Umsitingin hevur útvegað skitsuuppskot frá ráðgeva, sum er í samsvar við niðurstøðurnar frá ferðslugrannskoðanini. Eftir hesum uppskoti verða 23 P-pláss á økinum (sí j. nr. 15/04352-84).

Skitsuuppskotið hevur við sær, at umleið 52 fermetrar av lendi mugu útvegast burturav grannamatriklinum 727c norðan fyri P-økið og hevur ánarin av nevnda matrikli, sagt seg sinnaðan at selja lendið til kommununa eftir nærri avtalu.

Sunnan fyri ætlaða P-økið hevur ánarin av grannamatriklinum 726h ynski um marknaumskipan móti P-økinum, soleiðis at P-økið verður nakað longur burturfrá sethúsum hansara. Skitsuuppskotið til P-økið hevur fyrilit fyri hesi marknaumskipan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

1. At parkeringspláss verður gjørt við støði í nevnda skitsuuppskoti, sum er í samsvari við niðurstøðurnar frá ferðslugrannskoðanini og at grannarnir verða kunnaðir um avgerðina.
2. At umsitingin tekur stig til at fáa í lag tillaging av matrikulmarki samsvarandi skitsuuppskotinum.
3. At játtaðar verða kr. 150.000,- av konto 8110 Rakstur av vegum 2020, til prosjektering og útboð av arbeiðinum.
   At innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Samtykt taka undir við tilmælinum, tó so at eingin gjøgnumkoyring verður til Traðabrekku frá parkeringsplássinum.

**Ískoyti:**
Ánarin av grannamatriklinum nr. 726h sunnan fyri ætlaða P-økið hevur fráfallið ynski sínum um marknaumskipan móti P-økinum.

Ánarin av grannamatriklinum nr. 727c, norðan fyri P-plássið, sigur seg sinnaðan at lata lendi til innkoyringina frá Hoyvíksvegnum, men ikki fyri pening.
Ístaðin er ynski hansara, at kommunan steinsetur tann partin av hansara grundøki, sum er vátlendi og mold verður løgd á steinsetingina, soleiðis at grundøkið hansara hereftir verður væl drenað og vætan burturbeind.
Um ynski um steinseting og drening av grannastykkinum skal gangast á møti, er neyðugt at gera verkætlan við forkanningum og virðismeting v.m., sum skal góðtakast av pørtunum.
Um ætlanin, at gera innkoyringina til P-økið yvir grannamatrikulin 727c, verður slept og uppskotið um P-plássið verður umskipað, soleiðis at innkoyringin frá Hoyvíksvegnum ístaðin verður gjørd yvir kommunalt lendi, gerst málið um P-plássið munandi einfaldari og helst eisini bíligari at fáa í lag.

Ráðgevi kommununnar hevur á skitsuuppskoti lýst hvussu P-plássið kann skipast við innkoyring frá Hoyvíksvegnum yvir kommunalt lendi og 31 P-plássum (sí j. nr. 15/04352-91).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

1. At parkeringspláss verður gjørt við støði í nevnda skitsuuppskoti við innkoyring frá Hoyvíksvegnum yvir kommunalt lendi (sí j. nr. 15/04352-91 P-pláss uttan gjøgnumkoyring).
2. At játtaðar verða kr. 150.000,- av konto 8110 Rakstur av vegum 2020, til prosjektering og útboð av arbeiðinum.
   At innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Borgarar í og við Traðabrekku hava víst á viðurskifti við skitsuuppskotinum (sí. Jnr. 15/04352-91 (P-pláss uttan gjøgnumkoyring)), sum ikki eru samsvarandi við tey ynskir, sum borgararnir upprunaliga ynsktu fyri gøtuna.

Í januar 2023 hava borgararnir í gøtuni latið umsitingini undirskriftir, har víst verður á, at ynski enn er um at gera ábøtur á ferðsluligu viðurskiftini í gøtuni.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 692 |
| | Formansins merki: |

Á borgarafundi 31.01.2023, har býarverkfrøðingurin og formaðurin í teknisku nevnd eisini luttóku, vóru sjónarmiðini hjá borgarunum í gøtuni løgd fram. Samanumtikið varð víst á, at borgararnir í gøtuni ynskja, at:

1. Trygdin fyri bilaferðsluna verður raðfest, soleiðis at koyrandi verður beinleiðis í Hoyvíksvegin.
2. Trygdin fyri gangandi verður raðfest soleiðis at:
   a. Trygg gonguleið verður millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin
   b. Trygg gonguleið verður gjørd millum Láarveg og Traðaveg við hóskandi gongubreyt og rekkverki.
3. Avvatningin á brekkuni millum Lágarveg og Traðaveg verður dagførd, soleiðis at hálka í størri mun verður fyribyrgd.

**Skjøl**
15/04352-100 traðarbrekka-hoyvíksvegur 2-0

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | | | Dagføring av Traðabrekku | 1.800.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.800.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarvekfrøðingurin mæla til, at:

- heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við ráðgeva um prosjektering, og við arbeiðstakara um fremjan av hesum arbeiðum innan ein karm á tilsamans kr. 1.800.000.
- hetta verður fíggjað á nýggja verkætlan, Dagføring av Traðabrekku, av konto 8175 Vegir (íløgur) LK 81999 Vegaverkætlanir.
  málið verður beint í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið av skrá.
**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Málið beint í teknisku nevnd.

## 166/23 Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 1231a og matr.nr. 1175a til A2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2023 | 67/23 | 22/07354-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 111/23 | 22/07354-2 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 166/23 | 22/07354-2 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 1175i, Tórshavn, hevur søkt um at keypa uml. 7600 $m^2$ av festijørðini Eystara Húsagarðsfesti, at leggja afturat ogn síni, sí mál *Umsókn um keyp av lendi til bústaðarendamál,* og søkir í hesum sambandi somuleiðis um, at byggisamtyktin fyri økið, partur av matr. nr. 1231a og 1175a, verður broytt til A2 øki, ætlað høgari íbúðarbygging. Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 13. mars 2023 at fara undir tilgongdina at broyta byggisamtyktina fyri økið til bústaðarendamál, og at kommunan ognar sær lendið til at bjóða út.

Eigarin av matr. nr. 1175i er í løtuni í holt við at byggja tveir íbúðarblokkar á matr. nr. 1175i, og er ætlanin at byggja fleiri íbúðarblokkar, um umsókn teirra verður gingin á møti.

**Lýsing av málinum**
Økið, sum søkt verður um at broyta byggisamtyktina fyri, liggur norðanfyri Oyggjarvegin og einasta bústaðabygging í økinum er á grannastykkinum, sum umsøkjari somuleiðis eigur, har 48 íbúðir eru undir bygging. Tá søkt varð um ta ætlanina, mælti umsitingin frá at byggja bústaðir í økinum undir so óskipaðum umstøðum, og nú søkt verður um at keypa størri øki, kann væntast at uml. 70 íbúðir verða bygdar afturat. Talan gerst sostatt um ein nýggjan ad-hoc býling, ið verður gjørdur uttan býarskipanarliga heildarplanlegging og uttan allar teir hentleikar, ið hoyra einum býlingi til.

Væntast kann, at bygging av so nógvum bústøðum, hevur fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa, t.d. av tí at gongubreytir skulu gerast fram við Oyggjarvegnum, neyðugar íløgur skulu gerast í kloakkina, busssamband og onnur trivnaðarátøk.

Økið er sera sjónligt í býarmyndini, og mett verður, at um bygt verður í økinum, so er neyðugt, at byggingin er lægri, enn tann, sum er undir bygging, soleiðis at hon natúrliga fylgir lendisviðurskiftunum í økinum og gerst ein natúrligur partur av fjallarøðini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í samband við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.
- Útstykking til tílíka bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt nattúrliga avmarkað øki.

Ásetingar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
- Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Økið liggur upp at Húsahaga, sum er útnevnt býarvakstrarøki sambært Kommunuætlanini 2020, har økið verður umrøtt soleiðis:
"*Atkomuviðurskiftini í Húsahaga eru sera góð, tá til ber at koma inn á økið frá Oyggjarvegnum. Økið liggur lutfalsliga avbyrgt og langt burturi frá øðrum. Tí eru trivnaðarviðurskiftini ikki so góð her. Mett verður, at*

*neyðuga íløgan í kloakk, um økið skal nýtast sum bústaðarøki, er órímiliga dýr. Tí kann hugsast, um økið her kann nýtast til vinnuøki, tá tað ikki krevur eins nógv av kloakering."*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn*, journal nr. 20/04650.
- *Avrit av umsókn um keyp av lendi av festijørðini matr. nr. 1175a til samanlegging við matr. nr. 1175i, Tórshavn, til bústaðarendamál,* journal nr. 22/01629.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Viðmerkingar frá Teknisku deild:

Økið, sum søkt verður um at keypa, er ikki áður fyrireikað til umfatandi bústaðabygging. Sostatt eru kloakk-, brúksvatns- og onnur viðurskifti í samband við infrakervið, umframt atkomuviðurskiftini til økið ikki fyrireikað. Verandi bústaðarbygging fram við Oyggjarvegnum á matr. nr. 1175i er knýtt í verandi leiðingar og veitingar. Verður víðkað til meira umfatandi bústaðarbygging, er neyðugt at greina avleidda tørvin til hesi viðurskifti neyvari. Tað er tó vist, at hetta fer at viðføra avleiddar útreiðslur fyri Tórshavnar kommunu vegna etablering av nýggjum leiðingum og veitingum í nærøkinum. Harumframt kann eisini væntast, at henda bygging og møgulig víðari útbygging í økinum fer at krevja størri umleggingar og útbyggingar av leiðingskervinum longur niðri í býnum, eins og veitingarkervið til brúksvatn somuleiðis má útbyggjast. Tað verður ikki mett at vera skynsamt at halda fram við útbyggingum av leiðings- og veitingarnetinum uttan eina heildarætlan fyri alt økið á matr. nr. 1231a og harumleiðir, sum greinar, hvørjar samlaðu útreiðslur kommununar eru til at røkka hesi ætlan, soleiðis at hesar kunnu verða raðfestar. Møgulig bygging eigur ikki at verða loyvd, fyrr enn hesi viðurskifti eru avgreidd.

Viðvíkjandi atkomu frá økinum, sum søkt verður um at keypa, út á Oyggjarvegin, skal upplýsast, at í avtaluni, sum Tórshavnar kommuna hevur gjørt við Landsverk um yvirtøku av landsvegastrekkinum frá omankoyringini til Hotel Føroyar og oman til ringvegin, stendur, at talið av íbindingum í yvirtikna vegin skal avmarkast, og allar nýggjar íbindingar skulu ummælast av Landsverki. Tekniska deild metir harumframt, at ein íbinding í Oyggjarvegin út fyri økið, sum søkt verður um at keypa, kemur at liggja ov tætt at einum ov krøppum svingi, og útsýnið tí verður ov avmarkað her til, at íbinding kann loyvast. Tó verður møguleikin fyri at økið deilir íbinding við matr. nr. 1175i ikki frámæltur.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at broyta byggisamtyktina til A2, ætlað høgari íbúðarbygging, vísandi til, at ongin ætlan (kommunætlan, býarskipan ella skipan av tekniskum veitingum) fyriliggur fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2023:** Samtykt at fara undir tilgongd at broyta byggisamtyktina og at heita á umsitingina til komandi fund at koma við uppskoti um skipan av økinum.

**Ískoyti:**
Kommunuætlanin ásetur Húsahaga sum býarvakstrarøki, og tí er greitt, at økið við tíðini verður bygt øki við bústøðum, stovnum og tí, sum hartil hoyrir. Húsahagi er í kommunuætlanini raðfest sum býarvakstrarøki nr. 5 út av 6. Raðfestingin er grundað á viðurskifti so sum atkoma, veðurlag, umhvørvisárin, trivnaðarviðurskifti, lendisútvegan og fíggjarligar avleiðingar. Raðfest fram um øki við Húsahaga eru Stóratjørn og Klingrutørn, ið man er farin í holt við at býarmenna, og býarvakstrarøkini undir Vesturvarða og Flatnahagi, ið man enn ikki er farin í holt við at menna.

Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 08. mai 2023 varð samtykt, at umsitingin skuldi gera uppskot til skipan av økinum. Málið varð umrøtt á fundi millum býarskipanardeildina, teknisku deild og byggimálsdeildina. Fyri at tryggja, at sum mest og best fæst úr økinum sum gjørligt, er neyðugt at viðgera økið sum eina heild og gera eina heildarætlan fyri alt býarvakstrarøkið við Húsahaga.

Vanligt er at loyva høgari bygging fram við hamrum, soleiðis at byggingin ikki stingur seg upp um lendið og fjallarøðina, men ístaðin tillagar seg lendið, bygt verður í. Lendisviðurskiftini vestan fyri matr. nr. 1175i gera, at tað ikki hóskar seg við høgari bygging vestan fyri verandi íbúðarbygging í økinum, av tí at økið er munandi hægri, enn har verandi bygging er, og hevði høg bygging verið sera sjónlig í landslagnum. Tað verður ikki mett vera burðardygt at halda áfram við at spreingja sár inn í lendið, eins og íbúðar- og vinnubyggingin eystanfyri er, men tað hóskar seg betur at byggja við atliti at náttúrliga lendinum.

Atkoman til økið er avbjóðandi bæði grundað á lendisviðurskiftini í økinum og gjørdar avtalur/ognarviðurskiftini, og her er somuleiðis neyðugt við eini heildarloysn fyri alt økið, soleiðis at man tryggjar eina burðardygga lendisnýtslu:

1. Tað er stórur lendismunur millum Oyggjarvegin, og økið, ið søkt verður um at byggja á, og fyri ikki at gera seg ov nógv inn á náttúrliga lendið, ber ikki til at knýta beint i Oyggjarvegin. Tað er somuleiðis stórur lendismunur millum verandi íbúðarøki á matr. nr. 1175i og økið, ið søkt verður um at byggja á.
   Møguliga kann rundkoyring gerast við omankoyringina til Hotel Føroyar, og kundi íbúðarøkið fingið eina felags atkomu frá hesari, men hetta er ein loysn, ið má granskast nærri.
2. Smb. avtaluni við Landsverk um yvirtøku av Oyggjarvegnum niðan til Hotel Føroyar, skulu ikki fleiri íbindingar gerast í Oyggjarvegin. Býarverkfrøðingurin er samdur í, at tað skulu ikki gerast fleiri íbindingar í Oyggjarvegin.
   Umframt avbjóðingar við lendisviðurskiftunum, so gera ognarviðurskiftini eisini, at tað ikki er skynsamt at geva økinum vestan fyri matr. nr. 1175i atkomu gjøgnum matr. nr. 1175i, av tí at hetta er privat ogn.

Umframt býarskipanarligu- og ferðsluavbjóðingarnar, ið eru við at loyva íbúðarbygging í økinum, sum søkt verður um, verða eisini fleiri avleiddar verkætlanir og útreiðslur, ið man enn ikki til fulnar kennir avleiðingarnar av. T.d. eru kloakk- og brúksvatnsleiðingar og gøtukervið til økið ikki fyrireikað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til:

- at økið verður skipað í eini heild, tá alt býarvakstrarøkið við Húsahaga verður skipað.
- vísandi til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndni 08.05.2023, har samtykt varð at fara undir tilgongdina at broyta byggisamtyktina fyri øki til A2, verður málið beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt taka undir við timlælinum, tó so at verandi A2 øki verður víðkað til at ganga 110 m longur vestur, 60 m longur norður og heilt yvir til matr. nr. 1232, og heita á umsitingina um at tillaga kortið til býráðsfundin.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 167/23 Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 16, Norðradalur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 109/23 | 23/01619-2 |
| 2 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 167/23 | 23/01619-2 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 16, Norðradalur hevur søkt um at fáa gjørt byggisamtykt fyri ognina.

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 16, Norðradalur liggur í 4. grundumráði í Norðradali. Á ognini liggur ein vinnubygningur, umframt nakrir minni skúrar. Vinnubygningurin hevur áður verið nýttur sum smoltstøð, men verður í dag nýttur sum goymsluhøll. Ætlanir eru um at nýta part av bygninginum sum skjótihøll hjá Politinum. Bygningurin liggur nakað burtur frá bygging annars, og er hetta hóskandi til virksemi sum t.d. skjóting.

Skjótibanar eru fevndir av umhvørvisflokki 7 smb. vegleiðingini um umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu. Virki í umhvørvisflokki 7 kunnu smb. almennu byggisamtyktini staðsetast í B7 vinnuøki. Harumframt ber til at staðseta virki í umhvørvisflokki 5 og 6 í B7 øki.

Mælt verður til, at byggisamtyktin fyri matr. nr. 16, Norðradalur verður broytt til B7 vinnuøki, tó so at ein frástøða á 5 metrar verður til ánna og til vatnið fyri at verja hesi. Um so er, at økið verður broytt smb. uppskotinum, ber til at byggja uml. 1900 m$^2$ afturat á ognini – ella tað sum svarar til eina høll, líka sum tann, sum stendur á ognini í dag.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B7 vinnuøki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja hús til stór vinnuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.
- Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 5 til 7 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Ásetingar fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
- Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.
- Harafturat kann onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, staðsetast í 4. grundumráði.

Ásetingar fyri flokk 7 í vegleiðingini um umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu eru m.a.:
- Umfatar virkir, ið kunnu hava stór ávirkan á umhvørvi.
- Virki í hesum flokki eru orkuverk, hitamiðstøð, brennistøð, asfaltvirkir, framleiðsluvirkir til heilivág og pesticidir og onnur størri framleiðsla, landbúnaður, skipasmiður, flogvallir, skjótibanar, koyribreytir osfr.
- Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 500 metrar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild metir ikki, at uppskotið til broyting av byggisamtyktini ávirkar vegir og tekniskar leiðingar í økinum.

Økið liggur í 4. grundumráði, og skal broytingin góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

**Skjøl**

- *Áðrenn broyting,* journal nr. 23/01619-13.
- *Eftir broyting,* journal nr. 23/01619-13.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læ‌ttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 16, Norðradalur smb. skjalinum *Eftir broyting*, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 168/23 Umsókn um at fáa gjørda serliga byggisamtykt fyri økið matr. nr. 1265u og 1265v, oman Viðarlund 1 og 3, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2023 | 68/23 | 23/01717-3 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 128/23 | 23/01717-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.06.2023 | 95/23 | 23/01717-3 |
| 4 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 168/23 | 23/01717-3 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn frá Listasavni Føroya um at gera serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1265u og 1265v, oman Viðarlund, Tórshavn, í sambandi við ynski um at byggja savnið út.

**Lýsing av málinum**
Listasavnið hevur síðani 1970 húsast í bygningum í viðarlundini í Havn og hevur við tíðini bygt og umbygt eftir tørvi. Nú søkir Listasavnið um loyvi at byggja afturat. Ætlanin er at taka bygningin, sum í dag hýsir skiftandi serframsýningum, niður og byggja ein nýggjan á somu grund, umframt ein bygning við verkstovu til børn, og ein bygning til víðkan av verandi listasavni, sí skjal *Projektbeskrivelse.*

Bygglistarliga eru tilvísingar til verandi bygging, men við einum nútímans dámi. Framsíðurnar eru klæddar við trælamellum í ymiskum tjúktum og skapum, og fær bygningurin soleiðis eitt organiskt úttrykk við tilvísingum til umhvørvið og Viðarlundina.

Ognin hjá Listasavninum liggur í einum D1 øki. Vanligt er ikki at loyva bygging í D1 økjum, men Listasavnið hevur ligið sum ein partur av Viðarlundini síðani 70'ini, og tí verður tað mett hóskandi, at tað framvegis ger tað. Byggin er møgulig í D1 økjum, um serstøk byggisamtykt verður gjørd, og tískil verður mælt til at gera serstaka byggisamtykt í tráð við verandi-, og ætlaða bygging.
Listasavn Føroya hevur keypt sethúsini á grannastykkinum, matr. nr. 1265v, Tórshavn, og er ognin partur av virkseminum hjá savninum og nýggju ætlanini. Økið liggur í A1 sethúsaøki, og mælt verður til at broyta byggisamtyktina fyri matrikulin til D1 fríøki, og at serstaka byggisamtyktin somuleiðis fevnir um hendan matrikulin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.
- Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Matr. nr. 1265v, Tórshavn, er partur av sethúsaútstykking oman Viðarlund, og broytingin av almennu byggiamtyktini fyri ognina frá sethúsaøki til fríøki skal sendast grannum til hoyringar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Talan er um skógfriðað øki, og skal byggisamtyktin góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

**Skjøl**
- *Projektbeskrivels.pdf,* journal nr. 23/01717-1.

- *Serstøk byggisamtykt fyri Listasavnið,* journal nr. 23/01717-4.
- *Almenna byggisamtyktin – áðrenn broyting,* journal nr. 23/01717-6.
- *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting,* journal nr. 23/01717-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Listaskálan, og at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 1265v til D1 øki, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti;**
Eftir at málið varð viðgjørt í byggi- og býarskipanarnevndini 8. mai 2023, hevur umsøkjari sent inn nýggj tøl, viðv. víddini á byggisamtyktini, og í tí sambandi er neyðugt at tillaga mest loyvda byggi- og nýtslustig í serstøku byggisamtyktini. Mest loyvda byggistig verður broytt frá 0,35 til 0,45 og mest loyvda nýtslustig verður broytt frá 0,45 til 0,50. Nýtslustigið verður sostatt tað sama, sum er vanligt í øðrum almennum økjum, meðan byggistigið verður nakað hægri (0,25 er tað vanliga). Hetta verður tó mett at vera ráðiligt, av tí at talan er um serstakan bygning, ið liggur í einum náttúruøki, har stórt rúm er fyri uppihaldi annars, og av tí at parkeringin verður skipað sum partur av eini heild fyri ítróttar- og mentanarøkið í Gundadali.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja broytingina í uppskotinum av serstøku byggisamtyktini fyri Listaskálan, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

## 169/23 Íbúðarbygging á Frúutrøð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 45/18 | 18/00950-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 18/18 | 18/00950-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 79/18 | 18/00950-1 |
| 4 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 54/18 | 18/00950-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 84/18 | 18/00950-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 111/18 | 18/00950-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 71/18 | 18/00950-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 143/18 | 18/00950-1 |
| 9 Býráðsfundur | 18.05.2018 | 107/18 | 18/00950-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 241/18 | 18/00950-1 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 84/19 | 18/00950-1 |
| 12 Tekniska nevnd | 16.05.2019 | 33/19 | 18/00950-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.05.2019 | 151/19 | 18/00950-1 |
| 14 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 113/19 | 18/00950-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.06.2023 | 91/23 | 18/00950-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 168/23 | 18/00950-1 |
| 17 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 169/23 | 18/00950-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kommmunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í miðbýnum, og at hetta skal gerast við býartætting, har byggilendi og tómir bygningar inni í býnum verða gagnnýttir til bústaðir.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at verandi musikkskúli á Frúutrøð 1 flytur niðan í nýggja Musikkskúlan á Landavegnum við árslok 2018, og verandi læknavirksemi og býargartnari á økinum flyta í onnur høli, hevur umsitingin gjørt uppskot til útboðstilfar av Frúutrøð, matrikkul 645a, í optión. Uppskotið snýr seg um at bjóða lendi við verandi musikkskúla- og læknabygningi út til íbúðarbygging, har ein av treytunum er, at minst helvtin av íbúðunum skulu vera leiguíbúðir, og í minsta lagi 10 av íbúðunum skulu vera eldra- og rørsluvinarligar íbúðir. Av tí at økið liggur miðskeiðis í býnum, er ynskiligt, at fríøkið ella partur av fríøkinum skal vera ein almenn atkomulig park til gagn fyri allan býin.

Uppskotið stuðlar væl undir visjónunum hjá kommununi, og við støði í fjølbroyttum eigaraviðurskiftum av íbúðum, verður lagt upp til búseting við einum breiðum borgaraskara. Harumframt er møguleiki fyri, at eldri ella rørslutarnað kunnu búgva á økinum. Talan verður tískil um býartætting, gagnnýtslu av verandi infrakervi, umframt at gera eitt alment grønt øki/park miðskeiðis í býnum.

Hesin háttur at bjóða eina verkætlan út er ikki royndur fyrr í kommununi. Ætlanin er, at kommunan setur ávísar treytir í útbjóðingartilfarið, og at tey sum bjóða uppá verkætlanina binda seg til at byggja, fíggja og umsita íbúðir og fríøki á økinum.

Hetta merkir, at tey sum bjóða uppá verkætlanina helst eru toymi samansett við ráðgevum, umboð frá byggivinnuni, íleggjarum og møguliga eisini persónum/fyritøkum, ið kunnu umsita leiguíbúðirnar. Vinnandi tilboðsgevi fær optión uppá lendið, og ein søla verður ikki framd, fyrr enn kommunan hevur góðkent eitt liðugt verkætlanaruppskot. Verður ongin verkætlan innan eitt ásett tíðarskeið t.d. 1. ár, ella um kommunan ikki kann góðkenna verkætlanina, fellur optiónin burtur og ongin søla fer fram.

Ætlanin er at bjóða optiónina/verkætlanina út alment í undangóðkenning (prækvalifikatión). Í sambandi við eina prækvalifikatión, kunnu øll, sum lúka ávísar treytir, koma við eini áhugafráboðan, soleiðis at fleiri fáa møguleikan at bjóða uppá verkætlanina.

Økið, matr. 645a, sum talan er um, fevnir um økið á Frúutrøð, Revagarðarnar (Jóan Karls gøta og Í Lon) og ein part av Lützenstrøð.

Fyri at verkætlanin skal kunna lata seg gera, skulu kloakkirnar og vatnleiðingarnar skiftast út á økinum. Havast skal somuleiðis í huga, at tá tosað verður um býartætting, so kann ein av avleiðingunum verða, at færri parkeringspláss verða í mun til áðrenn ein bygging/tætting fer fram.

Neyðugt verður at skipa matrikkuleringina á økinum, áðrenn verkætlanin verður boðin út. Hvussu hetta verður gjørt, verður treytað av parkeringsviðurskiftunum á matrikklinum. Í dag eru 41 almenn parkeringspláss á Frúutrøð. Mett verður, at verkætlanin ikki fær nøkta parkeringstørvin við teimum 41 almennu parkeringsplássunum umframt tey kravdu parkeringsplássini til íbúðirnar. Tískil verður tað ein uppgáva hjá kommununi at varðveita og skipa verandi almennu parkeringsplássini á aðrari staðseting.

Áðrenn útbjóðingina av verkætlanini skulu grannar hoyrast.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | x |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at bjóða lendið á Frúutrøð, matr. 645a, út í optión til íbúðarbygging sambært útbjóðingartreytum, sum fyrisitingin ásetur, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí treyt, at dagføringin av kloakkskipanini verður fíggjað av søluni og at kommunan útvegar sama tal av parkeringsplássum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við teknisku nevnd og mælir býráðnum til at samtykkja málið við teirri treyt, ið nevndin hevur ásett, umframt teirri treyt, at tað bert skal verða loyvt at byggja tríggjar hæddir í økinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Atkvøtt varð um tilmæli frá borgarstjóranum at beina málið aftur í Byggi-og býarskipanarnevndina og Teknisku nevnd, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

19. mars var ein kunnandi fundur um verkætlanina fyri grannum uttanum økið á Frúutrøð. Eftir fundin varð avgjørt at nágreina ymisk viðurskifti í útbjóðingartilfarinum, undir hesum:

- Nágreina treytirnar, sum innkomnu uppskotini skulu lúka (sí pkt. *3.3 Treytir til økið og bygging* í útbjóðingartilfarinum) m.a.:
    - Byggilist
    - Talið av íbúðum
    - Hædd á nýggjum bygningum (sum eru lægri enn verandi bygningur)
    - Tíðarætlan
- Broytt í punktunum sum uppskotini verða dømd eftir (sí Pkt. *3.4 Døming av innkomnum uppskotum* í útbjóðingartilfarinum)
- Broytt tíðarætlan fyri verkætlan eftir undangóðkenning (sí pkt. *4.2 Tíðarætlan fyri verkætlan eftir undangóðkenning)*
- Víðka dómsnevndina við einum granna frá Frúutrøð
- Avgjørt at mæla til at áseta eina samsýning hjá dómsnevndini at ráða yvir, áljóðandi kr. 200.000,-, sum verður javnt býtt millum undangóðkendu tilboðsgevararnar, sum ikki vinna.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at umrøða omanfyristandandi nágreiningar, at taka undir við útbjóðingartilfarinum, og at játta kr. 200.000,00 av konto 6175, fyri síðani at beina málið í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

Annfinn Brekkstein stemmar blankt

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og mæla býráðnum til at samtykkja málið við tí ískoyti, at í minsta lagi 30 % av íbúðunum skulu markast fólki, ið eru 60 ár og eldri.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atvkøða blankt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Tikið av skrá**.**

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fleiri fundir við umboð fyri grannar á Frúutrøð, har teir hava havt framløgur um teirra ynskir til økið.
Umsitingin hevur við grundarlag í ynskjunum og avgerð í fíggjarnevndin 18. apríl gjørt fylgjandi broytingar í pkt. 3.3 Treytir til økið og byggingina:

- Øki sum verður bjóðað út er matrikul 645a. Um tilboðsgevari sær møguleika í at inndraga aðrar matriklar í grannalagnum sum ein part av tí samlaðu verkætlanini, er hetta eisini møguligt. Tó eru treytir til økið og byggingina einans galdandi fyri matrikul 645a.

- Møguleiki skal eisini vera fyri at gera luttaíbúðir. Helvtin av íbúðunum skulu vera leiguíbúðir men hin helvtin kann vera eigara- og/ella lutaíbúðir.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stóri og virkandi býararkitektur mæla til at fíggjarnevndin samtykkir útbjóðingartilfarið og tær broytingar sum eru gjørdar fyri síðani at beina málið í Býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 18. mai 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, trimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Djóni Nolsøe Joensen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, ið atkvøddu ímóti vísandi til, at tað manglar ein heildarætlan fyri økið og grannalagið.

**Ískoyti**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Av tí at eingi tilboð komu inn, tá Frúutrøð varð bjóðað út til íbúðarbygging, so hevur verið arbeitt við øðrum íbúðarbyggingum í kommununi. Men gundað á bústaðartørvin í kommununi hevur tað verið ynskiligt at fara undir hesa verkætlan aftur, og fyrst í árinum vísti Bústaðir áhugan í at fara undir eitt samstarv um hesa verkætlan.

Innleiðandi fundur varð hildin millum kommununa og Bústaðir, og tá varð avtalað, at teir vendu aftur við einum innleiðandi hugskoti fyri skipan av økinum. 07.03.2019 var aftur fundur millum umsitingina og Bústaðir, har MAP Arkitektar somuleiðis luttóku. Á fundinum var ein innleiðandi hugskotsætlan fyri skipan av Frúutrøð løgd fram saman við eini heilt yvirskipaðari kostnaðarmeting, sí journal nr. 18/00950-60.

Hugskotsætlanin fevnir um 4 ymisk uppskot til skipan av økinum. Hesi eru:

1. UMVP – uttan musikkskúlan og við p-kjallara:
   - Talan er um 2700 bygdar fermetrar við 34 íbúðum á 70 $m^2$ í tveimum hæddum.
   - Parkeringskjallarin verður í einum dekki gjørdur til 70 akfør, men í tveimum hæddum til 140 akfør.
2. VMVP – við musikkskúlanum og við p-kjallara:
   - Talan er um 2000 bygdar fermetrar við 25 íbúðum á 70 $m^2$ í tveimum hæddum.
   - Parkeringskjallarin verður í einum dekki gjørdur til 70 akfør, men í tveimum hæddum til 140 akfør.
3. UMUP – uttan musikkskúla og við verandi parkering:
   - Talan er um 1700 bygdar fermetrar við 22 íbúðum á 70 $m^2$ í tveimum hæddum.
   - Hetta hugskotið fevnir einans um verandi parkering, og verður mett, at ov lítið fæst burturúr við hesi ætlanini.
4. VMUP – við musikkskúla og við verandi parkering:
   - Talan er um 900 bygdar fermetrar við 12 íbúðum á 70 $m^2$ í tveimum hæddum.
   - Hetta hugskotið fevnir einans um verandi parkering, og verður mett, at ov lítið fæst burturúr við hesi ætlanini.

Tey fýra uppskotini hava verið umrødd í umsitingini, bæði í mun til hvussu nógvar búeindir og parkeringspláss fáast burturúr, umframt um musikkskúlin skal varðveitast, um borgarahús, sum eisini kann vera býarsavn ella partur av sama skal verða á staðnum o.s.fr.

Útfrá hesum, er umsitingin avgjørd um, at ynskiligt er at fara undir skipan av økinum, har útgangsstøðið verður tikið í uppskoti nr. 1, sum er uttan musikkskúlan og við p-kjallara.

Grundgevingin fyri valið er:
- At økið sýnist væl skipað við eini passaligari nøgd av bygningum í mun til fríøkið.
- At staðsetingin av bygningunum sum heild er væl skipað og út ímóti Jónas Broncks gøtu leggur uppskotið upp til, at byggilinjan út móti vegnum verður hildin ella kann man siga, at vegurin fær eina framsíðu út móti vegnum, sum verður mett at gagna heildarupplivingini úti á vegnum.
- At verandi parkeringsnøgd verður varðveitt, umframt at víst er á møguleikan at gera eini 100 parkeringspláss afturat teimum verandi við at gera parkeringskjallaran í tveimum hæddum.

Tað skal tó nevnast, at hetta er eitt yvirskipað innleiðandi hugskot, og í eini møguligari framhaldandi tilgongd kann skipanin broytast rættiliga nógv.

Enn er kostnaðarmetingin so yvirskipað og óítøkilig, at mett verður ikki at hon er sannførandi á núverandi støði og skal hendan og býtið av kostnaðinum nágreinast í framhaldandi tilgongdini.

Bústaðir hava víst á ynski um at skipa verkætlanina á líknandi hátt, sum samstarvið við Finsen varð skipað. Í hesum sambandinum verður neyðugt at nágreina leiklutin hjá báðum pørtunum nærri.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, kommunustjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til,
- at umsitingin arbeiðir víðari við at nágreina samstarvið við Bústaðir í einum partalagssáttmála,
- at játtaðar verða 400.000 kr. av konto 6475, L00002, Framfluttur løgurkarmur, til at gera eina masterplan av økinum, umframt
- at gera boriroyndir og kunnandi tilfar til grannarnar í økinum, og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam taka ikki undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 16. mai 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Turið Horn og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við tí ískoyti, at eitt ávíst tal av íbúðum í verkætlanini skal markast til eldri borgarar. Hetta verður at áseta nærri í samstarvsavtalu millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við ætlanini.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Peningur varð í 2018/2019 játtaður til at bjóða út og gera ætlan fyri íbúðarbygging á Frúutrøð av L64016. Ætlanirnar eru síðani sleptar, men um tað verður aktuelt, verður arbeiðið tikið upp aftur seinni. Saldan á verkætlanini er 6.000 kr í halli.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 6475 | L64016 | Íbúðarbyggin á Frúutrøð | | Kr. 6.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at loka verkætlanina Íbúðarbygging á Frúutrøð, L64016, at fíggja hallið á kr. 6.000 av karminum LK62999, Fríðkan av býnum, á konto 6275, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

## 170/23 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 102/22 | 22/01377-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 33/22 | 22/01377-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 154/22 | 22/01377-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 20.06.2022 | 50/22 | 22/01377-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 186/22 | 22/01377-1 |
| 8 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 157/22 | 22/01377-1 |
| 9 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 204/22 | 22/01377-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 114/23 | 22/01377-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 19.06.2023 | 36/23 | 22/01377-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 202/23 | 22/01377-1 |
| 13 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 170/23 | 22/01377-1 |

**Upprunin til málið**
Stórur eftirspurningur er á vinnuøkjum í Tórshavnar kommunu. Býarskipanarliga er í fyrstu atløgu skilabest at víðka um verandi vinnuøkir, áðrenn farið verður undir at staðseta nýggj økir, hetta fyri at gagnnýta lendið og savna virksemið á einum stað, umframt at infrakervi, leiðingar v.m. longu er á staðnum.

Í løtuni hevur kommunan ongi vinnustykkir á sølulista. Víst verðir á økið omanfyri á Hjalla sum eina eyðsædda nýggja vinnuútstykking, tí hetta økið byggisamtyktarliga longu er eitt vinnuøki, men eisini tí at økið liggur tætt við aðra vinnuútstykking.

**Lýsing av málinum**
Linjuføringin av innkomuvegnum er nú endaliga løgd, og umsitingin mælir til, at leggja eina útstykking sunnan fyri vegin norðan fyri Stórutjørn, sí kortskjal *Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.*

Umsitingin hevur í longri tíð arbeitt við at skipa Stórutjørn sum nýggjan býling við bústøðum, stovnum, ítróttarøki, grønum økjum og lættari vinnu. Arkitektakapping varð hildin í 2020 og í mars 2022 varð ráðgevarasáttmáli undirskrivaður um skipanina av Stórutjørn. Millum økið við Stórutjørn og Vinnuútstykkingina á Hjalla liggur økið Ovari Skarðshjalli. Tað er hetta økið, sum umsitingin mælir til skal gerast til eina nýggja vinnuútstykking í kommununi.

Í sambandi við at Eysturoyartunnilin varð gjørdur, og Tunnilsfelagið hevði til ábyrgd at gera veg til tættasta innkomuveg, so varð vegur gjørdur frá rundkoyringini og allan vegin niðan á hamaran og verður eftir ætlan knýttur í innkomuvegin. Í løtuni er  innkomuvegurin í útboði til í fyrsta umfari at gera ein arbeiðsveg allan vegin yvir í Villingadalin. Nýggja vinnuútstykkingin bindir beinleiðis í innkomuvegin, og gerst íbindingin sostatt fyrsta íbindingin norðast á strekkinum.

Umsitingin mælir til, at nýggja vinnuútstykkingin verður ætlað til vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Hetta er bæði grundað á, at tað er týdningarmikið, at vinnan ikki ávirkar býlingsmenningina á Stórutjørn, umframt at mett verður at stórur tørvur er á vinnugrundstykkjum í hesum umhvørvisflokkunum. Lagt verður tí upp til at útleggja vinnuústykkingina sum B4-øki í almennu byggisamtyktini, ið umfatar vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Undir lógir og ásetingar sæst lýsing av umhvørvisflokkunum 2-4.

Tá útstykkingin verður skipað, er tað umráðandi at skipa staðsetingina av virkjunum í mun til vinnuflokkarnar, soleiðis at bústaðarøkið hevur minst møguligan ampa av virkjunum og virkseminum. T.d

kundu virkini verið lagað eftir, at tann tyngra vinnan verður staðsett oman móti Skarðshjalla og tann léttara vinnan oman móti ítróttarøkinum og bústaðarøkjunum á Stórutjørn.

Ein leyslig meting av projekteringini fram til høvuðsprojekt liggur á uml. kr. 2 mió. kr. Um farið verður undir at projektera nú í vár, so verður mett, at útstykkingin er klár at bjóða út til arbeiðstakara longu í heyst. Mett verður, at útstykkingin kann verða liðug í 2023-24.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu

*Flokkur 2*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til smávegis ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum bókbindarar, elektronikk verkstaðir og starvstovur. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 20 metur.*

*Flokkur 3*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt umhvørvi, serliga orsakað av uttandura aktiviteti og kunnu staðsetast í ídnaðarøki ella í randarøki, sum minni dálkandi virkir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga virkir sum hava tænastuvirksemi, t.v.s. handverkstaðir, maskinvirkir og bensinstøðir. Minsta frástøðan til bústaðir fyri henda flokk er 50 metrar.*

*Flokkur 4*
*Umfatar virkir, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey léttastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Kunnu staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga matvøruvirkir, klædnavirkir og bilverkstaðir við sproytukabinu. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 100 metrar.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Neyðugt verður at broyta byggisamtyktina í sambandi við gerð av útstykkingini, og tí verður mælt til at fara undir hesa broyting skjótast.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03588 Nýggj útstykking til vinnustykkir. Umhvørvisflokkur 3 til 7.
18/03468 Skipan av Stórutjørn

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/01377-2 Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

Í málinum 18/03468 Skipan av Stórutjørn varð á býráðsfundi 24.03.2022 samtykt at játta fígging til keyp av lendinum til vinnuútstykkingina, umframt at játta fígging til projektering av vinnuútstykkingini. Tískil verður ikki neyðugt í hesum málinum at fáa fígging til hesi viðurskiftir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við ráðgeva um projektering av vinnustykkjunum á Ovara Skarðshjalla
- at heimila umsitingini at bjóða útstykkingina út, tá projekteringin er liðug, og at gera sáttmála um arbeiðstøkuna.
- at fara undir at broyta byggisamtyktina fyri økið til eitt B4-øki
- at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri viðmerking, at sáttmálin um arbeiðstøkuna verður at leggja fyri aftur avvarðandi nevndir.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at Articon skal gera arbeiðsvegin hjá Innkomuvegnum, sí mál 21/02196, er møguleiki at fáa avgrivið økið til vinnustykkir, ið kommunan hevur ognað sær at útstykkja til vinnustykkir, sí mál 18/03468, við at víðka arbeiðstøkuna av arbeiðsvegnum. Av tí at økið er stórt, uml. 150.000 $m^2$, vísa ávegis metingar, at tað vil kosta áleið 23 mió. kr., og er hesin kostnaður grundaður á eindarkostnaðir hjá arbeiðstakaranum í verandi sáttmála, at gera arbeiðsvegin til Innkomuvegin.

Óvissurnar í sambandi við støðuna í heimunum gera, at mett verður, at møguleikin er stórur fyri, at kostnaðurin kann hækka munandi næstu tíðina. Tí verður somuleiðis mett, at tað er ein fyrimunur fyri Tórshavnar kommunu, at partar av arbeiðinum at fyrireika vinnustykkini kunnu gerast fyri áður givnar eindarkostnaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Articon at fáa grivið økið av, ið er lagt av til vinnustykkir, soleiðis at allur avgrevstur verður grivin av, og yvirskotið verður koyrt niðan til bóndan.
- at játta 23 mió. kr. av kontu 6975, Byggibúning ídnaðarøki, ið verður afturgoldið Tórshavnar kommunu í sambandi við sølu av vinnustykkjum.
  at beina málið í býráðið, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina, til tvær viðgerðir, tí talan er um eykajáttan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at heimilað verður umsitingini at gera avtalu við Articon sambært tilmælinum og við somu eindarkostnaðum sum eru nýttir í verandi sáttmála um arbeiðsvegin til innkomuvegin

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera innkomuveg er komið væl í gongd, og er farið undir at spreingja tunnilin undir Húsareyni. Í hesum sambandi er tørvur á, at grót úr tunlinum, sum ikki skal fara í vegagerð, kann fáast til høldar so skynsamt og skilvíst sum gjørligt fyri kommununa. Vinnuútstykkingin á Ovara hjalla er væl egnað til at taka móti hesum gróti, samstundis sum tryggjað verður, at grótið verður stuttflutt og einans flutt eina ferð, umframt at tað ikki verður koyrt eftir kommunalum vegum ella landsvegum og har við elvir til óneyðugt slit á hesar vegir.

Umsitingin hevur sáttmála við ráðgeva um at projektera vinnuøkið, og er henda projektering í løtuni í myndugleikafasuni. Henda projektering skal sambært avtaluni leiða til eitt útboð í høvuðsarbeiðstøku. Í skjalinum 22/01377-193 «Dømi uppá Bygging parkering vm 230523» er víst yvirlit yvir høvuðstættirnar í hesi verkætlan. Henda verkætlan er, tá myndugleikaprojektið er góðkent, ætlað at fara víðari til høvuðsprojekt, sum at enda verður boðið út til arbeiðstakarar at fremja sum høvuðsarbeiðstøka. Metast kann, at henda tilgongd kann taka nakað av tíð, áðrenn arbeiðið kann byrja.

Arbeiðstakarin á innkomuvegnum, Articon P/F, hevur víst á tørvin at fáa grótið frá tunlinum undir Húsareyni til høldar skjótast gjørligt, og í hesum sambandi latið kommununi uppskot til heildararbeiðstøku av verkætlanini at gera vinnuøkið. Hetta uppskot verður kunnað um á fundinum.

Vísast kann á, at Articon P/F við heildararbeiðstøkuni at gera vinnuøkið, kann sameina verkætlanina við verkætlanina at gera innkomuvegin og Húsareynstunnilin, sum felagið eisini ger í heildararbeiðstøku. Hetta merkir, at felagið m.a. kann samskipa grótframleiðsluna úr vega- og tunnilsgerðini við annleggsarbeiðini í sambandi við vinnuøkið, sum hevur tørv á gróti.

Í stuttum kann greiðast frá, at størsti munurin millum verkætlanina, sum avtala er gjørd við ráðgeva um, og uppskotini frá Articon P/F, er, at í uppskotinum hjá Articon P/F verða vinnustykkini bundin saman við einum vegi eftir hjallanum, meðan í verkætlanini hjá ráðgevanum er talan um tveir vegir eftir hjallanum. Hetta merkir, at munur er á uppskotunum báðum, bæði tá ræður um væntaðan kostnað, men eisini um, hvussu uppskotini liggja í lendinum. Í uppskotinum hjá Articon P/F verður roknað við lutfalsliga djúpum stykkjum, sum hava ein hæddarmun millum veg og fjarasta lendi á uml. 10 m, sum verður vunnin við, at stykkini bæði oman- og niðanfyri vegin hava hæddarspring á uml. 4 m, 15 m frá vegøkslini og síðani skráar og beni fjarast frá vegnum at taka restina av hæddarmuninum. Í uppskotinum hjá ráðgevanum er roknað við, at stykkir niðanfyri vegirnar hava eitt hæddarspring á uml. 3 m, 15 m frá vegøkslunum og síðani skráar oman av fjarasta endanum. Stykkini omanfyri vegirnar eru á hædd við vegirnar og eru uttan hæddarspring, men einans við beni og skráum at vinna hæddina upp til lendið fjarast frá vegøksl. Í báðum uppskotum er møguleiki at blanda støddirnar av stykkjunum frá 200-300 m$^2$ til 5000 m$^2$. Eisini ber tá til at leggja størru stykkini saman til enn størri stykkir i báðum uppskotum.

Annar stórur munur á uppskotunum er, at uppskotið frá Articon letur upp fyri optión, har upp til uml. 100.000 m$^2$ av vinnustykkjum verða gjørd í mun til uml. 70.000 m$^2$ í uppskotinum uttan option og uppskotinum frá ráðgevanum. Her er kortini tørvur á, at byggisamtyktin fyri vinnuøkið á Ovara hjalla verður víðkað til at umfata alt ávirkaða økið.

Í tilfarinum, ið verður framlagt á fundinum, er samanbering millum uppskotini í teirra núverðandi skapi gjørd.

Articon P/F hevur bjóðað Tórshavnar kommunu at fremja verkætlanina eftir sínum uppskoti sum heildararbeiðstøku. Samlaður kostnaður fyri hesa heildararbeiðstøku er, íroknað byggiharraútreiðslur til óvæntað, kr. 54.000.000,- íroknað mvg. Afturat hesi upphædd skal roknast við útreiðslum til lendiskeyp av uml 20.000 $m^2$. Her kann roknast við samlaðum útreiðslum upp til kr. 2.000.000,-.

Umsitingin metir samanumtikið, at uppskotini frá ráðgevanum og P/F Articon bæði loysa tørvin á at fáa til vega vinnustykkir í økinum. Uppskotið frá ráðgevanum liggur betri í lendinum, tí tveir vegir verða gjørdir at røkka vinnustykkjunum. Hetta gevur eyka kostnað, sum ikki er í uppskotinum frá P/F Articon, har einans ein vegur er inni á økinum at røkka stykkjunum. Tann eyka vegurin í uppskotinum frá ráðgevanum viðførir ein hægri kostnað fyri verkætlanina á millum 10 og 15 mió. kr. Uppskotið hjá P/F Articon kann setast í verk og fremjast væl skjótari enn uppskotið hjá ráðgevanum, og hevur hetta eisini týdning fyri framdriftina í verkætlanini at gera innkomuvegin. Tí er samlaða metingin, at tikið eigur at vera av tilboðnum frá P/F Articon við optiónini, har 100.000 $m^2$ verða byggibúnaðir.

Tørvur er á, at byggisamtyktin fyri økið verður broytt í samsvar við víddina av økinum, sum skal nýtast til vinnustykkini og í mun til nýtsluna av økinum.

Umframt omanfyri standandi viðurskifti skal her upplýsast, at býráðið tann 21.12.2022 samtykti í máli 21/02196 “Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK – innkomuveg», at «sáttmáli verður gjørdur við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil um keyp av gróti frá sandoyartunlinum fyri eina upphædd á kr. 11.475,- (íroknað mvg), har av kr. 5.738.000 verða goldnar við undirskrift. Hetta verður at fíggja við útleggi av konto L69004 Vinnuútstykking Ovari hjalli undir deild 6975 Byggibúning ídnaðarøkir (íløgur).» Henda samtykt er ikki viðgjørd í hjáverandi máli, og verður gjørt vart við tað her. Sostatt verður eisini biðið um, at upphæddin verður íroknað samlaðu umbønina í hesum umfari. Somuleiðis hevur verkætlanin «18/03468 Skipan av Stórutjørn (L69003)» goldið fyri keypið av lendinum, og eigur hetta eisini at verða endurrindað. Her er talan um tilsamans kr. 14.430.000,-

Mett verður, at vinnustykkini kunnu seljast fyri kr. 1500,-/m². Hetta er kostnaður, sum endurspeglar kostnaðin at fremja útstykkingina. Fyri at styrkja um gjaldføri kommununar eiga stykkini at verða sett til sølu so skjótt sum gjørligt.

**Skjøl**
22/01377-193 Dømi uppá Bygging parkering vm 230523.pdf
22/01377-196 VOH_Articon uppskot
22/01377-197 VOH_230619_Fíggjaryvirlit

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☐ |
| Eyka játtan | ☒ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 72.917.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 99.007.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at heimilað verður umsitingini at samráðast við P/F Articon og gera sáttmála um heildararbeiðstøku av vinnustykkjunum á Ovara hjalla.
- at heimilað verður umsitingini at samráðast við Búnaðarstovuna um keyp av neyðugum eyka lendi og gera sáttmála um hetta.
- at omanfyri nevndu arbeiðir og keyp verða gjørd innanfyri ein karm fyri alla verkætlanina á kr. 56.000.000,-
- at játtaðar verða kr. 11.475.000,- til gjald fyri keyp av gróti frá sandoyartunlinum (jvf. Býráðssamtykt frá 21.12.22 í máli 21/02196 "Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK – innkomuveg»).
- at játtaðar verða kr. 14.430.000,- til keyp av lendi frá verkætlanini L69003 "Skipan av Stórutjørn".
- at byggisamtyktin verður broytt soleiðis, at økið, sum byggisamtyktin umfatar, samsvarar við vinnuútsykkingina.
- at heimilað verður umsitingini at fara undir at selja vinnustykkini fyri í minsta lagi ein fermetrakostnað á kr. 1500,-
- at samlaða játtanin á kr. 72.917.000,- verður fíggjað sum útlegg.
- og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men tó at punkt 4 verður tikið burturúr, og at samlaða játtanin verður reguleráð samsvarandi.

**Tekniska nevnd 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir ið málinum.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, trimum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Málið soleiðis samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

# 171/23 Skúlin við Løgmannabreyt : Karlamagnusarbreyt 47 – 188 Hoyvík – matr. nr. 135fe – Kanna klæðing – útveggir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 222/21 | 17/00415-66 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2022 | 128/22 | 17/00415-66 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 160/22 | 17/00415-66 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 146/22 | 17/00415-66 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.06.2023 | 89/23 | 17/00415-66 |
| 6 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 170/23 | 17/00415-66 |
| 7 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 171/23 | 17/00415-66 |

**Upprunin til málið**
Skúlin við Løgmannabreyt fekk ein skaða í jólaódnini 2016. Í sambandi við at skaðin varð kannaður, fekk húsaumsitingin illgruna um, at tað var vátt aftan fyri klædningin.

**Lýsing av málinum**
Húsaumsitingin gjørdi tí av, at kanna timbur og plátu- klæðingina fyri vætu, og varð hendan kanningin gjørd 23. januar 2017.
Timburklæðingin varð tikin niður ymsa staðni á skúlanum fyri at síggja inn í konstruktiónina. Kanningarnar vístu, at í fleiri kanningarstøðum er væta i konstruktiónini og í nøkrum førum eru tekin um soppavøkstur. Sambært tekniskum vegleiðingum er plátan innanfyri trækladningin, ikki egnað til endamálið.

Fyribils er einans talan um visuellar kanningar. Ongar sopparoyndir eru tiknar enn.

Árni Winther teknaði skúlan og hevði projektleiðsluna. Búsetur hevur bygt skúlan.

Skúlin varð avhendaður í 2009. Í sambandi við 5 ára eftirlitið vóru eingi tekin um lekar staðfest.

Í sambandi við fyrireikingar til møguligt sakarmál í móti Arkitektavirkinum Árni Winther, var sýns- og metingarfrágreiðing gjørd, dagf. 25.08.2018
Frágreiðingin staðfestir, at konstruktións uppbygnaðurin ikki er rættur, og vandi er fyri at partar av konstruktiónini verða niðurbrotnir yvir tíð.

Notatini í sambandi við kanningar, sum húsaumsitingin gjørdi í 2017, saman við sýns- og metingarfrágreiðingini frá 2018, geva eina ábending av skaðanum, men ikki eina fullfíggjaða mynd av hvussu umfatandi skaðin er.

**Lógir, ásetingar o.a.**
SBI 224 Fugt i bygninger. Byg-Erfa (21)050928

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Sýn og meting sí skjal: 17/00415-68

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Fíggjarligir avleiðingar verða lýstir seinni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til, at vit í fyrsta umfari (2022) gera umvælingar í einum avmarkaðum parti av framsíðunum, soleiðis at vit fáa eitt gott grundarlag at taka støðu til hvat skal gerast við restina av framsíðunum.

Kostnaðurin fyri at rætta konstruktiónsfeilin í einum avmarkaðum parti, umframt at kanna tørvin á størri umvæling, er mettur til 1,9 mió. kr.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við byggifyritøkuna Búsetur um at umvæla ein part av framsíðunum á skúlanum og at fáa hetta arbeiðið gjørt á sumri 2022.

Eisini hava umboð fyri SNA arkitektar gjørt nýggjar sermyndir fyri umvælingararbeiðið og gjørt leist fyri skráseting og uppfylging meðan bygt verður.

Ætlanin er enn sum áður, at fyrsti parturin skal verða grundarlag fyri framhaldandi umvælingararbeiði av øðrum framsíðum seinni, bæði plátu- og timburklæðing.

Umframt handverkaraútreiðslur til arbeiðstakara verða eisini útreiðslur til uppfylging, eftirlit, skráseting, ókendar útreiðslur og kommunalt mvg.

Viðlagt. Tilboð, kostnaðarmeting og uttanhýsis tilmæli.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til

- at flyta 1.310.000 mió. kr. av løgukarminum LK41014 á konto 4175, til verkætlan L41014 á konto 4175
- at fara í endaligar samráðingar og gera arbeiðstøkusáttmála við Búsetur á kr. 735.182,00 kr u. Mvg
  at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Ætlaða timburarbeiðið varð nakað seinkað, men er nú liðugt.

| | **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 715<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Umvælingararbeiðið á pørtum av skúlanum vísir, at verandi uppbygnaður av útveggum er skeivt gjørdur. Tað verður ikki ventilerað nóg væl aftanfyri timbur- og plátuklæðing, og vindplátur uttaná stórviðin eru heldur ikki nóg væl egnaðar at halda leingi. Í pørtum av umvælingararbeiðinum var konstruktiónin verri fyri enn aðrastaðni.

Mælt verður til av bygningsdeildini undir teknisku fyrisiting at umvæla restina av útsíðunum. Antin samlað ella í stigum.

Nú henda verkætlanin L41014 skal lokast, er sambært leiðslukunnningini staðfest eitt avlop á kr. 165.363,00.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 4175 | L41014 | Skúlin við Løgmannabreyt, umvælingar | 4175 | LK41014 | Dagføring, Skúlin við Løgmannabreyt | | 165.363,00 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 165.363,00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- at loka verkætlanina L41014
- at avlopið á 165.363,00 verður flutt aftur á karmin, LK41014
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 172/23 Skúlin á Fløtum - undirvísingarhøli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 40/22 | 22/01951-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 125/22 | 22/01951-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.05.2022 | 143/22 | 22/01951-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 116/22 | 22/01951-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 139/22 | 22/01951-1 |
| 6 Mentamálanevndin | | | 22/01951-1 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 19.06.2023 | 32/23 | 22/01951-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 192/23 | 22/01951-1 |
| 9 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 172/23 | 22/01951-1 |

**Upprunin til málið**
Tørvur á fleiri undirvísingarhølum vegna størri tal av flokkum.

**Lýsing av málinum**
Í samráð við skúlaleiðsluna hevur møguleikin verið umrøddur at byggja um verandi auditorii í útsynningshorninum móti parkeringsplássinum í Oyggj 7.

Verandi auditorii er dupulthøgt rúm. Umbyggingin hevur til endamáls at taka niður verandi uppbygging, leggja nýtt dekk í, umleggja tekniskar leiðingar og síðani byggja um til tvær nýggjar skúlastovur.

Nýggju stovurnar verða bygdar í sama sniði og dygd sum verandi stovur í skúlanum. Útveggirnir verða óbroyttir.

Skúlans leiðsla tekur undir við uppskotinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Biðið er um óbindandi tilboð frá arbeiðstakara, sum bygdi skúlan (Articon/Búsetur). Við ókendum, mvg v.m. er talan um kostnað uml. kr. 1,82 mió.

Játtan er ikki til endamálið í íløguætlanini 2022 grein 4.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Broytingin krevur dagført byggiloyvi. Við avhending av umbyggingararbeiðinum skal broytingin sýnast áðrenn nýtslutøku. Byggimálsdeildin er kunnað um broytingina og skal hava dagførdar tekningar við vm.

**Skjøl**
Kostnaðarmeting og arbeiðstakarans tilboð
Myndir av økjum, ið skulu umbyggjast.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 717 |
| | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til, um ætlanin skal fremjast, og um so er, at játtan kr. 1.820.000 verður fingin til vega. Samstundis verður mælt til at heimila umsitingini at fara í endaligar samráðingar og gera arbeiðstøkusáttmála við Articon/Búsetur á kr. 1.362.735,00 u/mvg. Málið at beina í fíggjarnevnd og býráð.

**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina um at ávísa fígging og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 24. mai 2022:** Samtykt at taka undir við at fremja ætlanina og játta kr. 1.820.000,00 av konto L27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir, til nýtt projekt til verkætlanina.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Umbyggingararbeiðið til tvær skúlastovur er liðugt og arbeiðið hevur sum heild gingið væl.

Nú verkætlanin L41016 skal lokast, er sambært leiðslukunnningini staðfest eitt avlop á kr. 23.796,00

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og leiðarin fyri bygningsdeildina mæla til at verkætlanin verður lokað og málið beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Trivnaðarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 718 |
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

## 173/23 Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin - víðkan av gravøki móti Sandá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 125/14 | 14/02585-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 01.05.2014 | 105/14 | 14/02585-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2014 | 103/14 | 14/02585-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 244/15 | 14/02585-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 311/15 | 14/02585-1 |
| 6 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 242/15 | 14/02585-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.04.2017 | 78/17 | 14/02585-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2017 | 111/17 | 14/02585-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 116/17 | 14/02585-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 140/17 | 14/02585-1 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2017 | 140/17 | 14/02585-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 159/17 | 14/02585-1 |
| 13 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 173/17 | 14/02585-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.06.2023 | 90/23 | 14/02585-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 169/23 | 14/02585-1 |
| 16 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 173/23 | 14/02585-1 |

**Lýsing av málinum-samandráttur:**
Seinast í nitiárunum varð farið undir at grava í nýtt graviøki suðurvestanvert Kapellið. Hetta økið varð tá mett tilsamans at rúma 1355 gravum. Verandi bruttovíddartørvur á einari grøv er uml. 4,5 m². Tá eru vegir og gøtur íroknað, og svarar tað til 560m² av nýggjum øki um árið. Tørvur er á at fara undir at fyrireika nýtt grevstrarøki.

Talið á jarðarferðum her er uml. 140 um árið. Mett verður at nýtt gravøki skal vera tøkt at grava í um 2-3 ár. Talið á jarðarferðum veksur ár um ár, og við tí eisini víddartørvurin. Mælt verður til víðkanar projektið fevnir um í minsta lagi 10.000 m².
Arbeitt hevur verið á býarskipanardeildini við uppskotum um, hvussu økið kann skipast.

Matr.nr.: Partar av 1073,1071, 1068 og 1067
Eigari: Tórshavnar kommuna
Staðseting : Millum Glyvursveg, Vegin í Vika og Sandá
Vídd samlað økisvídd: uml. 40.000 m²
Verandi víddartørvur : 10.000 m²
Friðingar: Náttúrufriðing
Verandi brúk: Traðarbrúk, beitilendi og leigumál
Kloakk: Høvuðskloakk gongur gjøgnum økið
Atkomuviðurskifti: Velbastaðvegur og vegurin í Vika.
P-pláss: Verandi p-rkering við kirkjugarðin og skipan av nýggjum
Áskot/mold: Tørvur á áskoti 25%
Fíggjarlig binding: 23-25 mill.

**Lendiseyðkenni:**
Vestur–eysturgangandi áardalur sum rennur út i Sandagerði. Landslagið horvir suðurvestureftir oman móti Sandá. Sunnanfyri ánna, Argjamegin, liggja sethúsaøki digst oman til ánna. Frítt útsýni er av Kongavarða og vesturargjum oman í kirkjugarðåin, meðam hann ikki sæst væl frá Havnasíðuni. Kirkjugarðurin kemur at liggja millum Glyvursvegin, Vikavegin og Sandá. At Glyvursvegur og brúgvin verða bygd fyri vestan, fer væntandi at skapa eitt betri veðurlag á kirkjugarðinum. Nakað av lívd fyri vestanættunum, ið liggja tráðar oman gjøgnum Havnardal.

Verandi nýtsla er  traðarbrúk. Økini eru leigað út við sáttmálum til traðarbrúkarar. Mest til beiti fyri seyð, ross og flogfenað. Hesir sáttmálar mugu sigast upp í góðari tíð framman undan.

Ávirkan á nærøkini verður mett lítil, liggur ikki áloypandi í lendinum. Og hædd verður tikin fyri nærleika til Sandá.

Víðkananmøguleikar: Samlaða økisvíddin er uml. 40.000 $m^2$. Skotið verður upp at arbeiða vestanífrá Glyvursvegi, og harfrá suðureftir í stigum. Í fyrstu atløgu at byrja við 10.000 $m^2$.

**Lógir og ásetingar o.a.:**
Umhvørvisárin verður flokka í umhvørvisbólki??
Náttúrufriðingarlógin Sandá er á, sum er breiðari enn 4. m í botninum, og krevur viðgerð av friðingarrnevndunum,

Matriklarnir liggja í umráðispartinum D1, í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Verandi kirkjugarður er eisini merktur D1.
Atkomuviðurskifti: Góðir og stórir vegir føra til kirkjugarðin. Parkeringin skal viðgerast og útbyggjast.

Skotið verður upp at fremja víðkanina í fýra stigum umleið 10.000 $m^2$ hvørt umfar, so sum higartil er farið fram. Samlað bruttovídd á víðkanarøki er 40.000 $m^2$
Søkt verður um at fara undir projektering, og at arbeiðið verður boðið út í innbodna lisitatión.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarskipanardeildin mæla nevndini til at góðkenna fyriliggjandi heildarskitsuuppskot til staðseting og skipan. Harumframt at veita loypandi 3 mill. kr. um árið av íløgum, til projektering, útbjóðingartilfar  og fremjing av ætlan, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:**  Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt kravfestingar til málið um víðkan av kirkjugarðinum við Velbastaðvegin, sí hjálagda kravfestingarskjal. Fyrsta byggistig fevnir um  lendi til 1075 gravir, at skipa øki til 100 parkeringspláss og at skipa atkomuveg eftir vegnum í Vika. Umframt at garðurin skal girðast inni.

Kravfestingarnar siga, hvussu víðkanin av verandi kirkjugarði ynskist skipað. Kravfestingarnar eru grundskjal undir uppskoti til skipan, projektering, myndugleikagóðkenning/Føroya Stift, friðingarviðgerð. Ætlan er at bjóða projekteringina út í innboðnari lisitasjón. Tilboðini verða løgd fyri nevnd aftur, tá tey eru innkomin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við kravfestingarskjølunum, og at bjóða projekteringina út.
Mælt verður eisini til at játta kr. 500.000,- av karminum á konto 6275 Kirkjugarðar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Einmælt samtykt.

**Ìskoyti:**
Fyri at vísa á tørvin á nýggjum grevstarøki, hevur umsitingin gjørt grevstrarstøðuna upp í Kirkjugarðinum við Velbastaðvegin.

Niðanfyri sæst yvirlit, sum vísir hvussu grivið hevur verið seinastu tvey árini. Hvussu nógvar gravir eru grivnar og hvar grivið hevur verið.

| Árstal | Gravir tils. | Dupultgrøv * | Einkultgrøv | Jarðað í gl. Øki ** |
|---|---|---|---|---|
| 2015 | 108 | 39 – 78* | 22 | 47 |
| 2016 | 125 | 41 – 82* | 18 | 66 |

* 39 dupultar gravir grivnar í nýtt útlagt øki, víddar tørvur tils.78 leiði.
** jarðað í verandi gamla gravøkið, samgrevstur oftast hjún

Av hesum sæst, at umleið helvtin av øllum teimum, sum verða grivin, fara í tað gamla økið, meðan hini fara øll, pør og støk, í nýtt gravøki.

Í dag eru uml. 200 gravstøð íalt eftir í grevstrarøkinum, og er tað sambært omanfyri standandi í besta fall nóg mikið til 1-1,5 ár fram.

Sum gongdin hevur verið higartil í 2017, eru nú longu 40 grivin, og kann væntast, at samlaða talið fyri árið, verður nakað hægri enn 130.

At gera nýggj gravøki tekur um 1,5 ár. Fyrivarni skal  takast fyri, at moldin skal sjunka. Tískil er neyðugt at fara undir framhald av kirkjugarðsvíðkanini í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin beinanvegin.

Mett verður, at sjálvt arbeiðið kann byrja miðjan juni 2017.
Neyðugt er at hava grevstarøki tøk at jarða í við ársenda í 2018.

Umsitingin hevur gjørt ráðgevaraavtalu við Hmp Consult at víðka verandi kirkjugarð við Velbastaðvegin mótvegis Sandá. Ráðgevaraarbeiðið er liðugt og verkætlanin klár at bjóða út. Sí viðhefta yvirlitsplan, j.nr. 14/02585-14.

Samlaða økið, sum er tøkt til víðkan av kirkjugarðinum er á leið 33.000 $m^2$. Byggistig I fevnir um økið á 11.000 $m^2$, sí viðheftu tekning, byggistig I, j.nr. 14/02585-15.  Talið á gravum í byggistig I er 1234.

Ætlanin er at bjóða byggistig I út soleiðis, at arbeiðstakarin átekur sær at gera alt byggistig I, tó yvir eitt longri tíðarskeið, soleiðis at vit tryggja okkum nøktandi gravir, tá vit hava tørv á teimum. Nágreining og arbeiðslag verður avgreitt saman við vinnandi arbeiðstakaranum.

Verkætlanin kann sostatt verða játtað í stigum í mun til ávísa arbeiðið, sum skal gerast, og arbeiðstakarin má leggja arbeiðið tilrættis eftir hesum treytum.

Verður omanfyri standandi leistur brúktur verður møguligt at játta peningin í stigum sum niðanfyri standandi:
    2017:   Kr. 3.800.000

2018: Kr. 4.000.000
2019: Kr. 4.000.000
2020: Kr. 4.000.000
2021: Kr. 4.000.000
2022: Kr. 4.000.000
2023: Kr. 4.000.000

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at samtykkja omanfyri standandi útbjóðingarleist og at játta 3.8 mió. kr. av konto xxxx, íløgur í kirkjugarðar og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. apríl 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tað er alneyðugt at arbeiðið at víðka kirkjugarðin fer í gongd í ár. Av tí at onki er eftir á íløgu-játtanini, til kirkjugarðar í 2017, er neyðugt at finna játtanina á øðrum økjum hjá nevndini. Tað verður ikki mett, at framhaldið av arbeiðunum í Steinatúni og frílendinum við Hoydalsá fara í gongd í 2017. Tí er møguligt at flyta ein part av hesum játtanum til kirkjugarðin. Biðið verður um at kr. 2.500.000 verða játtaðar í 2017 soleiðis at arbeiðið kann byrja.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 2.500.000 til L65004 kirkjugarðurin við Velbastaðvegin og at flyta kr. 2.000.000 frá íløgukarminum á 6275 fríðkan av kommununi og kr. 500.000 av verkætlanini L62023 Frílendið við Hoydalsá. Eisini verður mælt til at játtanin til 6275 Fríðkan av kommununi hækkar samsvarandi í 2018 og at avseta neyðugu upphæddini til framhald av kirkjugarðinum í 2018 – 2023 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at játta kr. 2.500.000 til L65004 kirkjugarðurin við Velbastaðvegin og at flyta kr. 2.000.000 frá íløgukarminum á 6275 fríðkan av kommununi og kr. 500.000 av verkætlanini L62023 Frílendið við Hoydalsá.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ískoytið og tilmælið kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Samlaða økið, sum er tøkt til víðkan av kirkjugarðinum er á leið 33.000 m$^2$. Byggistig I fevnir um økið á 11.000 m$^2$, sí viðheftu tekning, byggistig I, j.nr. 14/02585-15. Talið á gravum í byggistig I er 1234.

Umsitingini hjá Tórshavnar kommunu hevur saman við Hmp Consult arbeitt við at bjóða arbeiðið út. Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um avgrevstur av bleytum tilfari, boring og spreinging, javning av botni og uppfylling og planering fyri gravstøðum við tilhoyrandi gøtum, kloakk- og drenskipan, regnvatnsarbeiði og vatn-, el- og gøtuljósarbeiði.
Eisini verður vegurin "Í Vika" dagførdur. Hetta arbeiðið umfatar allan avgrevstur, spreinging, uppfylling, planering við stabilum, asfaltering og kantsteinar, gøtuljós og avvatning av vegi, sí viðhefta útbjóðingartilfar á j.nr. 14/02585-20.

Byggistig I er bjóðað út soleiðis, at arbeiðstakarin átekur sær at gera alt byggistig I, tó yvir eitt longri tíðarskeið, soleiðis at nøktandi tal av gravum er tøkt, tá tørvur er á teimum. Nágreining og arbeiðslag verður avgreitt saman við vinnandi arbeiðstakaranum.

5 arbeiðstakarar vórðu bodnir við til innbodna lisitatión. Lisitatión var fríggjadagin 16.06.2017.

Tilboðini eru áljóðandi:

| | | |
|---|---|---|
| P/F J&K Petersen Contractors | kr. | 17.518.840,00 uttan mvg. |
| Sp/f Konsax | kr. | 13.985.580,00 uttan mvg. |
| Sp/f Við Sjógv | kr. | 18.151.493,00 uttan mvg. |
| Sp/f Maskinkoyring | Einki boð | |
| Sp/f Hans Wilhelm Lützen | Einki boð | |

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting, sum er áljóðandi til samans 17.623.000,00 við mvg., um tikið verður av lægsta tilboðnum, j.nr. 14/02585-21.

Verður omanfyri standandi leistur brúktur er neyðugt at játta peningin yvir fleiri fíggjarár:
2017: Kr. 2.500.000
2018: Kr. 4.000.000
2019: Kr. 4.000.000
2020: Kr. 4.000.000
2021: Kr. 3.123.000

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum og fara í samráðingar við lægsta tilboðsgevaran um at arbeiða eftir omanfyri standandi leisti. Mælt verður eisini til at játta samlaða kostnaðin á 17.623.000,00 kr. av konto 6575, íløgur í kirkjugarðar, sum lýst omanfyri frá 2017-2021.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Arbeiðið hevur sum heild gingið væl. Verkætlanin hevur eina meirnýtslu uppá kr. 665.000. Orsøkin til, at verkætlanin hevur hall, er millum annað, at verkætlanin hevur tikið 4 ár at fremja, og index javningin hevur kostað meiri enn upprunaliga væntað. Samlaður kostnaður á index javna er 906.239,00 kr. Somuleiðis hevur verkætlanin fíggjað fleiri tilkeyp á eyka arbeiði og eyka útgerð, sum Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin hevur havt brúk fyri, men sum ikki var við í upprunaligu kostnaðarmetingini.

Millum annað eru hesi eykaarbeiði gjørd afturat í verkætlan Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin:
- Víðkað um gravarøki við 212 gravstøðum
- Gøtuljós við høvuðsgøtu inni í kirkjugarðin
- Vatn- og kloakkleiðingar til framtíðar toilettbygning
- Øking av % parti av sandi í gravarøki
- Elkaðal at veita og leggja til framtíðar toilettbygning
- Albertslund Mini gøtuljós í Vika
- Innkoyring til traðarstykki
- Monterað Elskáp til framtíðar toilettbygning

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 724<br>Formansins merki: |

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☒

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6575 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 6575 | L65004 | Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin | | 665.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 665.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at loka verkætlanina L65004 Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin
- at meirnýtslan verður fíggjað við kr. 665.000 av karminum LK62999 Fríðkan av býnum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 725<br><br>Formansins merki: |

# 174/23 Skansabryggjan - liðugtgerð av uttanumøkjunum við pakkhúsini hjá Faroe Ship.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 13.06.2023 | 18/23 | 23/03038-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 183/23 | 23/03038-3 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 174/23 | 23/03038-3 |

**Upprunin til málið**
Víðkan av Skansabryggjuni og byggingin av pakkhúsum hjá Faroe Ship.

**Lýsing av málinum**
Samskifti hevur verið millum Tórshavnar havn og Faroe Ship um hvussu økini rundanum pakkhúsini hjá Faroe Ship skulu gerast liðug og hvussu kostnaðurin skal býtast millum partarnar.

Partarnir eru komnir ásamt um ein hóskandi leist fyri býti av arbeiðsuppgávunum og kostnaðinum fyri ymsu økini, sí skjal 23/03038-1.

Arbeiðini fevna um planering/avrætting av økjunum í røttum hæddum í mun til bygningar og verandi økir, asfaltering (1 ella 2 løg, alt eftir hvat øki talan er um), umframt kloakkleiðing í lendi frá verkstaðsbygninginum við brimgarðin.

Meginreglan fyri býtinum er, at Tórshavnar havn sum eigari av lendinum, ber kostnaðin av planering og asfaltering av nýggjum økjum og av kloakkleiðingini í lendinum, meðan Faroe Ship ber kostnaðin av at reetablera økir, sum teirra byggiarbeiði ávirkar. Har ið gamla asfaltið var útslitið, ber Tórshavnar havn kostnaðin av at leggja nýtt asfalt.

Nøkur av økjunum verða gjørd í 2023 og í 2024. Seinni (um uml. 3-4 ár) skal eitt slitlag leggjast á tey økir, har ið bert 1 lag verður lagt nú, og verður tá neyðugt við nýggjari játtan til tað.

Kostnaðarmeting fyri partin hjá Tórshavnar havn er áljóðandi 7,0 mió kr..
Á íløguætlanini hjá Tórshavnar havn eru framfluttar 14 mió kr. á "P38 – Skipan av nýggja havnaøkinum".

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | | Blað nr.: 726 |
| | | Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læAttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Virkandi havnarmeistari mælir til at taka undir við semjuni við Faroe Ship um býti av arbeiðuppgávum og kostnaði og at játtaðar verða 7,0 mió av íløgum hjá Tórshavnar havn, verkætlan "P38 – Skipan av nýggja havnaøkinum", og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 13. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

# 175/23 Barðið : Umsókn um at leiga grundøki til frystugoymslu á Vestaru Bryggju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 13.06.2023 | 20/23 | 23/03342-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 203/23 | 23/03342-3 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 175/23 | 23/03342-3 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá P/F Barðið dagfest 7/6-2023 um at leiga grundøki á Vestaru Bryggju til frystigoymslu.

**Lýsing av málinum**
P/F Barðið søkir um at leiga eitt grundøki til at byggja eina 900 m² frystigoymslu á Vestaru Bryggju.
P/F Barðið vísir í umsóknini á, at felagið hevur ætlanir um at víðka virksemið við at kunna veita tænastur í sambandi við frystan fisk, umframt tað verandi virksemi og tænastur, ið felagið í dag hevur innan feskan fisk.
Í hesum sambandi hevur P/F Barðið tørv á frystigoymslu fyri at kunna bjóða verandi og nýggjum kundum eina nøktandi og kappingarføra tænastu innan frystan fisk.

Virksemið við frystihøll, ið P/F Barðið ætlar sær undir, hevur fleiri ágóðar við sær fyri Tórshavnar havn og -kommunu. Tað verða væl fleiri landingar og umsetning yvir kajkantin, ið viðføra fleiri beinleiðis inntøkur frá havna- og vørugjøldum, umframt leiguinntøku frá grundøkinum.
Virksemið væntast eisini at kunna skapa fleiri nýggj ársverk, umframt ymiskt annað avleitt virksemi í kommununi.

Økið, sum søkt verður um til frystioymsluna, er uml. 30x30 m, umframt ein yvirbygning til rampur. Økið til frystigoymsluna gongur uml 10 inn í verandi bygning á matr. 970c (Bacalao), og 20 m út frá hesum sama bygningi.
Sostatt verður neyðugt at taka ein part á uml 10X30 m av Bacalao bygninginum á matr 970c niður.
P/F Barðið ynskir, at grundøkið til frystigoymsluna stendur byggiklárt og at Tórshavnar havn ger neyðugu broytingarnar á verandi bygning á matr. 970c.

P/F Barðið søkir um 25 ára leigumál.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í øðrum leigusáttmálum, har sum ein nýggjur leigari skal leiga eitt øki, sum annar leigari hevur leigað og har ið bygningar hava staðið, er ásett, at Tórshavnar havn tekur bygningar niður, men at leigarin annars yvirtekur økið soleiðis sum tað liggur.

Kostnaðurin av at taka nevnda part av bygninginum niður og gera økið byggiklárt er ikki endaliga kendur í løtuni.

Í hesum partinum av Bacalao, sum verður neyðugur at taka niður, hevur Sp/f Ís eitt leigumál, har ið ísframleiðsla er. Eisini nýtir RC felagið eitt høli í hesum partinum av Bacalao

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/03342-1 : P/F Barðið: Umsókn um at leiga grundøki til frystigoymslu á Vestaru Bryggju
23/03342-2 : Uppskot til leigusáttmála við P/F Barðið viðv. frystigoymslu á Vestaru Bryggju
23/03342-4 : Yvirlitsplanur frostgoymsla

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Virkandi havnarmeistari mælir til:

- at ganga umsóknini á møti og gera leigusáttmála við vanligum treytum sambært uppskot til 25 ára leigusáttmála, j.nr. 23/03342-2, ið tó er treytaður av, at niðurtøka av bygninginum verður samtykt og fígging játtað til hetta.
- at projektera og gera kostnaðarætlan av niðurtøku av parti av bygninginum at leggja fyri aftur havnanevndina.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 13. juni 2023:** Ein meiriluti, Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, samtykti at taka undir við tilmælinum, men treytað av at tilboð um niðurtøku fyriliggur, og fígging verður játtað.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til, at arbeitt verður við eini loysn, sum loyvir útbygging av virkseminum hjá p/f Barðið, umframt at rúma virkseminum hjá verandi leigarum. Minnilutin mælir harafturat til, at farið verður undir arbeiðið at gera heildarætlan fyri Bacalao, sum fyrr er samtykt.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í havnanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á sína minnilutastøðu í havnanevndini.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Annika Olsen. Elsa Berg og Annika Olsen kravdu at fáa serstøðu sína í gerðabókin, og viðmerktu í hesum sambandi, at tær mæla til, at arbeitt verður við eini loysn, sum loyvir útbygging av virkseminum hjá p/f Barðið, umframt at rúma virkseminum hjá verandi leigarum. Minnilutin mælir harafturat til, at farið verður undir arbeiðið at gera heildarætlan fyri Bacalao, sum fyrr er samtykt.

## 176/23 LV mál nr. 21/01631 (VS: mál nr. 16/00514 Viðv. leigusáttmálanum á matr. nr. 1e og 1f á Sundi)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 18.01.2022 | 2/22 | 21/03297-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 52/22 | 21/03297-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 48/22 | 21/03297-2 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.05.2022 | 21/22 | 21/03297-2 |
| 5 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 176/23 | 21/03297-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Landsverk um at leingja leigusáttmálan undir asfaltverkinum á Sundi við 25 árum.

**Lýsing av málinum**
Í 2004 gjørdi Tórshavnar kommuna sáttmála um at leiga matr. nr. 1f til P/F Asfaltverkið á Sundi. Í 2011 verður leigumálið vaksið, til eisini at umfata matr. nr. 1e. Leigumálið er galdandi til 1. juli 2024, tá tað kann sigast upp av báðum pørtum við 6 mánaða freist.

Í 2016 framleigar P/F Asfaltverkið økið til Landsverk, við somu rættindum og skyldum, sum leigarin hevur sambært leigusáttmálanum við Tórshavnar kommunu.

**Landsverk sigur m.a. soleiðis í síni lýsing av verkinum:**
Staðsetingin á Sundi er munandi betri viðvíkjandi veðri, og tað krevur minni orku at koma til og frá við tilfari til verkið, enn um koyrast skal í Hundsarabotn.

Tá asfaltverkið á Sundi er liðugt útbygt í 2022, verður tað at sammeta við eitt nýtt verk, men longu nú er stórur partur av dagføringunum framdar.

Asfaltverkið kann í 2022 framleiða 200 tons um tíman, og arbeiðir tí effektivari, og koyrir færri tímar um árið enn higartil.
Larmurin frá verkinum lýkur galdandi ES krøv, men um samanborið verður við aðrar larmkeldur í økinum, so sum landsveg og skip við bryggju, gevur verkið sera lítið av larmi frá sær.

Umhvørvisgóðkenningin setur strong krøv til verkið, sum øll verða lokin. Onki verður latið á sjógv frá verkinum.

Útlátið úr skorsteininum er nærum 100% dampur, meðan alt annað útlát, so sum co2, nox og sox lýkur strangastu útlátskrøv. Samanborið við oljufýringar hjá húsarhaldinum er roykurin frá asfaltverkinum munandi reinari.

Bitumen, sum er 5% av asfaltinum er bólkað í 2B, sum viðgerð evni í møguliga eru krabbameinselvandi fyri menniskju. Í bólki 2B eru eitt nú fartelefonir og kaffi, so talan er ikki um eitt evni, sum verður katagoriserað sum vandamikið.

Samanumtikið er asfaltverkið hjá Landsverk á Sundi eitt nýmótans verk, sum lýkur øll umhvørviskrøv – bæði í Danmark og í Føroyum.

Ætlanin er, í mestan mun, at brúka føroyskt tilfar.

**Luftgóðskumátistøð í Kaldbak:**
Ein luftgóðskumátistøð hevur staðið í Kaldbak síðani 2019. Mátingarnar vísa, tað er onki dálkingarevni, sum fer uppum markvirðini í ES nakað ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Bæði leigari og útleigari hava hildið sínar skyldur í leigusáttmálanum.

Um leigumálið verður uppsagt, skal økið ruddast og latast aftur í sama standi, sum tá leigumálið byrjaði.

Grein 3 í leigusáttmálanum er soljóðandi:
*Leigumálið er galdandi til 1.juli 2024. Aftaná hetta kann leigumálið av báðum pørtum sigast upp við 6 mánaða freist til at halda uppat tann 1. Í einum mánaða.*

*Vil leigarin halda áfram við leigumálinum, aftaná at tað ásetta áramálið er útgingið, skal leigarin hava fyrsta rætt til at gera nýtt leigumál, um Tórshavnar kommuna loyvir hesum, og um kommunan ikki sjálv nýtir rættin til at taka økið í nýtslu til egið brúk.*

Tá Tórshavnar kommuna  ikki hevur boðað frá nøkrum ætlanum at taka økið til egið brúk, leigarin hevur yvirhildið ásetingarnar í leigusáttmálanum og stórar íløgur eru gjørdar í at uppstiga asfaltverkið, skulu týðandi grundgevingar liggja fyri ikki at leingja leigumálið.

Leigan verður sambært galdandi leigugjøldum fyri havnaøkir í Tórshavnar kommunu.

Mótmælisskriv móti bygging av asfaltverkið er komið frá fólki úr Kaldbak.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mótmæli úr Kaldbak um asfaltverk  j.nr 20/00731-44

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | X | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at ganga umsóknini á møti, at leingja leigumálið við 25 árum.

Tilmælið kann fáa fíggjarligar avleiðingar fyri Landsverk við at kostnaðurin á orku kann broytast og kann møguliga óbeinleiðis fáa fíggjarligar avleiðingar fyri kostnaðin á asfalti.

**Havnanevndin 18. januar 2022:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein samtykti at leingja leigumálið við 25 árum, treytað av, at Asfaltverkið hevur lagt um til til biogass – og í øðrum lagi til gass (nátúrgass) í seinasta lagi 1. juli 2024 og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ein minniluti:** Birgir Nielsen og Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum og mæla til nýggja staðseting.
**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í havnanevndini og beinir málið í býraðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til nýggja staðseting.
**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
17. juni 2021 fekk Tórshavnar býráð mótmælisskriv um asfaltverkið á Sundi frá Kaldbaksfólki og øðrum í nærumhvørvinum. Í mótmælisskrivinum verður gjørt vart við ótryggleika um staðsetingina av asfaltverkinum í mun til dálking frá verkinum og møguligar heilsuváðar av hesum. Gjørt verður vart við, at fólk av somu orsøk aftra seg við at seta búgv í Kaldbak. Eisini verður spurningur settur við tær mátingar, sum higartil eru gjørdar av útlátinum frá asfaltverkinum.

Umhvørvisdeildin undir Teknisku fyrisiting hjá Tórshavnar kommunu hevði 20. apríl fund við umboð fyri Landsverk (LV) um verkið og viðger herundir fylgjandi spurningar:
- hvørjar hugsandi staðsetingar kundu verið av slíkum asfaltverki,
- hvør av hesum staðsetingum er mest skynsom grundað á eina samlaða meting,
- hvørjar treytir kann tað vera viðkomandi at seta ísv. leingjan av sáttmálanum.

Verandi leigusáttmáli kann í ávísan mun tulkast at binda kommununa til at leingja sáttmálan, um kommunan ikki sjálv skal brúka økið til annað endamál, ella um ikki serliga tyngjandi viðurskifti tala ímóti tí – og/ella tala fyri aðrari staðseting. Kommunan hevur, sum er, ikki aðrar ætlanir við verandi øki á Sundi. Við atliti at ótryggleikanum hjá borgarunum í nærumhvørvinum er tað hinvegin skynsamt at viðgera møguligar alternativar staðsetingar. Neyvan eru heldur nakrar løgfrøðiligar forðingar fyri at seta nýggj, tíðarhóskandi krøv til rakstur av og dálking frá verkinum. LV upplýsir, at verkið koyrir so at siga hvønn gerandisdag í árinum. LV hevur longu gjørt stórar íløgur í ábøtur á verkið, og Løgtingið hevur uppskot til viðgerðar av uppaftur størri íløgu fyri yvir 10 mió. kr. Áðrenn tað verður gjørt, er neyðugt at taka endaliga støðu til, um verandi asfaltverk skal takast niður og flytast, ella heilt nýtt verk byggjast aðrastaðni.

**Hundsarabotnur, Signabøur og Gamlarætt**
Áðrenn asfaltverk varð bygt á Sundi, varð alt tilfar, sum ikki varð útvunnið á staðnum, flutt niðan í Hundsarabotn og haðani út um landið. Staðfest er tó, at skervur av føroyskum gróti slítist og morlast ov skjótt og er tí ikki egnaður til asfaltering, og verður skervur til asfaltering tí í dag yvirhøvur innfluttur. Í mun til at asfaltverkið er staðsett við eitt havnarøki, hevði tað, at koyrt skerv, bitumen og annað tilfar niðan í Hundsarabotn fyri síðan at flyta tað út um landið, elvt til eyka koyring og við hesum eyka ferðslu, slit, útlát av veðurlagsgassum og aðra eyka dálking. Varð asfaltverkið lagt ísv. havnarøkið á Signabø, høvdu fleiri íbúgvar búð tættari við verkið og verið órógvaðir av møguligari dálking, óljóði og øðrum, enn staðsetingin á Sundi elvir til. Á Gomlurætt er ov lítið pláss til slíkt virksemi, eisini um alivirksemi og Sandoyartunnilin ikki vóru farin við einum parti av lendinum har.

**Glyvursnes**
Tórshavnar kommuna hevur aðrar ætlanir við grótbrotinum á Glyvursnesi. Skuldi Glyvursnes hóast hetta verið umhugsað, er neyðugt, at lendingarviðurskiftini eru nóg støðug til slíkt virksemi. Óheft av hesum hevði staðseting á Glyvursnesi elvt til meiri koyring enn av Sundi. Vegurin av Argjahamri út á Glyvursnes hevði kravt stórar ábøtur, og koyringin millum asfaltverk og endaligu nýtslustøðini hevði verið longri, elvt til hægri orkunýtslu, meiri dálking og útlát av vakstrarhúsgassum og hevði órógvað ferðsluna í Tórshavn munandi meiri enn staðseting á Sundi.

**Møguligar aðrar staðsetingar**
Í prinsippinum kundi asfaltverkið verið flutt til eina aðra havn uttan fyri Tórshavnar kommunu. Tó er Tórshavnar kommuna, umframt Landsverk sjálvt, størsti einstaki brúkari av asfalti í landinum við um 10-15.000 tonsum av vanligu framleiðsluni á 30-50.000 tonsum árliga. Tí hevði staðseting aðrastaðni í landinum mest sannlíkt elvt til meiri flutning, størri útlát av vakstrarhúsgassum og aðra dálking. Sannlíkt

hevði onnur staðseting eisini havt neiliga ávirkan á fleiri borgarar í nærumhvørvinum av verkinum, umframt av eyka koyring í bygdum øki.

Av teimum møguleikum, sum her eru viðgjørdir, tykist staðsetingin á Sundi at vera eina frægast, praktiskt, fíggjarliga og umhvørvisliga.

**Burðardygt asfalt?**
Kann asfaltverkið so við verandi staðseting gerast meiri burðardygt og dálka minni? Eyðsæð kann tað vera torført at gera eitt asfaltverk burðardygt. Umframt umhvørvislig atlit snýr burðardyggleiki seg eisini um sosial og fíggjarlig viðurskifti í breiðum týdningi.

**Altjóða viðurkend krøv**
Í mótmælisskrivinum til Tórshavnar kommunu verður ivi sáddur um, hvørt mátingar av útlátum frá asfaltverkinum higartil eru framdar á mest umboðandi støðum. Fyri at tryggja, at borgarin kann kenna seg tryggan, er skilagott at tryggja, at tað lýkur altjóða og norðurlendsk krøv og viðurkendar framferðarhættir, eitt nú um innaneftirlit, mátingar av útláti, sertifisering, og um alsamt at nýta besta tøka tøkni og framferðarhættir (BAT).

**Frá olju til varandi orku og orkusparandi átøk**
Við fyrivarni fyri hesum benda tøku upplýsingarnar tó á, at høvuðsampin og størsta útlátið av asfaltverkinum stendst av roykinum frá, at brenniolja verður nýtt til at turka og hita skerv og bitumen. Sum skilst er stórur partur av orkunýtsluni farin til at turka og síðani hita skerv, bitumen og annað tilfar. Fyri at minka um orkunýtsluna eigur skervur og annað tilfar tí í mest møguligan mun at verða vart ímóti vætu, soleiðis at orkunýtslan í hesum sambandi verður minst møgulig. Sum skilst, eru átøk hesum viðvíkjandi sett í verk ella eru við at verða sett í verk, sum longu hava minkað nógv um orkunýtsluna.

Eisini eigur at verða miðað eftir, at framleitt og útlagt asfalt heldur longst møguligt, so minni skal framleiðast. Sum kunnugt er føroyskur skervur ikki egnaður til asfalt. Tí verður slitsterkari skervur innfluttur, og er hetta hóast flutningin tvørtur um hav nógv burðardyggari enn at nýta lokalan skerv. At nýta skerv, sum tolir mest møguligt slit, minkar í sjálvum sær um nýtsluna og tí eisini um rakstrartíðina hjá verkinum, og tí um dálking og ampar av verkinum.

Hinvegin skerst ikki burtur, at asfaltverkið nýtir stórar mongdir av olju sum orku, sum umframt at dálka, útleiðir stórar mongdir av vakstrarhúsgassum. Tí hevði verið skynsamt at skift orkunýtsluna til varandi orkukeldur. Hetta má gerast á ein hátt, sum hóast alt tryggjar virkisførið hjá verkinum, um og tá varandi orkukeldur stundum ikki eru tøkar. Treyt um at skifta til varandi orku eigur tó ikki at læsa partarnar til ávísa orkukeldu ella tøkni, tí rætta loysn í ár kann vera skeiva loysn næsta ár og kanska serliga longri fram í tíðina.

Ampar hava verið av lukti. Sambært LV kennast hesir mest tá asfaltið verður blandað, og tá asfaltið verður stoytt í lastbilarnar. Ætlanir eru um, at hetta í framtíðini skal fara fram undir yvirdekningi ella inni, so slíkir ampar kunnu minkast.

**Tíðarfreist**
Tíðarfreistin 1. juli 2024 at skifta til varandi orku, ið verður skotin upp av Havnanevndini, kann sambært LV gerast í so tepur; fyri at finna røttu loysnir krevjast kanningar, fyrireiking, bíleggingartíð og tíð til at fremja sjálvt arbeiðið. Tí kann mælast til, at skiftið skal gerast skjótast gjørligt, men at seinasta freist verður ásett eitt vet seinni.

Teknisk fyrisiting hevur á fundi við umboð fyri LV 20.04.2022 avtalað at samstarva um at kanna, hvat ið krevst fyri møguliga at kunna endurnýta asfalt, soleiðis at sleppast kann undan at tyrva tað, og at samstarva um hetta, skuldi tað víst seg møguligt. Tað skulu ávísar mongdir til, og sleppast skal í størst møguligan mun undan at leggja asfalt til endurnýtslu á goymslu, tí tað tá hevur lyndi at klumpa seg saman og gerast gróthart, so tað nærum ikki fæst út aftur. Tí er neyðugt at fáa allar kommunur og viðkomandi aktørar í landinum við til at nýta av endurnýtta asfaltinum, so hvørt tað kemur inn og verður viðgjørt.

**Útsjónd**
Neyvan prýðir eitt asfaltverk nærumhvørvið. Á Sundi liggur tað tó í einum havnarøki við tí virksemi, sum nú eina ferð hoyrir til. Men sjálvt fyri eitt havnarøki kann asfaltverkið og kringøkið undir seinastu eigarunum neyvan sigast at hava verið nakað prýði. Seinnu tíðina er hetta nógv bøtt. Fyri at asfaltverkið eisini frameftir skal skemma minst møguligt, kann mælast til, at tað í mestan mun, tó innnan rímilig mørk, verður roynt at minka um tess sjónligu árin á nærumhvørvið. Tað kundi t.d. snúð seg um viðlíkahald í tøkum tíma. Kommunan eigur lendið omanfyri og á síðunum, har kommunan, møguliga við fígging frá Tórshavnar Havn og av stuðulsjáttan hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til gróðurseting av trøum kundi plantað trø og runnar, eisini fyri á tann hátt at binda $CO_2$ og samstundis gera verkið minni sjónligt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at:

- Leigusáttmálin við Landsverk um asfaltverkið á Sundi verður longdur, treytað av støðugum átøkum fyri at minka um ampar av asfaltverkinum av óljóði, dálking og útláti av vakstrarhúsgassum, viðlíkahaldi, útsjónd og líknandi viðurskiftum,
- Landsverk alsamt viðlíkaheldur og tryggjar eitt virkið innaneftirlit og alsamt stýrir og hevur eftirlit við framleiðslu, árini og frávikum, og at skoðað verður eftir altjóða viðurkendum standardum, t.d. ISO14000,
- Landsverk umbiður endurskoðan av, um mátingar, mátingarhættir, og hvar ið mátað verður, er so skynsamt sum gjørligt í mun til landslagið, og hvussu luftin og harvið luftdálking ferðast á fjørðinum,
- Landsverk í árligari frágreiðing greinar nýggj ella bøtt átøk hesum viðvíkjandi,
- Allar orkukeldur hjá verkinum skjótast gjørligt, um til ber longu í 2024 og í seinasta lagi innan árslok 2025, verða frá varandi orkukeldum, tó á ein hátt, ið tryggjar verkinum fult virkisføri, um ella tá varandi orka stundum ikki er tøk,
- Skervur og annað tilfar í størst møguligan mun verður vart ímóti vætu,
- Tórshavnar kommuna og Landsverk saman við Kommunufelagnum greina møguleikar og krøv til at endurnýta asfalt og um gjørligt taka ítøkilig stig til hetta,
- Tórshavnar kommuna, umvegis Tórshavnar Havn, umhugsar at taka kostnaðin av ella at vera partur av tí at gera møguliga gróðurseting oman fyri verkið,
- Leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. mai 2022:** Málið varð umrøtt.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Málið beint í havnanevndina.

## 177/23 Lántøka og gjaldføri 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 147/23 | 23/02523-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 204/23 | 23/02523-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 177/23 | 23/02523-1 |

**Upprunin til málið**
Íløguætlanin hjá hjá Tórshavnar kommunu fyri 2023 er á 319,8 mió. kr. Harav eru 299,8 í Tórshavnar kommunu og 20 mió. kr. íløgur í Tórshavnar havn.

Minninýtsla av íløgum, sum eru í gerð, verða fluttar fram til næsta ár. Íløgujáttanir at flyta fram frá 2022 til 2023 eru 200,5 mió. kr. harav eru 133,4 í Tórshavnar kommunu og 67,1 í Tórshavnar Havn. Samlaða íløgujáttanin við framflytingum verður soleiðis 520,3 mió. kr. Harav eru samlaðu íløgurnar hjá Tórshavnar kommunu, uttan Tórshavnar havn 433,2 mió. kr.

Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast. Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar kommunu í fíggjarætlanini fyri 2023 er 225 mió.kr.

Í fíggjarætlanini fyri 2023 er roknað við eini lántøku á 75 mió. kr. til at fíggja innkomuvegin. Samlaða játtanin til innkomuvegin í 2023 og 2024 er 214 mió. kr. og skulu hesar fíggjast. Kostnaðurin er 324 mió. kr. og stuðulin fá landinum 110 mió. kr.

Í fíggjarætlanini fyri 2020 var roknað við eini lántøku á 57 mió. kr. í sambandi við Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin. Lántøka hevur ikki verið neyðug higartil; men sum framdrátturin er í íløgunum, verður neyðugt við lántøku í 2023.

**Lýsing av málinum**
Gjaldførið í Tórshavnar kommunu eigur altíð at svara til í minsta lagi ein mánaða ella í miðal 8,33% av mettu árligu kommunuskattainntøkunum. Samtyktin er frá fíggjarnevndarfundi 15. februar 2012 og býráðsfundi 23. februar 2012. Fyri 2023 er kommunuskattainntøkan mett til 951 mió.kr, og harvið er roknaða minsta gjaldføri 79 mió.kr.

Við ársbyrjan var gjaldførið 163 mió. kr. Gjaldførið tann 30. apríl var 86 mió. kr. harav vóru 54 mió. kr. lánsbrøv og 32 mió. kr. innistandandi. Fyri at tryggja gjaldførið í árinum verður neyðugt at taka ætlaðu lánini í fíggjarætlanini og at fíggja innkomuvegin. Upptøka av láni í árinum verður soleiðis 271 mió. kr.

Verandi lántøka í tórshavnar kommunu er 228 mió. kr. harav er 220,5 lán hjá Tórshavnar Havn og 7,7 mió. kr. lán hjá Tórshavnar kommunu.

Yvirlit yvir lán:

| Lángevari | | Upprunaligt lán tkr. | renta | Gjaldast fyrstu ferð | Afturgjaldstíð | Rest |
|---|---|---|---|---|---|---|
| BankNordik | Tórshavnar kommuna | 18.500 | 3 mðr. FOBOR + 1,0% p.a. | 01.10.2014 | 15 ár | |
| BankNordik | Tórshavnar havn | 250.000 | Føst renta 2,1% p.a. | 30.09.2019 | 15 ár | 22 |
| tilsamans | | | | | | 22 |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/02196 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK
23/0151 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

Gjaldførisyvirlit: Gjaldføri 2023, apríl – íløgur játtan
Gjaldføri 2023, apríl meting

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Fyri at tryggja gjaldførið restina av 2023, mælir stjórnin til, at kommunan tekur upp ætlaðu lánini uppá 271 mió. kr. og at fíggjarnevndin heimilar umsitingini útvega lánitilboð at leggja fyri nevnd.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum umframt at biðja um eina optión uppá 50 mió. kr.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, taka ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Biði er um lánitilboð, og hevur kommunan fingið tilsøgn um fígging. Víst verður til skjal nr. 23/02523-5 og tilfar í málinum.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at taka av lánitilboðnum á 150 mió. kr. skjal. nr. 23/02523-5. Lánið verður afturgoldið yvir 15 ár til eina fasta rentu. Eisini verður mælt til at hækkað kassakredittin til 100 mió. kr. fyri at tryggja minsta gjaldføri í árinum. Harumframt verður mælt til, at umsitingin far heimild til at útvega írestandi fígging til innkomuvegin tá tørvur er á hesum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Borgarstjórin nágreinaði, at talan er ikki um eykajáttan, og atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian Martin Skála og Súsana Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

| | Býráðsfundur<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 738<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 178/23 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 64/23 | 23/00151-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 55/23 | 23/00151-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 91/23 | 23/00151-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 97/23 | 23/00151-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 85/23 | 23/00151-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 129/23 | 23/00151-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 116/23 | 23/00151-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 154/23 | 23/00151-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 132/23 | 23/00151-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 186/23 | 23/00151-1 |
| 11 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 178/23 | 23/00151-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Framlagt og góðkent.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Tikið av skrá.
**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Framlagt og góðkent.

# 179/23 Umsókn um keyp av lendi til búðstaðarendamál

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2023 | 28/23 | 22/01629-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 207/23 | 22/01629-2 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 179/23 | 22/01629-2 |

**Upprunin til málið**
MARK Oyggjarvegur sp/f søkir Búnaðarstovuna um keyp av lendi.

**Lýsing av málinum**
Ánarin av matr.nr. 1175i, Tórshavn, søkti í 2020 um at fáa broytt byggisamtyktina, so loyvi kundi gevast at byggja íbúðir.
Um ársskiftið 2022 kom ein umsókn um byggi- og graviloyvi inn til íbúðarbygging við Oyggjarvegin, matr.nr. 1175i, Tórshavn. Kommunan gav í februar graviloyvi, og umsøkjarin fær byggiloyvi, tá øll viðurskiftir eru komin uppá pláss.

Í verandi máli søkir ánarin um at keypa umleið 7580 fermetrar av festijørð og haga hjá Búnaðarstovuni. Víst verður til »*22/01629-1 Umsókn um keyp av lendi Oyggjarvegur.pdf*«.

Í 2022 var ein avtala um yvirtøku av landsvegi millum Tórshavnar kommunu og Landsverk framd. Vegastrekki frá Vestara Ringvegi niðan til og við íbindingina til Hotel Føroyar var partur av hesi avtalu. Víst verður til skjal *»22/01629-13 Yvirtøka av landsvegi«.*

Í avtaluni millum Tórshavnar kommunu og Landsverk er longdin á strekkinum, ið er yvirtikið, lýst, meðan breiddin ikki er. Partur av økinum, ið søkt verður um, kann tí verða øki, sum er fevnt av avtaluni millum Landsverk og Tórshavnar kommunu í sambandi við yvirtøku av landsvegi.

Umsókn um keyp av lendi er send til Búnaðarstovuna, har avrit eisini er sent til Tórshavnar kommunu. Avritið til Tórshavnar kommunu er skilt sum ein umbøn um ummæli av umsókn av keypi av búnaðarjørð.
Í umsókninni, ið er innkomin, eru tvey mál, ið skulu viðgerast:

1) Søla av kommunalari ogn, ið er yvir 300 fermetrar
2) Ummæli av sølu av landsjørð.

**Lógir, ásetingar o.a.**
*Kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn*
Høvuðsreglan viðvíkjandi sølu av kommunalari fastogn er, at føst ogn hjá kommununi ikki má seljast, uttan so at ognin hevur verið boðin út alment, sbrt § 44, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 2000 um kommunustýri. Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um:

1. sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap, sbr. § 57 í kommunustýrislógini,
2. sølu til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul,
3. sølu av økjum, ið eru minni enn 300 m² til víddar, og sum tað ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á, ella
4. kommunalar útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir frammanundan ásettum reglum.

Stk. 2. Við góðkenning frá landsstýrismanninum kann verða vikið frá kravinum um alment útboð í sambandi við makaskifti, og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð, sambært § 2, stk. 2-4.

*Almenna byggisamtykt*

Økið liggur í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn, sum í høvuðsheitinum verður nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ikki øll viðurskifti í samband við avtaluna um yvirtøku av landsvegi eru komin í rætt lag. Enn manglar Landsvegaskráin at verða broytt, samstundis sum lendis- og ognarviðurskifti ikki eru endaliga avgreidd. Tørvur er á, at hesi viðurskifti koma í rætt lag, áðrenn málið kann viðgerast.

Áðrenn Tórshavnar kommuna kann viðgera málini er  eisini neyðugt, at ein byggisamtykt fyriliggur, har ásetingarnar eru í tráð við ynsktu nýtsluna; aðrir myndugleikar geva játtandi tilsøgn.
Umsitingin hevur fingið eina umsókn, har søkt verður um at broyta byggisamtyktina fyri økið.

Búnaðarstovan hevur áður víst á, at Búnaðarstovan sum meginregla selur landsjørð til kommunur í sambandi við sethúsaútstykkingar, ídnaðarøkir v.m. Tá talan er um ískoytisstykkir og smærri matrikulerar rættingar, verður í ávísum førum selt beinleiðis til umsøkjaran, tó at kommunalt álagdar treytir verða lagdar við søluni.

**Upplýsingar frá Býarskipanardeildini**
Matriklarnir, sum ætlanin er at keypa, eru møguliga partur av vegøki, umframt Húsahaga. Økið liggur norðan fyri Oyggjarvegin, og eru einans ætlaðu bústaðirnir hjá Mark staðsettir hesumegin Oyggjarvegin. Býarskipanarliga er tískil talan um eitt býarmark, ið ávegis verður flutt uttan eina samskipan við restina av framtíðar býarvakstrarøkinum í Húsahaga.

Í Kommunuætlanini 2020 er Húsahagi útnevndur sum býarvakstrarøki, men hevur hetta økið eina lága raðfesting.

Um Húsahaga sum býarvakstrarøki stendur í Kommunuætlanini:
"Atkomuviðurskiftini í Húsahaga eru sera góð, tá til ber at koma inn á økið frá Oyggjarvegnum. Økið liggur lutfalsliga avbyrgt og langt burturi frá øðrum. Tí eru trivnaðarviðurskiftini ikki so góð her. Mett verður, at neyðuga íløgan í kloakk, um økið skal nýtast sum bústaðarøki, er órímiliga dýr. Tí kann hugsast, um økið her kann nýtast til vinnuøki, tá tað ikki krevur eins nógv av kloakering."

Hóast bygging er ávegis á matr. nr. 1175i, so er økið avbyrgt og langt burturi frá øðrum bústøðum, trivnaðarviðurskiftini eru ikki so góð, og enn er vegurin ikki yvirtikin frá Landsverki.

Í máli nr. 20/04650 varð samtykt at broyta ásetingarnar fyri matr. nr. 1175i í almennu byggisamtyktini til økispart A2. Hetta málið er avgreitt, men vóru tá viðmerkingar um trygdina hjá komandi borgarunum í bústaðarbyggingini.

Økið, sum søkt verður um at keypa, liggur í 4. grundumráði, sum í høvuðsheitum er ætlað til landbúnað og alment frílendi og tílíkt. Um økið verður selt og skal brúkast til bústaðarendamál, so verður mælt til, at økið verður broytt til økisáseting A2, har ásetingarnar fyri økið m.a. eru.:
- Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.
- Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Býarskipanarliga er tað heldur óheppið, at býurin verður planlagdur ad-hoc og uttan eina samlaða heild. Hetta serliga grundað á, at tílík planlegging kann hava óhepnar avleiðingar fyri trivnaðin hjá íbúgvunum og framtíðar íbúgvunum í einum komandi bústaðarøki í Húsahaga.

**Upplýsingar frá Stjórnarskrivstovuni**
Í nýggjari tíð er einki dømi um, at kommunan hevur viðmælt sølu av búnaðarjørð beinleiðis til ein umsøkjara, ið ynskir at byggja bústaðir á lendi, ið ikki frammanundan er útlagt til byggilendi.

Tað kann tískil skapa fordømi, um Tórshavnar kommuna í fyriliggjandi máli mælir Búnaðarstovuni til at selja beinleiðis til umsøkjaran.

Tað kann harumframt vera trupult at finna sakligar orsøkir til at mæla til at selja beinleiðis til umsøkjararnar og at víkja frá vanligari mannagongd, har kommunan keypir búnaðarjørð frá Búnaðarstovuni, ið ætlanin er at nýta til býarvakstrarøki.

Søla uttan um kommununa av búnaðarjørð, ið ætlanin er at nýta til byggilendi, fer at skumpa undir eina tilvildarliga býarskpanarliga menning av býnum, og hetta kann vera óheppið og dýrt, tí tað áliggur kommununi at skipa allan annan infrastruktur í økinum so sum vegir, kloakkir, vatnleiðingar v.m. Kommunan verður sostatt bundin at gera íløgur, sum ætlanin kanska ikki hevur verið at gera.

Røtt og vanlig mannagongd vil vera, at nevnda økið verður ment býarskipanarliga eftir teirri raðfesting, ið er samtykt í Kommunuætlanini og í tráð við fakligu tilráðingina frá Býarskipanardeildini, og at Tórshavnar kommuna keypir økið frá Búnaðarstovuni og skipar økið sum kommunala útstykkingarætlan, tá ið tíðin er búgvin til tess.

**Upplýsingar frá Teknisku deild**
Økið, sum søkt verður um at keypa, er ikki áður fyrireikað til umfatandi bústaðarbygging. Sostatt eru kloakk-, brúksvatnsvatns- og onnur viðurskifti í samband við infrakervið, umframt atkomuviðurskiftini til økið ikki fyrireikað. Verandi bústaðarbygging fram við Oyggjarvegnum á matr. 1175i er knýtt í verandi leiðingar og veitingar. Verður víðkað til meira umfatandi bústaðarbygging er neyðugt at greina avleidda tørvin til hesi viðurskifti neyvari. Tað er tó víst, at hetta fer at viðføra avleiddar útreiðslur fyri Tórshavnar kommunu vegna etablering av nýggjum leiðingum og veitingum í nærøkinum. Harumframt kann eisini væntast, at henda bygging og møgulig víðari útbygging í økinum fer at krevja større umleggingar og útbyggingar av leiðingskervinum longur niðri í býnum, eins og veitingarkervið til brúksvatn somuleiðis má útbyggjast. Tað verður ikki mett at verða skynsamt, at halda fram við útbyggingum av leiðings- og veitingarnetinum uttan eina heildarætlan fyri alt økið á matr 1231a og harumleiðir, sum greinar, hvørjar samlaðu útreiðslur kommununar eru til at røkka hesi ætlan, soleiðis at hesar kunnu verða raðfestar. Møgulig bygging eigur ikki at verða loyvd, fyrr enn hesi viðurskifti eru avgreidd.

Viðvíkjandi atkomu frá økinum, sum søkt verður um at keypa, út á Oyggjarvegin, skal upplýsast, at í avtaluni, sum Tórhavnar kommuna hevur gjørt við Landsverk um yvirtøku av Landsvegastrekkinum frá omankoyringini til Hotel Føroyar og oman til ringvegin, stendur, at talið av íbindingum í yvirtikna vegin skal avmarkast, og allar nýggjar íbindingar skulu ummælast av Landsverki. Tekniska deild metir harumframt, at ein íbinding í Oyggjarvegin út fyri økið, sum søkt verður um at keypa, kemur at liggja ov tætt at einum ov krøppum svingið, og útsýni tí verður ov avmarkað her til, at íbinding kann loyvast. Tó verður møguleikin fyri, at økið deilir íbinding við íbindingina hjá matr. 1175i ikki frámæltur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

20/04650 Áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri matr.nr. 1175i, Tórshavn

21/04967 Umsókn til ummælis um uppískoytisstykki av Eystara Húsagarðsfesti, matr.nr. 1175 til samanlegging við matr.nr. 1175i, Tórshavn – íbúðarbyggiverkætlan við Oyggjarvegin

22/00422 Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á matr.nr. 1175i, Oyggjarvegur 42, Tórshavn

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 22/01629-1 Umsókn um keyp av lendi Oyggjarvegur.pdf
J.nr. 22/01629-13 Yvirtøka av landsvegi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | x | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | x | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, leiðarin á byggimálsdeildini, leiðarin á stjórnarskrivstovuni, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla frá at viðmæla sølu og frábýti av búnaðarjørð, vísandi til at:

- Søla av kommunalari jørð skal bjóðast út.
- Ongin ætlan (kommunuætlan, býarskipan ella skipan av infrakervi) fyriliggur fyri økið.
- Vikið verður frá meginregluni hjá Búnaðarstovuni um sølu av landbúnaðarjørð.
- Slík søla kann skapa fordømi og skumpa undir eina tilvildarliga býarskipanarliga menning av býnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023:** Nevndin samtykti, at farast skal undir tilgongdina at broyta byggisamtyktina fyri økið til bústaðarendamál, og at kommunan ognar sær lendið til at bjóða út.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

## 180/23 Asfaltering í Miðbýnum 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 19.06.2023 | 37/23 | 23/03610-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 208/23 | 23/03610-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 180/23 | 23/03610-1 |

**Upprunin til málið**
Borgarstjórin hevur sett fram ynski um, at fleiri vegir í miðbýnum verða asfalteraðir. Asfaltsætlanin fyri 2023 er longu løgd og samtykt í teknisku nevnd.

**Lýsing av málinum**
Tað er ført fram ynski um, at hesir vegir verða asfalteraðir til Ólavsøku:

- Skiparagøta
- Sigmundargøta
- Skálatrøð
- Grím Kambans gøta
- Tórsgøta
- Bryggjubakki
- Mylnugøta
- Sverrisgøta
- Niels Finsens gøta
- Áarvegur
- Bøkjarabrekka
- Húsabrúgv
- Bringsnagøta
- Bøgøta

Rakstrarstovnurin hevur gjørt kostnaðarmeting av hesum arbeiðum. Samanlagt er sambært kostnaðarmetingini talan um ein kostnað á uml. 3 mió. kr. Tó hava eftirfylgjandi innheintað tilboð víst, at kostnaðurin helst kemur at verða um 4 mió kr., um arbeiðini verða boðin út við so stuttum skotbrái, sum nú.

Harafturat skal viðmerkjast, at gøturnar Skiparagøta og Sigmundargøta bíða eftir arbeiði hjá NET at verða gjørd liðug, áðrenn asfalterað verður. Sverrisgøta bíðar eftir arbeiðinum við at gera Havnará. Áarvegur, Bøkjarabrekka, Húsabrúgv, og Bringsnagøta eru partur av eini kloakkætlan, har hesar gøturnar í næstum verða grivnar upp í sambandi við viðlíkahald av kloakkunum.

Við atliti til viðurskiftini, sum eru nevnd omanfyri, metir Rakstarstovnurin, at stovnurin meira skynsamt fíggjarliga kann asfaltera Sverrisgøtu og niðara part av Tórsgøtu við egnari manning, og um fíggingin røkkur, eisini asfaltera Vaglið fram við nýggju Havnará.

Til hesi arbeiðir metir stovnurin, at tørvur er á kr. 1 mió. Av tí at asfaltsætlanin longu er samtykt í Teknisku nevnd, verður tí mælt til, at henda upphædd verður fíggjað av 8175 Vegir (Íløgur).

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
jnr. 23/03610-2 Vegir at asfaltera í Miðbýnum 2023

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | | | Asfaltering í miðbýnum 2023 | 1.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.000.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:
- Sverrisgøta, niðari partur av Tórsgøtu og Vaglið fram við nýggju Havnará verða asfalterað áðrenn Ólavsøku
- Arbeiðið verður fíggjað við kr. 1.000.000,- sum íløga av LK81999 Vegaverkætlanir undir 8175 Vegir (íløgur) á nýggja verkætlan “Asfaltering í Miðbýnum 2023
- Málið verður beint víðari í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>21. juni 2023 | Blað nr.: 746 |
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Súsanna Olsen |
| | Kristian Martin Skála | |